TAK EFTIR TRÚGV TEIRRA

Ádam verður skaptur: 4026 f.o.t.

Ábel doyr: áðrenn 3896 f.o.t.

Nóa verður føddur: 2970 f.o.t.

Sem verður føddur: 2468 f.o.t.

Jehova boðar frá, at heimurin undan Vatnflóðini skal fyribeinast: 2490 f.o.t.

Lemek doyr: 2375 f.o.t.

Vatnflóðin kemur: 2370 f.o.t.
Metusalem doyr: 2370 f.o.t.

Ábraham verður føddur: 2018 f.o.t.
Nóa doyr: 2020 f.o.t.

4000 f.o.t. — 3000 f.o.t. — 2000 f.o.t.

1900 f.o.t. — 900 f.o.t. — 100 f.o.t. — 100 e.o.t.

Ábraham doyr: 1843 f.o.t.

Sem doyr: 1868 f.o.t.

Rutt giftist Boazi: 14. øld f.o.t. (tíðliga í dómaratíðini)

Hanna verður fødd: seint í 13. øld f.o.t.

Sámuel verður føddur: tíðliga í 12. øld f.o.t.

Abigajil giftist Dávidi: tíðliga í 11. øld f.o.t.

Elias: profeterar eftir 940 til áðrenn 905 f.o.t.

Jónas: profeterar uml. 844 f.o.t.

Ester: verjir Guds fólk frá 493 til uml. 475 f.o.t.

Jósef giftist Mariu: 2 f.o.t.

Maria eigur Jesus: 2 f.o.t.

Marta: umrødd í bibliufrásøguni í 29-33 e.o.t.

Pætur verður ápostul: 31 e.o.t.



TAK EFTIR TRÚGV TEIRRA

Hesa bókina eigur

Henda útgávan er ikki til sølu. Hon er framleidd sum liður í einum heimsumfatandi bibliuundirvísingararbeiði, ið verður fíggjað við sjálvbodnum stuðli.

Far inn á www.jw.org, um tú vilt lata stuðul.

Stendur einki annað viðmerkt, eru bibliuorðini eftir umseting Victor Danielsens, endurskoðaðu útgávuni 1974. © Hin Føroyski Bibliugrunnurin.
Styttingin *NW* vísir til *New World Translation of the Holy Scriptures.*

Imitate Their Faith
Prentað í november 2016

Faroese (*ia*-FR)

© 2013
WATCH TOWER BIBLE AND TRACT SOCIETY OF PENNSYLVANIA

Útgevarar:
Jehova vitni
© Druck und Verlag: Wachtturm Bibel- und Traktat-Gesellschaft, Selters/Ts.
Made in Germany

Til okkara kæru brøður og systrar!

Fyrstu ferð *Vagttårnet* kom út í almennari útgávu, 1. januar 2008, varð sjøtul settur á eina sera hugtakandi greinarød við heitinum „Efterlign deres tro“. Til okkara stóru gleði hevur ein nýggj grein síðani tá verið at lesa triðjahvønn mánað!

Hvussu hevur lesarunum dámt hesa greinarøðina? Ein lesari, sum hevði lisið greinina um Martu, skrivaði: „Eg flenti innantanna, tá ið eg las hana, tí eg eri akkurát sum hon. Eg vil altíð so fegin syrgja væl fyri gestunum og stákast, men gloymi onkuntíð at steðga á og njóta at vera saman við vinfólkunum.“ Ein tannáringur kom til hesa áhugaverdu niðurstøðuna eftir at hava lisið frásøguna um Ester: „Eg kendi meg aftur í tí, at vit kunnu vera alt ov upptikin av klæðum og nýggjasta mótanum. Gaman í skulu vit vera pent ílatin, men vit skulu ikki gera ov nógv burturur.“ Hon legði aftrat: „Jehova hugsar um, hvussu vit eru innaní.“ Og ein grein um Pætur ápostul fekk eina systur at skriva hesi eldhugaðu orðini: „Eg var púra burtur í frásøguni, tað kendist, sum eg veruliga var har. Við øllum sansum ímyndaði eg mær tað, sum frásøgan bert gav eina ábending um.“

Hesir lesararnir, og nógvir aðrir við teimum, ið hava skrivað, hvussu glaðir teir vóru um greinarøðina, staðfesta tað, sum Paulus ápostul skrivaði fyri langari tíð síðani: „Alt, ið áður er skrivað, er jú skrivað okkum til lærdóm.“ (Róm. 15:4) Ja, Jehova læt hesar frásøgurnar skriva í Bíbliuna til at geva okkum týðandi lærdóm. Uttan mun til hvussu leingi vit hava kent sannleikan, kunnu vit øll læra av teimum.

Vit mæla tær inniliga til at lesa hesa bókina skjótast gjørligt. Brúka hana, tá ið tit hava Teokratiskt familjukvøld — børnini fara at elska hana! Miss ikki eitt einasta møti, tá ið vit fara at viðgera hana í samkomubíbliulestrinum! Gev tær góðar stundir og hugsa um tað, ið tú lesur. Nýt hugflogið og hav sansarnar við. Royn at finna tær somu kenslurnar fram, sum persónarnir í bíbliufrásøgunum høvdu, og síggj fyri tær tað, ið teir sóu. Samanber tað, sum teir gjørdu, við tað, tú ætlandi hevði gjørt í somu støðu.

Vit gleðast um at geva tær hesa bókina. Vónandi fer hon at gagna bæði tær og familjuni. Okkara kærastu heilsanir og bestu ynski.

Stýrandi ráðið hjá Jehova vitnum

TAK EFTIR TRÚGV TEIRRA

Formæli

'Eftirfylgið teimum, sum við trúgv og toli arva lyftini.'
— HEBREARABRÆVIÐ 6:12.

„HANN tosar um persónarnar í Bíbliuni, sum vóru teir hansara gomlu vinir.“ Hetta segði ein systir, tá ið hon hevði hoyrt fyrilesturin hjá einum eldri ferðandi umsjónarmanni. Og rætt hevði hon, tí bróðirin hevði í fleiri áratíggju lisið og kannað Guds orð og undirvíst í tí. Ja, so nógv, at trúarinnar menn og kvinnur úr bíbliufrásøguni veruliga kendust sum vinir, hann hevði kent alt lívið.

2 Hevði tað ikki verið frálíkt at havt hesar bíbilsku persónarnar sum vinir? Eru teir líka veruligir í tínum huga? Hugsa tær, hvussu tað hevði verið at fylgst við teimum og tosað við teir, at lært menn og kvinnur sum Nóa, Ábraham, Rutt, Elias og Ester at kenna. Hugsa um, hvussu tey kundu ávirkað títt lív, hvørji dýrabar ráð og hvørja troyst tey kundu givið tær! — ***Les Orðtøkini 13:20.***

3 Tá ið „uppreisn verður . . . av rættvísum“, kunnu vit sjálvsagt fáa slík gevandi vinaløg. (Áps. 24:15) Men longu nú kunnu vit fáa nyttu av at læra um trúarinnar menn og kvinnur úr bíbliufrásøguni. Hvussu tá? Paulus ápostul gav hesi ráð: 'Eftirfylgið teimum, sum við trúgv og toli arva lyftini.' (Hebr. 6:12) Nú tá ið vit fara undir lesturin um menn og kvinnur, sum høvdu sterka trúgv, fara vit at kanna nakrar spurningar, sum orðini hjá Paulusi kunnu fáa okkum at hugsa um: Hvat er trúgv í roynd og veru, og hví skulu vit hava trúgv? Hvussu kunnu vit taka eftir trúføstu tænarum Jehova úr forðum?

Hvat er trúgv, og hví skulu vit hava trúgv?

4 Trúgv er ein dragandi eginleiki, ein eginleiki, sum allir menninir og allar kvinnurnar, vit fara at lesa um í hesi bókini, settu sera høgt. Nógv fólk í dag vita ikki, hvat sonn trúgv er, tey halda, at tað merkir at trúgva onkrum uttan at hava nøkur verulig prógv. Men tey fara skeiv. Sonn trúgv er ikki tað sama sum góðtrúni; hon er ikki bara ein kensla; hon er ikki blind trúgv. Góðtrúni er vandamikil. Ein kensla kann koma og fara, og sonn trúgv er meira enn at trúgva, at Gud er til, tí sjálvt 'illu andarnir trúgva — og skelva'. — Ják. 2:19.

1, 2. Hvussu metti ein ferðandi umsjónarmaður trúfastar persónar í Bíbliuni, og hví kundi tað verið frálíkt at havt teir sum vinir?

3. (a) Hvussu kunnu vit fáa nyttu av at læra um trúarinnar menn og kvinnur úr bíbliufrásøguni? (b) Hvørjar spurningar fara vit at kanna?

4. Hvat halda nógv fólk, at trúgv er, og hví fara tey skeiv?

5 Sonn trúgv hevur einki við góðtrúna at gera ella bert at trúgva, at Gud er til. Minst til, hvussu Bíblian lýsir trúgv. (***Les Hebrearabrævið 11:1.***) Paulus segði, at trúgv fevnir um tveir lutir, sum vit ikki síggja. Í fyrra lagi fevnir hon um veruleikar, 'sum ikki síggjast'. Okkara bókstavligu eygu síggja ikki veruleikarnar í andaheiminum, eitt nú Jehova Gud, son hansara ella Ríkið, sum stjórnar úr himli. Í seinna lagi fevnir trúgv um „tað, sum vónað verður" — tilburðir, ið ikki eru farnir fram enn. Enn síggja vit ikki nýggja heimin, sum Guds ríki skjótt fær til vegar. Merkir tað so, at vit einki grundarlag hava fyri trúnni á hesar veruleikarnar og fyri tí, vit hava vónað?

6 Nei, als ikki! Paulus greiddi frá, at sonn trúgv hevur haldgott grundarlag. Tá ið hann nevndi, at trúgv er „full vissa", nýtti hann eina orðing, ið eisini kann endurgevast sum „skeyti". Ímynda tær, at onkur fekk hug at geva tær eini hús. Hann gevur tær kanska skeytið til húsini og sigur: „Her er títt nýggja heim." Sjálvandi meinar hann ikki, at tú skalt búgva á sjálvum pappírslepanum; hann meinar, at skjalið er so løgfrøðiliga bindandi, at eigur tú skjalið, eigur tú húsini. Á líknandi hátt vissar trúgvin okkum um, at alt, sum Gud lovar í sínum orði, at kalla er gingið út.

7 Sonn trúgv fevnir altso um væl grundað álit og óvikandi sannføring, sum týðiliga er miðsavnað um Jehova Gud. Trúgv fær okkum at meta hann sum okkara góða Faðir og at hava álit á, at øll hansara lyfti við vissu ganga út. Men sonn trúgv fevnir um meira. Eins og alt livandi má hon hava føði, skal hon yvirliva. Hon má vísast í verki, annars doyr hon. — Ják. 2:26.

8 Hví er trúgv so umráðandi? Paulus gav eitt greitt svar. (***Les Hebrearabrævið 11:6.***) Uttan trúgv kunnu vit hvørki venda okkum til Jehova í bøn ella gleða hann. Tí er trúgv alneyðug, um vit skulu liva upp til størstu og tignarligastu ætlanina við øllum vitigum skapningum: at nærkast okkara himmalska Faðir, Jehova, og geva honum dýrd.

9 Jehova veit, hvussu stóran tørv vit hava á trúgv, og tí gevur hann okkum fyrimyndir, sum kunnu læra okkum at menna og vísa trúgv. Hann signar kristnu samkomuna við trúføstum monnum, sum ganga undan og eru góðar fyrimyndir. Orð hansara sigur: 'Eftirfylgið trúgv teirra!' (Hebr. 13:7) Og hann hevur givið okkum meira enn tað.

5, 6. (a) Hvørjar tveir lutir, sum ikki síggjast, fevnir okkara trúgv um? (b) Hvussu væl grundað eigur okkara trúgv at vera? Lýs við einum dømi.

7. Hvat fevnir sonn trúgv um?

8. Hví er trúgv so umráðandi?

9. Hvussu hevur Jehova víst, at hann veit, at okkum tørvar trúgv?

Paulus skrivaði um eitt „stórt skýggj av vitnum“, menn og kvinnur í forðum, sum gjørdust frálíkar fyrimyndir í trúgv. (Hebr. 12:1) Listin hjá Paulusi yvir tey trúføstu, sum stendur at lesa í Hebrearabrævinum kapittul 11, er verri enn so fullfíggjaður. Síðurnar í Bíbliuni eru fullar av sonnum søgum um menn og kvinnur, ung og gomul við ymiskari bakgrund, sum livdu eitt lív í trúgv. Tey hava almikið at læra okkum í hesum trúleysu tíðum.

Hvussu kunnu vit taka eftir trúnni hjá øðrum?

10 Tað ber ikki til at taka eftir einum persóni, fyrr enn tú hevur eygleitt hann gjølla. Sum tú lesur hesa bókina, finnur tú út av, at nógv hevur verið granskað fyri at hjálpa tær at læra hesar trúføstu tænararnar betur at kenna. Hví ikki fylgja sama leisti og sjálvur kanna meira? Tá ið tú lesur persónliga, kanst tú so at siga grava niður í Bíbliuna við teimum hjálparamboðunum, sum eru til taks. Meðan tú grundar á tað, sum tú lesur, kanst tú royna at ímynda tær umhvørvið og bakgrundina í bíbliufrásøgunum. Royn at síggja støðini fyri tær, at hoyra ljóðini, kenna luktirnar og — av enn størri týdningi — royn at skilja kenslurnar hjá persónunum. Tá ið tú livir teg inn í lívið hjá hesum trúføstu monnunum og kvinnunum, verða tey meira verulig — nøkur av teimum fara kanska enntá at kennast sum góðir gamlir vinir.

11 Tá ið tú veruliga kemur at kenna tey, fært tú hug at taka eftir teimum. Ímynda tær til dømis, at Jehova samskipan bjóðar tær at víðka tína tænastu á onkran hátt. Kanska verður tú biðin at flyta til eitt øki, har stórur tørvur er á fleiri boðarum, ella tú verður eggjaður til at royna eina tænastugrein, sum tú kanska ikki kennir so væl ella kennir teg ótryggan við. Meðan tú umhugsar uppgávuna og hevur hana við í tínum bønum, hevði tað so kanska verið ein hjálp at hugsa um Ábraham? Hann og Sára vóru fús at fara frá hentleikunum í Ur og fingu nógvar signingar afturfyri. Gongur tú í teirra fótafetum, kemur tú heilt vist at kenna tey nógv betur.

12 Og hvat um ein av tínum nærmastu var óreinur við teg, so tú vart um at missa mótið, og enntá kendi teg freistaðan at sita heima frá møtunum? Um tú tá hevur Hannu til fyrimynd og hugsar um, hvussu hon kláraði seg, hóast Peninna argaði hana, er tað kanska lættari hjá tær at taka ta røttu av-

10. Hvussu kann okkara persónligi lestur hjálpa okkum at taka eftir trúføstu monnunum og kvinnunum í bíbliufrásøguni?

11, 12. (a) Hvussu kanst tú kenna teg tættari knýttan at Ábrahami og Sáru? (b) Hvussu kann dømið við Hannu, Eliasi ella Sámueli gagna tær?

gerðina — og kanska verður Hanna eisini eins og ein góð vinkona. Um tú hevur mist mótið, tí tú kennir teg nyttuleysan, kanst tú kenna teg tættari knýttan at Eliasi, um tú kannar hansara torføru støðu, og sært hvussu Jehova uggaði hann. Og ungfólk, sum kenna eitt støðugt trýst frá siðleysum skúlafelagum, kunnu kenna seg tættari knýtt at Sámueli, eftir at tey hava lisið um, hvussu hann kláraði seg, hóast siðleysu synirnir hjá Eli gjørdu sína ávirkan galdandi í halgidóminum.

13 Hevur tín egna trúgv minni virði í eygum Jehova, um tú tekur eftir tí, sum onnur gjørdu fyri at vísa sína trúgv? Als ikki! Minst til, at Jehova í orði sínum eggjar okkum til at taka eftir fólki, sum høvdu trúgv. (1 Kor. 4:16; 11:1; 2 Tess. 3:7, 9) Haraftrat tóku nakrir av persónunum, sum vit fara at lesa um, sjálvir eftir øðrum trúføstum tænarum, ið vóru undan teimum. Til dømis leggja vit til merkis í kapittul 17 í hesi bókini, at Maria í talu síni eyðsýniliga tók upp eftir Hannu, uttan iva tí hon metti hana sum eina góða fyrimynd. Hevði Maria tískil veikari trúgv? Neyvan! Dømið við Hannu hjálpti hinvegin Mariu at styrkja sína trúgv, so hon kundi fáa sítt egna góða navn hjá Jehova Gudi.

13. Verður tín trúgv minni verd, um tú tekur eftir trúnni hjá øðrum? Greið frá.

14 Henda bókin er skrivað til at hjálpa tær at styrkja tína trúgv. Kapitlarnir taka støði í greinarøðini „Efterlign deres tro“, sum hevur verið prentað í *Vagttårnet* millum 2008 og 2013. Tó er okkurt nýtt tilfar lagt aftrat. Í kapitlunum eru spurningar, sum kunnu hjálpa okkum at tosa um tilfarið og læra av tí. Nógvar litríkar og nágreiniligar myndir eru gjørdar serliga til hesa útgávuna, og nakrar av teimum gomlu eru fríðkaðar og gjørdar størri. Annað hent tilfar er eisini lagt aftrat, eitt nú ein tíðarlinja og landkort. Bókin *Tak eftir trúgv teirra* er ætlað til persónligan lestur, familjulestur og samkomulestur. Nógvar familjur kunnu eisini gleðast um rætt og slætt at lesa søgurnar upp fyri hvør øðrum.

15 Vónandi fer henda bókin at hjálpa tær at taka eftir trúnni hjá teimum, sum trúføst tæntu Jehova í forðum. Og vónandi fer hon at styrkja tína trúgv, so hvørt sum tú fært tættari samband við himmalska Faðir tín, Jehova.

14, 15. Hvat finna vit í hesi bókini, og hvussu kunnu vit nýta hana?

INNIHALD

KAPITTUL			SÍÐA
	Formæli		4
1	'Hann talar enn, tóat hann er deyður'	ÁBEL	9
2	Hann „livdi við Gudi"	NÓA	17
3	„Faðir alra teirra, sum trúgva"	ÁBRAHAM	25
4	„Hagar sum tú fert, hagar fari eg"	RUTT	33
5	Ein „dugnalig kvinna"	RUTT	42
6	Hon læt hjarta sítt upp fyri Gudi í bøn	HANNA	51
7	Hann vaks upp hjá Jehova	SÁMUEL	59
8	Hóast vónbrot stóð hann fastur	SÁMUEL	67
9	'Hon var vitig kvinna'	ABIGAJIL	76
10	Hann vardi sanna tilbiðjan	ELIAS	84
11	Hann skimaðist, og hann bíðaði	ELIAS	92
12	Hann varð uggaður av Gudi	ELIAS	99
13	Hann lærdi av sínum mistøkum	JÓNAS	108
14	Hann lærdi miskunn	JÓNAS	116
15	Hon vardi Guds fólk	ESTER	125
16	Hon var vís, djørv og ósjálvsøkin	ESTER	135
17	Eg eri tænastukvinna Jehova	MARIA	145
18	Hon 'grundaði í hjarta sínum'	MARIA	153
19	Hann vardi, hann uppihelt, hann helt á	JÓSEF	162
20	„Eg trúgvi"	MARTA	172
21	Hann stríddist ímóti ótta og iva	PÆTUR	180
22	Hann var trúfastur í royndum	PÆTUR	188
23	Jesus lærdi hann at fyrigeva	PÆTUR	196
	Eftirmæli		206

KAPITTUL EITT

’Hann talar enn, tóat hann er deyður’

ÁBEL eygleiddi seyðafylgi sítt, ið gekk friðarliga á beiti í líðini. Síðani leitaðu eyguni kanska longri enn til seyðin, har hann langt burturi hómaði eitt veikt ljós. Hann visti, at beint har var eitt logandi svørð at síggja, sum støðugt vendi sær í allar ættir og forðaði fyri, at nakar slapp inn í urtagarðin Eden. Einaferð búðu foreldur hansara har, men hvørki tey ella børn teirra sluppu inn nú. Ímynda tær, hvussu kvøldarlotið tók í hárið á Ábeli, sum hann hugdi uppeftir og hugsaði um Skapara sín. Mundi gjógvin, sum nú var íkomin millum menniskju og Gud, nakrantíð fyllast aftur? Tað var størsta ynskið hjá Ábeli.

2 Ábel talar til tín í dag. Hoyrir tú hann? Kanska hugsar tú, at tað er ógjørligt. Hesin næstelsti sonur Ádams doyði jú fyri langari tíð síðan. Leivdirnar av honum eru langt síðani horvnar í moldini og dustinum úr nærum 6000 árum. Bíblian lærir okkum, at tey ’deyðu einki vita’. (Præd. 9:5, 10) Haraftrat stendur ikki eitt einasta orð av tí, sum Ábel segði, í Bíbliuni. Hvussu kann hann tá tala til okkara?

3 Við íblástri frá Gudi segði Paulus ápostul hetta um Ábel: „Við henni talar hann enn, tóat hann er deyður.“ (***Les Hebrearabrævið 11:4.***) Við hvørjum talar Ábel? Við trúgv. Hann var tað fyrsta menniskjað, sum menti henda dýrabara eginleikan. Hann vísti sína trúgv so væl og virðiliga, at hann er ein livandi fyrimynd, sum vit í dag kunnu taka eftir. Frásøgan um Ábel verður sera verulig og árinamikil, um vit læra av hansara trúgv og royna at taka eftir henni.

4 Men hvat kunnu vit læra um Ábel og hansara trúgv, tá ið Bíblian sigur so lítið um hann? Latið okkum vita.

---

1. Hvat forðaði familjuni hjá Ádami og Evu at fara inn í urtagarðin Eden, og hvat var størsta ynskið hjá Ábeli?

2-4. Á hvønn hátt talar Ábel til okkara í dag?

Alt lívið sá Ábel, at kerúbarnir vóru trúfastir og lýdnir tænarar hjá Jehova

Hann vaks upp, tá ið „heimurin varð grundaður“

5 Ábel varð føddur stutt eftir, at tey fyrstu menniskjuni vórðu skapt. Jesus setti seinni Ábel í samband við tíðina, tá ið „heimurin varð grundaður“. (***Les Lukas 11:50, 51.***) Jesus meinti eyðsýniliga við tann mannaheimin, sum hevur vón um at verða loystur frá syndini. Hóast Ábel var fjórða menniskjað, ið varð til, tykist tað, at hann var tann fyrsti, sum í Guds eygum hevði uppiborið at verða loystur frá syndini.* Ábel hevði heilt greitt ongar góðar fyrimyndir at taka eftir í sínum uppvøkstri.

6 Hóast menniskjuni ikki høvdu verið til serliga leingi, vóru tey longu í eini syrgiligari støðu. Foreldrini hjá Ábeli, Ádam og Eva, vóru helst vøkur og røsk. Men tey høvdu mistikið seg so dyggiliga, og tey vistu tað væl. Einaferð vóru tey fullkomin og høvdu útlit til at liva um ævir. Síðani gjørdu tey uppreistur ímóti Jehova Gudi, og tey vórðu rikin út úr paradísheimi sínum í urtagarðinum Eden. Av tí at tey raðfestu síni egnu ynski fram um alt annað — enntá tørvin hjá børnum sínum — mistu tey fullkomileikan og æviga lívið. — 1 Mós. 2:15–3:24.

7 Eftir at Ádam og Eva vóru rikin út úr urtagarðinum, høvdu

* Orðingin „heimurin varð grundaður“ fevnir um tankan at sáa, ella gróðurseta, og sipar tí til tey allarfyrstu børnini, ið vórðu fødd. Men hví setti Jesus Ábel í samband við, at „heimurin varð grundaður“ og ikki Káin, sum var tað fyrsta menniskjað, ið varð føtt? Avgerðirnar og verkini hjá Káini vístu, at hann við vilja gjørdi uppreistur ímóti Jehova Gudi. Eins og foreldur hansara tykist Káin ikki at vera millum teirra, sum fáa eina uppreisn og verða loyst frá syndini.

5. Hvat merkir tað, at Jesus setti Ábel í samband við, at „heimurin varð grundaður“? (Sí eisini undirgreinina.)

6. Hvussu vóru foreldrini hjá Ábeli?

7, 8. Hvat segði Eva, tá ið Káin varð føddur, og hvat kann hon hava havt í huga?

tey eina strævna tilveru. Men táið fyrsta barn teirra, Káin, var borið í heim, segði Eva: „Eg havi fingið son við hjálp [Jehova].“* Orðini benda á, at hon møguliga hevur hugsað um lyftið, Jehova hevði givið í urtagarðinum, táið hann boðaði frá, at ein ávís kvinna skuldi fáa eitt „avkom“,ið einaferð skuldi knúsa hin ónda, sum hevði lokkað Ádam og Evu av leið. (1 Mós. 3:15; 4:1) Mundi Eva hugsa, at hon var kvinnan í profetiini, og at Káin var lovaða ’avkomið’?

8 Um so var, fór hon so púra skeiv. Og um hon og Ádam løgdu slíkar hugsanir niður í Káin, meðan hann vaks upp, kundi tað gjørt hann stoltan. Seinni átti Eva ein son aftrat, men vit finna ongar stórlátaðar orðingar um hann. Tey róptu hann Ábel, sum møguliga merkir „lot“ ella „tómleiki“. (1 Mós. 4:2) Kann hetta navnavalið merkja, at tey væntaðu sær minni av Ábeli enn av Káini? Tað kunnu vit bert gita um.

9 Foreldur í dag kunnu læra nógv av hesum fyrstu foreldrunum. Kundu tit við tí, tit siga og gera, gjørt tykkara børn stolt, ærusjúk og sjálvglað? Ella fara tit at læra tey at elska Jehova Gud og verða vinir hansara? Tíverri tóku tey fyrstu foreldrini ikki sína ábyrgd í álvara. Tó var vón fyri børn teirra.

Hvat hjálpti Ábeli at fáa trúgv?

10 Meðan teir báðir dreingirnir vuksu til, lærdi Ádam teir helst at útinna arbeiði, sum var neyðugt fyri at uppihalda familjuni. Káin fór at dyrka jørðina, og Ábel fór at røkta seyð.

11 Men Ábel gjørdi nakað av enn størri týdningi. Sum árini gingu, menti hann eina sterka trúgv — vakra eginleikan, sum Paulus seinni skrivaði um. Hugsa um tað. Ábel hevði einki menniskja, hann kundi hava sum fyrimynd. Íðan, hvussu fekk hann so trúgv á Jehova Gud? Latið okkum kanna tríggjar grundir, sum møguliga hjálptu honum at fáa sterka trúgv.

12 **Skapanarverk Jehova.** Jehova hevði, gaman í, bannað jørðina, so hon bar tornir og tistlar og tískil var torfør at dyrka. Kortini gav hon ríkliga grøði, sum familjan hjá Ábeli kundi breyðføða seg við. Men dýrini vóru ikki bannað, heldur ikki fjøllini, vøtnini, áirnar og høvini ella himmalin, skýggini, sólin, mánin og

* Í endurgivnu skriftstøðunum í hesi bókini skriva vit Guds navn, Jehova, í klombrum, har tað er at finna í upprunatekstinum.

9. Hvat kunnu foreldur í dag læra av okkara fyrstu foreldrum?

10, 11. Hvat fingust Káin og Ábel við, og hvønn eginleika menti Ábel?

12, 13. Hvussu kann tað hava styrkt trúnna hjá Ábeli at eygleiða skapanarverk Jehova?

stjørnurnar. Hvagar Ábel so vendi sær, sá hann prógv um kærleika, vísdóm og góðsku Jehova Guds, sum hevði skapt alt. (***Les Rómbrævið 1:20.***) Tað styrkti uttan iva hansara trúgv at grunda á skapanarverkið og eginleikar Guds.

13 Ábel gav sær eyðsæð stundir til at hugsa um Jehova. Ímynda tær hann, sum hann gekk og røktaði seyð sín. Sum seyðamaður noyddist hann at ganga nógv. Hann leiddi seyðin um dalar og fjøll og yvir um áir, og leitaði altíð eftir tí besta beitilendinum, bestu støðunum at fáa vatn og bestu bólunum, har seyðurin fekk hvílt seg. Av øllum skapningum Guds tóktist seyðurin at vera tann mest hjálparleysi, eins og var hann skaptur til, at menniskju skuldu leiða og verja hann. Skilti Ábel, at hann eisini hevði tørv á, at onkur, sum var nógv vísari og máttmiklari enn nakað menniskja, skuldi leiða og verja hann? Hann bar ivaleyst slíkar tankar fram í sínum bønum, og soleiðis vaks trúgvin hjá honum.

14 **Lyfti Jehova.** Ádam og Eva søgdu helst synum sínum frá hendingunum í Eden, sum høvdu við sær, at tey vórðu rikin út úr urtagarðinum. Tískil hevði Ábel nógv at grunda á.

15 Jehova segði, at jørðin skuldi verða bannað. Tornarnir og tistlarnir, sum Ábel sá, vístu týðiliga, at so var. Jehova hevði eisini sagt, at Eva skuldi kenna pínu, meðan hon var við barn, og tá ið hon skuldi eiga. So hvørt sum systkin Ábels vórðu fødd, sá hann uttan iva, at eisini hetta gekk út. Jehova sá frammanundan, at Eva fór at hava alt ov stóran tørv á kærleika og umsorgan frá manni sínum, og at Ádam fór at ráða yvir henni. Hesin syrgiligi veruleikin fór fram beint fyri eygunum á Ábeli. Í øllum hesum sá Ábel, at orð Jehova er fullkomiliga álítandi. Tí hevði hann góðar grundir til at trúgva á tað lyftið, sum Jehova hevði givið um eitt „avkom“, ið einaferð skuldi bøta allan óndskapin, sum tók sína byrjan í Eden. — 1 Mós. 3:15-19.

14, 15. Á hvønn hátt góvu lyftini frá Jehova Ábeli nógv at grunda á?

16 **Tænarar Jehova.** Ábel fann ongar góðar fyrimyndir millum menniskjuni, men menniskjuni vóru ikki teir einastu vitigu skapningarnir á jørðini um tað mundið. Tá ið Ádam og Eva vórðu rikin út úr urtagarðinum, syrgdi Jehova fyri, at hvørki tey ella eftirkomarar teirra sluppu inn í hetta jarðiska paradísið. Til at halda vakt við inngongdina hevði Jehova sett kerúbar — sera týðandi einglar, sum høvdu serligar uppgávur — og eitt logandi svørð, ið støðugt vendi sær í allar ættir. — ***Les Fyrstu Mósebók 3:24.***

17 Ímynda tær, hvussu tað var hjá Ábeli at eygleiða hesar kerúbarnar, tá ið hann var smádrongur. Hóast teir vóru í mannalíki, hevur øll útsjónd teirra helst borið dám av stórum valdi. Og ’logandi svørðið’, sum støðugt mól runt, mundi eisini vera bergtakandi. Upplivdi Ábel nakrantíð í sínum uppvøkstri, at hesir kerúbarnir fóru at keða seg og rýmdu undan uppgávu síni? Nei. Nátt og dag, ár undan ári vórðu hesir vitigu og máttmiklu skapningarnir verandi á sínum tillutaða staði. Soleiðis lærdi Ábel, at Jehova hevði rættvísar og støðufastar tænarar. Hjá hesum kerúbunum sá Ábel trúskap og lýdni ímóti Jehova, nakað sum ikki var at finna í hansara egnu familju. Hesir einglarnir hjálptu honum uttan iva at fáa sterka trúgv.

18 Trúgvin hjá Ábeli gjørdist sterkari, við tað at hann grundaði á alt tað, sum Jehova hevði opinberað um seg sjálvan við

16, 17. Hvat lærdu kerúbar Jehova møguliga Ábel?

18. Hvørjar haldgóðar grundir hava vit til at styrkja okkara trúgv í dag?



Skapanarverkið gav Ábeli haldgóða grund til at trúgva á ein góðan Skapara

skapanarverki sínum, lyftum sínum og tænarum sínum. Tað er eyðsæð, at dømið við Ábeli kann læra okkum nógv. Tað kann vera serliga uggandi hjá ungum at vita, at tey kunnu fáa sterka trúgv á Jehova Gud, uttan mun til hvat onnur í familjuni velja at gera. Undrini í skapanarverkinum, at vit hava alla Bíbliuna og nógv dømi um trúfastar tænarar hjá Jehova geva okkum haldgóðar grundir til at styrkja okkara trúgv í dag.

Hví var offur Ábels betri?

19 So hvørt sum trúgv Ábels á Jehova vaks, fekk hann hug at vísa hesa trúnna í verki. Men hann var bert eitt menniskja, so hvat kundi hann geva Skaparanum av alheiminum? Gud hevði sjálvsagt ikki tørv á gávum ella hjálp frá menniskjum. Við tíðini skilti Ábel ein djúpan sannleika: Um hann við reinum hjarta gav Jehova tað besta, hann átti, so gleddi hann sín góða himmalska Faðir.

20 Ábel gjørdi nakrar seyðir úr fylgi sínum til reiðar, so hann kundi ofra teir. Hann valdi teir bestu av teimum frumbornu og ofraði tey bestu stykkini. Káin royndi eisini at vinna signing og tokka frá Gudi, og tí gjørdi hann nakað av grøði síni til reiðar at ofra. Men hann gjørdi tað ikki við reinum hjarta eins og Ábel. Munurin gjørdist týðiligur, tá ið teir báðir beiggjarnir bóru fram offur síni.

21 Báðir synir Ádams brúktu møguliga altar og eld, tá ið teir ofraðu, kanska nærindis kerúbunum, sum vóru teir einastu á jørðini, ið umboðaðu Jehova um tað mundið. Jehova legði tað til merkis. Í frásøguni lesa vit: „[Jehova] hugdi á Ábel og offur hansara.“ (1 Mós. 4:4) Bíblian sigur ikki, hvussu Gud vísti sín tokka.

22 Hví hugdi Gud á offur Ábels og ikki Káins? Var tað sjálvt ofrið, sum var orsøkin? Ábel ofraði eitt livandi dýr og úthelti dýrabara blóðið hjá tí. Visti Ábel, hvussu dýrabart eitt slíkt offur fór at vera? Nógvar øldir seinni nýtti Gud eitt lýtaleyst offurlamb til at lýsa ofringina av sínum egna fullkomna soni, ‘lambi Guds’, hvørs óseka blóð skuldi verða úthelt. (Jóh. 1:29; 2 Mós. 12:5-7) Men nógv av hesum visti ella skilti Ábel ivaleyst ikki.

23 Eitt vita vit tó við vissu: Ábel ofraði tað allarbesta, hann átti. Jehova hevði ikki bert tokka til ofrið, men eisini til mannin sjálvan. Verk Ábels vóru drivin av kærleika og sterkari trúgv á Jehova.

---

19. Hvønn djúpan sannleika skilti Ábel við tíðini?

20, 21. Hvat ofraðu Káin og Ábel til Jehova, og hvussu ávirkaði tað hann?

22, 23. Hví hevði Jehova tokka til offur Ábels?

Ábel bar offur sítt fram í trúgv; tað gjørdi Káin ikki

24 Øðrvísi var við Káini. Jehova 'hugdi ikki á Káin og offur hansara'. (1 Mós. 4:5) Tað var ikki ofrinum sjálvum, ið galið var við, tí lóg Guds loyvdi seinni, at offur kundu berast fram av grøðini, ið jørðin bar. (3 Mós. 6:7, 8) Men Bíblian sigur um Káin, at „verk hansara vóru ónd". (***Les Fyrsta bræv Jóhannesar 3:12.***) Eins og so nógv fólk á okkara døgum, helt Káin eyðsýniliga, at bara hann *sýntist* at vera gudrøkin, var alt í lagi. Hansara vantandi trúgv á og kærleiki til Jehova komu skjótt undan kavi.

25 Royndi Káin, tá ið hann skilti, at hann ikki hevði vunnið tokka Guds, at taka eftir Ábeli? Nei. Vreiði hansara tendraðist ímóti beiggjanum. Jehova sá, hvat fór fram í hjarta hansara, og royndi tolin at tosa við hann. Hann ávaraði Káin um, at leiðin, hann hevði valt, førdi til álvarsama synd, og hann gav honum vón um, at hann 'treystliga kundi hyggja upp', bert hann broytti kós. — 1 Mós. 4:6, 7.

26 Káin lurtaði ikki eftir ávaringini frá Gudi. Hann bað yngra beiggja sín koma við sær út á markina. Har leyp hann á hann og drap hann. (1 Mós. 4:8) Í so máta gjørdist Ábel tann fyrsti, ið var fyri átrúnaðarligari atsókn, tann fyrsti pínslarvátturin. Hann doyði, men Jehova gloymdi hann ikki.

27 Í fluttari merking ópti blóð Ábels til Jehova Gud um hevnd, ella rættvísi. Og Gud syrgdi fyri, at rættvísi varð framt, tá ið hann revsaði Káin fyri tað ónda, hann hevði gjørt. (1 Mós. 4:9-12) Men av enn størri týdningi er tað, at frásøgan um trúgv Ábels talar til okkara í dag. Hansara livitíð, sum kanska var eini 100 ár, var stutt í mun til, hvussu leingi fólk livdu tá í tíðini, men hann brúkti lív sítt væl. Tá ið hann doyði, visti hann, at himmalski Faðir hansara, Jehova, elskaði hann og hevði tokka til hansara. (Hebr. 11:4) Tí kunnu vit vera vís í, at Jehova goymir hann í sínum óavmarkaða minni, og at hann skal rísa upp til lív í einum paradísi á jørðini. (Jóh. 5:28, 29) Fert tú at hitta hann har? Tað fert tú, um tú setur tær fyri at lurta eftir tí, sum Ábel talar, og at taka eftir hansara einastandandi trúgv.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu talar Ábel til okkara í dag?
- Hvat kunnu foreldur læra av mistøkunum hjá foreldrum Ábels?
- Hvussu kunnu skapanarverk Jehova, lyfti hansara og kerúbarnir hava hjálpt Ábeli at fáa sterka trúgv?
- Hvussu ætlar tú tær at taka eftir trúnni hjá Ábeli?

---

24. (a) Hví kunnu vit siga, at tað ikki var sjálvum ofrinum hjá Káini, ið galið var við? (b) Hvussu var Káin eins og nógv fólk eru í dag?

25, 26. Hvørja ávaring gav Jehova Káini, men hvat gjørdi Káin?

27. (a) Hví kunnu vit vera vís í, at Ábel fær eina uppreisn? (b) Hvussu kunnu vit tryggja okkum, at vit ein dag hitta Ábel?

KAPITTUL TVEY

Hann „livdi við Gudi“

NÓA rættaði ryggin og strekti sínar eymu vøddar. Ímynda tær hann sitandi á einum stabba. Meðan hann soleiðis rindaði sær møðina, eygleiddi hann ta risastóru ørkina, sum stóð í gerð. Ramur luktur av heitari tjøru fylti luftina, og dunið av snikkaraamboðum hoyrdist. Haðani hann sat, sá Nóa synir sínar arbeiða ymsastaðni á tí stóra timburskrokkinum. Synir hansara, konur teirra og hansara egna kona høvdu øll í áratíggju arbeitt saman við honum í hesi verkætlanini. Tað gekk væl framá, men har var nógv eftir at gera hjá teimum.

2 Fólkini har um vegir hildu, at tey vóru býtt. So hvørt sum ørkin tók skap, flentu fólkini uppaftur meira við tankan um eina vatnflóð, sum skuldi fjala alla jørðina. Tey hildu vanlukkuna, sum Nóa ferð eftir ferð hevði ávarað um, vera bæði óhugsandi og láturverda. Tey skiltu ikki, at ein maður so býttisliga spilti lív sítt — og lívið hjá familju síni! Men Jehova Gud hevði eina heilt aðra áskoðan á Nóa.

3 Guds orð sigur: „Nóa livdi við Gudi.“ (***Les Fyrstu Mósebók 6:9.***) Hvat merkti tað? Ikki at Gud var á jørðini ella, at Nóa onkursvegna fór til himmals. Nei, tað merkti, at Nóa aktaði Gud sín og var so góður við hann, at hann so at siga fylgdist við Jehova, eins og vinir fylgjast. Fleiri túsund ár seinni segði Bíblian um Nóa: „Við [trúgv] dómfeldi hann heimin.“ (Hebr. 11:7) Hvussu tá? Hvat kunnu vit læra av hansara trúgv í dag?

Ein lýtaleysur maður í einum spiltum heimi

4 Nóa vaks upp í einum heimi, har óndskapurin alsamt versnaði. Heimurin var eisini óndur, tá ið langabbi hansara, Enok, livdi, ein annar rættvísur maður, ið livdi við Gudi. Enok hevði boðað frá, at ein dagur skuldi koma, tá ið Gud fór at útinna dóm yvir tey

---

1, 2. Hvørjari verkætlan arbeiddu Nóa og familja hansara við, og hvørjar avbjóðingar møttu teimum?

3. Á hvønn hátt livdi Nóa við Gudi?

4, 5. Hvussu var óndskapurin alsamt versnaður á døgum Nóa?

Nóa og kona hansara máttu verja síni børn fyri skaðiligari ávirkan

gudleysu menniskjuni í heiminum. Nú, á døgum Nóa, hevði óndskapurin vundið enn meiri upp á seg. Í roynd og veru var jørðin spilt í eygum Jehova, tí hon var full av órætti. (1 Mós. 5:22; 6:11; Jud. 14, 15) Hvat var hent, síðani óndskapurin hevði vundið so nógv upp á seg?

5 Ein ræðuligur sorgarleikur var farin fram millum gudssynirnar, ella einglarnar. Ein teirra hevði longu sett seg upp ímóti Jehova og gjørt seg sjálvan til Satan Djevulin við at baktala Gud og lokka Ádam og Evu at synda. Á døgum Nóa fóru aðrir einglar at gera uppreistur ímóti rættvísa stýri Jehova. Teir góvu upp bústað sín í himli, fóru niður á jørðina, fingu sær skap sum menniskju og tóku sær vakrar kvinnur til konur. Hesir stoltu, sjálvgóðu og uppreistrarhugaðu einglarnir høvdu skaðiliga ávirkan á menniskjuni. — 1 Mós. 6:1, 2; Jud. 6, 7.

6 Haraftrat kom burtur úr hesum ónatúrliga sambandinum millum einglarnar í mannalíki og kvinnurnar eitt kynblandað avkom, risar, ið vóru óvanliga sterkir. Í upprunatekstinum í Bíbliuni verða teir róptir nefilim, sum bókstaviliga merkir „teir, ið høgga niður“ — teir, ið fáa onnur at snáva. Hesi óndu bølmennini, nefilim, vóru orsøkin til, at viðurskiftini í heiminum versnaðu munandi. Ikki løgið, at Skaparin helt, „at óndskapurin í menniskjunum var stórur á jørðini, og at hjartans hugsan og tráan teirra var ikki annað enn ilt allan dagin“. Jehova setti sær fyri, at hann 120 ár seinni skuldi týna hetta ónda mannasamfelagið. — ***Les Fyrstu Mósebók 6:3-5.***

---

6. Hvussu ávirkaðu nefilim viðurskiftini í heiminum, og hvat setti Jehova sær fyri at gera?

7 Hugsa tær, hvussu torført tað mundi vera at uppala børn í einum slíkum heimi. Men tað gjørdi Nóa. Hann fekk eina góða konu, og eftir at hann var vorðin 500 ára gamal, bar hon honum tríggjar synir — Sem, Kam og Jafet.* Saman noyddust tey at verja synir sínar fyri óndskapinum, sum var rundan um tey. Smádreingir verða ofta hugtiknir av monnum, sum eru 'veldigir' og 'navngitnir', og júst tað vóru nefilim. Nóa og kona hansara fingu helst ikki vart synir sínar fyri at hoyra um øll brøgdini hjá hesum risunum, men tey kundu læra teir sannleikan um Jehova Gud, sum hatar allan óndskap. Tey máttu hjálpa dreingjunum at skilja, at Jehova kendi seg særdan av harðskapinum og uppreistrinum í heiminum. — 1 Mós. 6:6.

8 Foreldur nú á døgum munnu duga at seta seg inn í støðuna hjá Nóa og konu hansara. Heimurin í dag er eisini fullur av harðskapi og uppreistri. Bólkar av uppreistrarhugaðum ungum herja í nógvum býum. Sjálvt undirhald, sum er ætlað smábørnum, kann vera á tremur við harðskapi. Skilagóð foreldur gera alt, tey eru ment, fyri at reka slíka ávirkan aftur við at læra børn síni um Jehova, Gud friðarins, sum einaferð fer at beina fyri øllum harðskapi. (Sl. 11:5; 37:10, 11) Tað ber til at læra børn at gera tað rætta, sjálvt í einum óndum heimi! Hjá Nóa og konu hansara eydnaðist tað. Synirnir hjá teimum gjørdust góðir menn, og teir fingu sær konur, sum eisini settu Jehova Gud fremst í sínum lívi.

„Tú skalt gera tær ørk“

9 Ein dagin broyttist lívið hjá Nóa fullkomiliga. Jehova talaði við elskaða tænara sín og segði honum frá síni ætlan um at týna heimin, sum tá var. Gud gav Nóa hesi boð: „Tú skalt gera tær ørk av goferviði.“ — 1 Mós. 6:14.

10 Henda ørkin var ikki eitt skip, sum nøkur halda. Hon hevði hvørki bógv, hekku, kjøl ella róður, og eingin bugur var í. Hon var rætt og slætt ein stórur kassi. Jehova gav Nóa tey nágreiniligu mátini til ørkina, segði honum, hvussu skapið skuldi vera, og at hann skuldi smyrja hana bæði innan og uttan við tjøru. Hann greiddi

* Tá í tíðini livdu fólk nógv longur enn vit gera í dag. Orsøkin, til at tey livdu so leingi, var helst tann, at bert fá ættarlið vóru millum tey og Ádam og Evu, sum einaferð høvdu verið fullkomin.

7. Hví var tað ein avbjóðing hjá Nóa og konu hansara at verja synir sínar fyri óndskapinum?

8. Hvussu kunnu skilagóð foreldur nú á døgum taka eftir Nóa og konu hansara?

9, 10. (a) Hvørji boð frá Jehova broyttu lívið hjá Nóa? (b) Hvussu segði Jehova, at ørkin skuldi síggja út, og hvørja ætlan hevði hann við henni?

honum eisini frá hví: 'Eg lati nú vatnflóð koma yvir jørðina; alt tað, ið á jørðini er, skal ganga til grundar.' Men Jehova gjørdi henda sáttmálan, ella formligu avtaluna, við Nóa: „Tú skalt fara inn í ørkina, tú og synir tínir, kona tín og sonarkonur tínar við tær." Nóa skuldi eisini hava øll sløg av dýrum við sær. Bert tey, sum vóru í ørkini, kundu yvirliva Vatnflóðina. — 1 Mós. 6:17-20.

11 Nóa hevði eina risastóra uppgávu fyri sær. Ørkin skuldi verða ómetaliga stór — umleið 133 metrar long, 22 metrar breið og 13 metrar høg. Hon var nógv størri enn tey størstu havføru træskipini, ið nakrantíð eru bygd, sjálvt í nýggjari tíð. Royndi Nóa at sleppa undan hesi uppgávuni, grenjaði hann um avbjóðingarnar, ella royndi hann at broyta nakað fyri at lætta um stríðið? Bíblian svarar: 'Nóa gjørdi í einum og øllum, sum Gud hevði sagt við hann.' — 1 Mós. 6:22.

12 Arbeiðið stóð við í fleiri áratíggju, kanska 40 ella 50 ár. Trø skuldu fellast, bular skuldu dragast, bjálkar skuldu høggast, evnast til og skoytast saman. Tríggjar hæddir, ella trý dekk, skuldu vera í ørkini, nøkur rúm og ein hurð á síðuni. Vindeygu vóru eyðsýniliga í erva allan vegin runt, og takið hevði helst lága reising, so vatnið fekk runnið burtur. — 1 Mós. 6:14-16.

13 Sum árini gingu, og ørkin tók skap, man Nóa hava frøtt seg um, at familjan stuðlaði honum. Men eitt annað var, sum kanska var ein enn størri avbjóðing enn at byggja ørkina. Bíblian sigur okkum, at Nóa var 'prædikari rættvísinnar'. (***Les Seinna bræv Pæturs 2:5.***) Hann var djarvur og gekk undan við at ávara tað ónda og gudleysa mannasamfelagið um oyðingina, ið var á veg. Lurtaðu tey? Seinni mintist Jesus Kristus aftur á hesa tíðina og segði, at fólkini „vitstu av ongum". Hann segði, at tey vóru so upptikin av gerandislívinum — at eta, drekka og gifta seg — at tey ikki góvu gætur eftir Nóa. (Matt. 24:37-39) Nógv hildu ivaleyst hann og familju hansara fyri gjøldur. Nøkur hóttu hann møguliga og settu seg upp ímóti honum við harðskapi. Tey royndu kanska enntá at forða teimum í at byggja ørkina.

14 Men Nóa og familjan góvu kortini ikki uppat. Tey bygdu við sama lag, hóast fólk rundan um tey hildu tað vera høpisleyst, púra burtur við og láturligt. Familjur í dag kunnu læra nógv av trúnni hjá Nóa og familju hansara. Vit liva jú í tíðini, sum Bíblian nevnir 'síðstu dagarnar' hjá hesi heimsskipanini. (2 Tim. 3:1) Jesus

11, 12. Hvørja risastóra uppgávu hevði Nóa fyri sær, og hvussu tók hann við avbjóðingini?

13. Hvat kann hava verið ein størri avbjóðing hjá Nóa enn at byggja ørkina, og hvussu ávirkaði tað fólkini?

14. Hvat kunnu familjur í dag læra av Nóa og familju hansara?

Nóa og familja hansara samstarvaðu um at fylgja Guds boðum

Hóast tað var týðiligt, at Gud signaði Nóa, spottaðu fólk hann og vildu ikki lurta eftir honum

segði, at okkara tíð skuldi vera júst sum tíðin, tá ið Nóa bygdi ørkina. Vilja fólk í heiminum ikki lurta eftir boðskapinum um Guds ríki, men spotta ella enntá søkja at okkum, so er gott at hugsa um Nóa. Vit eru ikki tey fyrstu, ið eru fyri slíkum avbjóðingum.

„Far inn í ørkina“

15 Fleiri áratíggju vóru liðin, og ørkin tók so líðandi sítt endaliga skap. Tá ið Nóa nærkaðist teimum 600 árunum, misti hann nøkur av sínum kæru. Pápi hansara, Lemek, doyði.* Fimm ár seinni doyði Metúsalem, ið var pápi Lemek og abbi Nóa. Hann bleiv 969 ára gamal og gjørdist soleiðis elsta menniskjað, sum er nevnt í Bíbliuni. (1 Mós. 5:27) Bæði Metúsalem og Lemek høvdu livað samstundis sum fyrsta menniskjað, Ádam.

16 Tá ið Nóa var 600 ára gamal, fekk hann eini nýggj boð frá Jehova Gudi: „Far inn í ørkina, tú og alt hús títt.“ Jehova bað eisini Nóa hava øll sløg av dýrum við inn í ørkina — sjey av teimum reinu, ið kundu latast sum offur, og tvey av hinum. — 1 Mós. 7:1-3, *NW*.

* Lemek hevði givið soni sínum navnið Nóa, sum ætlandi merkir „hvíla“ ella „troyst“, og hevði profeterað, at Nóa skuldi liva upp til sítt navn, við tað at hann fór at geva mannaættini hvílu frá strævna arbeiðinum á bannaðu jørðini. (1 Mós. 5:28, 29) Lemek livdi ikki so leingi, at hann sá hesa profetiina ganga út. Mamma, brøður og systrar Nóa gingu møguliga burtur í Vatnflóðini.

15. Hvørjar av sínum kæru misti Nóa, tá ið hann nærkaðist teimum 600 árunum?

16, 17. (a) Hvørji nýggj boð fekk Nóa, tá ið hann var 600 ára gamal? (b) Lýs ógloymandi sjónina, sum Nóa og familjan sóu.

17 Tað man hava verið ein ógloymandi sjón. Í túsundatali komu tey undan sjónarringinum — gangandi, flúgvandi, skríðandi, vaggandi, dundrandi — øll hugtakandi ymisk í stødd, skapi og lyndi. Tað er ikki neyðugt at ímynda sær ein neyðars Nóa, sum royndi at reka ella onkursvegna lokka tey villu dýrini inn í trongu rúmini í ørkini. Frásøgan sigur, at tey *„fóru inn* í ørkina til Nóa“. — 1 Mós. 7:9.

18 Onkur hevur kanska hug at finnast at hesum og spyrja: ’Hvussu kundi nakað tílíkt bera til? Og hvussu kundu øll hasi dýrini liva so trongt, uttan at ruðuleiki stóðst av?’ Hugsa um hetta: Skuldi Skaparin av øllum alheiminum ikki vera førur fyri at hava tamarhald á dýrunum og enntá temja tey og fáa tey at akta, um neyðugt? Minst til, at Jehova Gud er tann, ið skapti dýrini. Nógv seinni kleyv hann eisini Reyðahavið og fekk sólina at standa stilla. Var hann so ikki førur fyri at fremja alt tað, sum stendur at lesa í frásøguni um Nóa? Sjálvandi var hann tað, og hann gjørdi tað eisini!

19 Gud kundi, gaman í, valt at bjarga dýrunum á ein annan hátt. Men í vísdómi sínum gjørdi hann tað á ein hátt, sum minnir okkum um tað, hann upprunaliga leit upp í hendurnar á menniskjunum, nevniliga at taka sær av øllum dýrunum á jørðini. (1 Mós. 1:28) Tí vísa nógv foreldur í dag á frásøguna um Nóa, tá ið tey læra børnini, at Jehova er góður bæði við dýrini og menniskjuni, sum hann hevur skapt.

18, 19. (a) Hvat kunnu vit hugsa um í sambandi við spurningarnar, sum atfinnarar seta viðvíkjandi tí, sum fór fram í frásøguni um Nóa? (b) Hvussu kom vísdómur Jehova til sjóndar í tí, sum hann gjørdi fyri at bjarga dýrunum?

20 Jehova segði við Nóa, at Vatnflóðin skuldi koma sjey dagar seinni. Tað man hava verið ein rokalig vika hjá familjuni. Hugsa tær, hvussu strævið tað hevur verið at skipa fyri, at øll dýrini, fóðrið og matvørurnar komu á rætta plássið og eisini, at ognirnar hjá familjuni komu inn í ørkina. Kona Nóa og konurnar hjá Sem, Kam og Jafet hugsaðu kanska serliga um at gera tað liviligt inni í ørkini.

21 Hvat gjørdu fólkini rundan um tey? Tey „vitstu“ framvegis „av ongum“, hóast tað var týðiligt, at Jehova signaði Nóa og alt hansara stríð. Tað er heilt vist, at tey sóu dýrini streyma inn í ørkina. Men líkasælan hjá teimum skuldi ikki komið óvart á okkum. Fólk í dag geva sær heldur ikki far um týðiligu prógvini um, at vit nú liva á síðstu døgunum hjá hesi heimsskipanini. Og sum Pætur ápostul boðaði frá, hava spottarar háðað og spottað tey, sum geva gætur eftir ávaring Guds. (***Les Seinna bræv Pæturs 3:3-6.***) Fólk spottaðu ivaleyst eisini Nóa og familju hansara.

22 Nær hildu tey uppat at spotta? Frásøgan sigur, at tá ið Nóa hevði fingið familju sína og dýrini inn í ørkina, 'læt [Jehova] aftur eftir honum'. Vóru nakrir spottarar nærindis, fekk henda guddómliga gerðin teir helst at tagna. Um ikki, fekk regnið teir at tagna — tí tað fór at oysa niður! Tað regnaði og regnaði og regnaði — inntil allur heimurin var undir í vatni, júst sum Jehova hevði sagt. — 1 Mós. 7:16-21.

23 Gleddist Jehova um, at tey óndu fólkini doyðu? Nei, als ikki! (Ez. 33:11) Hann hevði tvørturímóti givið teimum ríkan møguleika at broyta kós og gera tað, sum var rætt. Høvdu tey kunnað tað? Lívsleiðin hjá Nóa svarar spurninginum. Hann livdi við Jehova, aktaði Gud í øllum og vísti soleiðis, at tað bar til at verða bjargaður. Í so máta dómfeldi hann heimin við trúgv síni, og við henni vísti hann eisini, hvussu stórur óndskapurin var á hansara døgum. Hansara trúgv bjargaði honum og familju hansara. Tekur tú eftir trúnni hjá Nóa, kanst tú kanska eisini bjarga tær sjálvum og teimum, tú elskar. Eins og Nóa kanst tú liva við Jehova Gudi og hava hann sum vin. Og tað vinalagið kann vara ævigt!

HUGSA UM HETTA . . .

- Hví var tað ein avbjóðing hjá Nóa og konu hansara at uppala síni børn?
- Hví hevði Nóa tørv á trúgv, tá ið hann skuldi byggja ørkina?
- Hví man tað hava verið torført at boða á døgum Nóa?
- Hvussu hevur tú sett tær fyri at taka eftir trúnni hjá Nóa?

20. Hvat mundu Nóa og familjan takast við í vikuni undan Vatnflóðini?

21, 22. (a) Hví skuldi líkasælan hjá fólki á Nóa døgum ikki komið óvart á okkum? (b) Nær hildu fólk uppat at spotta Nóa og familju hansara?

23. (a) Hvussu vita vit, at Jehova ikki gleddist um, at tey óndu fólkini doyðu á døgum Nóa? (b) Hví er tað skilagott at taka eftir trúnni hjá Nóa í dag?

KAPITTUL TRÝ

„Faðir alra teirra, sum trúgva“

ÁBRAHAM hugdi upp, og eyguni vórðu drigin at sigguratinum, einum bygningi, ið hevði skap sum ein pyramida.* Hesin bygningurin var høgt hevjaður yvir heimbý hansara, Ur. Har var gangur, og roykur steig upp. Prestarnir hjá mánagudinum vóru aftur í holt við at ofra. Ímynda tær, at Ábraham vendi sær burtur, risti við høvdinum og setti knyklar í brýr. Meðan hann trokaði seg heim gjøgnum mannamúgvurnar á gøtunum, hugsaði hann helst um avgudadýrkanina, ið gjøgnumsúrgaði Ur. Henda spilta tilbiðingin hevði veruliga vundið upp á seg í heiminum, síðani Nóa livdi.

Hvussu gjørdist Ábraham ein einastandandi fyrimynd í trúgv?

2 Bert tvey ár áðrenn Ábraham varð føddur, doyði Nóa. Tá ið Nóa og familja hansara fóru út úr ørkini eftir Vatnflóðina, ofraði hann til Jehova Gud, sum afturfyri læt ein ælaboga koma til sjóndar. (1 Mós. 8:20; 9:12-14) Tá var reina tilbiðingin einasta tilbiðingin. Men nú, tá ið tíggjunda ættarliðið hjá Nóa spjaddist um jørðina, var reina tilbiðingin vorðin heldur sjáldsom. Allastaðni tilbóðu fólk heidnar gudar. Sjálvt pápi Ábrahams, Tara, hevði við avgudadýrkan at gera; møguliga gjørdi hann avgudar. — Jos. 24:2.

3 Ábraham var øðrvísi. Sum hann gjørdist eldri, líktist hann meira og meira burtur úr mongdini vegna sína trúgv. Paulus ápostul fekk seinni íblástur frá Gudi til at rópa hann „faðir alra teirra, sum trúgva“. (***Les Rómbrævið 4:11.***) Latið okkum vita, hvat

* Um hetta mundið æt Ábraham Ábram, men fleiri ár seinni broytti Gud navn hansara til Ábraham, sum merkir „faðir at mongd“. — 1 Mós. 17:5.

1, 2. Hvussu var heimurin broyttur, síðani Nóa livdi, og hvussu ávirkaði tað Ábraham?

3. Hvønn eginleika menti Ábraham, so hvørt sum hann gjørdist eldri, og hvat kann tað læra okkum?

Ábraham vísti avgudadýrkanini, sum var so vanlig í Ur, frá sær

hjálpti Ábrahami at fáa so sterka trúgv. Tað kann læra okkum, hvussu vit kunnu fáa sterkari trúgv.

Hvussu tað var at tæna Jehova eftir Vatnflóðina

4 Hvussu lærdi Ábraham um Jehova Gud? Vit vita, at Jehova hevði trúfastar tænarar á jørðini tá á døgum. Ein teirra var Sem. Hóast hann ikki var tann elsti av teimum trimum synunum hjá Nóa, verður hann ofta nevndur fyrst. Orsøkin var eftir øllum at døma, at Sem hevði einastandandi trúgv.* Eina tíð eftir Vatnflóðina rópti Nóa Jehova fyri „Gud Sems“. (1 Mós. 9:26) Sem hevði virðing fyri Jehova og sannari tilbiðing.

5 Kendi Ábraham Sem? Møguliga gjørdi hann tað. Ímynda tær Ábraham, meðan hann var smádrongur. Tað hevur helst hugtikið hann at fáa at vita, at hann átti ein skyldmann, sum hevði livað í meira enn 400 ár. Sem hevði sæð óndskapin fyri Vatnflóðina, sæð at Vatnflóðin reinsaði alla jørðina, sæð at fyrstu tjóðirnar vórðu til, so hvørt sum menniskjuni gjørdust fleiri, og eisini sæð myrku dagarnar, tá ið Nimrod gjørdi uppreistur og bygdi Bábelstornið. Trúfasti Sem hevði einki við henda uppreisturin at gera, so tá ið Jehova blandaði tungumálini hjá teimum, sum bygdu tornið, hildu Sem og familja hansara fram at tosa upprunamálið hjá mannaættini, tað málið, sum Nóa tosaði. Ábraham var ættaður frá hesi familjuni. Tað er eyðsæð, at Ábraham hevði stóra virðing fyri Sem, meðan hann vaks upp. Og Sem var á lívi meginpartin av langa lívi Ábrahams. So kanska hevur Sem lært Ábraham um Jehova.

6 Í hvussu er lærdi frásøgan um Vatnflóðina Ábraham nógv. Hann legði seg eftir at liva við Gudi, eins og Nóa hevði gjørt. Tí vísti Ábraham avgudadýrkanini frá sær og var øðrvísi enn onnur í Ur, kanska eisini øðrvísi enn nærmastu skyldfólkini. Men hann fann sær eina góða konu. Hann gifti seg við Sáru, sum ikki bara

* Av synum Tara verður Ábraham á líknandi hátt ofta nevndur fyrst, hóast hann ikki var tann elsti.

4, 5. Hvør kann hava lært Ábraham um Jehova, og hvussu kunnu vit siga, at tað er ein møguleiki?

6. (a) Hvussu vísti Ábraham, at frásøgan um Vatnflóðina hevði lært hann nógv? (b) Hvussu var lívið hjá Ábrahami og Sáru?

var sjáldsom í vakurleika, men eisini í síni sterku trúgv á Jehova.* Hóast tey eingi børn áttu, gleddust tey uttan iva um at tæna Jehova saman. Tey tóku eisini foreldraleysa bróðurson Ábrahams, Lot, til sín.

7 Ábraham læt ongantíð avgudadýrkanina í Ur oyðileggja sítt samband við Jehova. Hann og Sára vóru fús at líkjast burturúr í tí spilta samfelagnum. Skulu vit menna sanna trúgv, mugu vit gera tað sama. Vit mugu eisini vera fús at líkjast burturúr. Jesus segði, at hansara lærisveinar ikki skuldu vera „av heiminum“, og at heimurin skuldi hata teir afturfyri. (***Les Jóhannes 15:19.***) Verður tú av og á keddur um, at skyldfólk ella onnur ikki vilja hava við teg at gera, tí tú hevur valt at tæna Jehova, mást tú minnast til, at tú ikki ert einsamallur. Tú tekur eftir góðu fyrimyndunum, Ábrahami og Sáru, sum eisini trúføst tæntu Gudi.

„Far úr landi tínum“

8 Ein dagin fekk Ábraham eina ógloymandi uppliving. Hann fekk eini boð frá Jehova Gudi! Bíblian sigur okkum ikki út í æsir, hvussu Ábraham fekk hesi boðini, men hon sigur, at „Gud dýrdarinnar“ vísti seg fyri hesum trúfasta manninum. (***Les Ápostlasøguna 7:2, 3.***) Kanska var tað ein eingil, sum vísti seg fyri Ábrahami, sum soleiðis slapp at hóma ómetaligu dýrd hins alvalda Guds. Vit kunnu bert ímynda okkum, hvussu fegin Ábraham var um at síggja munin á hinum livandi Gudi og teimum lívleysu avgudunum, sum fólk rundan um hann tilbóðu.

9 Hvørji vóru boðini frá Jehova til Ábraham? „Far úr landi tínum og frá skyldfólki tínum, og far til landið, ið Eg skal vísa tær!“ Jehova segði ikki *hvat* land, hann hevði í huga, men bert at hann skuldi vísa Ábrahami tað. Fyrst skuldi Ábraham tó fara úr heimlandi sínum og frá skyldfólki sínum. Í fornaldar Miðeystri hevði familjan sera stóran týdning. At ein maður skuldi fara frá skyldfólki sínum og flyta langt burtur, var ofta roknað sum ein ræðulig lagna. Summi hildu, at tað var verri enn deyðin.

10 Tað var allarhelst torført hjá Ábrahami at fara frá øllum hentleikunum í Ur. Ur var eyðsýniliga ein rokmikil og ríkur býur. (Sí rammuna „Býurin, sum Ábraham og Sára fóru úr“.) Útgrevstrar

* Um hetta mundið æt Sára Sárai, men seinni broytti Gud navn hennara til Sára, sum merkir „háborin“. — 1 Mós. 17:15.

7. Á hvønn hátt skulu lærisveinar Jesusar taka eftir Ábrahami?

8, 9. (a) Hvørja ógloymandi uppliving fekk Ábraham? (b) Hvørji vóru boðini frá Jehova til Ábraham?

10. Hví var tað allarhelst torført hjá Ábrahami og Sáru at fara úr heimi sínum í Ur?

vísa, at fín hús við nógvum hentleikum vóru í fornaldar Ur; í nøkrum vóru tólv ella fleiri rúm til familjur og tænarar, og rúmini umgirdu eitt steinsett tún. Millum annað var vanligt, at hús høvdu vatn, vesi og kloakkskipan. Minst eisini til, at Ábraham og Sára ikki vóru heilt ung; hann var helst í 70'unum og hon í 60'unum. Hann vildi ivaleyst, at Sára skuldi hava eina hampiliga góða tilveru og kenna seg trygga — sum ein og hvør góður maður hevði viljað. Hugsa tær allar samrøðurnar, spurningarnar og stúranirnar, tey hava havt í sambandi við hesa uppgávuna. Sum tað man hava glett Ábraham, at Sára tók við hesi avbjóðingini! Eins og hann var hon fús at fara frá øllum hesum hentleikunum.

11 Nú tá ið avgerðin var tikin, høvdu Ábraham og Sára úr at gera. Tey høvdu nógv at pakka og leggja til rættis. Hvat skuldu tey hava við sær á hesa ferðina út í tað ókenda, og hvat skuldu tey lata verða eftir? Næstringarnir hjá teimum høvdu sjálvsagt enn størri týdning. Hvat skuldu tey gera við Tara, sum jú var gamal? Tey gjørdu av at taka hann við sær og ansa eftir honum. Kanska samtykti hann fegin, tí frásøgan nevnir, at tað var hann, ættarfaðirin, sum tók familju sína og fór úr Ur. Hann var uttan iva givin at dýrka avgudar. Bróðursonur Ábrahams, Lot, fór eisini við teimum. — 1 Mós. 11:31.

12 At enda kom dagurin, tá ið tey skuldu fara. Ímynda tær ferðalagið, sum savnaðist uttan fyri býmúrarnar í Ur. Viðførið var lagt á kamelarnar og eslini, fylgini vóru savnað, familjan og tænararnir vóru til reiðar, og øll vóru spent at fara avstað.* Kanska vóru øll eygu vend á Ábraham fyri at vita, nær tey skuldu fara. Endiliga kom løtan, og tey fóru avstað og løgdu Ur aftur um seg við alla.

13 Nógvir tænarar hjá Jehova nú á døgum gera av at flyta til eitt stað, har tørvur er á fleiri boðarum. Nøkur gera av at læra seg eitt fremmant mál fyri at víðka sína tænastu. Onnur gera av at royna ymiskar tænastugreinir, sum tey kenna seg ótrygg við. Tað krevur vanliga offur at taka slíkar avgerðir — at vera ávísar materiellar ágóðar fyri uttan. Tá ið tænarar Jehova vísa ein slíkan fús-

* Nakrir granskarar seta spurnartekn við, um tað var vanligt at hava kamelar, tá ið Ábraham livdi. Men grundarlagið hjá teimum er veikt, tí Bíblian nevnir fleiri ferðir, at Ábraham átti kamelar. — 1 Mós. 12:16; 24:35.

11, 12. (a) Hvørjar fyrireikingar skuldu gerast, og hvørjar avgerðir skuldu takast, áðrenn farið varð úr Ur? (b) Hvussu ímyndar tú tær dagin, tá ið tey fóru avstað?

13. Hvussu vísa nógvir tænarar hjá Jehova nú á døgum sama hugburð sum Ábraham og Sára?

leika og taka eftir Ábrahami og Sáru, hava teir sanniliga rós uppiborið! Vísa vit eina slíka trúgv, kunnu vit vera vís í, at Jehova altíð fer at geva okkum nógv meira, enn vit geva honum. Hann lønir altíð teimum, sum vísa trúgv. (Hebr. 6:10; 11:6) Lønti hann Ábrahami?

Tey fóru um Eufratánna

14 Ferðalagið vandi seg so hvørt við at ferðast. Vit kunnu kanska ímynda okkum, at Ábraham og Sára skiftust ímillum at ríða og ganga, og at samrøðurnar teirra millum blandaðust við ljóðið av bjøllunum, sum hingu á kríatúrunum. Sum frá leið lærdu sjálvt tey, sum ikki vóru so von at ferðast, mestsum av handahógvi at seta upp og taka niður tjaldleguna og at hjálpa gamla Tara til rættis á einum kameli ella esli. Tey ferðaðust í ein útnyrðing og gingu fram við tí stóru Eufratánni. Dagar gjørdust til vikur, meðan tey spakuliga hildu leiðina fram gjøgnum landslagið.

15 Tá ið tey høvdu ferðast einar 960 kilometrar, komu tey at enda til smátturnar í Karan, ið høvdu skap sum býflugubøli. Karan var ein blómandi býur, ið lá á einum sera týðandi handilsvegi,

14, 15. Hvussu var ferðin úr Ur til Karan, og hví mundi Ábraham gera av at búsetast í Karan eina tíð?

Býurin, sum Ábraham og Sára fóru úr

Miðskeiðis millum Persaraflógvan og býin Bagdad liggur ein óruddiligur dungi av múrsteinum. Veðurbard av fúkandi sandstormum og stingandi sól liggur henda toftin púra einsamøll í eini stórari og ófruktbarari oyðimørk. Tøgnin verður bert slitin av ýlum frá ymiskum náttardýrum. Hetta er alt, ið er eftir av tí einaferð so mæta býnum Ur.

Men ímynda tær, hvussu Ur sá út fyri fýra túsund árum síðani. Á eystara áarbakka Eufrats liggur Ur sum ein blómandi handilsbýur. Skínandi kálkhvít hús og sølubúðir liggja á rað oman eftir buktutu gøtunum. Handilsmenn og kundar tingast um prísirnar í basarunum. Fólk arbeiða nátt og dag við at spinna mjólkarhvítt tógv úr stórum ullarlagdum. Trælir eru um at hokna undir vektini av innfluttum vørum, sum teir koma berandi við eftir knakandi landgongubrúm.

Alt hetta gongur fyri seg í skugganum av einum risastórum siggurati, sum sæst úr øllum býnum. Fólk koma í henda halgidómin at tilbiðja gudin, sum tey halda er orsøkin til ríkidømið í býnum — mánagudin Nanna, ella Sin.

Men hjá einum manni er lukturin av ofrunum, sum verða latin ovast á hesi veldigu pyramiduni, kortini ein vanheilagur og ramur roykur. Navn hansara er Ábraham.

sum strekti seg bæði eystureftir og vestureftir. Har búsettist familjan í eina tíð. Kanska var Tara ov veikur at ferðast longri.

16 Við tíðini doyði Tara, 205 ára gamal. (1 Mós. 11:32) Ábraham kendi seg sera uggaðan, tá ið Jehova aftur talaði til hansara. Hann treiv í aftur boðini, hann hevði givið í Ur, og legði meira aftrat lyftunum. Ábraham skuldi gerast eitt „stórt fólk“, og allar ættir á jørðini skuldu fáa møguleika at verða signaðar við honum. (***Les Fyrstu Mósebók 12:2, 3.***) Ábraham var fegin um henda sáttmálan millum hann og Gud og skilti, at nú var tíð at halda leiðina fram.

17 Men hesa ferð var enn meira at pakka, tí Jehova hevði signað Ábraham, meðan hann hevði verið í Karan. Frásøgan nevnir „alt tað, ið teir áttu — sum teir høvdu savnað sær — og fólkið, ið teir høvdu fingið sær í Karan“. (1 Mós. 12:5) Skuldi Ábraham gerast eitt fólk, hevði hann tørv á nógvum materiellum ognum og einum stórum húsarhaldi við nógvum tænastufólki. Jehova gevur ikki altíð tænarum sínum ríkidømi, men hann syrgir fyri, at teir fáa tað, sum teimum tørvar til at fremja hansara vilja. Styrktur á henda hátt helt Ábraham leiðina fram út í tað ókenda.

18 Fleiri dagsferðir úr Karan lá Karkemis, har stór ferðaløg vanliga fóru yvir um Eufratánna. Kanska var tað júst her, at Ábraham kom fram á eitt vegamót í søguni hjá Guds fólki. Eftir øllum at døma var tað 14. dagin í mánaðinum, sum seinni varð róptur nisan, at Ábraham við ferðalagi sínum fór yvir um ánna í 1943 f.o.t. (2 Mós. 12:40-43) Landið, ið Jehova hevði lovað at vísa Ábrahami, strekti seg suðureftir. Henda dagin kom sáttmálin, sum Gud gjørdi við Ábraham, í gildi.

19 Ábraham ferðaðist suður gjøgnum

16, 17. (a) Hvønn sáttmála var Ábraham fegin um? (b) Hvussu signaði Jehova Ábraham, meðan hann var í Karan?

18. (a) Nær kom Ábraham fram á eitt vegamót í søguni hjá Guds fólki? (b) Hvørjar aðrar týðandi hendingar fóru fram 14. nisan í árum, sum komu? (Sí rammuna „Ein týðandi dagur í bíbliusøguni“.)

19. Hvat nevndi Jehova í lyftinum, hann gav Ábrahami, og hvat kann tað hava mint Ábraham á?

Ein týðandi dagur í bíbliusøguni

Dagurin, tá ið Ábraham fór yvir um Eufratánna, hevur stóran týdning í bíbilsku tíðarrokningini. Aðrar umráðandi hendingar fóru fram henda sama dagin í seinni árum. Júst 430 ár seinni, tann 14. nisan í 1513 f.o.t., fríaði Jehova ísraelsfólk úr trældómi í Egyptalandi, so tey kundu ogna sær landið, sum Gud hevði lovað Ábrahami. (2 Mós. 12:40, 41; Gal. 3:17) Og sama dagin í ár 33 e.o.t. savnaði Jesus ápostlar sínar og gjørdi ein sáttmála við teir um, at teir skuldu verða partur av eini himmalskari stjórn, sum skjótt fer at loysa allar trupulleikarnar hjá mannaættini. (Luk. 22:29) Enn í dag savnast Jehova vitni á hvørjum ári tann dagin, sum svarar til 14. nisan eftir tí jødiska kalendaranum, til at minnast kvøldmáltíð Harrans. — Luk. 22:19.

At fara frá øllum hentleikunum í Ur hevði avbjóðingar við sær fyri Ábraham og Sáru

landið, og ferðalagið steðgaði nærindis eikina More, nærindis Sikem. Har talaði Jehova enn eina ferð við Ábraham. Hesa ferð nevndi Gud avkom Ábrahams í lyfti sínum, og hetta avkomið skuldi taka landið í ogn. Mundi Ábraham minnast aftur á profetiina, sum Jehova hevði opinberað í Eden, har hann umrøddi eitt „avkom“, sum einaferð skuldi bjarga mannaættini? (1 Mós. 3:15; 12:7) Kanska. Hann kann so dánt hava skilt, at hann var partur í eini størri ætlan hjá Jehova.

20 Ábraham var sera takksamur um framíhjárættin, Jehova gav honum. So hvørt sum hann ferðaðist gjøgnum landið — uttan iva varisliga, tí kána'anitar búðu har enn — steðgaði hann á og bygdi altar til Jehova, fyrst nærindis eikina More, síðani nærindis Betel. Hann ákallaði navn Jehova og takkaði helst Gudi sínum, meðan hann hugsaði um framtíðina hjá avkomi sínum. Kanska hevur hann eisini sagt grannunum, sum vóru kána'anitar, frá Gudi sínum. (***Les Fyrstu Mósebók 12:7, 8.***) Trúgvin hjá Ábrahami skuldi sjálvsagt koma at standa sína roynd á lívsleið hansara. Ábraham var skilagóður, tí hann dvøldi ikki við heimið og hentleikarnar, hann hevði havt í Ur. Hann hugsaði heldur um tað, ið lá fyri framman. Í Hebrearabrævinum 11:10 stendur um Ábraham: „Hann væntaði staðin, ið hevur fastan grundvøll, og hvørs byggimeistari og skapari er Gud.“

21 Vit, sum tæna Jehova í dag, vita nógv meira um henda ímyndarliga staðin, Guds ríki, enn Ábraham gjørdi. Vit vita, at Ríkið stjórnar úr himli og skjótt fer at beina fyri hesi heimsskipanini, og vit vita, at lovaða avkomið hjá Ábrahami, Jesus Kristus, stjórnar hesum ríkinum nú. Tað verður av sonnum ein framíhjárættur at sleppa at uppliva tíðina, tá ið Ábraham rísur upp og til fulnar fær greiðu á, hvussu ætlan Jehova varð framd! Hevði tú viljað sæð, hvussu Jehova uppfyllir øll síni lyfti? So mást tú endiliga halda fram at gera, sum Ábraham gjørdi. Ver ósjálvsøkin, lýðin og takka Jehova í bøn fyri tey framíhjárættindini, hann gevur tær. Tá ið tú tekur eftir trúnni hjá Ábrahami, verður „faðir alra teirra, sum trúgva“, á ein hátt eisini faðir tín!

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vísti Ábraham trúgv, tá ið talan var um avgudadýrkan?
- Hvat hugtekur teg í sambandi við, at Ábraham var fúsur at fara úr Ur?
- Hvussu signaði Jehova trúgv Ábrahams?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Ábrahami?

20. Hvussu vísti Ábraham, at hann var takksamur fyri framíhjárættin, Jehova gav honum?

21. Hvat vita vit um Guds ríki í mun til Ábraham, og hvat fært tú hug at gera?

KAPITTUL FÝRA

„Hagar sum tú fert, hagar fari eg“

RUTT kom gangandi saman við No’omi eftir einum vegastrekki, sum fór tvørtur um veðurbardu háslættarnar í Móabslandi. Tær vóru einsamallar nú, tveir evarska lítlir skapningar í einum landslagi, sum kundi tykjast óendaligt. Ímynda tær, at Rutt varnaðist, at tað leið móti kvøldi. Hon hugdi at vermammuni og hugsaði, at nú mundi skjótt vera tíð at finna sær eitt stað at sova. Hon elskaði No’omi og vildi gera alt fyri at hjálpa henni.

2 Báðar kvinnurnar bóru sorg. No’omi hevði verið einkja í fleiri ár, men nú syrgdi hon um, at hon nýliga hevði mist báðar synirnar hjá sær, Kiljon og Malon. Rutt syrgdi eisini. Malon var maður hennara. Hon og No’omi vóru báðar á veg til býin Betlehem í Ísrael. Hóast tær fylgdust til sama bý, var støðan hjá teimum ymisk. No’omi var á veg heim. Men Rutt var á veg inn í eina tilveru, hon ikki kendi. Hon var farin frá skyldfólki sínum, heimlandi sínum og øllum siðunum og gudunum har. — ***Les Rutt 1:3-6.***

3 Hví valdi henda unga kvinnan at gera eina so stóra broyting? Hvussu skuldi Rutt orka at byrja av nýggjum og samstundis taka sær av No’omi? Tá ið vit kanna hesar spurningarnar, fáa vit nógv at vita um trúnna hjá móabitisku kvinnuni Rutt, sum er vert at taka eftir. (Sí eisini rammuna „Eitt lítið meistaraverk“.) Men latið okkum fyrst vita, hvussu tað bar til, at hesar kvinnurnar vóru farnar tann langa vegin til Betlehem.

Ein familja í stórari sorg

4 Rutt vaks upp í Móabslandi, einum lítlum landi eystarumegin Deyðahavið. Økið var fyri tað mesta háslætti við lítlum skógarvøkstri og djúpum gjáum. Í Móabslandi vóru vanliga

1, 2. (a) Lýs ferðina hjá Rutt og No’omi og sorgina, tær bóru. (b) Hvussu var støðan hjá Rutt øðrvísi enn tann hjá No’omi?

3. Hvørjir spurningar kunnu hjálpa okkum at taka eftir trúnni hjá Rutt?

4, 5. (a) Hví flutti familjan hjá No’omi til Móabsland? (b) Hvørjum avbjóðingum var No’omi fyri í Móabslandi?

Í sorg síni leitaði Rutt sær ugga hjá No’omi

góð gróðrarlíkindi, eisini tá ið hungursneyð var í Ísrael. Og hungursneyð var júst orsøkin til, at Rutt hitti Malon og familju hansara. — Rutt 1:1.

5 Ein hungursneyð í Ísrael hevði fingið mannin hjá No'omi, Elimelek, at flyta úr heimlandi sínum til Móabsland at búgva har sum fremmandur við konu síni og báðum sonum sínum. Tað hevur allarhelst verið ein avbjóðing hjá hvørjum einstøkum í familjuni at varðveita trúnna, tí ísraelsmenn skuldu regluliga tilbiðja Jehova á tí heilaga staðnum, hann hevði ávíst. (5 Mós. 16:16, 17) Tað eydnaðist No'omi at varðveita trúnna. Men hon varð kortini niðurboygd av sorg, tá ið hon misti mannin. — Rutt 1:2, 3.

6 No'omi gjørdist kanska eisini kedd, tá ið synir hennara giftu seg við móabitiskum kvinnum. (Rutt 1:4) Hon visti, at ættarfaðirin hjá fólki hennara, Ábraham, gjørdi sær stóran ómak at finna soni sínum, Ísaki, eina konu millum sítt egna fólk, ið tilbað Jehova. (1 Mós. 24:3, 4) Seinni ávaraði Móselógin ísraelsmenn um ikki at lata synir ella døtur sínar gifta seg við fremmandum, fyri at Guds fólk ikki skuldi verða fløkt upp í avgudadýrkan. — 5 Mós. 7:3, 4.

7 Og kortini giftu Malon og Kiljon seg við móabitiskum kvinnum. No'omi var møguliga stúrin ella vónbrotin um hetta. Hvussu var og ikki, var hon bæði góð og blíð við verdøturnar, Rutt og Orpu. Hon vónaði kanska, at tær einaferð fóru at tilbiðja Jehova eins og hon. Í øllum førum vóru bæði Rutt og Orpa góðar við No'omi. Góða sambandið teirra millum kom teimum til góðar, tá ið vanlukkan hendi. Hvørgin av teimum ungu kvinnunum átti nakað barn, tá ið tær gjørdust einkjur. — Rutt 1:5.

8 Hjálpti átrúnaðarliga bakgrundin hjá Rutt henni at fóta sær eftir ein slíkan sorgarleik? Tað er ringt at ímynda sær. Móabitar tilbóðu nógvar gudar, og høvuðsgudurin kallaðist Kamos. (4 Mós. 21:29) Í síni gudsdýrkan hava teir eyðsýniliga verið líka harðligir og ógvusligir, sum vanligt var tá í tíðini, og til dømis ofrað børn. Alt tað, sum Malon og No'omi høvdu lært Rutt um góða og miskunnsama Gud Ísraels, Jehova, hevur allarhelst staðið sum ein týðiligur mótsetningur til gudsdýrkanina í Móabslandi. Jehova ráddi ikki við harðskapi, men við kærleika. (***Les Fimtu Mósebók 6:5.***) Eftir at Rutt hevði mist mann sín, knýtti hon seg

6, 7. (a) Hví hevur No'omi helst verið stúrin, tá ið synirnir hjá henni giftu seg við móabitiskum kvinnum? (b) Hví var atburðurin hjá No'omi í sambandinum við verdøturnar rósverdur?

8. Hví hevur Rutt helst fingið hug at nærkast Jehova?

ivaleyst enn nærri at No'omi. Hon hevur helst lurtað væl eftir tí, tann eldra konan segði henni um hin alvalda Gud, Jehova, um hansara undurfullu verk og um, hvussu væl hann fór við sínum fólki.

9 No'omi var spent at hoyra tíðindi úr heimlandi sínum. Ein dagin frætti hon, kanska frá einum ferðandi handilsmanni, at hungursneyðin í Ísrael var av. Jehova hevði ikki gloymt fólk sítt. Betlehem livdi aftur upp til navn sítt, sum merkir „breyðhús". No'omi gjørdi av at fara heimaftur. — Rutt 1:6.

10 Hvat skuldu Rutt og Orpa nú gera? (Rutt 1:7) Tær kendu seg báðar knýttar at No'omi, serliga eftir at tær høvdu mist menn sínar. Tað tykist, sum serstakliga Rutt var hugtikin av, hvussu hjartagóð No'omi var, og hvussu sterka trúgv hon hevði á Jehova. Tær tríggjar einkjurnar settu nú kós móti Juda.

11 Frásøgan um Rutt minnir okkum á, at sorgarleikir ráma bæði góð og ónd menniskju. (Præd. 9:2, 11) Hon vísir okkum eisini, at tað í sorgini er skilagott, at vit leita okkum ugga og linna hjá øðrum — serliga hjá teimum, ið leita sær skjól hjá honum, sum No'omi tilbað, Jehova Gudi. — Orðt. 17:17.

Trúfasti kærleikin hjá Rutt

12 Sum tær tríggjar einkjurnar nú vóru komnar væl áleiðis, fór No'omi at stúra. Hon hugsaði um tær báðar ungu kvinnurnar, sum fylgdust við henni, og um kærleikan, tær høvdu víst henni og sonum hennara. Hon vildi ikki leggja teimum stein oman á byrðu. Hvat hevði hon at bjóða teimum, um tær fóru úr heimlandi sínum og komu við henni til Betlehem?

13 At enda segði No'omi: „Vendið nú við og farið heimaftur, hvør til hús móður sínar! [Jehova] veri tykkum góður, eins og tit

9-11. (a) Hvørja avgerð tóku No'omi, Rutt og Orpa? (b) Hvat kunnu vit læra av sorgarleikunum, sum No'omi, Rutt og Orpa vóru fyri?

12, 13. Hví vildi No'omi hava Rutt og Orpu at fara heimaftur, heldur enn at koma við sær, og hvør var fyrsta hugsanin hjá teimum báðum ungu kvinnunum?

hava verið góðar, bæði við teir, ið farnir eru, og við meg!“ Hon segði eisini, at tað var hennara vón, at Jehova fór at signa tær, so tær aftur fingu mann og heim. „So kysti hon tær,“ stendur í frásøguni, og „tær skóru í grát“. Tað er lætt at skilja, hví Rutt og Orpa vóru so góðar við hesa hjartagóðu og ósjálvsøknu kvinnuna. Báðar søgdu: „Nei, vit koma við tær heimaftur til fólk títt!“ — Rutt 1:8-10.

14 Tað var kortini ikki so lætt at sannføra No’omi. Hon royndi sítt besta og segði við tær, at hon lítið fekk hjálpt teimum í Ísrael, nú tá ið hon ongan mann hevði, sum kundi taka sær av henni, ongar synir, tær kundu gifta seg við, og eingi útlit til nakað av hesum. Hon segði teimum, at tað veruliga píndi hana, at hon ikki var før fyri at taka sær av teimum. Orpa skilti, hvat No’omi meinti við. Hon hevði jú familju sína í Móabslandi, eina mammu og eitt heim, sum bíðaði henni. Tað tyktist meira lagaligt at verða verandi í Móabslandi. Tung um hjartað kysti hon No’omi farvæl og fór avstað. — Rutt 1:11-14.

15 Men hvat gjørdi Rutt? Grundgevingarnar hjá No’omi vóru eisini galdandi fyri hana. Tó lesa vit: „Rutt vildi ikki skiljast frá henni.“ Kanska var No’omi longu farin til gongu aftur, tá ið hon legði til merkis, at Rutt fylgdi aftan á henni. Hon mótmælti: „Tú sært, at hin sonarkona mín er farin heimaftur til fólk sítt og gud sín — far tú nú eisini heimaftur og fylg við hini sonarkonu míni!“ (Rutt 1:15) Hesi orðini hjá No’omi geva lesaranum eina týðandi

14, 15. (a) Hvat fór Orpa aftur til? (b) Hvussu royndi No’omi at yvirtala Rutt at fara heimaftur?

„Fólk títt skal vera fólk mítt, og Gud tín skal vera Gud mín“

upplýsing. Orpa fór ikki bert aftur til fólk sítt, men eisini til „gud sín“. Hon var nøgd við framvegis at tilbiðja Kamos og aðrar falskar gudar. Hevði Rutt tað eisini soleiðis?

16 Meðan Rutt stóð saman við No’omi á hesi oydnu leiðini, ivaðist hon onga løtu í, hvat hon skuldi velja. Hon elskaði veruliga No’omi — og Gud hennara. Tí segði Rutt: „Royn ikki at yvirtala meg at fara frá tær og fara heimaftur! Nei, hagar sum tú fert, hagar fari eg, og har sum tú búsetist, har búsetist eg; fólk títt skal vera fólk mítt, og Gud tín skal vera Gud mín; har sum tú doyrt, vil eg doyggja, og har vil eg verða jarðað. [Jehova] lati mær gangast illa, bæði nú og hereftir, um nakað annað enn deyðin skilir meg frá tær!“ — Rutt 1:16, 17.

17 Orðini hjá Rutt eru so merkisverd, at tey enn, umleið 3000 ár eftir deyða hennara, eru kend millum manna. Tey lýsa ein dýrabaran eginleika, trúfastan kærleika. Rutt var so góð við No’omi, at hon altíð vildi vera hjá henni, hvagar hon enn fór. Bert deyðin kundi skilja tær. Fólkið hjá No’omi skuldi nú eisini vera hennara fólk, tí hon var til reiðar at fara frá øllum, hon kendi í Móabslandi — eisini teimum móabitisku gudunum. Mótsett Orpu kundi Rutt av øllum hjartanum siga, at hon eisini vildi hava Jehova — sum No’omi tilbað — til Gud.*

18 Tær hildu nú leiðina fram, tværeinar, allan vegin til Betlehem. Mett verður, at ferðin kann hava vart eina heila viku. Men tær hava uttan iva uggað hvørja aðra í sorgini.

19 Í dag er heimurin fullur av sorg. Bíblian rópar okkara tíð fyri eina ’torføra tíð’, og vit uppliva nógvar sorgarleikir. (2 Tim. 3:1) Tí hevur trúfastur kærleiki, sum tann hjá Rutt, størri týdning enn nakrantíð. Trúfastur kærleiki — tann kærleikin, sum knýtir seg at onkrum og ikki vil sleppa tí aftur — er ein sterk megi, sum fremur tað góða í hesum ónda heimi. Okkum tørvar hann í sambandi við hjúnaband, familjuviðurskifti, vinaløg og í kristnu samkomuni. (***Les Fyrsta bræv Jóhannesar 4:7, 8, 20.***) Tá ið vit ala fram ein slíkan kærleika, taka vit eftir Rutt, sum var ein frálík fyrimynd hesum viðvíkjandi.

---

* Tað er vert at leggja til merkis, at Rutt ikki bert nýtti ópersónliga heitið „Gud“, sum nógv fremmand helst høvdu gjørt; hon nýtti eisini Guds persónliga navn, Jehova. *The Interpreter’s Bible* sigur: „Soleiðis leggur rithøvundurin dent á, at henda fremmanda kvinnan tilbað hin sanna Gud.“

16-18. (a) Hvussu vísti Rutt trúfastan kærleika? (b) Hvat kann Rutt læra okkum um trúfastan kærleika? (Sí eisini myndirnar av teimum báðum kvinnunum.)

19. Hvussu heldur tú, at vit kunnu taka eftir trúfasta kærleikanum hjá Rutt í familjuni, millum vinir og í samkomuni?

Rutt og No’omi í Betlehem

20 Eitt er sjálvsagt at vísa trúfastan kærleika í orðum, men nakað heilt annað er at vísa hann í verki. Rutt hevði ikki bert møguleika fyri at vísa No’omi trúfastan kærleika, men eisini Jehova Gudi, sum hon valdi at tilbiðja.

21 Loksins komu tær báðar kvinnurnar leiðina fram til Betlehem, eina bygd umleið tíggju kilometrar sunnan fyri Jerusalem. Tað tykist, sum No’omi og familja hennara høvdu verið høgt í metum í hesum lítla býnum, tí øll á staðnum tosaðu um, at No’omi var komin heim. Kvinnurnar hugdu at henni og søgdu: „Er hetta No’omi?“ Tíðin, hon hevði verið í Móabslandi, hevði eyðsýniliga sett síni spor; fleiri ár við hørðum arbeiði og sorg høvdu merkt bæði andlitsbragd og kropsburð. — Rutt 1:19.

22 No’omi fortaldi hesum skyldkonum og gomlu grannum, hvussu beiskt lívið var vorðið henni. Hon helt enntá fyri, at hon átti at verða kallað Mara, sum merkir „hin sorgarbundna“, heldur enn No’omi, sum merkir „hin lukkuliga“. Neyðars No’omi! Eins og Job á sinni helt hon, at tað var Jehova Gud, sum hevði latið alla hesa sorgina koma yvir hana. — Rutt 1:20, 21; Job 2:10; 13:24-26.

23 Sum tær báðar kvinnurnar so líðandi funnu seg til rættis í Betlehem, fór Rutt at hugsa um, hvussu hon best kundi syrgja fyri No’omi og sær sjálvari. Hon fann út av, at lógin, Jehova hevði givið sínum fólki í Ísrael, millum annað fevndi um eina umsorgarskipan, ið gagnaði teimum fátæku. Í heystingartíðini høvdu tey loyvi at fylgja aftan á akurfólkunum og sanka tað upp, sum lá eftir teimum, og eisini tað, sum vaks í útjaðaranum ytst á akrinum.* — 3 Mós. 19:9, 10; 5 Mós. 24:19-21.

* Hetta var ein einastandandi lóg; Rutt visti allarhelst ikki um nakra slíka lóg í sínum heimlandi. Tá á døgum vórðu einkjur í Miðeystri ikki serliga væl viðfarnar. Eitt uppslagsverk sigur: „Tá ið ein kona hevði mist mann sín, mátti hon vanliga líta á, at synirnir tóku sær av henni; átti hon ongan son, noyddist hon kanska at vera trælkvinna, skøkja ella doyggja.“

20-22. (a) Hvussu hevði tíðin í Móabslandi ávirkað No’omi? (b) Hvørja skeiva fatan hevði No’omi av sorgini, ið var komin yvir hana? (Sí eisini Bræv Jákups 1:13.)

23. Hvat fór Rutt at hugsa um, og hvør skipan var í Móselógini til tey fátæku? (Sí eisini undirgreinina.)

Eitt lítið meistaraverk

Bókin Rutt hevur verið lýst sum ein lítil gimsteinur, eitt lítið meistaraverk. Gaman í er bókin hvørki líka stór ella umfatandi sum Dómarabókin, ið kemur undan henni, og sum hjálpir okkum at tíðarfesta hendingarnar í bókini um Rutt. (Rutt 1:1) Sámuel profetur skrivaði eyðsýniliga báðar bøkurnar. So hvørt sum tú lesur alla Bíbliuna, tekur tú allarhelst undir við, at bókin Rutt hevur fingið eitt gott og vakurt pláss í Bíbliuni. Eftir at hava lisið um kríggj, álop og mótálop í Dómarabókini, kemur tú fram til hesa lítlu bókina, sum minnir okkum á, at Jehova ongantíð gloymir friðsom fólk, ið hava vanligar gerandistrupulleikar at stríðast við. Henda stutta og einfalda frásøgan lærir okkum nógv um kærleika, miss, trúgv og trúfesti, sum kann gagna okkum øllum.

24 Tíðin var komin at heysta bygg, tað var eyðsýniliga í apríl mánaði eftir okkara kalendara, og Rutt fór út á akrarnar at vita, hvør vildi lata hana arbeiða undir sankingarskipanini. Hon kom tilvildarliga út á akrarnar hjá einum manni, Boaz at navni, sum átti nógva jørð. Hann og maður No'omi, Elimelek, vóru skyldmenn. Hóast hon eftir lógini hevði rætt til at sanka, tók hon tað ikki sum givið; hon bað tænaran, ið var settur yvir akurfólkini, um loyvi til at arbeiða. Tað loyvdi hann henni, og Rutt fór alt fyri eitt til verka. — Rutt 1:22–2:3, 7.

25 Hugsa tær Rutt, har hon gekk aftan á akurfólkunum. So hvørt sum tey skóru byggið við akurknívum sínum, boygdi hon seg niður og hentaði upp tað, sum tey mistu ella løgdu eftir seg, bant øksini saman í bundi og bar tey til eitt stað, har hon seinni kundi sláa kjarnarnar úr øksunum. Tað var eitt seinført og møðsamt arbeiði, og longri út á fyrrapartin tey komu, strævnari varð tað. Men Rutt helt kortini fram og steðgaði bert á fyri at turka sveittan av pannuni og fyri at fáa sær ein bita.

26 Rutt mundi hvørki vóna ella vænta, at nakar fór at varnast hana, men so varð kortini. Boaz sá hana og spurdi tann unga tænaran, hvør hon var. Boaz, sum hevði sera sterka trúgv, heilsaði arbeiðsmonnunum — har nakrir av teimum kanska vóru dagløna-menn ella enntá fremmandir — við orðunum: „[Jehova] veri við tykkum!“ Og teir heilsaðu honum aftur. Hesin andaliga sinnaði eldri maðurin hevði faðirligan áhuga fyri Rutt. — Rutt 2:4-7.

24, 25. Hvat gjørdi Rutt, tá ið hon tilvildarliga kom út á akrarnar hjá Boazi, og hvussu var sankingararbeiðið?

26, 27. Hvussu var Boaz, og hvussu fór hann við Rutt?

Rutt var fús at arbeiða hart til tess at syrgja fyri sær sjálvari og No'omi

27 Boaz rópti Rutt 'dóttur mín' og bað hana halda fram at sanka á økrum hansara og at halda seg hjá gentunum har, so arbeiðsmenninir ikki skuldu gera henni nakað. Hann syrgdi fyri, at hon hevði nakað at eta um døgurðaleitið. (***Les Rutt 2:8, 9, 14.***) Men fram um alt rósti og uggaði hann hana. Hvussu tá?

28 Tá ið Rutt spurdi Boaz, hvussu tað bar til, at hann vísti henni vælvild, tóat hon var fremmand, svaraði hann henni, at hann hevði hoyrt um alt, ið hon hevði verið fyri vermammu sína, No'omi. No'omi hevði allarhelst fortalt kvinnunum í Betlehem nógv gott um Rutt, og tað var komið Boazi fyri oyra. Hann visti eisini, at Rutt var farin at tilbiðja Jehova, tí hann segði: „[Jehova] løni tær tað, ið tú hevur gjørt, og løn tín verði ríklig frá [Jehova] Gudi Ísraels, undir hvørs veingjum tú komst og leitaði tær lívd!“ — Rutt 2:12.

29 Sum hesi orðini munnu hava glett Rutt! Hon hevði veruliga valt at leita sær skjól undir veingjum Jehova Guds, eins og ein fuglaungi leitar sær tryggleika hjá foreldrunum. Hon takkaði Boazi fyri, at hann hevði tosað so blídliga við hana. Og hon helt fram at arbeiða líka til kvølds. — Rutt 2:13, 17.

30 Rutt hevði sterka trúgv, og hon er eitt frálíkt fyridømi hjá okkum, sum í dag stríðast fyri at fáa endarnar at røkka saman í hesum fíggjarliga torføru tíðum. Hon hugsaði ikki, at onnur skyldaðu henni nakað, og tí var hon takksom fyri alt, ið henni var givið. Hon skammaðist ikki við at arbeiða leingi og hart til tess at syrgja fyri einari, sum hon elskaði, sjálvt um talan ikki var um nakað serliga ærumikið arbeiði. Við takksemi tók hon ímóti og fylgdi góðum ráðum um, hvussu hon kundi arbeiða undir tryggum umstøðum og í góðum felagsskapi. Av enn størri týdningi er, at hon ongantíð misti sítt sanna skjól úr eygsjón — sín góða Faðir, Jehova Gud.

31 Vísa vit trúfastan kærleika á sama hátt sum Rutt og taka eftir hennara eyðmjúkleika, ídni og takksemi, verður okkara trúgv eisini eitt gott fyridømi hjá øðrum. Men hvussu tók Jehova sær av Rutt og No'omi? Tað fara vit at kanna í næsta kapitli.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vísti Rutt sína trúgv á Jehova Gud?
- Hvussu vísti Rutt trúfastan kærleika?
- Hví virðismetti Jehova Rutt?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Rutt?

28, 29. (a) Hvat orð hevði Rutt á sær? (b) Hvussu kanst tú eins og Rutt leita tær skjól hjá Jehova?

30, 31. Hvat kann frásøgan um Rutt læra okkum um arbeiðslag, takksemi og trúfastan kærleika?

KAPITTUL FIMM

Ein „dugnalig kvinna“

RUTT legði seg á knæ framman fyri dungan av byggøksunum, sum hon hevði samlað tann dagin. Tað var farið at líða móti kvøldi á økrunum rundan um Betlehem, og nógv arbeiðsfólk vóru longu farin til gongu niðan móti portrinum inn til tann lítla býin, sum lá á eini høvd nær við. Rutt hevði ivaleyst eymar vøddar, tí hon hevði arbeitt allan samlan dagin. Men hon gavst ikki so. Hon fór at sláa kjarnarnar úr øksunum við einum stavi ella treskitræi. Samanumtikið hevði hetta verið ein góður dagur — betri enn hon hevði væntað.

2 Lagaði lívið seg umsíðir fyri hesa ungu einkjuna? Sum vit fingu at vita í undanfarna kapitlinum, hevði hon knýtt seg at vermammuni, No’omi, og lovað at verða verandi hjá henni og at tilbiðja hennara Gud, Jehova. Hesar báðar einkjurnar fylgdust úr Móabslandi til Betlehem, og móabitiska kvinnan Rutt fann skjótt út av, at lógin, sum Jehova hevði givið Ísrael, syrgdi fyri, at tey fátæku og fremmandu í landinum fingu tað, teimum tørvaði. Og nú sá hon, at nøkur í Jehova fólki, sum vóru undirløgd Lógina og upplærd við henni, vóru so andaliga sinnað og blíð, at tað nam hennara særda hjarta.

3 Ein av hesum var Boaz, tann ríki eldri maðurin, sum átti akrarnar, har hon sankaði. Hann hevði víst henni faðirliga umsorgan henda dagin. Hon smíltist við sær sjálvari, tí hon hugsaði um, hvussu fittur hann var at rósa henni fyri at taka sær av No’omi, og fyri at hon hevði valt at leita sær skjól undir veingjum Jehova. — ***Les Rutt 2:11-14.***

4 Rutt hevur helst hugsað um lívið, sum lá fyri framman. Hvussu skuldi hon, ein fátæk og fremmand kvinna, ið hvørki hevði mann ella børn, syrgja fyri sær sjálvari og No’omi í árunum, sum komu? Mundu tær fara at klára seg fyri tað, sum hon

---

1, 2. (a) Hvat slag av arbeiði tókst Rutt við? (b) Hvat gott lærdi Rutt um Guds lóg og hansara fólk?

3, 4. (a) Hvussu hjálpti og gleddi Boaz Rutt? (b) Hvussu kann frásøgan um Rutt hjálpa okkum í teimum fíggjarliga torføru tíðunum, vit uppliva í dag?

sankaði? Og hvør skuldi taka sær av *henni*, tá ið hon bleiv gomul? Tað hevði verið skilligt, um hon stúrdi fyri slíkum. Í teimum fíggjarliga torføru tíðunum, vit uppliva í dag, eru nógv, sum hava líknandi stúranir at dragast við. Tá ið vit læra, hvussu trúgvin hjálpti Rutt at klára slíkar avbjóðingar, skilja vit, at har er nógv, vit kunnu taka eftir.

Hvat er ein familja?

5 Tá ið Rutt var liðug at sláa kjarnarnar úr øksunum og hevði samlað teir saman, sá hon, at hon hevði sankað okkurt um eina efu, ella 22 litrar, av byggi. Byrðan hjá henni vigaði kanska eini 14 kilo! Hon lyfti hana upp og bar hana á høvdinum, kanska í einum pjøka, og so fór hon leið sína til Betlehem, meðan sólin setti. — Rutt 2:17.

6 No’omi frøddi seg um at síggja elskaðu verdóttrina, og kanska stúrsaði hon við, tá ið hon sá ta stóru byrðuna av byggi, Rutt kom berandi við. Rutt hevði eisini tikið tað við heim, sum hon hevði leivt av matinum, ið Boaz hevði givið arbeiðsfólkunum. So nú fóru tær báðar at fáa sær ein bita at eta. No’omi spurdi: „Hvar hevur tú sankað øks í dag — hvar hevur tú verið? Signaður veri hann, ið vísti tær vælvild!“ (Rutt 2:19) No’omi var gløgg. Tá ið hon sá, hvussu nógv korn var í pjøkanum hjá Rutt, skilti hon á lagnum, at onkur hevði víst tí ungu einkjuni vælvild.

7 Tær báðar fóru at práta, og Rutt fortaldi No’omi, hvussu blíður Boaz hevði verið. Rørd segði No’omi: „[Jehova], sum ikki hevur tikið miskunn Sína, hvørki frá teimum, ið liva, ella frá teimum, ið farnir eru, Hann signi hann!“ (Rutt 2:20) Hon hugsaði, at vælvildin, sum Boaz vísti Rutt, kom frá Jehova, tí hann fær tænarar sínar at vísa blíðskap og lovar at løna fólki sínum vælvildina aftur, ið tey vísa.* — ***Les Orðtøkini 19:17.***

8 No’omi bað Rutt taka við tilboðnum frá Boazi og halda fram at sanka á økrum hansara og halda seg hjá gentum hansara, so arbeiðsmenninir ikki skuldu gera henni nakað. Rutt gjørdi, sum hon segði. Hon varð eisini verandi „hjá vermóður síni“. (Rutt 2:22, 23)

* Sum No’omi segði, vísir Jehova ikki bert teimum livandi miskunn, nei, sjálvt teimum deyðu vísir hann miskunn. No’omi hevði mist mann sín og báðar synirnar. Rutt hevði mist mann sín. Tær høvdu ivaleyst báðar verið góðar við hesar tríggjar menninar. Vælvild, ið varð sýnd No’omi og Rutt, varð soleiðis eisini sýnd monnunum, sum høvdu viljað, at onkur skuldi tikið sær av teimum báðum kvinnunum.

5, 6. (a) Hvussu gekst fyrsta dagin, Rutt sankaði á akrinum hjá Boazi?
(b) Hvat segði No’omi, tá ið hon sá Rutt?

7, 8. (a) Hvørjum helt No’omi, at vælvildin hjá Boazi kom frá, og hví?
(b) Á hvønn annan hátt vísti Rutt vermammu síni trúfastan kærleika?

Í hesum orðum síggja vit enn eina ferð tað, sum serliga eyðkendi Rutt — hennara trúfasti kærleiki. Frásøgan um Rutt fær okkum kanska at spyrja okkum sjálvi, um vit vísa okkara familju æru, um vit í trúfesti stuðla teimum, sum vit eru góð við, og bjóða teimum ta hjálpina, teimum tørvar. Jehova leggur altíð til merkis, tá ið slíkur trúfastur kærleiki verður vístur.

9 Ber tað til at siga, at Rutt og No'omi vóru ein familja? Nøkur halda, at í eini rættiligari familju skulu bæði vera maður, kona, sonur, dóttir, abbi, omma og so framvegis. Men frásøgan um Rutt og No'omi minnir okkum á, at tænarar Jehova kunnu lata upp hjørtu síni og fáa sjálvt ta minstu familjuna at glógva í hita, vinsemi og kærleika. Virðismetir tú familjuna, tú hevur? Jesus minti lærisveinar sínar á, at kristna samkoman kann vera sum ein familja hjá teimum, ið onga hava. — Mark. 10:29, 30.

„Hann er ein loysari okkara"

10 Rutt helt fram at sanka á økrunum hjá Boazi frá byggið varð heystað í apríl til hveitin varð heystað í juni. Sum vikurnar gingu, fór No'omi uttan iva at hugsa meira um, hvat hon kundi gera fyri sína elskaðu verdóttur. Tá ið tær vóru í Móabslandi, hevði No'omi ongar vónir um at kunna hjálpa Rutt at finna ein nýggjan mann. (Rutt 1:11-13) Men nú var hon farin at hugsa øðrvísi. Hon fór til Rutt og segði við hana: „Dóttir mín! Skuldi eg ikki hjálpt tær at fingið heim!" (Rutt 3:1) Tað var síður tá, at foreldur funnu børnum sínum ein maka, og Rutt var veruliga vorðin sum ein dóttir hjá No'omi. Hon vildi fegin finna eitt „heim" til Rutt — hon hugsaði um tryggleikan, sum eitt heim og ein maður kundu geva. Men hvat kundi No'omi gera?

Frásøgan um Rutt og No'omi minnir okkum á, at vit skulu virðismeta okkara familju

11 Fyrstu ferð Rutt tosaði um Boaz, segði No'omi: „Hesin maður er nær skyldur við okkum, hann er ein loysari okkara." (Rutt 2:20) Hvat merkti hetta? Í Guds lóg til Ísrael var í eini serligari skipan hugsað um familjur, sum vegna fátækradømi ella andlát komu illa fyri. Um ein kvinna gjørdist einkja, áðrenn hon hevði átt børn, var hon serliga illa stødd, tí so varð ættargreinin

9. Hvat kunnu Rutt og No'omi læra okkum um familju?

10. Á hvønn hátt vildi No'omi fegin hjálpa Rutt?

11, 12. (a) Hvørja góða skipan í Guds lóg sipaði No'omi til, tá ið hon rópti Boaz ein 'loysara'? (b) Hvussu tók Rutt ímóti ráðunum frá vermammu síni?

Rutt og No'omi hjálptu og stuðlaðu hvør aðra

kvett, og eingir eftirkomarar vóru at bera navnið á manninum víðari. Men Guds lóg segði, at ein bróðir hjá hesum manninum kundi gifta seg við einkjuni, so hon kundi bera ein arving í heim, sum kundi bera navnið á deyða manni hennara víðari og varðveita arvalutin hjá familjuni.* — 5 Mós. 25:5-7.

12 No'omi greiddi Rutt frá síni ætlan. Vit kunnu ímynda okkum, hvussu eyguni í hesi ungu kvinnuni vuksu, meðan vermamma hennara tosaði. Lógin í Ísrael var enn nýggj fyri Rutt, og nógvir av siðunum vóru enn rættiliga fremmandir. Men hóast hetta hevði hon so stóra virðing fyri No'omi, at hon lurtaði væl og virðiliga eftir hvørjum orði, hon segði. Tað, sum No'omi ráddi henni at gera, hevur kanska virkað løgið og gjørt hana illa við — ja, tað kundi enntá verið eyðmýkjandi fyri hana. Men kortini játtaði Rutt. Hon var eyðmjúk og segði: „Eg skal gera alt tað, ið tú sigur!" — Rutt 3:5.

13 Av og á kann tað vera torført hjá ungum fólki at lurta eftir ráðum frá teimum, sum eru eldri og hava fleiri royndir enn tey. Tað er so lætt at hugsa, at tey eldru ikki veruliga skilja, hvørjar avbjóðingar og trupulleikar tey ungu hava. Frásøgan um Rutt minnir okkum á, at tað loysir seg at lurta eftir vísdóminum hjá

* Rætturin at gifta seg við eini slíkari einkju fall eyðsýniliga fyrst brøðrunum hjá tí deyða manninum í lut og síðani nærmasta mannliga skyldfólkinum, og hetta var eisini galdandi fyri rættin til arvalutin. — 4 Mós. 27:5-11.

13. Hvat kann Rutt læra okkum um at taka við ráðum frá teimum eldru? (Sí eisini Job 12:12.)

Rutt var ósjálvsøkin og hevði bert reinar ætlanir í huga, tá ið hon fór til Boaz

eldri fólki, sum eru góð við okkum og vilja okkum tað besta. (***Les Sálm 71:17, 18.***) Men hvørji vóru ráðini hjá No'omi, og loysti tað seg veruliga hjá Rutt at taka við teimum?

Rutt á treskiplássinum

14 Tað kvøldið fór Rutt út á treskiplássið, sum var ein flatur, fastur vøllur, har fleiri bøndur tresktu kornið hjá sær og reinsaðu tað. Treskiplássið lá vanliga á eini fjallasíðu ella eini høvd, har lotið var frískt seint seinnapartin og tíðliga á kvøldi. Til at skilja kjarnarnar frá agnunum og øksunum brúktu arbeiðsfólkini eina kvísl ella ein breiðan og kúputan spaka at kasta kornið upp ímóti vindinum, sum fekk tær løttu agnarnar at fúka burtur, meðan kjarnarnir, sum vóru tyngri, duttu niður aftur á vøllin.

15 Rutt hugdi stillisliga at um kvøldið, tá ið arbeiðið var um at vera liðugt. Boaz hevði umsjón við, at kornið hjá honum varð reinsað og so líðandi gjørdist til ein stóran dunga. Tá ið hann hevði etið, legði hann seg við enda korndungans. Hetta var eyðsýniliga vanligt at gera tá í tíðini, møguliga fyri at ansa eftir, at einki av hesum dýrabara korni varð stolið. Rutt sá, at Boaz legði seg fyri náttina. Nú var tíðin komin at gera tað, No'omi hevði biðið hana gera.

16 Við titrandi hjarta nærkaðist Rutt Boazi. Hon varnaðist, at hann lá í fasta svøvni. Júst sum No'omi hevði sagt, fór hon spaku-

14. Hvat var eitt treskipláss, og hvussu varð tað brúkt?

15, 16. (a) Lýs støðuna á treskiplássinum, tá ið Boaz gjørdi seg lidnan at arbeiða um kvøldið. (b) Hvussu varð Boaz varur við, at Rutt lá við føtur hansara?

liga yvir til føtur hansara, lyfti upp kappan og legði seg har. Og so bíðaði hon. Tíðin gekk. Hjá Rutt hevur tað helst kenst sum ein ævi. Endiliga, um midnáttarleitið, fór Boaz at kvaklast við. Hann skalv av kulda og settist upp undir seg, kanska fyri at balla kappan um føturnar aftur. Men hann varð varur við, at onkur lá har. Sum sagt verður í frásøguni, „sá hann, at kvinna lá við føtur hansara“. — Rutt 3:8.

17 „Hvør ert tú?“ spurdi hann. Rutt skalv kanska á málinum, tá ið hon svaraði: „Eg eri Rutt, tænastukvinna tín — breið út kappahorn títt yvir tænastukvinnu tína, tí tú ert loysari mín!“ (Rutt 3:9) Nakrir nútímans tulkarar hava róð framundir, at tað, Rutt gjørdi og segði, hevði kynsligan dám, men teir gloyma tvær einfaldar sannroyndir. Í fyrra lagi fylgdi Rutt siðunum, sum vóru vanligir tá á døgum, og nógvir av teimum eru heilt ókendir hjá okkum í dag. Tí hevði tað verið skeivt at mett hennara gerðir eftir lága moralinum nú á døgum. Í seinna lagi vísir svarið hjá Boazi, at hann helt framferðarháttin hjá Rutt vera reinan og hava nógv rós uppiborið.

Rutt hevði sera gott orð á sær, tí hon var so góð við onnur og vísti teimum virðing

18 Boaz tosaði, og eingin ivi er um, at hansara eyma og vinaliga rødd uggaði Rutt. Hann segði: „[Jehova] signi teg, dóttir mín! Tú hevur nú víst enn meiri kærleika enn áður — at tú ert ikki farin eftir hinum ungu dreingjunum, hvørki fátækum ella ríkum!“ (Rutt 3:10) Boaz sipaði til trúfasta kærleikan, sum Rutt „áður“ hevði víst við at fara við No’omi aftur til Ísrael og taka sær av henni. Og „nú“ gjørdi hann vart við, at ein ung kvinna sum Rutt kundi havt lyndi til at leitað eftir einum nógv yngri hjúnafelaga, ríkum ella fátækum. Men hon vildi heldur vísa bæði No’omi og deyða manni hennara góðvild við at bera navnið hjá deyða manninum víðari í heimlandi hansara. Tað er lætt at skilja, at Boaz varð rørdur, tá ið hann sá, hvussu ósjálvsøkin henda unga kvinnan var.

19 Boaz helt fram: „Óttast tí nú ikki, dóttir mín! Alt tað, ið tú sigur, skal eg gera fyri teg; tí alt fólkið í býi mínum veit, at tú ert

17. Hvørjar tvær einfaldar sannroyndir gloyma tey, sum rógva framundir, at Rutt hevði okkurt ósømiligt í huga?

18. Hvat segði Boaz, sum uggaði Rutt, og hvørji tvey dømi um hennara trúfasta kærleika sipaði hann til?

19, 20. (a) Hví gifti Boaz seg ikki alt fyri eitt við Rutt? (b) Hvussu vísti Boaz, at hann hugsaði um Rutt og hennara umdømi?

dugnalig kvinna.“ (Rutt 3:11) Hann gleddist um at hava útlit til at gifta seg við Rutt, og tað kom kanska heldur ikki heilt óvart á hann, at hann varð biðin at vera loysari hennara. Men Boaz var ein rættvísur maður, og hann ætlaði sær ikki bert at vera sær sjálvum til vildar. Hann segði við Rutt, at ein annar loysari var, ein sum var nærri skyldur við familjuna hjá deyða manni No’omi. Tí fór Boaz fyrst at seta seg í samband við henda mannin og geva honum møguleika fyri at gifta seg við Rutt.

20 Boaz bað Rutt leggja seg aftur at hvíla seg, inntil tað fór at lýsa fyri degi; tá kundi hon fara til hús aftur, uttan at nakar varnaðist hana. Hann vildi bæði verja hennara og sítt egna umdømi, av tí at fólk av órøttum kundu hildið, at okkurt ósømiligt var farið fram. Rutt legði seg aftur við føtur hansara, kanska eitt sindur meira rólig, nú hann hevði svarað henni so vinaliga. Meðan tað enn var myrkt, fór hon á føtur. Boaz fylti kápuna hjá henni við stórari mongd av byggi, og so fór hon leiðina aftur til Betlehem. — ***Les Rutt 3:13-15.***

21 Sum tað man hava glett Rutt at hugsa um, at Boaz hevði sagt, at hon var kend fyri at vera ein „dugnalig kvinna“! Hetta umdømið mundi hon fyri ein stóran part hava fingið, tí hon var so íðin eftir at læra Jehova at kenna og at tæna honum. Hon hevði eisini víst No’omi og hennara fólki stóra vælvild og umhugsni, og hon var fús at fylgja teirra siðum, sum uttan iva vóru fremmandir fyri hana. Taka vit eftir trúnni hjá Rutt, fara vit væl við øðrum og hava virðing fyri teirra siðum. Gera vit tað, fáa vit eisini eitt gott umdømi.

Rutt fær eitt heim

22 „Hvussu gekst, dóttir mín?“ spurdi No’omi, tá ið Rutt kom heim. Hon var helst forvitin eftir at vita, um einkjustøðan hjá Rutt var óbroytt, ella um hon nú hevði útlit til at blíva gift. Rutt var skjót at siga vermammu síni frá øllum, sum var farið fram millum hana og Boaz. Hon vísti henni eisini ta stóru mongdina av byggi, sum Boaz hevði biðið hana geva No’omi.* — Rutt 3:16,17.

* Boaz gav Rutt seks mál av ókendari vekt — møguliga fyri at vísa, at eins og seks arbeiðsdagar vóru áðrenn sabbatshvíluna, vóru strævnu dagarnir hjá Rutt sum einkja skjótt taldir, tí nú fór hon skjótt at fáa ta hvílu, sum eitt heim og ein maður kundu geva henni. Hinvegin kundu hesi seks málini — kanska seks spakar av byggi — eisini heilt einfalt verið tann mongdin, Rutt orkaði at bera.

21. Hví mundi Rutt vera kend sum ein „dugnalig kvinna,“ og hvussu kunnu vit taka eftir henni?

22, 23. (a) Hvat vildi Boaz møguliga vísa við gávuni, hann gav Rutt? (Sí undirgreinina.) (b) Hvat bað No’omi Rutt gera?

Jehova signaði Rutt og gav henni framíhjárættin at verða ættarmóðir Messiasar

23 Skilagóð sum No'omi var, bað hon Rutt verða verandi heima tann dagin heldur enn at fara út at sanka á økrunum. Hon segði við Rutt: „Maðurin gevst ikki, fyrrenn hann fær hesi viðurskifti gjørd av, og tað í dag!" — Rutt 3:18.

24 No'omi hevði púra rætt viðvíkjandi Boazi. Hann fór niðan í býportrið, har teir elstu í býnum vanliga hittust, og bíðaði har eftir, at maðurin, ið var tann nærri skyldmaðurin, kom framvið. Meðan vitni vóru hjástødd, gav Boaz hesum manninum møguleika fyri at vera loysari og gifta seg við Rutt. Men maðurin vildi ikki, tí so hevði hann spilt sín egna arvalut. Tá segði Boaz, meðan vitnini í býportrinum hoyrdu, at hann vildi vera loysari og keypa ognina hjá deyða manni No'omi, Elimelek, og gifta seg við Rutt, einkjuni hjá syni Elimeleks, Malon. Boaz segði frá, at hansara vón í hesum sambandi var 'at reisa navn hansara, sum deyður var, á arvaluti hansara'. (Rutt 4:1-10) Boaz var veruliga ein heiðurligur og ósjálvsøkin maður.

25 Boaz gifti seg við Rutt. Síðani lesa vit: '[Jehova] læt hana verða við barn, og hon átti son.' Kvinnurnar í Betlehem signaðu No'omi og lovaðu Rutt, tí hon var No'omi betri enn sjey synir høvdu verið. Seinni fáa vit at vita, at sonur Rutt gjørdist ættarfaðir hjá Dávidi kongi. (Rutt 4:11-22) Og Dávid gjørdist ættarfaðir hjá Jesusi Kristi. — Matt. 1:1.*

26 Rutt varð sanniliga signað, og somuleiðis No'omi, ið var við til at uppala barnið, sum var tað hennara egna. Hesar báðar kvinnurnar eru ein livandi áminning um, at Jehova Gud leggur til merkis øll tey, sum í eyðmjúkleika stríðast fyri at taka sær av sínum egnu og tæna honum trúføst saman við hansara útvalda fólki. Hann gloymir ongantíð trúføst fólk sum Boaz, No'omi og Rutt.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vísti Rutt No'omi trúfastan kærleika?
- Hvussu vísti No'omi Rutt trúfastan kærleika?
- Hví er Jehova góður við tænarar sum Boaz, No'omi og Rutt?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Rutt?

* Rutt er ein av teimum fimm kvinnunum, sum standa í ættarskrá Jesusar í Bíbliuni. Ein onnur teirra er Rahab, sum var mamma Boaz. (Matt. 1:3, 5, 6, 16) Eins og Rutt var hon ikki úr Ísraelslandi.

24, 25. (a) Hvussu vísti Boaz, at hann var ein heiðurligur og ósjálvsøkin maður? (b) Hvussu bleiv Rutt signað?

26. Hvat minnir frásøgan um Rutt og No'omi okkum á?

KAPITTUL SEKS

Hon læt hjarta sítt upp fyri Gudi í bøn

HANNA royndi at fylla sína tíð við fyrireikingum til ferðina, so hon ikki skuldi hugsa um sínar trupulleikar. Tað átti at verið ein tíð at gleða seg. Maður hennara, Elkana, plagdi á hvørjum ári at fara til Silo at tilbiðja har í halgidóminum, og hann hevði altíð familjuna við sær. Jehova vildi, at slík høvi skuldu vera gleðilig. (***Les Fimtu Mósebók 16:15.***) Og tað er eingin ivi um, at Hanna, heilt frá hon var smágenta, hevði glett seg til slíkar høgtíðir. Men seinnu árini høvdu hennara umstøður broytt seg.

2 Hon kundi gleða seg um at hava ein mann, sum elskaði hana. Men Elkana hevði eina konu aftrat. Hon æt Peninna, og tað tykist, sum hon hevði sett sær fyri at vera órein við Hannu. Tað eydnaðist enntá Peninnu at gera hesar árligu ferðirnar til eina sanna plágu hjá Hannu. Hvussu tá? Og av enn størri týdningi, hvussu hjálpti sterka trúgvin Hannu at klára eina støðu, sum ofta kendist púra vónleys? Um tú ert fyri avbjóðingum, sum stjala tína gleði um lívið, fer frásøgan um Hannu kanska serliga at nema títt hjarta.

„Hví ert tú so sorgarbundin?“

3 Bíblian nevnir, at Hanna hevði tveir stórar trupulleikar. Tann fyrra hevði hon lítla ávirkan á og tann seinna als onga. Hon var í einum fleirkonuhjúnalagi, har hin konan hataði hana. Haraftrat kundi hon ikki fáa børn. Barnloysi er ein torfør støða hjá øllum kvinnum, sum leingjast eftir at fáa børn, men í teirri tíðini og í samfelagnum, sum Hanna livdi í, var tað orsøk til enn størri sorg. Allar familjur væntaðu at fáa børn, sum kundu bera familjunavnið víðari. Tað var bæði skomm og vanæra, um hjún eingi børn fingu.

4 Hanna hevði kanska klárað at borið tað, um Peninna ikki hevði argað hana. Fleirkonuhjúnalag hevur ongantíð verið nøkur

1, 2. (a) Hví var Hanna kedd, meðan hon fyrireikaði seg til eina ferð? (b) Hvat kann søgan um Hannu læra okkum?

3, 4. Hvørjar tveir stórar trupulleikar hevði Hanna at dragast við, og hví vóru teir báðir ein avbjóðing?

fyrimyndarlig støða at vera í. Kapping, klandur og hjartasorg var gerandiskostur. Tað var langt frá tí hjúnalagnum, sum Gud ásetti í urtagarðinum Eden, nevniliga tað millum *ein* mann og *eina* kvinnu. (1 Mós. 2:24) Bíblian málar soleiðis eina óhugaliga mynd av fleirkonuhjúnalagi, og beiska lýsingin av lívinum í húskinum hjá Elkana er eitt týðandi penslastrok í hesi myndini.

5 Elkana elskaði Hannu meira enn Peninnu. Sambært jødiskari søgn gifti hann seg fyrst við Hannu og so, nøkur ár seinni, við Peninnu. Hvussu var og ikki, fann Peninna, sum var sera øvundsjúk inn á Hannu, nógvar mátar at gera seg inn á sín kappingarneyta. Fyrimunurin, Peninna hevði fram um Hannu, var, at hon var før fyri at fáa børn. Hon fekk eitt barnið fyri og annað eftir, og gjørdist meiri og meiri innbilsk fyri hvørt barnið, hon fekk. Heldur enn at taka synd í Hannu og at ugga hana í hesi sorgarfullu støðuni, stoytti Peninna salt í sárið. Bíblian sigur, at Peninna argaði Hannu „fyri at loypa ilt í hana“. (1 Sám. 1:6) Hon gjørdi tað við vilja. Hon vildi særa Hannu, og tað eydnaðist henni.

6 Tað tykist, sum Peninnu serliga væl dámdi at arga Hannu, tá ið árliga ferðin til Silo stóð fyri durum. Elkana gav „øllum sonum og døtrum“ Peninnu nakrar lutir av ofrinum til Jehova. Men síni elskaðu Hannu gav hann eitt serligt stykki. Tað fekk øvundsjúku Peninnu at arga Hannu so illa við hennara barnloysi, at henda neyðars kvinna brast útúr at gráta og enntá misti matarlystin. Elkana sá týðiliga, at Hanna var sorgarbundin, og at hon einki át; tí royndi hann at ugga hana. Hann spurdi: „Hanna, hví grætur tú, og hví etur tú ikki? Hví ert tú so sorgarbundin? Eri eg tær ikki betri enn tíggju synir?“ — 1 Sám. 1:4-8.

Tá ið Hanna varð illa viðfarin heima við hús, leitaði hon sær ugga hjá Jehova

7 Tað skal Elkana eiga, hann skilti, at orsøkin, til at Hanna var so kedd, hevði við hennara barnloysi at gera. Og Hanna var ivaleyst glað um, at hann vissaði hana um sín kærleika.* Men Elkana nevndi einki um, hvussu órein Peninna var, og einki í bíbliufrásøguni bendir á, at

* Hóast bíbliufrásøgan sigur, at Jehova 'hevði stongt móðurlívið' hjá Hannu, so bendir einki á, at Gud ikki var nøgdur við hesa eyðmjúku og trúføstu kvinnu. (1 Sám. 1:5) Bíblian leggur stundum Gud undir at vera atvoldin til hendingar, sum hann í royndi og veru bert *loyvdi* í eina tíð.

5. Hví gjørdi Peninna seg inn á Hannu, og hvussu?

6, 7. (a) Hví mundi Hanna ikki siga Elkana frá allari søguni, tá ið hann nú royndi at ugga hana? (b) Merkti barnloysið hjá Hannu, at Jehova ikki var nøgdur við hana? Greið frá. (Sí undirgreinina.)

Tað píndi Hannu, at hon ikki kundi fáa børn, og Peninna gjørdi ilt verri

Hanna fortaldi honum tað. Kanska dugdi hon at síggja, at hon bara hevði gjørt støðuna verri við at siga honum, hvussu Peninna bar seg at. Hevði Elkana veruliga gjørt nakað fyri at broyta støðuna? Hevði Peninna ikki fingið enn størri illvilja móti Hannu, og høvdu børnini og tænararnir hjá hesi óreinu kvinnuni ikki bert fylgt hennara fyridømi? Hanna hevði bara kent seg meira og meira óynskta í sínum egna húski.

8 Uttan mun til um Elkana visti, hvussu órein Peninna var, sá Jehova Gud alt, sum fór fram. Hansara orð vísir okkum alla myndina, og er soleiðis teimum ein ávaring, ið av øvundsjúku ella hatri ynda at gera og siga ymiskt óreint, sum kanska einki tykist at hava upp á seg. Hinvegin kunnu tey, sum eru sakleys og friðsom eins og Hanna, ugga seg við, at okkara rættvísi Gud fær alt í rættlag, tá ið hann vil, og sum hann vil. (***Les Fimtu Mósebók 32:4.***) Hetta visti Hanna kanska, tí tað var nettupp hjá Jehova, hon leitaði sær hjálp.

'Ikki longur sorgarbundin'

9 Tíðliga á morgni var rokan í húsinum. Øll gjørdu seg klár til ferðina, eisini børnini. Henda stóra familjan skuldi ferðast meiri enn 30 kilometrar gjøgnum fjallalendið í Efraim fyri at koma til Silo.* Tað fór at taka ein ella tveir dagar til gongu. Hanna visti, hvussu Peninna fór at vera, men kortini fór hon við. Soleiðis gjørdist hon ein einastandandi fyrimynd hjá Guds tænarum fram til henda dag. Vit mugu ongantíð lata ringa atburðin hjá øðrum órógva okkara gudsdýrkan. Gjørdu vit tað, høvdu vit ikki fingið tær signingarnar, okkum tørvar fyri at halda út.

10 Tá ið tey høvdu gingið ein heilan dag eftir buktutum fjallagøtum, nærkaðust tey umsíðir Silo. Har lá býurin, á eini høvd við fjøllum næstan allan vegin rundan um. Sum tey nærkaðust býnum, hugsaði Hanna helst nógv um, hvat hon skuldi siga við Jehova í bøn. Tá ið tey vóru komin leiðina fram, fóru tey at eta eina máltíð saman. So skjótt sum til bar, reistist Hanna og fór yvir til halgidómin hjá Jehova. Høvuðspresturin Eli var har, hann sat við

* Frástøðan er grundað á, at heimbýurin hjá Elkana, Rama, væntandi var sami býurin, ið á Jesu døgum var kendur sum Arimatea.

8. Hví er tað uggandi at minnast til, at Jehova er hin rættvísi Gud, tá ið vit eru fyri óreinskapi ella órættvísi?

9. Hvat lærir tað okkum, at Hanna fór við til Silo, hóast hon visti, hvussu Peninna fór at vera?

10, 11. (a) Hví fór Hanna so skjótt sum til bar yvir til halgidómin? (b) Hvussu oysti Hanna út hjarta sítt í bøn til himmalska Faðir sín?

durastavin. Men Hanna hugsaði bert um Gud sín. Hon var vís í, at Gud fór at hoyra hennara bøn her í halgidóminum. Sjálvt um eingin annar til fulnar skilti hennara truplu støðu, so skilti Faðir hennara í himli hana. Sorgin bólgnaði upp innan í henni, og hon fór at gráta.

11 Hanna græt so illa, at hon ristist, øll sum hon var, meðan hon bað til Jehova. Varrar hennara rørdust, tá ið hon innantanna setti orð á sína sorg fyri Jehova. Hon bað leingi og oysti út hjarta sítt í bøn til Faðir sín. Men hon gjørdi meir enn bert at biðja Gud uppfylla hennara djúpa ynski um at fáa eitt barn. Hanna var ikki bert altrá eftir at verða signað av Gudi, men eisini eftir at geva honum nakað. Tí gav hon Jehova eitt lyfti og segði, at um hon fekk ein son, skuldi hon víga hann til eina lívlanga tænastu fyri Jehova. — 1 Sám. 1:9-11.

12 Soleiðis gjørdist Hanna ein fyrimynd hjá øllum tænarum Guds í sambandi við bøn. Jehova bjóðar sínum tænarum, at teir frítt kunnu venda sær til hansara í bøn og oysa út sínar stúranir, eins og eitt barn leitar sær hjálp hjá sínum góðu foreldrum. (***Les Sálm 62:9; Fyrra Tessalonikabræv 5:17.***) Pætur ápostul fekk íblástur til at skriva hesi uggandi orðini um bøn til Jehova: „Kastið alla sorg tykkara á Hann! Tí Hann hevur umsorgan fyri tykkum.“ — 1 Pæt. 5:7.

13 Men menniskju eru ikki so samkennandi sum Jehova. Meðan Hanna grátandi bað til Gud, kvakk hon við av eini rødd. Tað var Eli, høvuðspresturin, sum hevði eygleitt hana. Hann segði: „Hvussu leingi fert tú at ganga og vera drukkin? Síggj til, at tú letur renna av tær!“ Eli hevði lagt til merkis, at Hanna var kensluliga ávirkað, at varrar hennara rørdu seg, og at hon græt. Heldur enn at spyrja, hvat var galið, leyp hann framav og helt, at hon var drukkin. — 1 Sám. 1:12-14.

14 Sum tað man hava sært Hannu í hesi sálarkvølini at vera fyri eini so ógrundaðari ákæru — og so frá einum manni, sum hevði eitt slíkt álitisstarv! Kortini var hon aftur eitt frálíkt fyridømi í trúgv. Hon læt ikki ófullkomileikan hjá einum menniskja forða sær í at tilbiðja Jehova. Hon svaraði Eli við virðing og greiddi honum frá støðuni. Nú segði hann við hana, møguliga meira sinniliga og blídliga enn áður: „Far í friði! Gud Ísraels skal geva tær tað, ið tú hevur biðið Hann um!“ — 1 Sám. 1:15-17.

---

12. Hvat skulu vit hava í huga í sambandi við bøn, sum dømið við Hannu vísir?

13, 14. (a) Hvat var Eli skjótur at hugsa um Hannu, og hví? (b) Hvussu er svarið, Hanna gav Eli, eitt frálíkt dømi um trúgv?

15 Hvussu ávirkaði tað Hannu, at hon læt hjarta sítt upp fyri Jehova í bøn og tilbað hann í halgidómi hansara? Frásøgan sigur: „So fór kvinnan avstað, og nú át hon og sá ikki longur so sorgarbundin út.“ (1 Sám. 1:18) Nú lætnaði Hanna um hjartað. Hon hevði so at siga flutt sína tungu kensluligu byrðu yvir á herðar, sum vóru nógv breiðari og sterkari enn hennara egnu, herðarnar á himmalska Faðir sínum. (***Les Sálm 55:23.***) Er nakar trupulleiki ov tungur at bera hjá honum? Nei — ikki tá, ikki nú, nei, á ongum sinni!

16 Tá ið vit kenna okkum niðurboygd ella yvirtikin av sorg, er tað skilagott, at vit taka eftir Hannu og frítt venda okkum til hansara, sum sambært Bíbliuni „hoyrir bønir“. (Sl. 65:3) Gera vit tað í trúgv, verður okkara sorg kanska eisini umskift við ’frið Guds, sum stígur upp um alt vit’. — Fil. 4:6, 7.

„Eingin klettur er sum Gud okkara“

17 Morgunin eftir fór Hanna aftur yvir til halgidómin saman við Elkana. Hon hevði allarhelst sagt honum frá tí, hon hevði biðið um, og frá lyftinum, hon hevði givið, tí Móselógin segði, at ein maður hevði rætt til at ógilda eitt lyfti, sum kona hansara hevði givið uttan hansara góðkenning. (4 Mós. 30:11-16) Men tað kom ikki trúfasta Elkana til hugs. Nei, hann og Hanna tilbóðu Jehova saman í halgidóminum, áðrenn tey fóru heimaftur.

18 Nær skilti Peninna, at tað ikki longur nyttaði nakað at arga Hannu? Tað fáa vit ikki at vita í frásøguni, men orðingin *„ikki longur* so sorgarbundin“ rør fram undir, at Hanna nú varð glaðari. Tað tykist í hvussu er, sum Peninna skjótt skilti, at hennara óreinskapur ikki longur rein við hjá Hannu. Peninna verður ikki nevnd aftur í Bíbliuni.

19 Sum mánaðirnir gingu, vaks innari friðurin hjá Hannu til eina ósigiliga lukku. Hon var við barn! Í allari gleðini gloymdi Hanna ongantíð, hvaðani henda signingin var komin. Tá ið drongurin var borin, valdi hon navnið Sámuel, ið merkir „navn Guds“, og tað sipar eyðsýniliga til at ákalla navn Jehova, sum Hanna hevði gjørt. Tað árið fór hon ikki við Elkana og familjuni til Silo. Hon varð verandi heima við dreinginum í trý ár, inntil hon hevði vant hann frá brósti. Í huganum royndi hon at búgva seg til tann dagin, hon skuldi lata elskaða son sín frá sær.

15, 16. (a) Hvussu ávirkaði tað Hannu, at hon læt hjarta sítt upp fyri Jehova í bøn og tilbað hann í halgidóminum? (b) Hvussu kunnu vit taka eftir Hannu, tá ið vit eru kedd?

17, 18. (a) Hvussu stuðlaði Elkana Hannu í sambandi við lyftið, sum hon hevði givið? (b) Hvat bar ikki longur til hjá Peninnu?

19. Hvørja signing fekk Hanna, og hvussu vísti hon, at hon skilti, hvaðani signingin var komin?

20 Tað hevur ikki verið lætt at fara frá soninum. Hanna visti sjálvsagt, at Sámuel fór at hava tað gott í Silo. Kanska fóru nakrar av kvinnunum, sum tæntu í halgidóminum at ansa eftir honum. Men hann var so lítil, og hvørjari mammu leingist ikki eftir at vera saman við barni sínum? Kortini fóru Hanna og Elkana avstað við dreinginum, ikki treyðugt, men í takksemi. Tey ofraðu í húsi Guds og fóru til Eli við Sámueli og mintu Eli á lyftið, Hanna hevði givið fleiri ár frammanundan.

21 Hanna bað síðani eina bøn, sum Gudi dámdi so væl, at hann læt hana skriva í sítt innblásta orð. Meðan tú lesur orðini hjá Hannu, sum eru at finna í Fyrru Sámuelsbók 2:1-10, sært tú á hvørjari reglu, hvussu sterka trúgv hon hevði. Hon lovaði Jehova fyri, at hann nýtti vald sítt so avbera væl — hann eyðmýkti hini hugmóðigu og signaði tey kúgaðu, hann tók lív og bjargaði eisini undan deyðanum. Hon lovaði Faðir sínum fyri hansara framúrskarandi heilagleika, rættvísi og trúfesti. Við góðari grund kundi Hanna siga: „Eingin klettur er sum Gud okkara!“ Jehova er fullkomiliga álítandi og óbroytiligur, eitt skjól hjá øllum teimum kúgaðu, sum leita sær hjálp hjá honum.

22 Lítli Sámuel var sanniliga heppin at hava eina mammu, sum hevði so sterka trúgv á Jehova. Hóast hann sjálvandi saknaði hana, meðan hann vaks upp, føldi hann seg ongantíð gloymdan. Ár undan ári kom Hanna aftur til Silo, og hon hevði ein kappa við til Sámuel, sum hann

20. Hvussu hildu Hanna og Elkana lyftið, tey høvdu givið Jehova?

21. Hvussu sást sterka trúgvin hjá Hannu aftur í hennara bøn til Jehova? (Sí eisini rammuna „Tvær merkisverdar bønir“.)

22, 23. (a) Hví kunnu vit vera vís í, at Sámuel visti, at foreldrini elskaðu hann? (b) Hvørjar aðrar signingar gav Jehova Hannu?

Tvær merkisverdar bønir

Í teimum báðum bønunum hjá Hannu, sum standa at lesa í Fyrru Sámuelsbók 1:11 og 2:1-10, fáa vit nakrar sera áhugaverdar upplýsingar. Latið okkum kanna nakrar av teimum:

- Í fyrru bønini vendi Hanna sær til „[Jehova] Gud herskaranna“. Hon er tann fyrsta, sum er endurgivin í Bíbliuni fyri at nýta hetta heitið. Tað stendur 285 ferðir í Bíbliuni og sipar til, at Gud hevur ómetaliga stórar herar av andasynum undir sær.
- Legg til merkis, nær Hanna bað ta seinnu bønina. Tað var ikki, tá ið sonur hennara var føddur, men tá ið hon og Elkana fóru við honum til Silo, so hann kundi tæna Gudi í halgidóminum. So tað, sum Hanna frøddi seg um, var ikki at teppa kappingarneytan Peninnu, men um at Jehova hevði signað hana.
- Tá ið Hanna segði: „Hátt er horn mítt lyft upp í [Jehova],“ hevur hon kanska hugsað um oksan, eitt sterkt klyvjadjór, sum brúkar síni horn við stórari megi. Hanna segði í roynd og veru: ’Jehova, tú gert meg sterka.’ — 1 Sám. 2:1.
- Orðini hjá Hannu um „salvaða“ Guds verða mett sum profetisk. Hetta orðið fyri ’hin salvaða’ verður eisini endurgivið „messias“, og Hanna er tann fyrsti persónurin, sum er endurgivin í Bíbliuni fyri at nýta tað um ein framtíðar salvaðan kong. — 1 Sám. 2:10.
- Mamma Jesusar, Maria, tók nakrar av orðingunum hjá Hannu upp aftur umleið 1000 ár seinni, tá ið hon sjálv lovprísaði Jehova. — Luk. 1:46-55. (Sí kapittul 17.)

Hanna var veruliga Sámueli ein góð mamma

kundi brúka í tænastuni í halgidóminum. Hvør einasti stingur bar boð um hennara móðurkærleika og umsorgan. (***Les Fyrru Sámuelsbók 2:19.***) Tað er lætt at síggja Hannu fyri sær, sum hon læt Sámuel í tann nýggja kappan, hampaði hann við eymligum eygnabrái og tosaði blídliga við hann. Tað var ein signing hjá Sámueli at hava eina sovorðna mammu, og hann vaks upp og bleiv ein signing hjá foreldrunum og øllum Ísrael.

23 Hanna varð heldur ikki gloymd. Jehova læt upp hennara móðurlív, og hon bar Elkana fimm børn aftrat. (1 Sám. 2:21) Men kanska var størsta signingin hjá Hannu tað bandið, sum var millum hana og Faðir hennara, Jehova, og tað bara styrktist sum árini gingu. Vónandi fært tú eisini eitt tættari samband við Jehova, tá ið tú tekur eftir trúnni hjá Hannu.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vísti Hanna sína trúgv hóast mótstøðu?
- Hvussu sást trúgvin hjá Hannu í hennara bønum?
- Hví er Jehova góður við tænarar sum Hannu?
- Hvussu ætlar tú tær at taka eftir trúnni hjá Hannu?

KAPITTUL SJEY

Hann vaks upp hjá Jehova

SÁMUEL leit út yvir fólkið, sum var komið saman í býnum Gilgal. Hesin trúfasti maðurin, ið hevði tænt sum profetur og dómari í fleiri áratíggju, hevði kallað tjóðina saman. Tað var í mai ella juni mánaði eftir okkara kalendara, so turra árstíðin var longu byrjað. Akrarnir har um leiðir vóru gyltir við hveiti, sum var klár at heysta. Tøgn fall á mannamúgvuna. Hvussu skuldi Sámuel røkka hjørtum teirra?

2 Fólkið skilti ikki, hvussu álvarsom støðan var. Tey høvdu sett fram krav um at fáa ein kong, eitt menniskja, at stjórna yvir sær. Tey fataðu ikki, at tey soleiðis á grovan hátt høvdu vanvirt Gud sín, Jehova, og hansara profet. Í roynd og veru vrakaðu tey Jehova sum kong! Hvussu skuldi Sámuel fáa tey at angra?

Dreingjaárini hjá Sámueli læra okkum, at tað ber til at styrkja sína trúgv á Jehova hóast ringa ávirkan

3 Sámuel talaði. Hann segði við mannamúgvuna: „Eg eri gamal og gráur.“ Tey gráu hárini góvu orðum hansara tyngd. Síðani segði hann: „Eg havi stýrt hjá tykkum, frá tí eg var ungur og líka til henda dag.“ (1 Sám. 11:14, 15; 12:2) Hóast Sámuel var gamal, hevði hann ikki gloymt ungdóm sín. Hansara minni um teir dagarnar var enn livandi. Tær avgerðirnar, hann hevði tikið í uppvøkstrinum, høvdu givið honum eitt lív í trúgv og kærleika til tann Gud, hann tilbað, Jehova.

4 Sámuel noyddist at menna og varðveita sína trúgv, tí fólkini rundan um hann ferð eftir ferð vóru trúleys. Í dag er tað ein líka so stór avbjóðing at menna sína trúgv, tí vit liva í einum trúleysum

---

1, 2. Hvør var støðan, tá ið Sámuel talaði til ísraelsfólk, og hví mátti hann fáa tey at angra?

3, 4. (a) Hví talaði Sámuel um ungdóm sín? (b) Hví kann trúgvin hjá Sámueli gagna okkum í dag?

og spiltum heimi. (***Les Lukas 18:8.***) Latið okkum vita, hvat vit kunnu læra av Sámueli. Vit byrja í hansara dreingjaárum.

Gjørdi tænastu fyri ásjón Jehova í dreingjaárunum

5 Sámuel hevði ein sjáldsaman barndóm. Stutt eftir at hann var vandur frá brósti, møguliga tá ið hann var trý ára gamal ella eitt sindur eldri, fór hann undir lívlangu tænastu sína í halgidómi Jehova í Silo, meiri enn 30 kilometrar frá heimbýi sínum Rama. Foreldur hansara, Elkana og Hanna, vígdu Jehova son sín til eina serliga tænastu og gjørdu hann til nasireara fyri lívið.* Vil tað siga, at tey sleptu Sámueli upp á fjall og ikki elskaðu hann?

6 Nei, als ikki! Tey vistu, at sonur teirra fór at vera í góðum hondum í Silo. Høvuðspresturin Eli hevði uttan iva umsjón við tænastuni, og Sámuel arbeiddi tætt hjá honum. Har vóru eisini fleiri kvinnur, sum tæntu á ymiskan hátt í halgidóminum. — 2 Mós. 38:8; Dóm. 11:34-40.

7 Haraftrat gloymdu Hanna og Elkana ongantíð frumborna son sín, sum jú var svarið upp á eina bøn. Hanna hevði biðið Gud um ein son og lovað at víga hann til eitt lív í heilagari tænastu fyri Gud. Á hvørjum ári, tá ið Hanna vitjaði Sámuel, hevði hon seymað honum ein nýggjan kappa at vera í, tá ið hann gjørdi tænastu sína í halgidóminum. Hesin lítli drongurin hevur uttan iva frøtt seg um hesar vitjanirnar. Foreldrini fortaldu honum ivaleyst, hvussu stórur framíhjárættur tað var at sleppa at tæna Jehova hetta undursama staðið, og tað hevur allarhelst styrkt hann og fingið hann at trívast.

8 Foreldur í dag kunnu læra nógv av Hannu og Elkana. Tað er vanligt, at foreldur bara hugsa um tað materiella, tá ið tað snýr seg um barnauppaling, og skúgva andaliga tørvin hjá børnunum til viks. Men foreldrini hjá Sámueli raðfestu tað andaliga fremst, og tað hevði stóra ávirkan á, hvussu sonur teirra varð sum vaksin. — ***Les Orðtøkini 22:6.***

9 Vit kunnu ímynda okkum, at drongurin í uppvøkstrinum fór út at kanna fjøllini rundan um Silo. Meðan hann stóð og hugdi

* Nasirearar høvdu eitt lyfti á sær, sum millum annað forbjóðaði teimum at drekka rúsandi løg og at klippa hárið. Í flestu førum var eitt slíkt lyfti bert galdandi í eina tíð, men nakrir fáir, eitt nú Samson, Sámuel og Jóhannes doyparin, vóru nasirearar fyri lívið.

5, 6. Hvussu var barndómur Sámuels sjáldsamur, men hví vóru foreldrini vís í, at hann var í góðum hondum?

7, 8. (a) Hvussu vístu foreldrini Sámueli kærleika og styrktu hann ár undan ári? (b) Hvat kunnu foreldur í dag læra av foreldrunum hjá Sámueli?

9, 10. (a) Lýs halgidómin og kenslurnar, hin ungi Sámuel hevði í sambandi við hetta heilaga staðið. (Sí eisini undirgreinina.) (b) Hvørjar skyldur kann Sámuel millum annað hava havt, og hvussu heldur tú, at ung nú á døgum kunnu taka eftir honum?

oman í býin og dalin niðanfyri, fylti tað hann uttan iva við gleði og stoltleika at síggja halgidóm Jehova. Hesin halgidómurin var av sonnum eitt heilagt stað.* Hann var bygdur nærum 400 ár frammanundan, og tað var Móses, sum hevði havt umsjón við arbeiðinum. Hetta var einasti miðdepilin fyri sonnu tilbiðingina av Jehova í øllum heiminum.

10 Tann ungi Sámuel kom at elska halgidómin. Í frásøguni, sum hann sjálvur skrivaði, lesa vit: „Sámuel gjørdi tænastu fyri ásjón [Jehova], og drongurin gekk í lívkyrtli av lørifti.“ (1 Sám. 2:18) Hesin einfaldi kappin skuldi eyðsýniliga vísa, at Sámuel hjálpti prestunum í halgidóminum. Hóast Sámuel ikki sjálvur var prestur, hevði hann ymiskar skyldur, so sum at lata upp dyrnar inn til forgarðin í halgidóminum um morgunin og at ganga gamla Eli til handa. Hóast honum dámdi síni forrættindi í halgidóminum sera væl, varð hansara óseka hjarta sum frá leið ørkymlað. Okkurt var heilt galið í húsi Jehova.

Varð verandi reinur hóast siðspillu

11 Sum ungur var Sámuel vitni til óndskap og siðspillu av ringasta slag. Eli átti tveir synir, sum itu Hofni og Pinehas. Í frásøguni hjá Sámueli stendur: „Synir Eli vóru ringir menn — teir løgdu einki í [Jehova].“ (1 Sám. 2:12) Hesir báðir tankarnir hóska væl saman. Hebraiska orðið, ið er nýtt í hesum ørindinum og endurgivið „ringir menn“, merkir beinleiðis „synir ónyttu“. Og tað er ein beinrakin lýsing av Hofni og Pinehas, tí teir høvdu onga virðing fyri Jehova. Teir lótu als ikki rættvísu normar og krøv hansara við seg koma. Úr hesum sprettu allar hinar syndirnar hjá teimum.

Sámuel hevur helst verið sera harmur um at síggja óndskapin hjá synum Eli

12 Tað stóð heilt greitt í Guds lóg, hvørjar skyldur prestarnir høvdu, og hvussu teir skuldu bera seg at, tá ið teir ofraðu í halgidóminum. Og tað við góðari grund! Ofrini umboðaðu tað, sum Gud hevði gjørt fyri at fyrigeva syndir, so hansara fólk kundi vera reint í hansara eygum og harvið hava uppiborið hansara signing

* Halgidómurin hevði skap sum ein avlangur fýrakantur, og var so at siga eitt stórt tjald á einum træskrokki. Men hann var gjørdur úr fínasta tilfari — kópaskinni, vøkrum broderaðum klædnastykkjum og dýrabarum viði, sum var klæddur við silvuri og gulli. Samkomutjaldið var inni í einum avlongum forgarði, har eitt stórfingið brenniofturaltar eisini var. Líkt er til, at síðukømur vórðu bygd aftrat samkomutjaldinum til prestarnar at brúka. Sámuel svav kanska í einum av teimum.

11, 12. (a) Hvat grundleggjandi mistak gjørdu Hofni og Pinehas? (b) Hvørja siðspillu framdu Hofni og Pinehas í halgidóminum? (Sí eisini undirgreinina.)

og leiðbeining. Men Hofni og Pinehas fingu hinar prestarnar at vanvirða ofrini.*

13 Ímynda tær, hvussu skelkaður hin ungi Sámuel hevur verið, tá ið hann sá hesar grovu syndirnar fara fram, uttan at nakar talaði at. Hvussu nógv fólk mundi hann ikki síggja — harímillum fátøk, eyðmjúk og kúgað — sum komu til halgidómin í vón um at verða andaliga styrkt og uggað, fyri bert at fara vónsvikin, særd ella eyðmýkt heimaftur? Og hvussu man tað hava ávirkað hann, tá ið hann fann út av, at Hofni og Pinehas eisini lítilsvirdu lóg Jehova um kynslívið, við tað at teir lógu hjá nøkrum av kvinnunum, sum tæntu har í halgidóminum? (1 Sám. 2:22) Kanska vónaði hann, at Eli fór at gera nakað við málið.

14 Eli hevði allar møguleikar at gera nakað við henda vaksandi trupulleikan. Sum høvuðsprestur hevði hann ábyrgd av øllum, sum fór fram í halgidóminum. Sum pápi hevði hann skyldu at hava at synum sínum. Teir vóru jú ikki bara sær sjálvum til skaða, men eisini óteljandi øðrum í landinum. Men Eli sveik í báðum førum, bæði sum pápi og sum høvuðsprestur. Tað einasta hann gav synum sínum var ein viljaveik átala. (***Les Fyrru Sámuelsbók 2:23-25.***) Men synir hansara høvdu tørv á eini nógv harðari átalu. Teir framdu syndir, sum høvdu uppiborið deyðarevsing!

15 Tað var so galið, at Jehova sendi ein 'gudsmann', ein profet, ið ikki er nevndur við navni, til Eli við einum hørðum dómsboðskapi. Jehova segði við Eli: „Tú ærir synir tínar meir enn Meg.“ Gud boðaði frá, at óndu synir Eli báðir skuldu doyggja sama dag, og at familjan hjá Eli skuldi fáa harða revsing og enntá missa framíhjárættin at hoyra til prestastættina. Fekk henda sterka ávaringin familjuna at broyta seg? Frásøgan nevnir einki um nakra slíka broyting. — 1 Sám. 2:27–3:1.

16 Hvussu ávirkaði allan henda siðspillan hin unga Sámuel? Í hesi dimmu frásøguni eru stundum bjartir ljósglottar at hóma, góð

* Frásøgan vísir á tvey dømi um vanvirðing. Í fyrra lagi stóð nágreiniliga í Lógini, hvørji stykki av heiløgu ofrunum, prestarnir skuldu hava at eta. (5 Mós. 18:3) Men í halgidóminum høvdu teir óndu prestarnir gjørt sínar heilt egnu reglur. Teir fingu tænarar sínar til rætt og slætt at stinga ein stóran gaffil niður í pottin, har kjøtið stóð og kókaði, og tóku so tað fyrsta og besta stykkið, sum nú einaferð kom upp við! Í seinna lagi settu teir óndu prestarnir ein tænara at hótta tey, ið komu at bera fram brennioffur, og at krevja tað ráa kjøtið frá teimum, enntá áðrenn feittið var ofrað til Jehova. — 3 Mós. 3:3-5; 1 Sám. 2:13-17.

13, 14. (a) Hvussu ávirkaði óndskapurin, sum varð framdur í halgidóminum, uttan iva trúføst fólk? (b) Hvussu sveik Eli bæði sum pápi og sum høvuðsprestur?

15. Hvønn harðan boðskap gav Jehova Eli, og hvussu tók familjan hjá Eli ímóti ávaringini?

16. (a) Hvat lesa vit um framgongdina hjá hinum unga Sámueli? (b) Heldur tú, at tað er hjartanemandi at lesa um hesa framgongdina? Greið frá.

tíðindi um uppvøkstur og framgongd Sámuels. Minst til, at vit í Fyrru Sámuelsbók 2:18 lesa, at Sámuel í dreingjaárunum trúfastur „gjørdi tænastu fyri ásjón [Jehova]“. Sjálvt meðan hann var smádrongur, var tænastan fyri Jehova altso tað, sum hevði størstan týdning í hansara lívi. Í ørindi 21 í sama kapitli lesa vit nakað enn meira hjartanemandi: „Drongurin Sámuel vaks upp hjá [Jehova].“ Meðan hann vaks til, gjørdist hansara samband við Jehova sterkari og sterkari. Eitt so tætt og persónligt samband við Jehova er besta verjan ímóti allari siðspillu.

17 Sámuel kundi eins væl hugsað sum so, at tá ið høvuðspresturin og synir hansara kundu geva eftir fyri synd, kundi hann tað sama gera, sum honum lysti. Men vit mugu ongantíð brúka siðspilluna hjá øðrum, ei heldur hjá teimum, ið hava myndugleika, sum umbering fyri sjálvi at synda. Nú á døgum taka nógv ung kristin eftir Sámueli og ’vaksa upp hjá [Jehova]’ — sjálvt tá ið nøkur rundan um tey ikki eru góðar fyrimyndir.

18 Hvat hevði tað við sær, at Sámuel valdi at akta Jehova? Vit lesa: „Drongurin Sámuel vaks til og varð meiri og meiri avhildin, bæði av [Jehova] og menniskjum.“ (1 Sám. 2:26) Sámuel var altso væl dámdur, í hvussu er av teimum, hvørs meining hevði týdning. Jehova elskaði henda dreingin, tí hann var trúfastur. Og Sámuel ivaðist ikki í, at Gud fór at gera nakað við allan óndskapin, sum fór fram í Silo, men kanska hugsaði hann um, nær Jehova mundi fara at gera tað. Eina náttina kom svarið.

17, 18. (a) Hvussu kunnu ung kristin taka eftir Sámueli, tá ið tey síggja siðspillu? (b) Hvat vísir, at Sámuel valdi røttu leiðina?

„Tala — tænari Tín hoyrir“

19 Morgunin nærkaðist, men tað var enn myrkt. Ljósið bleiktraði frá stóru lampuni, sum enn brann í samkomutjaldinum. Alt var friðarligt, tá ið Sámuel hoyrdi eina rødd, sum rópti hansara navn. Hann hugsaði, at tað var Eli, sum nú var vorðin sera gamal og nærum blindur. Sámuel fór á føtur og „skundaði sær“ til hansara. Sært tú dreingin fyri tær, tá ið hann rennandi á leistum fór yvir til Eli at vita, hvat hann vildi? Tað er rørandi at leggja til merkis, at Sámuel vísti Eli virðing og vinsemi. Hóast allar syndirnar, Eli framdi, var hann framvegis høvuðsprestur Jehova. — 1 Sám. 3:2-5.

20 Sámuel vakti Eli og segði: „Her eri eg — tú rópti meg!“ Men Eli segði, at hann ikki hevði rópt og sendi dreingin í song aftur. Tað sama hendi tvær ferðir aftrat. Nú skilti Eli, hvat var á vási. Tá í tíðini var tað sjáldsamt, at Jehova gav fólki sínum sjónir ella ein profetiskan boðskap, og tað er lætt at skilja hví. Men Eli visti, at tað var Jehova, sum aftur talaði — nú við henda dreingin. Eli bað Sámuel fara at leggja seg aftur og segði honum, hvussu hann skuldi svara, tá ið Jehova talaði aftur. Sámuel aktaði. Løtu seinni hoyrdi hann røddina rópa: „Sámuel, Sámuel!“ Drongurin svaraði: „Tala — tænari Tín hoyrir!“ — 1 Sám. 3:1, 5-10.

21 Nú hevði Jehova endiliga ein tænara í Silo, sum lurtaði. Sámuel lurtaði altíð eftir Jehova. Gert tú eisini tað? Okkum nýtist ikki at bíða eftir, at ein yvirnatúrlig rødd talar til okkara á nátt. Í dag talar Guds rødd so at siga altíð til okkara. Hon talar til okkara gjøgnum hansara orð, Bíbliuna. Jú meiri vit lurta eftir Gudi og fylgja tí, hann lærir okkum, tess meiri veksur okkara trúgv. Soleiðis var tað hjá Sámueli.

22 Henda náttin í Silo var ein varði í lívinum hjá Sámueli, tí frá teirri stund fekk hann eitt heilt serligt samband við Jehova, við tað at hann gjørdist profetur og talsmaður hansara. At byrja við var drongurin bangin fyri at bera Eli boðskapin frá Jehova, tí tað var ein boðskapur um, at profetiin um hansara familju skjótt fór at ganga út. Men Sámuel mannaði seg upp, og Eli tók eyðmjúkur ímóti dóminum frá Gudi. Áðrenn long tíð var liðin, gekk alt tað út, sum Jehova hevði sagt: Ísrael fór í kríggj ímóti filistarum, Hofni

---

19, 20. (a) Lýs, hvat hendi Sámueli seint eina náttina í halgidóminum. (b) Hvussu fann Sámuel út av, hvør ið átti røddina, og hvussu fór hann við Eli?

21. Hvussu kunnu vit lurta eftir Jehova í dag, og hví er tað ómakin vert at gera tað?

22, 23. (a) Hvussu gekk dómurin út, sum Sámuel at byrja við var bangin fyri at bera fram? (b) Hvussu gjørdist umdømið hjá Sámueli betri?

Sámuel bað í trúgv, og Jehova svaraði við einum ódnarveðri

og Pinehas vórðu báðir dripnir sama dag, og Eli doyði, tá ið hann hoyrdi, at ørk Jehova var tikin. — 1 Sám. 3:10-18; 4:1-18.

23 Men umdømið hjá Sámueli sum trúfastur profetur gjørdist bara betri. „[Jehova] var við honum," stendur í frásøguni, og lagt verður aftrat, at Jehova læt allar profetiirnar hjá Sámueli ganga út. — ***Les Fyrru Sámuelsbók 3:19.***

Sámuel rópti til Jehova

24 Tóku ísraelsmenn eftir Sámueli og fingu tætt samband við Jehova og vórðu trúfastir? Nei. Sum frá leið vildu teir ikki bara hava ein profet at døma seg. Teir vildu vera sum hinar tjóðirnar og hava ein kong, eitt menniskja, at stjórna sær. Eftir boðum Jehova gav Sámuel teimum tað, teir ynsktu. Men hann noyddist at gera teimum greitt, hvussu álvarsom synd teirra var. Teir vístu ikki bert einum menniskja frá sær, men sjálvum Jehova! Tí kallaði hann fólkið saman, og bað tey koma til Gilgal.

25 Latið okkum venda aftur til spentu støðuna, tá ið Sámuel skuldi tala til ísraelsfólk í Gilgal. Sámuel, sum nú var vorðin eldri, minti tey á, at hann hevði verið trúfastur í nógv ár. Síðani lesa vit: „Sámuel rópti nú til [Jehova]." Hann bað Jehova senda eitt ódnarveður. — 1 Sám. 12:17, 18.

26 Ódnarveður? Ta turru árstíðina? Tað var púra óhoyrt! Um har var ein lítil neisti av ivasemi ella spottan millum fólkið, varð hann skjótt sløktur. Alt í einum myrknaði himmalin. Vindurin legði hveitina niður á akrinum. Toran gekk við buldur og brak. Og so fór at oysa niður. Hvussu tók fólkið tað? „Tá fall stórur ótti á alt fólkið fyri [Jehova] og Sámuel." Endiliga skiltu tey, hvussu álvarsliga tey høvdu syndað. — 1 Sám. 12:18, 19.

27 Tað var ikki Sámuel, men Gud hansara, Jehova, sum hevði rokkið teirra óndu hjørtum. Frá Sámuel var ungur til hann bleiv gamal, setti hann sítt álit á Jehova. Og Jehova signaði hann. Til henda dag er Jehova ikki broyttur. Hann er enn við teimum, sum taka eftir trúnni hjá Sámueli.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvat hjálpti Sámueli at fáa sterka trúgv í dreingjaárunum?
- Hvussu hjálpti trúgvin Sámueli at standa ímóti ringari ávirkan?
- Hvussu hjálpti trúgvin Sámueli at vinna á ótta?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Sámueli?

---

24. Hvat kravdu ísraelsmenn sum frá leið, og hví var tað ein álvarsom synd?

25, 26. Hvussu hjálpti Sámuel fólkinum at skilja, hvussu álvarsliga tey høvdu syndað ímóti Jehova?

27. Hvat heldur Jehova um tey, sum taka eftir trúnni hjá Sámueli?

KAPITTUL ÁTTA

Hóast vónbrot stóð hann fastur

SÁMUEL føldi sorgina í Silo. Tað tóktist næstan, sum býurin var um at drukna í tárum. Grátur hoyrdist allarhelst úr nógvum húsum, tí kvinnur og børn syrgdu um, at pápar, menn, synir og brøður ikki komu heimaftur. Ísrael hevði mist einar 30.000 hermenn í einum ræðuligum bardaga móti filistarum stutt eftir, at teir høvdu mist 4000 í einum øðrum bardaga. — 1 Sám. 4:1, 2, 10.

2 Hetta var bert ein av mongum sorgarleikum. Hofni og Pinehas, teir báðir óndu synirnir hjá høvuðsprestinum Eli, vóru farnir í bardaga og høvdu tikið heilagu sáttmálaørkina við sær úr Silo. Sáttmálaørkin, sum vanliga hevði til húsa í tí alraheilagasta í samkomutjaldinum, skuldi vísa, at Gud var hjástaddur. Ísraelsmenn hildu býttisliga, at høvdu teir bert ørkina við sær í bardaga, fór hon at verja teir og geva teimum sigur. Men filistarar tóku ørkina og drupu Hofni og Pinehas. — 1 Sám. 4:3-11.

3 Sáttmálaørkin hevði verið í halgidóminum í Silo í øldir. Men nú var hon burtur. Tá ið 98 ára gamli Eli frætti hetta, datt hann eftir nakkanum av stóli sínum og doyði. Sama dag gjørdist verdóttir hansara einkja og doyði í barnsburði. Í tí hon andaðist, segði hon: „Burtur er dýrdin vikin frá Ísrael.“ Silo fór ongantíð at verða sami býur aftur. — 1 Sám. 4:12-22.

4 Hvussu mundu hesi stóru vónbrotini fara at ávirka Sámuel? Hevði hann so sterka trúgv, at hann fekk hjálpt einum fólki, sum Jehova ikki longur vardi og hevði tokka til? Hjá okkum øllum verður trúgvin viðhvørt roynd av avbjóðingum og vónbrotum. Latið okkum tí vita, hvat frásøgan um Sámuel kann læra okkum í tí sambandi.

---

1. Hví var grátur og sorg í Silo?

2, 3. Hvør rød av sorgarleikum hevði tikið burtur dýrdina frá Silo?

4. Hvat fara vit at kanna í hesum kapitlinum?

Hvussu fekk Sámuel hjálpt fólkinum at klára ræðuligan miss og vónbrot?

Hann 'útinti rættvísi'

5 Nú steðgar frásøgan um Sámuel eina løtu og fer at snúgva seg um sáttmálaørkina. Vit fáa at vita, hvussu illa tað gekst filistarum, tí teir høvdu tikið ørkina, og at teir noyddust at lata hana aftur. Næstu ferð Sámuel verður nevndur, eru eini 20 ár liðin. (1 Sám. 7:2) Hvørjum var hann upptikin av hesi árini?

6 Vit fáa at vita, at áðrenn hetta tíðarskeiðið byrjaði, 'kom orð Sámuels til alt Ísrael'. (1 Sám. 4:1) Frásøgan sigur, at táið hetta tíðarskeiðið var av, fór Sámuel at vitja tríggjar býir í Ísrael á hvørjum ári fyri at taka sær av ósemjum og ymiskum spurningum. Og so fór hann heimaftur til heimbýin, Rama. (1 Sám. 7:15-17) Sámuel hevði altíð úr at gera, og hesi umrøddu 20 árini vóru helst einki undantak.

7 Vegna siðloysið og óndskapin, sum synir Eli høvdu framt, var trúgvin hjá fólkinum viknað. Tað tykist, sum nógv av tí sama vendu sær til avgudadýrkan. Men eftir tógvið stríð í 20 ár, hevði Sámuel henda boðskapin at bera fólkinum: „Ætla tit at venda við til [Jehova] av øllum hjarta tykkara, so beinið burtur hinar fremmandu gudar og Astarturnar, vendið hjarta tykkara til [Jehova] og tænið Honum eina! So skal Hann bjarga tykkum av hondum Filistara.“ — 1 Sám. 7:3.

Hóast Bíblian ikki nevnir Sámuel í eitt 20 ára langt tíðarskeið, kunnu vit vera vís í, at hann hevði úr at gera í tænastuni fyri Jehova

8 'Hond filistara' lá tung á fólkinum. Av tí at herur Ísraels lá í sori, hildu filistarar, at teir kundu kúga Guds fólk og sleppa snikkaleysir. Men Sámuel vissaði fólkið um, at vendu tey bert aftur til Jehova, fór alt at broyta seg. Vildu tey so tað? Tíbetur beindu tey fyri sínum avgudum og „tæntu [Jehova] eina“, og tað gleddi Sámuel stórliga. Hann gav boð um, at fólkið skuldi koma saman í Mizpa, sum var ein býur í fjallalendinum norðanfyri Jerusalem. Fólkið savnaðist, fastaði og angraði sína avgudadýrkan. — ***Les Fyrru Sámuelsbók 7:4-6.***

9 Men tað kom filistarum fyri oyra, at fólkið savnaðist, og teir ætlaðu at gera sær dælt av støðuni og sendu her sín til Mizpa at

---

5, 6. Hvat snýr frásøgan seg um í eitt 20 ára langt tíðarskeið, og hvat tókst Sámuel við ta tíðina?

7, 8. (a) Hvønn boðskap hevði Sámuel at bera fólkinum eftir at hava stríðst teirra millum í 20 ár? (b) Hvussu tók fólkið ímóti boðskapinum frá Sámueli?

9. Hvørjari støðu royndu filistarar at gera sær dælt av, og hvussu ávirkaði hesin vandin Guds fólk?

knúsa hesar tænarar Jehova. Ísraelsmenn frættu, at filistarar vóru á veg. Ræðsluslignir bóðu teir Sámuel biðja fyri sær. Tað gjørdi hann og bar eisini fram eitt offur. Meðan hann gjørdi hetta, nærkaðist filistaraherurin Mizpa. Tá svaraði Jehova bønini hjá Sámueli. Hann læt eitt vreiðiróp gella. Hann 'sendi sama dag eitt øgiligt toruveður yvir Filistarar'. — 1 Sám. 7:7-10.

10 Vóru filistarar eins og smábørn, sum bebbarædd fara stetlandi til mammu sína at krógva seg, tá ið toran gongur? Nei, teir vóru djarvir og royndir hermenn. Hetta toruveðrið má altso hava verið nógv øðrvísi enn tað, teir vóru vanir við. Var ljóðið av hesum 'øgiliga toruveðrinum' óvanliga hart? Gekk toran frá einum klárum og bláum himli, ella gav fjallalendið afturljóð, so ruðuleiki stóðst av tí? Hvussu var og ikki, vórðu filistarar skelkaðir inn at sálini. Í øllum hurlivasanum broyttist støðan brádliga. Teir, ið lupu á, vórðu nú sjálvir álopnir. Ísraelsmenn komu brestandi út úr Mizpa, vunnu á teimum og eltu teir líka til eitt stað, sum lá í ein útsynning úr Jerusalem. — 1 Sám. 7:11.

Filistarar hildu, at teir kundu gera sær dælt av, at fólk Jehova savnaðist í Mizpa

11 Hesin bardagin var eitt vegamót. Filistarar tóku seg longri og longri burtur, so leingi sum Sámuel var dómari. Býirnir, sum filistarar høvdu tikið, komu so hvørt aftur í hendurnar á Guds fólki. — 1 Sám. 7:13, 14.

12 Øldir seinni nevndi Paulus ápostul Sámuel millum teir trúføstu dómararnar og profetarnar, ið „útintu rættvísi". (Hebr. 11:32, 33) Sámuel gjørdi av sonnum tað, sum var gott og rætt í eygum Guds, og eggjaði eisini øðrum til at gera tað sama. Tað, sum hjálpti honum støðugt at útinna rættvísi, var, at hann í tolni bíðaði eftir Jehova og trúfastur tænti honum hóast vónbrot. Hann vísti eisini takksemi. Eftir sigurin í Mizpa reisti Sámuel ein minnisvarða til minnis um, at Jehova hevði hjálpt sínum fólki. — 1 Sám. 7:12.

13 Hevur tú hug at 'útinna rættvísi'? Um so er, hevði tað verið gott hjá tær at tikið eftir Sámueli í sambandi við hansara tol, eyðmjúkleika og takksemi. (***Les Fyrra bræv Pæturs 5:6.***) Hvør av

10, 11. (a) Hví hevur tað ikki verið eitt heilt vanligt toruveður, sum Jehova sendi ímóti filistaraherinum? (b) Hvat hevði bardagin í Mizpa við sær?

12. Hvat merkir tað, at Sámuel 'útinti rættvísi', og hvørjir eginleikar hjálptu honum at gera tað?

13. (a) Hvørjum eginleikum hava vit tørv á, um vit skulu taka eftir Sámueli? (b) Nær heldur tú, at tað er gott at ala fram eginleikar sum teir, Sámuel hevði?

okkum hevur ikki tørv á slíkum eginleikum? Tað var gott, at Sámuel menti og vísti slíkar eginleikar, meðan hann var lutfalsliga ungur, tí táið hann gjørdist gamal var hann fyri enn størri vónbrotum.

„Synir tínir ganga ikki í fótasporum tínum“

14 Næstu ferð vit lesa um Sámuel, var hann „vorðin gamal“. Sámuel hevði nú tveir synir, Jóel og Abia, og hann leit teimum í hendi at hjálpa sær at døma fólkið. Men teir høvdu tíverri ikki uppiborið eitt slíkt álit. Hóast Sámuel var reiðiligur og rættvísur, brúktu synir hansara støðuna til egnan fyrimun, við tað at teir boygdu rættin og tóku við mutri. — 1 Sám. 8:1-3.

15 So ein dagin komu teir elstu í Ísrael til hansara at klaga. „Synir tínir ganga ikki í fótasporum tínum,“ søgdu teir. (1 Sám. 8:4, 5) Visti Sámuel um henda trupulleikan? Tað nevnir frásøgan einki um. Men mótsett Eli var Sámuel ikki ein eftirlátin pápi. Jehova hevði at Eli og revsaði hann, tí hann ikki átalaði tað, sum synir hansara gjørdu, og tí hann ærdi synir sínar meir enn Gud. (1 Sám. 2:27-29) Jehova ákærdi ongantíð Sámuel fyri slíkt.

14, 15. (a) Hvørjum stórum vónbroti var Sámuel fyri, táið hann var „vorðin gamal“? (b) Var Sámuel ein eftirlátin pápi eins og Eli? Greið frá.

Hvussu klæraði Sámuel at standa fastur, hóast hann var vónsvikin av, at synir hansara gjørdu uppreistur?

16 Frásøgan nevnir einki um skommina, stúranina ella vónbrotið, Sámuel allarhelst kendi, tá ið hann hoyrdi, at synir hansara framdu óndar gerðir. Nógv foreldur duga bert alt ov væl at ímynda sær, hvussu Sámuel man hava havt tað. Í okkara døpru tíð gera børn og ung í øllum heiminum uppreistur ímóti myndugleika og uppaling foreldranna. (***Les Seinna Timoteusbrævv 3:1-5.***) Foreldur, sum hava uppreistrarhugað børn, kunnu kanska kenna ein ávísan ugga og hjálp í døminum við Sámueli. Hann læt ikki trúloysið hjá synunum ávirka sín egna atburð á nakran hátt. Minst til, at sjálvt um orð og uppaling ikki rína við hjá børnunum, kann góða fyridømið hjá foreldrunum kanska gera tað. Og foreldur hava altíð møguleika at gleða sín egna Faðir, Jehova Gud, eins og Sámuel gjørdi.

'Set okkum kong'

17 Havisjúkan og sjálvgóðskan hjá synum Sámuels fekk nógv størri avleiðingar, enn teir nakrantíð kundu havt ímyndað sær. Teir elstu í Ísrael søgdu nú við Sámuel: „Set okkum tí nú kong at døma okkum, eins og allar aðrar tjóðir hava!“ Kendi Sámuel seg vrakaðan av hesi umbønini? Hann hevði hóast alt verið dómari hjá fólkinum fyri Jehova í fleiri áratíggju. Nú vildu tey hava ein kong sum dómara og ikki bert ein profet sum Sámuel. Grannatjóðirnar høvdu kongar, og tað vildu ísraelsmenn eisini hava. Hvussu ávirkaði tað Sámuel? Honum 'dámdi tað illa', sigur Bíblian. — 1 Sám. 8:5, 6.

18 Legg til merkis, hvat Jehova segði, tá ið Sámuel legði málið fram fyri hann í bøn: „Akta fólkið í øllum, sum teir siga við teg! Tað er ikki teg, ið teir vraka; tað er Meg, ið teir vraka og ikki vilja hava til kong longur.“ Hesi orðini hava uttan iva uggað Sámuel, men sum tað var ein ræðulig háðan móti hinum alvalda Gudi! Jehova bað Sámuel ávara ísraelsmenn um høga prísin, teir máttu gjalda fyri at hava eitt menniskja sum kong. Tá ið Sámuel so gjørdi, segði fólkið: „Nei, vit vilja hava kong yvir okkum!“ Sámuel, ið altíð aktaði Gud sín, fór so og salvaði kongin, sum Jehova valdi. — 1 Sám. 8:7-19.

19 Men hvussu aktaði Sámuel? Var hann tvørur og lítið hug-

---

16. Hvørjar kenslur tyngja foreldur, sum hava uppreistrarhugað børn, og hvussu kunnu foreldur kenna ein ávísan ugga og hjálp í døminum við Sámueli?

17. Hvat bóðu teir elstu í Ísrael Sámuel um, og hvussu ávirkaði tað hann?

18. Hvussu uggaði Jehova Sámuel, men hvat gjørdi hann samstundis greitt?

19, 20. (a) Hvussu aktaði Sámuel boðini frá Jehova um at salva Saul til kong í Ísrael? (b) Hvussu helt Sámuel fram at hjálpa fólki Jehova?

aður? Læt hann vónbrot og beiskleika festa røtur í sínum hjarta? Mangur maður hevði helst latið seg ávirka á slíkan hátt í eini sovorðnari støðu, men ikki Sámuel. Hann salvaði Saul og viðurkendi, at tað var hann, Jehova hevði valt. Hann kysti Saul og vísti soleiðis, at hann bjóðaði honum vælkomnum og gav seg undir hann, nú hann var vorðin kongur. Og síðani segði hann við fólkið: „Síggja tit hann, ið [Jehova] hevur útvalt! Líki hansara er ikki í øllum fólkinum!“ — 1 Sám. 10:1, 24.

20 Sámuel legði dent á teir góðu eginleikarnar hjá manninum, sum Jehova hevði valt, ikki teir ringu. Fyri sítt egna viðkomandi, vildi hann heldur vera Gudi til vildar enn hesum vingluta fólkinum. (1 Sám. 12:1-4) Hann gjørdi eisini trúfastur, sum honum var álagt, og ávaraði Guds fólk um tað, sum kundi hótta tey andaliga, og hann stuðlaði teimum til altíð at vera trúføst móti Jehova. Leiðbeiningin rakk hjørtum teirra, og tey bóðu hann biðja fyri sær. Hann gav teimum hetta fløvandi svarið: „Langt veri tað frá mær at synda móti [Jehova] og geva uppat at biðja fyri tykkum! Eg skal eisini vísa tykkum hin góða og beina veg.“ — 1 Sám. 12:21-24.

Frásøgan um Sámuel minnir okkum á, at vit ongantíð skulu lata øvundsjúku ella beiskleika festa røtur í okkara hjørtum

21 Hevur tú nakrantíð verið vónbrotin um, at ein annar fekk eina ávísa uppgávu ella forrættindi, sum tú sjálvur kundi hugsað tær? Dømið við Sámueli er ein kraftmikil áminning um, at vit ongantíð mugu lata øvundsjúku ella beiskleika festa røtur í okkara hjørtum. (***Les Orðtøkini 14:30.***) Gud hevur ríkiligt av góðum og nøktandi arbeiði til allar sínar trúføstu tænarar.

„Hvussu leingi ætlar tú at ganga og syrgja um Saul?“

22 Tað var rætt av Sámueli at leggja til merkis teir góðu eginleikarnar hjá Sauli, tí hann var av sonnum ein heilt serligur maður. Umframt at vera høgur og vakur á at líta, var hann djarvur og uppfinningarsamur, og at byrja við eisini eyðmjúkur. (1 Sám. 10:22, 23, 27) Hann hevði eisini eina aðra dýrabara gávu — ein frían vilja. Hann kundi liva og láta, sum honum lysti, og taka

21. Hvussu kann dømið við Sámueli vera ein hjálp hjá tær, um tú ert vónbrotin um, at ein annar fær eina ávísa uppgávu ella forrættindi?

22. Hví var tað rætt av Sámueli at leggja til merkis teir góðu eginleikarnar, sum Saul hevði at byrja við?

sínar egnu avgerðir. (5 Mós. 30:19) Brúkti hann hesa gávuna rætt?

23 Tá ið eitt menniskja sólar sær í nýfingnari makt, er eyðmjúkleiki tíverri ofta tann fyrsti eginleikin, sum verður blakaður fyri borð. Áðrenn long tíð var liðin, gjørdist Saul hugmóðigur. Hann valdi ikki at akta boðini frá Jehova, sum Sámuel gav honum. Einaferð gjørdist Saul ótolin og bar fram eitt offur, sum Sámuel skuldi bera fram. Sámuel noyddist at hava harðliga at honum og boðaði frá, at kongadømið ikki skuldi verða verandi í ættini hjá Sauli. Heldur enn at læra av átaluni, framdi Saul enn verri syndir móti Gudi. — 1 Sám. 13:8, 9, 13, 14.

24 Jehova bað Sámuel geva Sauli boð um at fara í kríggj ímóti amalekitum. Jehova gav eisini boð um, at óndi kongurin hjá teimum, Agag, skuldi drepast. Men Saul spardi Agag, og hann goymdi eisini tað besta av herfonginum, sum annars skuldi oyðileggjast. Tá ið Sámuel kom til hansara at átala hann fyri tað, sást tað týðiliga, hvussu nógv hann var broyttur. Heldur enn at vera eyðmjúkur og taka við átaluni, royndi hann at skava út yvir sínar syndir, at koma við umberingum, at rættvísgera seg sjálvan, at koma við uttanumtosi og at geva fólkinum skyldina fyri tað, hann hevði gjørt. Tá ið Saul royndi at lítilsgera átaluna við at siga, at nakað av herfonginum skuldi nýtast sum offur til Jehova, segði Sámuel tey kendu orðini: „Lýdni er meiri vert enn sláturoffur!“ Sámuel var djarvur og gav manninum eina harða átalu og segði honum, hvørja avgerð Jehova hevði tikið: At kongadømið skuldi verða tikið frá Sauli og gevast einum øðrum og betri manni.* — 1 Sám. 15:1-33.

Sámuel skilti, at eingin støða er so trupul og einki vónbrot so stórt, at Jehova ikki fær gjørt tað gott aftur, ella enntá vent tí til eina signing

25 Sámuel var sera harmur um misbrot Sauls. Hann rópti til Jehova alla náttina viðvíkjandi hesum. Hann syrgdi enntá um

* Sámuel drap sjálvur Agag. Hvørki hesin óndi kongurin ella familja hansara hevði uppiborið nakra náði. Øldir seinni royndi 'Haman agagitur', eyðsýniliga ein av eftirkomarum Agags, at beina fyri Guds fólki. — Est. 8:3; sí kapitlarnar 15 og 16 í hesi bókini.

23. Hvønn dýrabaran eginleika misti Saul sum hin fyrsta, og hvussu vísti hann, at hann gjørdist meiri og meiri hugmóðigur?

24. (a) Hvussu var Saul ólýðin móti Jehova í krígnum móti amalekitum?
(b) Hvussu svaraði Saul átaluni, og hvørja avgerð tók Jehova?

25, 26. (a) Hví syrgdi Sámuel um Saul, og hvussu vegleiddi Jehova profet sín?
(b) Hvat lærdi Sámuel, tá ið hann fór inn á gólvið hjá Ísai?

hann. Sámuel hevði sæð so nógvar góðar møguleikar í Sauli, men nú var vónin brostin. Maðurin, hann einaferð kendi, var nú broyttur. Hann hevði ikki longur teir góðu eginleikarnar, hann áður hevði havt, og hann hevði vent sær ímóti Jehova. Sámuel vildi ikki síggja Saul fyri eygum sínum aftur. Seinni gav Jehova kortini Sámueli hesa mildu vegleiðingina: „Hvussu leingi ætlar tú at ganga og syrgja um Saul? Eg havi jú vrakað hann, so hann skal ikki verða verandi kongur yvir Ísrael! Fyll horn títt við olju og far avstað! Eg sendi teg til Ísai Betlehemit; tí millum synir hansara havi Eg valt Mær kong.“ — 1 Sám. 15:34, 35; 16:1.

26 Ætlan Jehova er ikki treytað av, um ófullkomin menniskju eru trúføst ella ikki. Er ein tænari hjá Jehova trúleysur, finnur hann ein annan at útinna sín vilja. So helt Sámuel uppat at syrgja um Saul. Hann fór nú, sum Jehova hevði biðið hann, til hús Ísais í Betlehem, og har hitti hann fleiri prúðar synir hjá Ísai. Men longu tá ið Sámuel sá fyrsta sonin, segði Jehova, at hann ikki bert skuldi hyggja at útsjóndini. (***Les Fyrru Sámuelsbók 16:7.***) At enda hitti Sámuel yngsta sonin, Dávid, og tað var hann, Jehova hevði valt.

27 Tey síðstu árini, Sámuel livdi, sá hann enn týðiligari, hvussu rættvíst tað var, at Jehova setti Dávid sum kong í staðin fyri Saul. Saul gjørdist so øvundsjúkur, at hann royndi at drepa Dávid, og hann fall eisini frá trúnni. Men Dávid vísti harafturímóti vakrar eginleikar sum dirvi, falsloysi, trúgv og trúfesti. Sum lívið hjá Sámueli nærkaðist endanum, gjørdist trúgvin hjá honum enn sterkari. Hann skilti, at eingin støða er so trupul og einki vónbrot so stórt, at Jehova ikki fær gjørt tað gott aftur, ella enntá vent tí til eina signing. At enda legði Sámuel árarnar inn. Hann hevði havt eitt hendingaríkt lív, sum vardi sløk hundrað ár. Ikki løgið, at alt Ísrael syrgdi um, at hesin trúfasti maðurin nú var farin. Eisini í dag eiga tænarar Jehova at spyrja seg sjálvar: „Fari eg at taka eftir trúnni hjá Sámueli?“

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu ávirkaðu sorgarleikirnir í Silo Sámuel?
- Hvat hjálpti Sámueli at standa fastur, hóast synir hansara gjørdu uppreistur?
- Hvussu kom Sámuel yvir vónbrotið, ið Saul kongur var orsøk til?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Sámueli?

27. (a) Hví gjørdist trúgvin hjá Sámueli sterkari og sterkari? (b) Hvussu dámar tær fyrimyndina, sum Sámuel setti?

’Hon var vitig kvinna’

ABIGAJIL sá, hvussu hjartkiptur tann ungi maðurin var. Hann var ræðslusligin — og við góðari grund. Stórur vandi var á ferð, tí júst í somu løtu vóru umleið 400 hermenn á veg ímóti teimum, og teir høvdu sett sær fyri at drepa allar av mannkyni í húsi Nabals, sum var maður Abigajil. Hví?

2 Nabal var orsøkin til hesa ræðuligu støðuna. Hann hevði verið óndur og nasadjarvur sum altíð. Men hesa ferð hevði hann mistikið seg so dyggiliga — hann hevði háðað herovastan fyri ein bólk av væl vandum hermonnum, sum elskaðu leiðara sín og vóru trúfastir móti honum. Nú kom ein av ungu arbeiðsmonnunum hjá Nabali, kanska ein seyðamaður, til Abigajil í vón um, at hon fekk gjørt okkurt fyri at bjarga teimum. Men hvat fekk *ein* kvinna gjørt ímóti einum heilum heri?

> Hvat fekk *ein* kvinna gjørt ímóti einum heilum heri?

3 Latið okkum fyrst fáa eitt sindur meira at vita um hesa framúrskarandi kvinnuna. Hvør var Abigajil? Hvussu hevði henda ræðuliga støðan tikið seg upp? Og hvat kann hennara trúgv læra okkum?

„Hon var vitig og vøkur kvinna“

4 Abigajil og Nabal hóskaðu ikki væl saman sum hjúnafelagar. Nabal kundi neyvan fingið ein betri maka, og Abigajil kundi hinvegin neyvan gift seg við einum verri manni. Gaman í var maðurin ríkur. Tí helt hann nógv um seg sjálvan. Men hvussu mettu onnur hann? Tað verður ringt at finna ein persón í Bíbliuni, sum verður umrøddur meiri háðandi enn Nabal. Sjálvt navnið hjá honum merkir „dári“. Góvu foreldrini honum hetta navnið, tá ið hann

---

1-3. (a) Hví var húskið hjá Abigajil í vanda? (b) Hvat fara vit at læra um hesa framúrskarandi kvinnuna?

4. Hvussu var Nabal?

varð føddur, ella var tað eitt eyknevni, hann fekk seinni? Hvussu var og ikki, livdi hann upp til sítt navn. Nabal var „harður og óndur í øllum atburði sínum". Hann var eitt illmenni og ein drykkjumaður, og tí var hann illa dámdur, og nógv fólk ræddust hann. — 1 Sám. 25:2, 3, 17, 21, 25.

5 Abigajil var heilt øðrvísi enn Nabal. Navn hennara merkir „faðir mín hevur frøtt seg". Nógvir pápar eru ernir av at eiga eina vakra dóttur, men ein vitigur pápi frøist enn meiri um eina dóttur, sum hevur vakran persónleika. Nógv, sum eru vøkur í útsjónd, gloyma at menna eginleikar sum vit, skyn, dirvi og trúgv. Men so var ikki við Abigajil. Bíblian sigur, at hon bæði „var vitig og vøkur kvinna". — ***Les Fyrru Sámuelsbók 25:3.***

6 Í dag undrast summi kanska á, at henda skilagóða unga kvinnan gifti seg við einum illmenni sum Nabali. Men minst til, at nógv hjúnaløg á Bíbliunnar tíð vórðu fyriskipað av foreldrunum. Í øllum førum hevði tað stóran týdning, at foreldrini góvu sítt samtykki. Høvdu foreldrini hjá Abigajil góðan tokka til hetta hjúnalagið og kanska enntá skipað fyri tí, av tí at tey vóru hugtikin av ríkidømi og giti Nabals? Kendu tey seg kroyst, tí tey vóru fátæk? Hvussu var og ikki, kundi ríkidømið hjá Nabali ikki gera hann til ein góðan hjúnafelaga.

7 Skilagóð foreldur læra børnini at hava røttu áskoðanina á hjúnalagið. Tey royna ikki at stuðla uppundir, at tey gifta seg fyri pengar, og tey royna heldur ikki at fáa tey at byrja at ganga saman við nøkrum, áðrenn tey eru búgvin at átaka sær leiklutin sum hjúnafelagi. (1 Kor. 7:36) Men tað var ov seint hjá Abigajil at hugsa um slíkt. Uttan mun til hvør orsøkin var, var hon altso gift við Nabali, og hon hevði sett sær fyri at fáa sum best burtur úr hesi truplu støðuni.

„Hann skeldaði teir út"

8 Nabal hevði júst gjørt støðuna hjá Abigajil verri enn nakrantíð. Maðurin, sum hann hevði háðað, var eingin annar enn Dávid — trúfasti tænarin hjá Jehova, sum Sámuel profetur hevði salvað fyri at vísa, at tað var hann, Jehova hevði valt at vera kong eftir Saul. (1 Sám. 16:1, 2, 11-13) Dávid fjaldi seg í oyðimørkini saman við sínum 600 trúføstu hermonnum, tí hin øvundsjúki kongurin, Saul, vildi drepa hann.

5, 6. (a) Hvørjar eginleikar hjá Abigajil dámar tær best? (b) Hví man Abigajil hava gift seg við einum slíkum illmenni?

7. (a) Hvat skulu foreldur í dag ikki gera, um tey vilja læra síni børn at hava røttu áskoðanina á hjúnalagið? (b) Hvat hevði Abigajil sett sær fyri at gera?

8. Hvønn hevði Nabal háðað, og hví var tað tápuligt?

9 Nabal búði í Maon, men arbeiddi og átti eyðsýniliga jørð nærindis Karmel.* Tætt við hesar býirnar var hálendi við góðum seyðabiti, og Nabal átti 3000 seyðir. Men allan vegin rundanum var oyðimørk. Sunnanfyri lá hin stóra Paransoyðimørk. Eystanfyri var leiðin til Salthavið (Deyðahavið) oyðin og ber við nógvum gjáum og hellum. Á hesum leiðum stríddust Dávid og menn hansara fyri at yvirliva; teir royndu allarhelst at veiða sær okkurt til matna og vóru fyri nógvum avbjóðingum. Teir hittu mangan teir ungu seyðamenninar hjá hinum ríka Nabali.

10 Hvussu fóru hesir hermenninir við seyðamonnunum? Tað hevði verið lagamanni hjá teimum at rænt sær ein seyð av og á, men teir gjørdu einki slíkt. Teir vóru tvørturímóti sum ein múrur rundan um fylgið hjá Nabali og tænarum hansara. (***Les Fyrru Sámuelsbók 25:15, 16.***) Seyðir og seyðamenn vóru ofta í vanda. Nógv villdjór vóru, og sunnara landamark Ísraels var nærindis, so fremmand ránsmannalið lupu ofta á.#

11 Tað man hava verið ein torfør uppgáva at syrgja fyri føði til allar hasar menninar í oyðimørkini. Tí sendi Dávid einaferð tíggju menn til Nabal at biðja hann hjálpa sær. Dávid valdi ta røttu løtuna. Tað var í roytingini, tá ið fólk vanliga vóru glað, gávumild og í veitsluhýri. Dávid valdi sær eisini tey røttu orðini og málbar seg á fólkaligan og virðiligan hátt. Hann umrøddi enntá seg sjálvan sum 'sonur tín Dávid', møguliga fyri vísa, at hann hevði virðing fyri Nabali, tí hann var eldri. Hvussu svaraði Nabal? — 1 Sám. 25:5-8.

12 Hann østi seg upp! „Hann skeldaði teir út," segði hin ungi maðurin, sum vit hoyrdu um í inngangínum, tá ið hann greiddi Abigajil frá støðuni. Gírigi Nabal gramdi seg um sítt dýrabara breyð, vatn og kjøt. Hann háðaði Dávid sum ein, ið ongan týdning hevði, og samanbar hann við ein rýmdan tænara. Nabal hevði kanska nakað ta somu áskoðanina sum Saul, ið hataði Dávid. Hvørgin teirra hevði somu áskoðan sum Jehova. Gud elskaði Dávid

* Hetta var ikki hitt navnframa Karmelsfjall, har profeturin Elias og ba'alsprofetarnir seinni hittust í sambandi við styrkiroyndina. Tað lá nógv norðari. (Sí kapittul 10.) Í hesum føri er talan um býin Karmel, sum lá sunnanfyri í útjaðaranum av Paransoyðimørk.

Líkt er til, at Dávid metti tað at verja jarðeigarar har á staðnum og fylgi teirra sum eina tænastu fyri Jehova Gud. Tá í tíðini var tað Guds ætlan, at eftirkomarar Ábrahams, Ísaks og Jákups skuldu búgva í hesum landinum. Tí var tað heiløg tænasta at verja landið fyri fremmandum álopsmonnum og ránsmannaliðum.

9, 10. (a) Undir hvørjum umstøðum stríddust Dávid og menn hansara fyri at yvirliva? (b) Hví skuldi Nabal verið glaður fyri tað, Dávid og menn hansara høvdu gjørt? (Sí eisini undirgreinina til stykki 10.)

11, 12. (a) Hvussu bar Dávid seg fólkaliga at og sýndi virðing, tá ið hann bað Nabal hjálpa sær? (b) Hvat var galið við svarinum hjá Nabali?

og metti hann ikki sum ein uppreistrarhugaðan træl, men sum framtíðar kongin í Ísrael. — 1 Sám. 25:10, 11, 14.

13 Tá ið menn Dávids komu aftur og søgdu honum, hvat ið hent hevði, gjørdist hann óður. „Gyrðið tykkum við svørði, hvør maður!" segði hann. Dávid gjørdi seg til reiðar at fara í hernað og hevði 400 mans við sær. Hann svór, at hann skuldi drepa allar av mannkyni í húsi Nabals. (1 Sám. 25:12, 13, 21, 22) Tað var væl skilligt, at Dávid gjørdist illur, men tað var skeivt, at hann hótti við at drepa. Bíblian sigur: „Vreiði mans avrikar ikki tað, sum rætt er fyri Gudi." (Ják. 1:20) Men hvussu kundi Abigajil bjarga sínum húski?

„Lovaður veri klókskapur tín"

14 Vit hava á ein hátt longu sæð Abigajil taka fyrsta stigið til at bøta hesa ræðuligu støðuna. Mótsett manni sínum, Nabali, var hon fús at lurta. Hin ungi tænarin segði um Nabal: 'Hann er eitt illmenni, sum ikki tosast við!' (1 Sám. 25:17) Syndarligt, at Nabal metti seg sjálvan so høgt, at hann ikki vildi lurta. Slíkt hugmóð er tíverri eisini alt ov vanligt í dag. Men tann ungi tænarin visti, at Abigajil var øðrvísi, og tað var uttan iva tí, at hann fór til hennara við trupulleikanum.

Mótsett Nabali var Abigajil fús at lurta

15 Abigajil hugsaði skjótt og var kvik at fara til verka. Hon 'skundaði sær', lesa vit. Í frásøguni verða ymiskir formar av sagnorðinum „at skunda sær" brúktir fýra ferðir um hesa kvinnuna. Hon gjørdi eina stóra gávu til reiðar til Dávid og menn hansara. Í gávuni vóru breyð, vín, tilgjørdur seyður, bakað korn, rosinukøkur og fikukøkur. Tað sæst týðiliga, at Abigajil visti, hvat tey áttu, og hon stóð væl fyri húsi sínum eins og hin dugnaliga konan, sum verður lýst í Orðtøkunum. (Orðt. 31:10-31) Hon sendi gávuna við nøkrum av tænarum sínum. Hon bað teir fara undan sær og segði, at hon kom aftaná. „Men Nabal, manni sínum, segði hon einki um hetta," lesa vit í frásøguni. — 1 Sám. 25:18, 19.

---

13. (a) Hvat kom Dávidi fyrst í hug at gera, tá ið hann hoyrdi um háðan Nabals? (b) Hvat lærir meginreglan í Brævi Jákups 1:20 okkum um vreiði Dávids?

14. (a) Á hvønn hátt tók Abigajil fyrsta stigið til at bøta skaðan, sum stóðst av atburðinum hjá Nabali? (b) Hvat kunnu vit læra av muninum á Nabali og Abigajil?

15, 16. (a) Hvussu vísti Abigajil, at hon var sum hin dugnaliga konan, ið verður lýst í Orðtøkunum? (b) Hví var tað, sum Abigajil gjørdi, ikki tað sama sum at seta seg upp ímóti leiðsluni hjá manni sínum?

16 Vil tað siga, at Abigajil setti seg upp ímóti manni sínum, sum jú av røttum var høvdið í familjuni? Nei. Minst til, at Nabal hevði borið seg illa at ímóti einum salvaðum tænara hjá Jehova, ein gerð, sum væl kundi verið orsøk til, at nógv ósek í húski Nabals vórðu dripin. Høvdu fólk ikki hildið Abigajil vera samseka, um hon einki hevði gjørt? Í hesum førinum mátti hon heldur vera Gudi sínum undirgivin enn manni sínum.

17 Tað vardi ikki leingi, áðrenn Abigajil møtti Dávidi og monnum hansara. Nú skundaði hon sær aftur. Í frásøguni stendur, at hon við tað sama fór niður av eslinum og boygdi seg til jarðar fyri Dávidi. (1 Sám. 25:20, 23) Síðani segði hon Dávidi frá sínum innastu kenslum og bønaði hann um at vísa manni og húski sínum miskunn. Hvussu fekk hon orðað seg soleiðis, at Dávid lurtaði?

18 Hon tók ábyrgdina av trupulleikanum og bað Dávid fyrigeva sær persónliga. Hon ásannaði, at maður hennara veruliga var so tápuligur, sum navnið gav ábending um. Kanska royndi hon soleiðis at vísa á, at tað ikki mundi loysa seg hjá einum tignarmanni sum Dávidi at revsa ein dára sum hann. Hon vísti, at hon hevði álit á, at Dávid umboðaði Jehova, við tað at hon viðurkendi, at hann stríddi í „bardøgum [Jehova]“. Hon visti eisini, at Jehova hevði lovað Dávidi kongadømið, tí hon segði: „[Jehova] . . . setur teg til høvdinga yvir Ísrael.“ Haraftrat bað hon inniliga Dávid um ikki at gera nakað, sum kundi draga blóðskyld oman yvir hann, ella sum seinni kundi verða honum „samvitskuófriður“. (***Les Fyrru Sámuelsbók 25:24-31.***) Hetta vóru hjartanemandi orð.

19 Hvussu svaraði Dávid? Hann tók við gávuni frá Abigajil og segði: „Lovaður veri [Jehova] Gud Ísraels, sum í dag hevur sent teg ímóti mær! Lovaður veri klókskapur tín, og lovað veri tú sjálv, sum í dag hevur forðað mær at draga blóðskyld oman yvir meg!“ Dávid prísaði henni fyri, at hon var djørv og skjót at koma ímóti honum, og hann ásannaði, at hon hevði forðað honum í at draga blóðskyld oman yvir seg. „Far heimaftur í friði!“ segði hann við hana og legði eyðmjúkur aftrat: „Eg havi lurtað eftir orðum tínum.“ — 1 Sám. 25:32-35.

„Her er tænastukvinna tín“

20 Á veg heimaftur fekk Abigajil helst ikki latið vera við at

17, 18. Hvussu vendi Abigajil sær til Dávid, og hvat segði hon, sum fekk Dávid at lurta?

19. Hvussu svaraði Dávid Abigajil, og hví prísaði hann henni?

20, 21. (a) Hví heldur tú, at tað var gott, at Abigajil fór aftur til mann sín? (b) Hvussu vísti Abigajil seg djarva og klóka, tá ið hon valdi, nær hon skuldi tosa við Nabal?

„Loyv tænastukvinnu tíni at tala til tín“

hugsa um tað, sum júst var hent. Og hon legði allarhelst til merkis, hvussu stórur munur var á Dávidi, sum var trúfastur og vinaligur, og hennara egna manni, Nabali, sum var ein dári. Men hon dvøldi ikki við slíkar tankar. Vit lesa: „Abigajil kom heim til Nabal.“ Ja, hon fór heimaftur til mann sín, avgjørd um eftir besta førimuni at vera honum ein góð kona. Hon noyddist at fortelja honum um gávuna, hon hevði givið Dávidi og monnum hansara. Tað átti hann at fáa at vita. Hon noyddist eisini at fortelja honum um vandan, sum forðað var fyri, áðrenn hann frætti tað frá øðrum, tí so hevði tað verið honum enn størri skomm. Men hon fekk ikki sagt honum tað beinanvegin, tí ’hann hevði gestaboð sum hjá kongi og var ógvuliga drukkin’. — 1 Sám. 25:36.

21 Hon vísti seg aftur djarva og klóka við at bíða til næsta morgun, tá ið runnið var av honum. Tá fór hann at vera so mikið edrúur, at hann skilti hana, men kanska eisini meiri vandamikil í sínum illsinni. Kortini fór hon til hansara og segði honum alla søguna. Hon væntaði uttan iva, at hann fór at verða í øðini og kanska leggja hond á hana. Men hann sat bara har sum steinrunnin. — 1 Sám. 25:37.

22 Hvat feilti manninum? ’Hjartað stívnaði í brósti hansara, og hann varð sum steinur.’ Kanska hevði hann fingið eina heilabløðing. Hann doyði umleið tíggju dagar seinni — og ikki bert av sjúku. Frásøgan sigur, at ’[Jehova] sló Nabal, so hann doyði’. (1 Sám. 25:38) Og soleiðis endaði ræðuliga hjúnalagið hjá Abigajil. Hóast Jehova ikki fremur slík undur í dag, er frásøgan ein góð áminning um, at Jehova sær alla kúgan og allan harðskap, sum gongur fyri seg heima hjá fólki. Á tíð síni fremur hann altíð rættvísi. — ***Les Lukas 8:17.***

23 Umframt at sleppa burtur úr einum ræðuligum hjúnabandi, hevði Abigajil eisini aðra signing í væntu. Tá ið Dávid hoyrdi, at Nabal var deyður, sendi hann menn avstað at bjóða henni hjúnaband. Hon svaraði: „Her er tænastukvinna tín, til reiðar at verða trælkvinna tín og vaska tænarum harra míns um føturnar!“ Hon var eyðsæð einki broytt av útlitunum til at gerast kona Dávids; hon bjóðaði seg enntá fram at verða tænastukvinna hjá tænarum

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvat kunnu vit læra av torføru hjúnastøðuni hjá Abigajil?
- Hvussu vísti Abigajil, at hon var djørv og vitig, tá ið maður hennara hevði háðað Dávid?
- Á hvønn hátt var Abigajil vinalig og sannførandi, tá ið hon tosaði við Dávid?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Abigajil?

22. Hvat hendi Nabali, og hvat læra vit um kúgan og harðskap heima hjá fólki?

23. Hvørja signing fekk Abigajil eisini, og hvussu vísti hon, at nýggju útlitini ikki broyttu hana?

Abigajil var djørv og segði Nabali, hvat hon hevði gjørt fyri at bjarga lívi hansara

hansara! Nú lesa vit aftur um, at hon skundaði sær, hesa ferð at gera seg til reiðar at fara til Dávid. — 1 Sám. 25:39-42.

24 Men alt endaði ikki sum í ævintýrunum. Lívið hjá Abigajil saman við Dávidi fór ikki altíð at vera lætt. Dávid var longu giftur við Ahinoam, og hóast Gud loyvdi fleirkonuhjúnalagi, var tað ein sera torfør støða at vera í hjá trúføstum kvinnum tá í tíðini. Og Dávid var ikki kongur enn; fleiri forðingar og trupulleikar fóru at stinga seg upp, áðrenn hann skuldi tæna Gudi á tann hátt. Men Abigajil var Dávidi ein góð kona og við tíðini føddi hon honum ein son, og sum árini gingu skilti hon, at hon hevði ein mann, sum virðismetti og vardi hana. Til dømis bjargaði hann henni einaferð, eftir at hon var hertikin. (1 Sám. 30:1-19) Soleiðis tók Dávid eftir Jehova Gudi, sum elskar og virðismetir slíkar vitigar, djarvar og trúfastar kvinnur.

24. Hvørjar avbjóðingar fekk Abigajil í sínum nýggja lívi, men hvussu mettu maður hennara og Gud hennara hana?

KAPITTUL TÍGGJU

Hann vardi sanna tilbiðjan

ELIAS hugdi út yvir fjøldina, meðan hon tungliga gekk niðan eftir Karmelsfjalli. Sjálvt í dimmalættingini var tað lætt at síggja, hvussu fátæk og illa stødd hesi fólkini vóru. Turkurin, sum hevði vart hálvtfjórða ár, hevði sett síni spor.

2 Millum teirra gingu hinir 450 ba'alsprofetarnir, fullir í stoltleika og hatri til Elias, profet Jehova. Jesabel drotning hevði dripið nógvar tænarar hjá Jehova, men hesin maðurin stóð stinnur ímóti tilbiðjanini av Ba'al. Men hvussu leingi? Kanska hugsaðu hesir prestarnir sum so, at ein einsamallur maður ongantíð kundi standa seg ímóti øllum teimum. (1 Kong. 18:4, 19, 20) Akab kongur var eisini hjástaddur. Hann var komin í sínum kongliga stríðsvogni. Honum dámdi heldur ikki Elias.

3 Dagurin, sum hesin einsamalli profeturin hevði fyri sær, var ólíkur øllum øðrum døgum í lívi hansara. Meðan Elias stóð og hugdi at fólkinum, varð leikpallurin settur til ein tann mest ógvusliga samanbrestin millum tað góða og tað ónda, sum heimurin nakrantíð hevur sæð. Hvussu hevði hann tað, tá ið tað fór at lýsa fyri degi? Elias visti, hvat tað var at vera bangin, tí hann „var menniskja undir somu korum sum vit". (***Les Bræv Jákups 5:17.***) Eitt er vist: Elias hevur veruliga kent seg einsamallan, tí hann var umgirdur av trúleysum fólki, fráfalna kongi teirra og drápshugaðum prestum. — 1 Kong. 18:22.

4 Men hvussu var Ísrael komið í hesa ringu støðuna? Og hvat hevur henda frásøgan við okkum at gera? Latið okkum kanna trúnna hjá Eliasi, og hvussu hon kann koma okkum til nyttu í dag.

Eitt áralangt stríð kemur í hæddina

5 Ein stóran part av sínum lívi, hevði Elias verið ein hjálpar-

---

1, 2. (a) Hvørjari ringari støðu var ísraelsfólk í? (b) Hvør mótstøða møtti Eliasi á Karmelsfjalli?

3, 4. (a) Hví hevur Elias kanska verið eitt sindur bangin, tá ið ein týðandi dagur tók við? (b) Hvørjar spurningar fara vit at kanna?

5, 6. (a) Hvat gjørdu nógvir ísraelsmenn? (b) Hvussu hevði Akab kongur syndað stórliga ímóti Jehova?

leysur áskoðari til, at tað besta í heimlandi hansara og fólkinum var skúgvað til viks og traðkað undir fót. Støðan var tann, at nógvir ísraelsmenn leingi høvdu tilbiðið falskar gudar, eins og tjóðirnar rundan um teir, heldur enn at tilbiðja hin sanna Gud Jehova. Á døgum Eliasar var henda avgudadýrkanin versnað í ólukku máta.

6 Akab kongur hevði syndað stórliga ímóti Jehova. Hann gifti seg við Jesabel, sum var dóttir kongin í Zidon. Jesabel hevði sett sær fyri at fremja ba'alsdýrkanina í Ísraelslandi og beina fyri tilbiðjanini av Jehova. Og tað vardi ikki leingi, fyrr enn hon hevði fingið Akab at taka undir við sær. Hann bygdi eitt tempul og eitt altar til Ba'al og gekk undan við at boyggja seg fyri hesum heidna gudinum. — 1 Kong. 16:30-33.

7 Hví var ba'alsdýrkanin so andstyggilig? Hon tøldi Ísrael og lokkaði nógv fólk burtur frá hinum sanna Gudi. Tað var eisini ein viðurstyggiligur og harðligur átrúnaður, sum framdi mannligan og kvinnuligan skøkjulevnað í templinum, hópólevnað og enntá barnaofringar. Jehova svaraði aftur við at senda Elias til Akab at kunngera, at turkur skuldi vera í landinum, inntil profetur Guds boðaði frá, at hann var av. (1 Kong. 17:1) Fleiri ár gingu, áðrenn Elias fór til Akab og bað hann savna fólkið og ba'alsprofetarnar saman á Karmelsfjalli.*

Tað, sum eyðkendi ba'alsdýrkanina, gongur so at siga eisini fyri seg nú á døgum

8 Men hvat hevur hetta stríðið at týða fyri okkum í dag? Nøkur vilja kanska vera við, at henda søgan um ba'alsdýrkanina ikki hevur nakran týdning fyri okkum, av tí at eingi tempul ella altar hjá Ba'al eru at síggja rundan um okkum. Men frásøgan er ikki bert gomul søga. (Róm. 15:4) Orðið Ba'al merkir „eigari" ella „harri". Jehova segði við fólk sítt, at tey skuldu velja hann sum sín „ba'al" ella 'ektamann'. (Es. 54:5) Er tað ikki satt, at fólk enn tæna eini ørgrynnu av øðrum „harrum" enn hinum alvalda Gudi? Uttan mun til um fólk brúka sítt lív í eini stremban eftir pengum, karrieru, stuttleika, kynsligari nøktan ella onkrum øðrum av teimum nógvu gudunum, ið verða tilbidnir í staðin fyri Jehova, so velja

* Sí rammuna „Hvussu leingi vardi turkurin á døgum Eliasar?"

7. (a) Hví var ba'alsdýrkanin so andstyggilig? (b) Hvussu kunnu vit vera vís í, at talan ikki er um eina mótsøgn í Bíbliuni í sambandi við, hvussu leingi turkurin á døgum Eliasar vardi? (Sí eisini rammuna.)

8. Hvønn týdning hevur frásøgan um ba'alsdýrkanina fyri okkum í dag?

tey sær ein „harra“. (Matt. 6:24; ***les Rómbrævið 6:16.***) Vit kunnu onkursvegna siga, at tað, sum eyðkendi ba’alsdýrkanina, eisini gongur fyri seg nú á døgum. At hugsa um styrkiroyndina millum Ba’al og Jehova kann hjálpa okkum og geva okkum skyn, tá ið vit skulu velja, hvørjum vit vilja tæna.

Hvussu ’haltaðu’ ísraelsmenn?

9 Av Karmelsfjalli var eitt bergtakandi útsýni — úr Kisonsløki niðan fyri fjallið til Stórahavið (Miðjarðarhavið) nærindis og til fjøllini í Libanon, sum hómaðust í norði.* Men tá ið sólin reis

* Vanliga er Karmelsfjall fruktagott og grønt á at líta, tí skýggj frá havinum koma rekandi upp eftir fjallasíðunum og hava nógva vætu við sær. Av tí at Ba’al varð lovaður fyri at geva regn, hevði hetta fjallið eyðsýniliga stóran týdning í ba’alsdýrkanini. Eitt bert og turt Karmelsfjall var soleiðis rætta staðið at avdúka, at ba’alsdýrkanin var følsk tilbiðjan.

9. (a) Hví var Karmelsfjall rætta staðið at avdúka ba’alsdýrkanina? (Sí eisini undirgreinina.) (b) Hvat segði Elias við fólkið?

Hvussu leingi vardi turkurin á døgum Eliasar?

Elias profetur boðaði Akabi kongi frá, at turkurin, sum nú hevði vart so leingi, skjótt skuldi fáa enda. Og so varð. Hann endaði „triðja árið“ — eyðsýniliga roknað frá tí degnum, tá ið Elias á sinni hevði boðað frá turkinum. (1 Kong. 18:1) Stutt eftir at Elias hevði borið boðini, læt Jehova regnið koma. Onkur kundi tí hildið, at turkurin, sum steðgaði í ’triðja árinum’, altso ikki vardi í samfull trý ár. Men eftir tí, sum bæði Jesus og Jákup siga okkum, vardi turkurin „trý ár og seks mánaðir“. (Luk. 4:25; Ják. 5:17) Er hetta ein mótsøgn?

Nei, als ikki. Vit skulu minnast til, at turra tíðin í fortíðar Ísrael var rættiliga long, heilt upp í seks mánaðir. Tá ið Elias kom til Akab at boða frá turkinum, hevði turra tíðarskeiðið ivaleyst longu verið óvanliga langt og strævið. Turkurin var sostatt byrjaður nærum eitt hálvt ár frammanundan. Tá ið Elias so í ’triðja árinum’ eftir fráboðanina kunngjørdi, at turkurin skuldi steðga, hevði hann longu vart í nærum hálvtfjórða ár. Tey ’trý árini og seks mánaðirnir’ vóru liðin, tá ið alt fólkið kom saman at eygleiða styrkiroyndina á Karmelsfjalli.

Við hesum í huga skilja vit, hvussu væl vald løtan var, tá ið Elias fyrstu ferð fór at vitja Akab. Fólk trúðu, at Ba’al var „tann, ið ríður á skýggjunum“, gudurin, sum sendi regn, tá ið turra tíðin var liðin. Var turra tíðin óvanliga drúgv, undraðust fólk og spurdu: ’Hvar er Ba’al? Nær sendir hann regn?’ Fráboðanin hjá Eliasi um, at nú kom hvørki regn ella døgg, fyrr enn hann segði frá, má hava verið ba’alsdýrkarunum ein dyggur smeitur. — 1 Kong. 17:1.

henda hendingaríka dagin, var tað eingin vøkur sjón. Ein deyðakendur dámur hekk sum eitt skýggj yvir tað einaferð so fruktbara landið, Jehova hevði givið eftirkomarum Ábrahams. Nú var landið skróvturt av bakandi sólini og oyðilagt av dárskapinum hjá Guds egna fólki. Tá ið fólkið savnaðist, vendi Elias sær til teirra og segði: „Hvussu leingi ætla tit at halta til báðar síður? Er [Jehova] Gud, so haldið tykkum til Hansara, og er Ba'al Gud, so haldið tykkum til hansara!" — 1 Kong. 18:21.

10 Hvat meinti Elias við orðingini at 'halta til báðar síður'? Jú, hesi fólkini skiltu ikki, at tey noyddust at velja ímillum at tilbiðja Jehova og at tilbiðja Ba'al. Tey hildu, at tey kundu bæði — at tey kundu blíðka Ba'al við sínum viðurstyggiligu siðum og samstundis biðja Jehova Gud hjálpa sær. Kanska hugsaðu tey sum so, at Ba'al fór at signa grøði og fæ teirra, meðan '[Jehova] Gud herskaranna', fór at verja tey í bardøgum. (1 Sám. 17:45) Tey høvdu gloymt ein grundleggjandi sannleika — ein, sum nógv fólk í dag heldur ikki geva sær far um — at Jehova ikki vil, at nakar annar enn hann skal verða tilbiðin. Hann krevur og hevur uppiborið óskerdan kærleika. Ein og hvør tilbiðjan av honum, sum er blandað við tilbiðjan av øðrum slagi, hevur ikki hansara tokka; hon er enntá andstyggilig í eygum hansara. — ***Les Aðru Mósebók 20:5.***

11 Ísraelsmenn 'haltaðu' eins og ein maður, ið roynir at ganga á tveimum gøtum í senn. Nógv fólk í dag gera sama mistak, tí tey lata aðrar „ba'alar" sníkja seg inn í sítt lív og skúgva tilbiðjanina av Gudi til viks. At geva gætur eftir inniligu áheitan Eliasar um ikki at halta til báðar síður, kann hjálpa okkum at endurskoða okkara egnu raðfestingar og tilbiðjan.

Ein avgerandi roynd

12 Elias kom nú við uppskoti um at gera eina roynd. Hon var sera einføld. Ba'alsprestarnir skuldu byggja eitt altar og leggja eitt offur á tað; síðani skuldu teir biðja til gud sín um at kynda eldin. Elias skuldi gera tað sama. Hann segði: „Tann Gud, ið svarar við eldi, Hann er hin sanni Gud." Elias visti væl, hvør ið var hin sanni Gud. Hann hevði so sterka trúgv, at hann ikki aftraði seg við at lata

10. Hvussu 'haltaðu' ísraelsmenn „til báðar síður", og hvønn grundleggjandi sannleika høvdu teir gloymt?

11. Hvussu heldur tú, at talan hjá Eliasi á Karmelsfjalli kann hjálpa okkum at endurskoða okkara raðfestingar og tilbiðjan?

12, 13. (a) Hvørjum uppskoti kom Elias við? (b) Hvussu kunnu vit vísa, at vit hava líka stórt álit á Gudi, sum Elias hevði?

mótstøðufólkini fáa allar fyrimunir. Hann læt ba'alsprofetarnar velja sær ein tarv at ofra og at venda sær til Ba'al fyrst.* — 1 Kong. 18:24, 25.

13 Undur fara ikki fram á sama hátt í dag. Men Jehova er ikki broyttur. Vit kunnu hava líka stórt álit á honum, sum Elias hevði. Er onkur til dømis ósamdur við okkum um, hvat Bíblian lærir, skulu vit ikki vera bangin fyri at lata tey sleppa framat og siga sína meining fyrst. Eins og Elias kunnu vit leita til hin sanna Gud og lata hann avgera málið. Tað kunnu vit gera við at líta á hansara orð og ikki á okkum sjálvi, tí Bíblian er skrivað okkum „til rættleiðing". — 2 Tim. 3:16.

14 Ba'alsprofetarnir gjørdu nú ofrið til reiðar og fóru at biðja til gud sín. „Svara okkum, Ba'al!" róptu teir aftur og aftur. Teir hildu fram, og tímarnir gingu. „Men einki ljóð hoyrdist; har var eingin, ið svaraði," sigur Bíblian. Um middagsleitið fór Elias at speireka teir og segði upp á spott, at Ba'al ikki mundi hava tíð at svara teimum, at hann var farin avsíðis at hjálpa sær sjálvum, ella at hann fekk sær ein blund, og onkur noyddist at vakja hann. „Rópið harðari!" segði Elias við svikararnar. Tað er einki at ivast í, at hann metti hesa ba'alsdýrkanina sum láturligt svik, og hann vildi, at Guds fólk skuldi skilja, hvussu svikafull hon var. — 1 Kong. 18:26, 27.

Elias metti ba'alsdýrkanina sum láturligt svik, og hann vildi, at Guds fólk skuldi skilja, hvussu svikafull hon var

15 Ba'alsprofetarnir gjørdust meiri og meiri uppøstir og „róptu nú enn harðari; og sum siður var hjá teimum, særdu teir likam síni við svørðum og spjótum, so blóðið rann av teimum." Men til onga nyttu. „Ikki hoyrdist ljóð; har var eingin, ið svaraði, og eingin, ið aktaði eftir teimum." (1 Kong. 18:28, 29) Nei, har var eingin Ba'al. Hann var ein gudur, sum Satan hevði íspunnið til at lokka fólk burtur frá Jehova. At velja sær annan „harra" enn Jehova hevur einki annað enn vónbrot og skomm við sær. — ***Les Sálm 25:3; 115:4-8.***

* Tað er vert at leggja til merkis, at Elias segði við teir: „Eld mugu tit ongan leggja við!" Nakrir granskarar siga, at slíkir avgudadýrkarar stundum nýttu eitt altar við einum duldum rúmi undir, soleiðis at ein eldur kundi tykjast at verða kyndur yvirnatúrliga.

14. Á hvønn hátt helt Elias ba'alsprofetarnar fyri spott, og hví?

15. Hvussu vísir dømið við ba'alsprofetunum, at tað er tápuligt at velja nakran annan „harra" enn Jehova?

„Tá fall eldur [Jehova] niður“

Hin sanni Gud svaraði

16 Seint seinnapartin átti Elias tørn. Hann reisti upp aftur altarið hjá Jehova, sum fíggindar hins sanna Guds eftir øllum at døma høvdu brotið niður. Hann brúkti 12 steinar, sum kanska skuldu minna nógv í tíggjuættaríki Ísraels á, at Lógin, ið var givin øllum 12 ættum, enn var galdandi fyri tey øll. Síðani legði hann ofrið hjá sær á altarið og læt tað díkja undir í vatni, møguliga úr Miðjarðarhavinum, sum lá nærindis. Hann gróv enntá eina grøv rundan um altarið og læt hana fylla við vatni. Eins og hann hevði givið ba'alsprofetunum allar fyrimunir, gav hann Jehova allar vansarnar — so stórt álit hevði hann á Gudi sínum. — 1 Kong. 18:30-35.

Bønin hjá Eliasi vísti, at hann enn var góður við fólkið, tí hann vildi so fegin síggja Jehova 'venda hjarta teirra aftur til sín'

17 Tá ið alt var klárt, bað Elias eina bøn. Tað var ein einføld og væl orðað bøn, sum vísti, hvat Elias hugsaði mest um. Fremst av øllum vildi hann, at øll skuldu vita, at tað ikki var Ba'al, men Jehova, sum var „Gud í Ísrael". Í øðrum lagi vildi hann, at øll skuldu vita, at hann var tænari Jehova, og at øll æra og dýrd hoyrdi Gudi til. At enda vísti hann, at hann enn var góður við fólkið, tí hann vildi so fegin síggja Jehova 'venda hjarta teirra aftur til sín'. (1 Kong. 18:36, 37) Hóast alla neyðina, sum trúloysi teirra var orsøk til, elskaði Elias tey framvegis. Kunnu vit í okkara bønum vísa líknandi áhuga fyri, at navn Guds verður halgað, vera líka eyðmjúk og hava líknandi samkenslu við teimum, sum tørvar hjálp?

18 Áðrenn Elias bað, hevur mannamúgvan kanska ivast í, um Jehova eisini skuldi vísa seg at vera ein lygn, eins og Ba'al hevði víst seg at vera. Men eftir bønina var einki at ivast í. Frásøgan sigur: „Tá fall eldur [Jehova] niður; hann gjørdi enda á brenniofrinum, brenninum, grótinum og svørðinum og turkaði upp vatnið, sum í grøvini var." (1 Kong. 18:38) Av sonnum eitt stórfingið svar! Men hvussu svaraði fólkið?

19 „Tað er [Jehova], sum er Gud! Tað er [Jehova], sum er Gud!" róptu tey øll. (1 Kong. 18:39) Endiliga skiltu tey, hvør sannleikin var. Men tey høvdu kortini onga trúgv víst enn. At viðurkenna

---

16. (a) Hvat varð fólkið kanska mint á, tá ið Elias reisti upp aftur altarið hjá Jehova á Karmelsfjalli? (b) Hvat gjørdi Elias eisini, sum vísti, at hann veruliga hevði álit á Gudi sínum?

17. Hvussu avdúkaði bønin hjá Eliasi, hvat hann hugsaði mest um, og hvussu kunnu vit taka eftir honum í okkara egnu bønum?

18, 19. (a) Hvussu svaraði Jehova bønini hjá Eliasi? (b) Hvat gav Elias fólkinum boð um at gera, og hví høvdu ba'alsprestarnir onga náði uppiborið?

Jehova sum hin sanna Gud, eftir at hava sæð eld falla niður av himli sum svar upp á eina bøn, var satt at siga einki serligt tekin um trúgv. Tí kravdi Elias meira av teimum. Hann bað tey gera tað, sum tey áttu at gjørt nógv ár frammanundan — akta lóg Jehova. Lóg Guds segði, at falskir profetar og avgudadýrkarar skuldu verða tiknir av døgum. (5 Mós. 13:5-9) Hesir ba'alsprestarnir vóru stívrendir fíggindar hjá Jehova Gudi, og teir arbeiddu við vilja ímóti hansara ætlanum. Høvdu teir uppiborið náði? Hvørja náði høvdu teir kanska víst øllum teimum óseku børnunum, ið vórðu brend livandi sum offur til Ba'al? (***Les Orðtøkini 21:13;*** Jer. 19:5) Hesir menn høvdu als onga náði uppiborið! Tí gav Elias boð um, at teir skuldu verða dripnir, og dripnir vórðu teir. — 1 Kong. 18:40.

20 Nútímans atfinnarar finnast kanska harðliga at tí, sum hendi eftir royndina á Karmelsfjalli. Nøkur bera kanska ótta fyri, at átrúnaðarligir fanatikarar skulu brúka hesa hendingina til at rættvísgera harðskap móti fólki, sum hevur eina aðra trúgv. Og tíverri eru nógvir átrúnaðarligir fanatikarar eisini harðligir nú á døgum. Men Elias var eingin fanatikari. Hann útinti tann rættvísa dómin, sum Jehova hevði felt, tá ið hann drap ba'alsprestarnar. Haraftrat vita sonn kristin, at tey ikki kunnu gera sum Elias og draga svørð úr slíðra móti óndum menniskjum. Nei, tey fylgja regluni, sum Jesus lærdi allar sínar lærisveinar, tá ið hann segði við Pætur: „Stikk svørð títt aftur, hagar sum tað eigur at vera! Tí allir teir, ið taka til svørð, skulu falla fyri svørði." (Matt. 26:52) Sum frá líður, fer Jehova at útinna sítt guddómliga rættvísi við soni sínum.

21 Sonn kristin eiga at liva eitt lív í trúgv. (Jóh. 3:16) Tað kann millum annað gerast við at taka eftir trúføstum monnum sum Eliasi. Hann tilbað bara Jehova og royndi av øllum alvi at fáa onnur at gera tað sama. Hann avdúkaði djarvur, at átrúnaðurin, sum Satan brúkti at lokka fólk burtur frá Jehova, var falskur. Og heldur enn at líta á seg sjálvan hevði hann álit á, at Jehova fór at avgera málið. Elias vardi sanna tilbiðjan. Latið okkum øll taka eftir hansara trúgv!

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvat kann Elias læra okkum um bara at tilbiðja Jehova og ongan annan?
- Hvussu kunnu vit taka eftir Eliasi, tá ið onkur er ósamdur við okkum um, hvat Bíblian lærir?
- Hvat kann bønin, sum Elias bað á Karmelsfjalli, læra okkum?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Eliasi?

---

20. Hví hava nútímans atfinnarar einki grundarlag fyri sína stúran í sambandi við, at Elias drap ba'alsprestarnar?

21. Hví er Elias eitt gott fyridømi hjá sonnum kristnum í dag?

KAPITTUL ELLIVU

Hann skimaðist, og hann bíðaði

ELIASI longdist eftir at sleppa at biðja til sín himmalska Faðir í einsemi. Men mannamúgvan, sum var rundan um hann, hevði júst sæð henda sanna profetin kalla eld niður av himli, og nógv av teimum royndu allarhelst at lifra fyri honum. Áðrenn Elias kundi fara niðan á Karmelsfjall at biðja til Jehova Gud fyri seg sjálvan, hevði hann eina óhugaliga uppgávu fyri sær. Hann skuldi tosa við Akab kong.

2 Munurin á teimum báðum monnunum fekk helst ikki verið størri. Akab, sum var ílatin kongalig stásklæði, var ein grammur, viljaveikur og fráfallin maður. Elias var í vanligum profetaklæðum — einum einfaldum kappa, kanska úr skinni ella vovnari kamel- ella geitaull. Hann var ein sera djarvur, falsleysur og trúfastur maður. Dagurin, sum nú var farin at halla, hevði avdúkað nógv um lyndið í hesum báðum monnunum.

3 Tað hevði verið ein ringur dagur hjá Akabi og øðrum ba'alsdýrkarum. Heidni átrúnaðurin, sum Akab og kona hansara, Jesabel drotning, stóðu á odda fyri í tíggjuættaríkinum Ísrael, hevði fingið ein ógvusligan stoyt. Ba'al var avdúkaður sum ein falskur gudur. Profetar hansara høvdu í vitloysi ákallað hann, dansað og skorið seg, so blóðið rann, fyri at fáa hann at svara við eldi. Men hesin lívleysi gudurin fekk ikki svarað teimum við so mikið sum einum lítlum eldi. Ba'al var ikki mentur at forða fyri, at teir 450 ba'alsprofetarnir vórðu dripnir, sum teir høvdu uppiborið. Men hesin falski gudurin hevði eisini svikið á annan hátt, og hetta svikið var av álvara um at koma fram í ljósmála. Í meiri enn trý ár høvdu ba'alsprofetarnir bønað Ba'al um at gera enda á turkinum, sum var í landinum, men tað hevði hann ikki megnað. Skjótt fór Jehova sjálvur at gera enda á turk-

1, 2. Hvørja óhugaliga uppgávu hevði Elias fyri sær, og á hvønn hátt vóru hann og Akab ymiskir?

3, 4. (a) Hví hevði tað verið ein ringur dagur hjá Akabi og øðrum ba'alsdýrkarum? (b) Hvørjar spurningar fara vit at kanna?

inum og harvið vísa, at hann var hin sanni Gud. — 1 Kong. 16:30–17:1; 18:1-40.

4 Men nær fór Jehova at leggja upp í leikin? Hvat fór Elias at gera inntil tá? Og hvat kunnu vit læra av hesum trúfasta manninum? Latið okkum kanna frásøguna. — ***Les Fyrru Kongabók 18:41-46.***

Ein biðjandi hugburður

5 Elias fór til Akab og segði: „Far nú niðan og et og drekk! Tí eg hoyri ljóð av regni.“ Hevði hesin óndi kongurin yvirhøvur lært nakað av tí, sum var farið fram henda dagin? Tað fáa vit ikki at vita í frásøguni, men einki bendir á, at hann angraði ella bað profetin biðja Jehova um fyrigeving sína vegna. Nei, Akab fór rætt og slætt „niðan at eta og drekka“. (1 Kong. 18:41, 42) Hvussu við Eliasi?

6 „Elias fór niðan á Karmelstind og boygdi seg til jarðar við andlitinum millum knøini.“ Meðan Akab fór niðan at eta og drekka, hevði Elias høvi at biðja til himmalska Faðir sín. Legg

5. Hvat bað Elias Akab gera, og mundi Akab hava lært nakað av tí, sum var farið fram henda dagin?

6, 7. Hvat bað Elias um, og hví?



Bønin hjá Eliasi speglaði hansara inniliga ynski um at síggja Guds vilja verða framdan

til merkis eyðmjúka kropsburðin hjá Eliasi — hann lá á knæ við andlitinum millum knøini. Hvat gjørdi hann? Okkum nýtist ikki at gita. Bíblian sigur í Brævi Jákups 5:18, at Elias bað Jehova geva regn. Hann bað helst eina slíka bøn á Karmelstindi.

7 Jehova hevði áður sagt: 'Eg skal lata regna á jørðini.' (1 Kong. 18:1) So Elias bað um, at vilji Jehova skuldi ganga út, og tað minnir nógv um bønina, sum Jesus lærdi sínar lærisveinar at biðja áraka túsund ár seinni. — Matt. 6:9, 10.

Elias bíðaði spentur eftir tekni um, at Jehova skjótt fór at lata tað regna

8 Dømið við Eliasi lærir okkum nógv um bøn. Tað, sum lá Eliasi fremst í huga, var, at vilji Guds skuldi verða framdur. Tá ið vit biðja, er gott at minnast til, at „biðja vit um okkurt eftir vilja [Guds], so hoyrir Hann okkum". (1 Jóh. 5:14) Tað er eyðsæð, at vit mugu vita, hvat vilji Guds er, um okkara bønir skulu hava hansara tokka — og tí eiga vit at lesa í Bíbliuni hvønn dag. Elias vildi eisini uttan iva, at turkurin skuldi fáa ein enda, tí hann hugsaði um alla neyðina hjá landsmonnum sínum. Hann var ivaleyst takksamur um undrið, hann hevði sæð Jehova útinna henda dagin. Vit vilja eisini, at okkara bønir skulu vísa okkara hjartans takksemi og umsorgan fyri øðrum. — ***Les Seinna Korintbræv 1:11; Filippibrævið 4:6.***

Hann hevði álit á Gudi og var eftiransin

9 Elias ivaðist ikki í, at Jehova fór at senda regn, men hann visti ikki, *nær* hann fór at gera tað. Hvat gjørdi profeturin, ímeðan hann bíðaði? Legg til merkis, at frásøgan sigur: „So segði hann við tænara sín: 'Far niðan og hygg út í havið!' Hann fór niðan og hugdi út, men segði: 'Einki er at síggja!' Sjey ferðir segði hann: 'Far avstað aftur!'" (1 Kong. 18:43) Hetta lærir okkum millum annað, at profeturin hevði álit á Gudi, og at hann var eftiransin.

10 Elias hevði álit á lyfti Jehova, og tí var hann spentur at síggja tekin um, at Jehova skjótt fór at lata tað regna. Hann bað tænara sín fara niðan á eitt gott útsýnisstað, so hann kundi líta

8. Hvat lærir dømið við Eliasi okkum um bøn?

9. Hvat bað Elias tænara sín gera, og hvørjar tveir eginleikar fara vit at kanna?

10, 11. (a) Hvussu vísti Elias, at hann hevði álit á lyfti Jehova? (b) Hví kunnu vit eisini líta á Guds lyfti?

út í havsbrúnna fyri at vita, um nakað bendi á, at tað fór at regna. Tá ið tænarin kom oman aftur, hevði hann ikki góð tíðindi at bera. Hann segði: „Einki er at síggja!“ Einki var at síggja í havsbrúnni, og eingi skýggj vóru eyðsýniliga at hóma á himli. Men legði tú til merkis nakað løgið? Minst til, at Elias júst hevði sagt við Akab kong: „Eg hoyri ljóð av regni.“ Hvussu kundi profeturin siga soleiðis, tá ið einki regnskýggj var at hóma?

11 Elias visti, hvat Jehova hevði lovað. Sum profetur og sendiboð Jehova var hann vísur í, at Gud fór at halda sítt lyfti. Elias hevði so stórt álit á Gudi, at tað var, sum hoyrdi hann longu ljóð av regni. Kanska minnir hetta okkum á tað, sum Bíblian sigur um Móses: „Hann helt á, sum hann hevði sæð hin ósjónliga.“ Er Gud líka veruligur í tínum huga? Hann gevur okkum góðar orsøkir til, at vit kunnu hava somu trúgv á hann og hansara lyfti. — Hebr. 11:1, 27.

12 Legg nú til merkis, hvussu eftiransin Elias var. Hann sendi tænara sín avstað aftur, ikki bara eina ferð ella tvær ferðir, men sjey ferðir! Vit kunnu ímynda okkum, at tænarin kanska troyttaðist av eini so eintáttaðari uppgávu, men Elias var enn líka íðin eftir at fáa eitt tekin og misti ikki vónina. Tá ið tænarin kom aftur sjeyndu ferð, segði hann endiliga: „Nú stígur lítið skýggj, til støddar sum manshond, upp úr havsbrúnni.“ Sært tú tænaran fyri tær, meðan hann stendur við strektum armi og við hondini roynir at meta um støddina á tí lítla skýnum, sum kom undan havsbrúnni í Stórahavinum? Kanska helt tænarin ikki, at hetta skýggið var nakað serligt. Men Elias helt, at tað hevði stóran týdning. Nú gav hann tænara sínum hesi átrokandi boð: „Far avstað og sig við Akab: ’Set hestarnar fyri vagnin og far oman, meðan framkomandi er fyri regni!’“ — 1 Kong. 18:44.

13 Aftur nú er Elias ein sera góð fyrimynd hjá okkum. Vit liva eisini á eini tíð, tá ið Gud skjótt fer at fremja sína ætlan. Elias bíðaði eftir, at turkurin skuldi halda uppat, og Guds tænarar í dag bíða eftir, at spilta heimsskipanin verður fyribeind. (1 Jóh. 2:17) Inntil Jehova Gud leggur upp í viðurskiftini, mugu vit vera líka so eftiransin sum Elias. Guds egni sonur, Jesus, gav lærisveinunum hesi ráð: „Vakið tí! Tit vita jú ikki, hvønn dag Harri tykkara kemur.“ (Matt. 24:42) Meinti Jesus, at lærisveinarnir fóru at vera fullkomiliga óvitandi um, nær endin skuldi

12. Hvussu vísti Elias, at hann var eftiransin, og hvat gjørdi hann, tá ið hann hoyrdi tíðindini um eitt lítið skýggj?

13, 14. (a) Hvussu kunnu vit vera eftiransin eins og Elias? (b) Hvørjar orsøkir hava vit til at gera tað, sum neyðugt er, uttan at drála?

„Ógvuligt regn kom“

koma? Nei, tí hann tosaði nógv um, hvussu heimurin fór at vera, tá ið endin nærkaðist. Vit hava øll møguleika at eygleiða uppfyllingina av nágreiniliga tekninum, sum eyðkennir endan á hesi heimsskipanini. — ***Les Matteus 24:3-7.***

14 Hvør einasti partur av tekninum gevur haldgóð og sannførandi prógv um hetta. Kunnu slík prógv fáa okkum at gera tað, sum neyðugt er í okkara tænastu fyri Jehova, uttan at drála? Eitt lítið skýggj í havsbrúnni var nóg mikið til at sannføra Elias um, at Jehova skjótt fór at senda regn. Varð trúfasti profeturin vónsvikin?

Jehova uggar og signar

15 Frásøgan sigur: „Eftir eini løtu var himmalin svartur av stormskýggjum, og ógvuligt regn kom. Akab fór upp í vagn sín og helt avstað til Jizre'el.“ (1 Kong. 18:45) Nú kom ferð á hendingarnar. Ímeðan tænarin hjá Eliasi bar Akabi boðini, gjørdist tað lítla skýggið til fleiri, og himmalin varð samdrigin og gráur. Vindurin vaks. Og endiliga fór tað at regna í Ísrael, eftir at turkur hevði verið í landinum í hálvtfjórða ár. Upptornaða jørðin seyg droparnar í seg. Tað regnaði av grimd, so vatnið í Kisonsløki fleyt yvir og uttan iva skolaði blóðið av ba'alsprofetunum burtur. Tey treisku fólkini í Ísrael fingu eisini ein kjans at vaska burtur ta ræðuligu dálkingina, ið ba'alsdýrkanin hevði ført inn í landið.

Eitt lítið skýggj var nóg mikið til at sannføra Elias um, at Jehova skjótt fór at senda regn. Teknið um teir síðstu dagarnar gevur okkum sannførandi orsøkir til at gera tað, sum neyðugt er, uttan at drála

16 Tað var ivaleyst tað, Elias vónaði. Kanska hugsaði hann um, hvussu hesar ógvusligu hendingarnar fóru at ávirka Akab. Fór Akab at angra og venda sær burtur frá ba'alsdýrkanini? Tað, sum var hent henda dagin, átti at fingið hann at gjørt slíkar broytingar. Vit vita sjálvsagt ikki, hvat Akab hugsaði um alt tað, sum var farið fram henda dagin. Frásøgan sigur okkum bara, at kongurin „fór upp í vagn sín og helt avstað til Jizre'el“. Hevði hann lært nakað? Hevði hann sett sær fyri at broyta kós? Nakað, sum hendi seinni, vísir, at svarið er nei. Men dagurin var ikki at enda komin hjá Akabi — ei heldur hjá Eliasi.

15, 16. Hvussu kom ferð á hendingarnar, og hvat kann Elias hava hugsað um Akab?

17 Elias fór nú avstað eftir sama vegi sum Akab. Ein long, vát og myrk ferð lá fyri framman. Men so hendi nakað óvanligt.

18 „Hond [Jehova] kom yvir Elias; hann gyrdi lendar sínar og rann undan Akab líka til Jizre'el." (1 Kong. 18:46) Tað er eyðsæð, at „hond [Jehova]" hevði yvirnatúrliga ávirkan á Elias. Jizre'el lá 30 kilometrar burtur, og Elias var eingin unglingi.* Ímynda tær Elias, tá ið hann bant síni longu klæði upp um lendarnar, so hann betur fekk rørt seg, og síðani rann eftir tí dýggjváta vegnum — hann rann so skjótt, at hann fekk kongliga stríðsvognin aftur og legði hann aftur um seg!

19 Elias má veruliga hava mett hetta sum eina stóra signing! At kenna slíka styrki, lívsmegi og áhaldni — kanska meiri enn hann hevði havt í ungdómi sínum — má veruliga hava verið hugtakandi. Vit minnast kanska lyftini um, at hini trúføstu skulu fáa fullkomna heilsu og verða birgari enn í ungdóminum, tá ið jørðin aftur verður eitt paradís. (***Les Esaias 35:6;*** Luk. 23:43) Meðan Elias fór spelandi eftir tí váta vegnum, visti hann uttan iva, at hann hevði tokka hins einasta sanna Guds, Jehova.

20 Jehova er fúsur at signa okkum. Latið okkum stremba eftir at fáa hansara signing; tað er altíð stríðið vert. Í hesum torføru og álvarsomu tíðum mugu vit eins og Elias vera eftiransin og gjølla kanna týðiligu prógvini um, at Jehova skjótt fer at leggja upp í leikin. Eins og Elias hava vit allar orsøkir til at líta fullkomiliga á lyftini frá Jehova, tí hann er hin „trúfasti Gud". — Sl. 31:6.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vísti Elias ein biðjandi hugburð?
- Hvussu vísti Elias, at hann hevði álit á lyfti Jehova?
- Hvat kunnu vit læra av eftiransni Eliasar?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Eliasi?

* Stutt eftir hetta gav Jehova Eliasi uppgávuna at læra Elisa upp. Elisa gjørdist kendur sum „hann, sum helti vatn á hendur Eliasar". (2 Kong. 3:11) Elisa var tænari Eliasar, við tað at hann eyðsýniliga hjálpti hesum eldra manninum á ymiskan hátt.

17, 18. (a) Hvat hendi Eliasi á vegnum til Jizre'el? (b) Hvat var merkisvert við ferðini hjá Eliasi frá Karmelsfjalli til Jizre'el? (Sí eisini undirgreinina.)

19. (a) Hvørji lyfti verða vit kanska mint á í sambandi við orkuna og áhaldnið, sum Jehova gav Eliasi? (b) Hvat visti Elias uttan iva, meðan hann rann til Jizre'el?

20. Hvussu kunnu vit stremba eftir at fáa signing Jehova?

KAPITTUL TÓLV

Hann varð uggaður av Gudi

ELIAS rann í regninum, meðan myrkrið legði seg. Teinurin til Jizre'el var langur, og Elias var ikki ungur longur. Men kortini rann hann uttan at møðast, tí „hond [Jehova]" var yvir honum. Hann hevði allarhelst ongantíð upplivað eina slíka megi streyma gjøgnum kroppin á sær. Hann hevði enntá lagt stríðsvognin hjá Akabi aftur um seg! — ***Les Fyrru Kongabók 18:46.***

2 Nú lá leiðin opin fyri honum. Ímynda tær Elias koma rennandi í oysandi regninum. Hann hevur allarhelst hugsað um alt tað, sum var farið fram henda mest hendingaríka dagin í lívi hansara. Tað, sum var hent, var av sonnum ein stórsigur hjá Jehova og tí sonnu tilbiðjanini. Vindbarda Karmelsfjall, har Jehova við Eliasi hevði framt tað stóra undrið, sum vísti, at ba'alsdýrkanin var følsk, var nú langt burturi og hómaðist neyvan í illveðrinum. Hundraðtals ba'alsprofetar vóru avdúkaðir sum óndir svíkjarar, og teir vóru av røttum fyribeindir. Síðani bað Elias Jehova gera enda á turkinum, sum hevði herjað landið í hálvtfjórða ár. Og regnið kom! — 1 Kong. 18:18-45.

3 Meðan Elias rann teir 30 kilometrarnar til Jizre'el við rununi spruttandi upp eftir beinunum, hevði hann helst góðar vónir. Hann hugsaði kanska, at nú var endiliga vend komin í. Nú mátti Akab broyta seg! Eftir tað, hann hevði verið vitni til, skuldi tað verið eyðsæð, at hann mátti gevast við ba'alsdýrkanini, forða Jesabel drotning í hennara óndu gerðum og steðga atsóknini ímóti tænarum Jehova.

4 Tá ið alt tykist at ganga eftir vild, er tað bara natúrligt at hava góðar vónir um framtíðina. Vit ímynda okkum kanska, at nú fara okkara umstøður at batna, og at okkara størstu trupulleikar langt um leingi eru loystir. Var tað soleiðis, Elias hugsaði, er tað einki

1, 2. Hvat fór fram tann mest hendingaríka dagin í lívi Eliasar?

3, 4. (a) Hví man Elias hava havt góðar vónir, meðan hann rann til Jizre'el? (b) Hvørjar spurningar fara vit at kanna?

„Elias . . . rann undan Akab líka til Jizre’el“

løgið, tí hann „var menniskja undir somu korum sum vit“. (Ják. 5:17) Men í roynd og veru hevði Elias minni enn so vunnið á øllum sínum trupulleikum. Satt at siga fór Elias bert fáar tímar seinni at verða so óttafullur og niðurboygdur, at hann bara ynskti sær deyðan. Hvussu bar tað til, og hvussu hjálpti Jehova honum at styrkja sína trúgv og sítt dirvi? Latið okkum vita.

Tað gekk ikki sum væntað

5 Sást nakað tekin um, at Akab var ein broyttur maður, tá ið hann kom til kongsborgina í Jizre’el? Vit lesa: „Akab segði nú Jesabel frá øllum, ið Elias hevði gjørt, og hvussu hann hevði dripið allar profetarnar við svørði.“ (1 Kong. 19:1) Legg til merkis, at Akab einki nevndi um Jehova, Gud Eliasar, tá ið hann segði frá, hvat var farið fram henda dagin. Av tí at Akab ikki var ein andaligur maður, dugdi hann bert at síggja hesi stóru undrini úr einum menniskjaligum sjónarhorni — sum nakað, „ið Elias hevði gjørt.“ Eitt er vist, hann hevði ikki lært at virða Jehova Gud. Og hvat gjørdi hevndarhugaða kona hansara?

6 Jesabel varð fúkandi óð! Frá sær sjálvari í øði sendi hon Eliasi hesi boð: „Gudarnir lati mær gangast illa bæði nú og hereftir, um eg ikki um hesa tíðina í morgin geri við lív títt, sum gjørt er við lív teirra!“ (1 Kong. 19:2) Hetta var ein deyðshóttan av ringasta slag. Við øðrum orðum svór Jesabel, at hon sjálv skuldi doyggja, um Elias ikki var dripin innan eitt samdøgur fyri at hevna ba’alsprofetarnar. Ímynda tær, at Elias verður vaktur í herbergi sínum í Jizre’el hesa illveðursnáttina — bert fyri at hoyra tey ræðuligu orðini frá boðberanum hjá drotningini. Hvussu ávirkaði tað Elias?

Mótleysur og óttafullur

7 Hevði Elias havt nakra vón um, at stríðið ímóti ba’alsdýrkanini var um at vera av, skilti hann brádliga, at so var ikki. Jesabel læt seg ikki ræða. Ein rúgva av øðrum trúføstum profetum vóru longu dripnir eftir hennara boðum, og nú tóktist hann at vera hin næsti í røðini. Hvussu ávirkaði henda hóttanin Elias? Bíblian sigur: „Tá fall ræðsla á hann.“ Sá Elias fyri sær tann ræðuliga deyðan, sum Jesabel ætlaði honum? Dvøldi hann við slíkar tankar, er tað ikki løgið, at hann misti mótið. Hvussu var og ikki, ’helt hann avstað fyri at bjarga lívinum’. — 1 Kong. 18:4; 19:3.

---

5. Fekk Akab størri virðing fyri Jehova eftir tað, sum var hent á Karmelsfjalli, og hvussu vita vit tað?

6. Hvørji boð sendi Jesabel Eliasi, og hvat lá í teimum?

7. Hvussu ávirkaði hóttanin hjá Jesabel Elias, og hvat gjørdi hann?

8 Elias var ikki hin einasti av Guds trúføstu tænarum, sum varð yvirtikin av ótta. Nógv ár seinni hevði Pætur ápostul ein líknandi trupulleika. Tá ið Jesus til dømis gjørdi Pætur føran fyri at ganga á vatninum, fall ótti á Pætur, „táið hann sá hitt ringa veðrið“. Hann misti mótið og fór at søkka. (***Les Matteus 14:30.***) Frásøgurnar um Elias og Pætur læra okkum nakað virðismikið. Vilja vit varðveita okkara dirvi, mugu vit ikki dvølja við tað, sum ger okkum óttafull. Vit mugu festa tankar okkara við Hann, sum gevur vón og styrki.

„Nú er nóg mikið!“

9 Fullur av ótta flýddi Elias einar 150 kilometrar í ein útsynning til Be’erseba, ein bý nærindis sunnara landamarkinum í Juda. Har læt hann tænara sín vera eftir, meðan hann sjálvur fór út í oyðimørkina. Í frásøguni stendur, at hann fór eina „dagsferð“. Tí kunnu vit hugsa okkum, at hann fór avstað í lýsingini, helst uttan at hava nakað við sær. Hugtungur og drivin av ótta bardi hann seg ígjøgnum illgongda lendið í tí brennandi sólini. Tá ið sólin roðaði og at enda hvarv í sjónarringinum, hvurvu eisini seinastu kreftirnar hjá Eliasi. Útlúgvaður setti hann seg undir ein gývilrunn — frægasta skjólið, ið var at finna í hesum bera landslagnum. — 1 Kong. 19:4.

Vilja vit varðveita okkara dirvi, mugu vit ikki dvølja við tað, sum ger okkum óttafull

10 Elias bað í berum vónloysi. Hann bað um at sleppa at doyggja. Hann segði: „Eg eri ikki betri enn fedrar mínir!“ Hann visti, at fedrar hansara ikki vóru annað enn dust og bein í grøvini og tí ikki vóru førir fyri at gera nakað fyri nakran. (Præd. 9:10) Elias kendi seg líka nyttuleysan sum teir. Tað er ikki løgið, at hann segði: „Nú er nóg mikið!“ Hvat skuldi hann liva til?

11 Skuldi tað komið óvart á okkum, at ein tænari hjá Gudi kundi gerast so hugtungur? Nei, ikki endiliga. Í Bíbliuni lesa vit um fleiri av trúføstu tænarum Guds, ið vóru so illa fyri kensluliga, at teir ynsktu sær deyðan — teirra millum vóru Rebekka, Jákup, Móses og Job. — 1 Mós. 25:22; 37:35; 4 Mós. 11:13-15; Job 14:13.

---

8. (a) Hvussu líktist trupulleikin hjá Pæturi tí hjá Eliasi? (b) Hvat kunnu frásøgurnar um Elias og Pætur læra okkum?

9. Lýs ferðina hjá Eliasi, og hvussu hann hevði tað, meðan hann flýddi.

10, 11. (a) Hvat bað Elias Jehova um, og hví? (b) Nýt skriftstøðini til at lýsa kenslurnar hjá øðrum trúføstum tænarum, sum gjørdust hugtungir.

12 Vit liva í 'torførum tíðum', og tí er tað ikki løgið, at nógv fólk, ja, eisini trúfastir tænarar hjá Gudi, kenna seg hugtung viðhvørt. (2 Tim. 3:1) Skuldi tú einaferð komið so illa fyri, hevði tað verið gott hjá tær at gjørt sum Elias, ið oysti út hjarta sítt fyri Gudi. Jehova er hóast alt „Gud alrar troystar". (***Les Seinna Korintbræv 1:3, 4.***) Troystaði hann Elias?

Jehova tók sær av sínum profeti

13 Hvussu heldur tú, Jehova hevði tað, tá ið hann hugdi niður úr himli og sá elskaða profetin hjá sær liggja undir einum runni í oyðimørkini og bøna um at sleppa at doyggja? Okkum nýtist ikki at gita. Tá ið Elias var sovnaður, sendi Jehova ein eingil til hansara. Eingilin nam blídliga við Elias, vakti hann og segði: „Reis teg og et!" Tað gjørdi Elias, tí eingilin hevði sett vatn og eitt nýbakað breyð framman fyri hann. Mundi hann takka einglinum? Frásøgan sigur bert, at hann fekk sær at eta og drekka og síðani legði seg aftur at sova. Var hann so mótfallin, at hann ikki fekk tosað? Í øllum førum vakti eingilin hann eina ferð aftrat, kanska tá ið tað fór at lýsa fyri degi. Enn eina ferð segði hann við Elias: „Reis teg og et," og legði hesi áhugaverdu orðini aftrat: „Annars verður vegurin tær ov langur." — 1 Kong. 19:5-7.

14 Gud hevði boðað einglinum frá, hvagar Elias ætlaði sær. Eingilin visti eisini, at ferðin hevði verið ov tung hjá Eliasi at klárað í egnari megi. Sum tað er uggandi at tæna einum Gudi, ið kennir okkara mál og avmarkingar betur enn vit sjálvi gera! (***Les Sálm 103:13, 14.***) Hvussu væl gagnaðist henda máltíðin Eliasi?

15 Vit lesa: „Hann reistist tá og fekk sær at eta og drekka, og styrktur av hesi máltíð gekk hann 40 dagar og 40 nætur, líka til Horeb, fjall Guds." (1 Kong. 19:8) Elias fastaði í 40 dagar og 40 nætur eins og Móses hevði gjørt umleið 600 ár frammanundan, og eins og Jesus gjørdi næstan 1000 ár seinni. (2 Mós. 34:28; Luk. 4:1, 2) Henda eina máltíðin fekk ikki allar trupulleikarnar at hvørva, men hon helt honum uppi á undursaman hátt. Ímynda tær henda gamla mannin stríða seg ígjøgnum illgongdu oyðimørkina dag eftir dag, viku eftir viku í næstan hálvanannan mánað.

---

12. Hvussu eigur tú at taka eftir Eliasi, um tú viðhvørt kennir teg sera tungan í huga?

13, 14. (a) Hvussu vísti Jehova hugtunga profeti sínum eyma umsorgan við einum eingli? (b) Hví er tað uggandi at vita, at Jehova veit alt um okkum øll, harímillum okkara avmarkingar?

15, 16. (a) Hvat varð Elias førur fyri vegna máltíðina frá Jehova? (b) Hví skulu vit virðismeta tað, sum Jehova gevur sínum tænarum í dag?

16 Jehova tekur sær eisini av sínum tænarum í dag, ikki við at geva teimum bókstaviligan mat á undurfullan hátt, nei, hann gevur teimum eina aðra og betri føði. Hann gevur sínum tænarum andaliga føði. (Matt. 4:4) Tá ið vit læra um Gud við at lesa í hansara orði og í lesnaði, sum er neyvt grundaður á Bíbliuna, verða vit styrkt andaliga. At taka slíka andaliga føði til okkum, loysir kanska ikki allar okkara trupulleikar, men tað kann hjálpa okkum at tola tað, sum annars hevði verið ótolandi. Tað gevur okkum eisini 'ævigt lív'. — Jóh. 17:3.

17 Elias gekk nærum 320 kilometrar, inntil hann umsíðir kom til Horebsfjall. Hetta staðið hevði stóran týdning, tí tað var her, Jehova nógv ár frammanundan við einum eingli vísti seg fyri Mósesi í brennandi tornarunninum, og tað var eisini her, Jehova seinni gjørdi Lógarsáttmálan við Ísrael. Elias fann sær skjól í einum helli.

Hvussu uggaði og styrkti Jehova profet sín?

18 Á Horebsfjalli kom „orð" Jehova til Elias, eyðsýniliga við einum eingli, sum spurdi: „Hvat vilt tú her, Elias?" Spurningurin varð helst settur í blídligum tónalagi, tí hann fekk Elias at siga frá sínum innastu kenslum. Hann segði: „Eg havi verið íðin fyri [Jehova] Gud herskaranna; tí Ísraelsmenn hava vent sáttmála Tínum bakið; altar Tíni hava teir rivið niður, og profetar Tínar hava teir dripið við svørði; eg eri einsamallur eftir, og nú liggja teir mær eftir lívinum." (1 Kong. 19:9, 10) Hesi orðini vísa á í minsta lagi tríggjar orsøkir til, at Elias var hugtungur.

19 Í fyrsta lagi helt Elias, at hansara arbeiði hevði verið til fánýtis. Hóast hann í áravís hevði „verið íðin" at tæna Jehova og hevði sett Guds heilaga navn og tilbiðjanina av honum fram um alt annað, so tóktust viðurskiftini bara at versna. Fólkið var enn trúleyst og uppreistrarhugað, og falska tilbiðjanin hevði veruliga vundið upp á seg. Í øðrum lagi kendi Elias seg einsamallan. „Eg eri einsamallur eftir," segði hann, sum var hann einasti maðurin í landinum, ið enn tænti Jehova. Í triðja lagi var hann bangin. Nógvir aðrir trúfastir profetar vóru longu dripnir, og hann var vísur í, at nú fór hann at verða tann næsti í røðini. Kanska hevur tað ikki verið lætt hjá Eliasi at leggja hesar kenslurnar á borðið, men hann aftraði seg ikki, hvørki av stoltleika ella av smædni. Við at lata hjarta sítt upp fyri Gudi í bøn, gjørdist hann eitt gott fyridømi hjá øllum trúføstum menniskjum. — Sl. 62:9.

---

17. Hvar fór Elias, og hví hevði hetta staðið stóran týdning?

18, 19. (a) Hvønn spurning setti eingil Guds, og hvussu svaraði Elias?
(b) Hvørjar tríggjar orsøkir vóru til, at Elias var hugtungur?

Jehova uggaði og styrkti Elias við síni undurfullu megi

20 Hvussu hjálpti Jehova Eliasi burtur úr óttanum og stúranini? Eingilin gav Eliasi boð um at stilla seg við hellismunnan. Hann gjørdi, sum hann varð biðin, uttan at vita hvat hann hevði í væntu. Knappliga kom sterkur stormur! Gangurin hevur helst verið øgiligur, tí hann kleyv fjøll og soraði klettar. Ímynda tær Elias, meðan hann royndi at verja eyguni og samstundis helt fast um síni tungu klæði, sum stormurin hálaði og skrykti í. Síðani mátti hann stríðast fyri ikki at missa fótafestið, tí sjálv hellan undir honum fór at ridla og skelva — ein jarðskjálvti risti økið! Hann var ikki meir enn komin fyri seg aftur, fyrr enn ein stórur eldur kom framvið og noyddi hann inn aftur í hellið at verja seg fyri brennandi hitanum. — 1 Kong. 19:11, 12.

21 Frásøgan sigur í hvørjum einstøkum føri, at Jehova ikki var í hesum ógvusligu náttúrufyribrigdunum. Elias visti, at Jehova ikki var nakar fornur náttúrugudur, sum til dømis Ba'al, ið varð ákallaður sum „tann, ið ríður á skýggjunum" ella sum tann, ið gevur regn. Jehova er tann veruliga keldan til allar tær stórslignu náttúrukreftirnar, og hann er eisini so ómetaliga nógvar ferðir størri enn nakað av tí, hann hevur skapt. Sjálvt bókstavligu himlarnir rúma honum ikki! (1 Kong. 8:27) Hvussu hjálpti alt hetta Eliasi? Minst til, hvussu bangin hann var. Var Jehova Gud, sum átti alla hesa veldigu megi, við Eliasi, nýttist honum als ikki at óttast Akab og Jesabel. — ***Les Sálm 118:6.***

Bíblian kann vera sum tann 'milda, lágmælta røddin', um vit fylgja henni

22 Tá ið eldurin var farin, gjørdist púra kvirt, og Elias hoyrdi eitt „milt suð ['eina milda, lágmælta rødd,' *NW*]". Hon eggjaði aftur Eliasi til at tosa, og tað gjørdi hann, ja, enn eina ferð oysti hann út hjarta sítt.* Kanska hevur hetta eisini sissað hann. Men tað, sum 'milda, lágmælta røddin' nú segði við hann, hevur uttan iva styrkt hann uppaftur meira. Jehova vissaði

* Tann, sum átti hesa 'mildu, lágmæltu røddina' kann hava verið sami eingilin, ið verður umrøddur í Fyrru Kongabók 19:9 sum tann, ið bar „orð [Jehova]". Í ørindi 15 verður hesin andin rætt og slætt umrøddur sum „[Jehova]". Kanska verða vit mint á himmalska sendiboðið, sum Jehova nýtti til at leiða ísraelsfólk í oyðimørkini. Gud segði um hann: „Navn Mítt er í honum." (2 Mós. 23:21) Vit vita sjálvandi ikki við vissu, hvør ið átti røddina, men tað er vert at leggja til merkis, at Jesus, áðrenn hann gjørdist menniskja, tænti sum „Orðið", serligi talsmaður Jehova, tá ið ein boðskapur skuldi berast tænarum Guds. — Jóh. 1:1.

20, 21. (a) Lýs tað, sum Elias sá úr hellismunnanum á Horebsfjalli. (b) Hvat lærdi Elias av, at Jehova sýndi honum sítt vald?

22. (a) Hvussu vissaði 'milda, lágmælta røddin' Elias um, at hann var ein sera virðismikil tænari? (b) Hvør kann hava átt ta 'mildu, lágmæltu røddina'? (Sí undirgreinina.)

Elias um, at hann var ein sera virðismikil tænari. Hvussu tá? Gud avdúkaði fyri honum, hvørja langtíðarætlan hann hevði í stríðnum við ba'alsdýrkanina í Ísrael. Greitt var, at stríðið hjá Eliasi ikki hevði verið til fánýtis, tí einki kundi forða Gudi í at fremja sína ætlan. Haraftrat hevði Elias framvegis ein leiklut í hesi ætlanini, tí Jehova bað hann fara aftur til verka og gav honum ávísa leiðbeining hesum viðvíkjandi. — 1 Kong. 19:12-17.

23 Men hvussu var vorðið við einseminum hjá Eliasi? Jehova hjálpti honum eisini í tí sambandi. Í fyrra lagi bað hann Elias salva Elisa sum tann profetin, ið seinni skuldi verða eftirmaður hansara. Hesin yngri maðurin skuldi vera felagi og hjálpari Eliasar í eitt áramál. Sum hetta kom væl við! Í seinna lagi gav Jehova honum hesi góðu tíðindi: „Eg skal lata 7000 verða eftir í Ísrael — hvørt knæ, ið ikki hevur boygt seg fyri Ba'al, og hvønn munn, ið ikki hevur kyst hann." (1 Kong. 19:18) Elias var als ikki einsamallur. Tað hevur allarhelst uggað hann at hoyra um tey túsundtals trúføstu fólkini, sum ikki vildu tilbiðja Ba'al. Tey høvdu tørv á, at Elias helt fram í síni trúføstu tænastu, so hann kundi vera ein fyrimynd í óvikandi trúfesti móti Jehova ta døpru tíðina, sum tá var. Tað var uttan iva hjartanemandi hjá Eliasi at hoyra hesi orðini frá sendiboðnum hjá Jehova — tað var sum at hoyra 'mildu, lágmæltu rødd' Guds.

24 Eins og Elias kunnu vit verða púra bergtikin av at síggja stóru náttúrukreftirnar í skapanarverkinum, og tað av røttum! Skapanin speglar týðiliga megina hjá Skaparanum. (Róm. 1:20) Jehova nýtir enn sína óavmarkaðu megi til at hjálpa sínum trúføstu tænarum. (2 Krøn. 16:9) Men vit læra uppaftur meira um Gud við at lesa í hansara orði, Bíbliuni. (***Les Esaias 30:21.***) Bíblian kann vera sum tann 'milda, lágmælta røddin', um vit fylgja henni. Við henni rættleiðir og tilstuðlar Jehova okkum og vissar okkum um sín kærleika.

25 Kendi Elias seg uggaðan av tí, sum Jehova gjørdi á Horebsfjalli? Ja, tað gjørdi hann uttan iva, tí skjótt fór hann aftur til verka, og var aftur hin djarvi, trúfasti profeturin, sum stríddist ímóti falskari tilbiðjan. Taka vit eisini innblástu orðini hjá Gudi til okkum, 'troystina, ið skriftirnar geva', verða vit før fyri at taka eftir trúnni hjá Eliasi. — Róm. 15:4.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hví gjørdist Elias sera hugtungur?
- Hvørjar kenslur fingu Elias at missa mótið?
- Á hvønn hátt uggaði Jehova Elias?
- Hvussu fert tú at taka eftir Eliasi, um tú skuldi mist mótið?

---

23. Hvussu hjálpti Jehova Eliasi í sambandi við hansara einsemi? Nevn tvey dømi.

24, 25. (a) Á hvønn hátt kunnu vit lurta eftir 'mildu, lágmæltu rødd' Jehova í dag? (b) Hví kunnu vit vera vís í, at Elias kendi seg uggaðan?

KAPITTUL TRETTAN

Hann lærdi av sínum mistøkum

JÓNAS vildi ynskt, at hann fekk latið oyruni aftur fyri tí ræðuliga ganginum. Tað var ikki bert stormurin, sum ýldi í rigninginum á skipinum, og heldur ikki risastóru aldurnar, ið buldraðu inn at skipinum, so tað knakaði og brakaði í hvørjum spreki. Nei, tað var nógv verri hjá Jónasi at hoyra rópini frá skiparanum og manningini, sum stríddust fyri at halda skipinum á floti. Jónas var vísur í, at teir fóru at drukna — og alt var hansara skyld!

2 Hvussu var Jónas komin í eina slíka trongstøðu? Hann hevði syndað álvarsliga ímóti Jehova Gudi. Hvat hevði hann gjørt? Var tað ov seint at bøta um støðuna? Svarini kunnu læra okkum nógv. Til dømis lærir frásøgan um Jónas okkum, at sjálvt tey, sum hava sterka trúgv, kunnu fara av kós — men eisini, at tey kunnu koma upp á rættkjøl aftur.

Jónas hevði ikki bara ringar síður — hann gjørdi eisini nógv gott

Ein profetur úr Galilea

3 Tá ið fólk hugsa um Jónas, hava tey ofta lyndi til at leggja dent á hansara ringu síður, eitt nú at hann stundum var ólýðin og treiskur. Men Jónas gjørdi eisini nógv gott. Minst til, at Jehova hevði valt hann at vera profet. Hevði Jónas verið trúleysur ella órættvísur, hevði Jehova ikki givið honum eina slíka ábyrgdaruppgávu.

4 Bíblian sigur okkum eitt sindur um, hvør Jónas var. (***Les Seinnu Kongabók 14:25.***) Hann var úr Gat-Hefer, bert 4 kilo-

1, 2. (a) Hvørja støðu hevði Jónas komið sær sjálvum og skipsmonnunum í? (b) Hvussu kann frásøgan um Jónas hjálpa okkum?

3-5. (a) Hvat leggja fólk ofta dent á, tá ið tey hugsa um Jónas? (b) Hvat vita vit um Jónas? (Sí eisini undirgreinina.) (c) Hví var uppgávan hjá Jónasi sum profetur hvørki løtt ella hugalig?

metrar frá Nazaret, har sum Jesus Kristus umleið 800 ár seinni skuldi vaksa upp.* Jónas var profetur, meðan Jeroboam II var kongur í tíggjuættaríkinum Ísrael. Elias var langt síðani deyður, og eftirmaður hansara, Elisa, doyði, meðan pápi Jeroboam stjórnaði. Hóast Jehova við teimum hevði beint fyri ba'alsdýrkanini, var Ísrael aftur farið av leið. Landið var ávirkað av einum kongi, ið „gjørdi tað, sum ónt var í eygum [Jehova]". (2 Kong. 14:24) So tað hevur valla verið nøkur løtt ella hugalig uppgáva hjá Jónasi at vera profetur. Men hann var trúfastur og gjørdi, sum honum var álagt.

5 Men so ein dagin broyttist lívið hjá Jónasi fullkomiliga. Hann fekk eina uppgávu frá Jehova, sum hann helt vera sera torføra. Hvat bað Jehova hann gera?

„Halt avstað, far til Nineve"

6 Jehova segði við Jónas: „Halt avstað, far til Nineve, hin stóra stað, og tala móti honum! Tí óndskapur teirra er stigin upp fyri andlit Mítt." (Jón. 1:2) Tað er ikki ringt at skilja, hví Jónas kanska helt hesa uppgávuna vera ræðandi. Nineve lá okkurt um 800 kilometrar eystanfyri, og til gongu mundi ferðin hagar vara umleið ein mánað. Men henda langa ferðin tóktist kanska at vera tann minsti parturin av uppgávuni, tí í Nineve skuldi Jónas bera assýrum ein dómsboðskap frá Jehova. Teir vóru tiltiknir fyri at vera sera harðligir og ógvusligir. Tá ið Guds egna fólk sum heild ikki vildi lurta eftir Jónasi, kundi hann so vænta, at hesir heidningarnir fóru at gera tað? Hvussu mundi fara at gangast einum einsamallum tænara hjá Jehova í stóra staðnum Nineve, sum við tíðini fór at verða róptur 'blóðstaður'? — Nah. 3:1, 7.

7 Vit vita ikki, um slíkir tankar runnu fram fyri Jónasi, men vit vita, at hann rýmdi. Jehova hevði biðið Jónas fara eystureftir, men hann fór beint øvuta vegin, so langt vestureftir sum gjørligt. Hann fór út móti strondini til havnarbýin Joppe, har hann fann eitt skip, sum skuldi til Tarsis. Nakrir bíbliuviðmerkjarar siga, at Tarsis lá í Spania. Um so var, ætlaði Jónas sær einar 3500 kilometrar burtur frá Nineve. Ein slík sjóferð tvørtur um

* Tað er áhugavert, at Jónas kom úr einum býi í Galilea, tí farisearnir søgdu forhánisliga um Jesus: „Rannsaka, so fært tú at síggja, at eingin profetur kemur úr Galilea!" (Jóh. 7:52) Nógvir umsetarar og granskarar rógva framundir, at farisearnir hildu, at eingin profetur nakrantíð var komin ella fór at koma úr lítilsvirda Galilea. Um so var, skúgvaðu farisearnir bæði søgu og profeti til viks. — Es. 9:1, 2.

6. Hvørja uppgávu gav Jehova Jónasi, og hví tóktist hon kanska ræðandi?

7, 8. (a) Hvussu avgjørdur var Jónas um at sleppa sær undan uppgávuni, sum Jehova hevði givið honum? (b) Hví skulu vit ikki halda, at Jónasi vantaði dirvi?

Stórahavið kann hava vart so mikið sum eitt ár. So avgjørdur var Jónas um at sleppa sær undan uppgávuni, sum Jehova hevði givið honum. — ***Les Jónas 1:3.***

8 Merkir tað, at Jónas var dirvisleysur? Vit mugu ikki vera ov skjót at døma hann. Sum vit seinni fáa at vita, var hann í øðrum sambandi sera djarvur. Men sum øll onnur, var Jónas eisini eitt ófullkomið menniskja, sum hevði nógvar veikleikar at dragast við. (Sl. 51:7) Hvør av okkum hevur ongantíð verið óttafullur?

9 Vit kunnu stundum halda, at tað, sum Gud biður okkum gera, er torført ella kanska ógjørligt. Vit kunnu enntá halda, at tað er ræðandi at bera øðrum tey góðu tíðindini um Guds ríki, sum kristin hava skyldu at gera. (Matt. 24:14) Tað er tíverri alt ov lætt hjá okkum at gloyma sannleikan í orðunum hjá Jesusi: „Alt er Gudi møguligt.“ (Mark. 10:27) Hava vit onkuntíð gloymt hetta, skilja vit kanska betur, at Jónas eisini av og á var ræddur. Men hvørjar avleiðingar fekk tað, at Jónas rýmdi?

Jehova rættleiðir profet sín

10 Ímynda tær Jónas, tá ið hann royndi at finna seg til rættis umborð á skipinum, sum allarhelst var eitt fønikiskt farmaskip. Hann sá, hvussu skipari og manning rokaðust við at rigga skipið til og leggja frá landi. Strondin hvarv so líðandi, og Jónas vónaði kanska, at nú var sloppið. Men knappliga broyttist veðrið.

11 Ódnarstormur brast á, og sjógvurin stóð í andarisi! Aldurnar vóru so høgar, at sjálvt eitt nútímans skip hevði verið lítið afturímóti. Hvussu leingi mundi eitt træskip so klára seg í hesum ódnarveðrinum uttan at smildrast í mastrarhøgu aldunum? Skilti Jónas longu nú tað, hann seinni skrivaði — at tað var Jehova, sum „sendi harðveður á sjógvin“? Tað er ilt at siga. Men hann sá í hvussu er, at skipsmenninir róptu á gudar sínar, og hann visti, at har var eingin hjálp at heinta. (3 Mós. 19:4) Hann skrivaði: „Skipið var um at ganga burtur.“ (Jón. 1:4) Og hvussu kundi Jónas biðja til tann Gud, sum hann rýmdi undan?

12 Av tí at Jónas kendi seg maktarleysan, fór hann niðurundir

---

9. Hvussu kunnu vit av og á hava tað í sambandi við eina uppgávu frá Jehova, og hvønn sannleika mugu vit tá minnast til?

10, 11. (a) Hvat vónaði Jónas kanska, tá ið farmaskipið legði út á hav? (b) Hvønn vanda kom skip og manning í?

12. (a) Hví skulu vit ikki uttan víðari lasta Jónas fyri at leggja seg at sova, meðan stormurin herjaði? (Sí eisini undirgreinina.) (b) Hvussu avdúkaði Jehova orsøkina til trupulleikan?

at finna eitt stað at leggja seg. Og har steinsovnaði hann.* Skiparin fann Jónas, vakti hann og segði, at hann mátti gera sum allir hinir og biðja til sín gud. Vísir í, at illveðrið onkursvegna var yvirnatúrligt, fóru sjómenninir at kasta lut um, hvør umborð á skipinum mundi vera orsøk til ta truplu støðuna, teir vóru komnir í. Eingin ivi er um, at Jónas fánaði meir og meir, so hvørt sum ein maður fyri og annar eftir varð útilokaður. Skjótt fór sannleikin at koma í ljósmála. Jehova stýrdi bæði storminum og lutakastinum ímóti einum og sama manni — Jónasi! — ***Les Jónas 1:5-7.***

13 Nú segði Jónas sjómonnunum, sum var. Hann tænti hinum alvalda Gudi, Jehova. Hann var rýmdur undan Gudi sínum og hevði verið honum ólýðin. Harvið hevði hann komið sær sjálvum og allari manningini í hesa vandamiklu støðuna. Menninir vóru skelkaðir, ræðslan lýsti úr eygum teirra. Teir spurdu hann, hvat teir skuldu gera við hann, so teir fingu bjargað skipinum og sær sjálvum. Hvat segði hann? Jónas fór møguliga upp at skelva, tá ið hann hugsaði um at drukna í kalda og uppøsta havinum. Men hvussu kundi hann lata allar hesar menninar doyggja, tá ið hann visti, at hann fekk bjargað teimum? Tí segði hann: „Takið meg og kastið meg á sjógvin! So fer sjógvurin at slætna hjá tykkum; tí eg veit, at tað er fyri mína skuld, hesin ógvuligi stormur er komin á tykkum.“ — Jón. 1:12.

14 Hetta vóru neyvan orð frá einum dirvisleysum manni! Tað man hava glett Jehova, at síggja, hvussu djarvur og ósjálvsøkin Jónas var í hesi neyðarstundini. Hetta er eitt dømi um, hvussu sterka trúgv Jónas hevði. Vit kunnu taka eftir hesi trúnni í dag við at hugsa meira um vælferðina hjá øðrum enn hjá okkum sjálvum. (Jóh. 13:34, 35) Eru vit fús at hjálpa, tá ið onkrum tørvar likamliga, kensluliga ella andaliga hjálp? Jehova verður sera glaður, tá ið vit gera tað.

15 Møguliga vóru sjómenninir eisini ávirkaðir av orðum Jónasar, tí í fyrstuni vildu teir ikki blaka hann fyri borð. Nei, teir royndu alt, teir vóru mentir sjálvir at stríða seg ígjøgnum stormin

* *Septuaginta* lýsir, hvussu fast Jónas svav við at leggja aftrat, at hann snorkaði. Men áðrenn vit koma til ta niðurstøðu, at Jónas legði seg at sova av berari líkasælu, mugu vit minnast til, at fólk, sum eru tung í huga, av og á blíva ógvuliga lin. Í sínum síðstu sorgartungu tímum saman við Pæturi, Jákupi og Jóhannesi í urtagarðinum Getsemane, fann Jesus „teir sovandi av sorg“. — Luk. 22:45.

13. (a) Hvat avdúkaði Jónas fyri sjómonnunum? (b) Hvat bað Jónas sjómenninar gera, og hví?

14, 15. (a) Hvussu kunnu vit taka eftir trúgv Jónasar? (b) Hvat gjørdu sjómenninir, tá ið Jónas segði, at teir skuldu kasta hann á sjógv?

— men einki hjálpti. Ódnarveðrið bara versnaði. At enda sóu teir, at einki annað var at gera enn at akta Jónas. Teir róptu á Gud hansara, Jehova, og bóðu hann miskunna sær. Síðani lyftu teir Jónas upp og blakaðu hann fyri borð. — Jón. 1:13-15.

Jehova miskunnar og bjargar Jónasi

16 Jónas sakk niður í uppøsta sjógvin. Møguliga baksaðist hann eina løtu fyri at halda sær á floti, ímeðan hann sá skipið sigla burtur í øllum sjórokinum. Men tey øgiligu aldubrotini skolaðu inn yvir hann og trýstu hann undir. Hann sakk longri og longri niður og misti alla vón.

17 Jónas greiddi seinni frá, hvussu hann hevði tað hesa løtuna. Ymiskar hendingar runnu honum í hug. Hann óttaðist fyri, at hann hevði mist tokka Guds vegna sítt ólýdni. Hann kendi tað, sum sakk hann heilt niður á havsins botn, til grundvøllir fjallanna, har hann varð fløktur inn í tara. Hetta skuldi eftir øllum at døma verða hansara váta grøv. — ***Les Jónas 2:3-7.***

16, 17. Lýs, hvat hendi Jónasi, tá ið hann varð kastaður av skipinum. (Sí eisini myndirnar.)

Jónas bað sjómenninar blaka seg á sjógv

18 Men bíða nú! Okkurt rørdi seg skamt frá honum — ein risastór, myrk og livandi vera. Hon kom nærri, og alt í einum setti hon eftir honum. Ein stórur kjaftur gloypti honum og svølgdi hann!

19 Nú mundi vera úti við honum. Men Jónas varnaðist nakað undursamt. Hann var enn á lívi! Hann var hvørki knústur, sodnaður ella kvaldur. Nei, hann andaði enn, hóast hetta átti at verið hansara grøv. Spakuliga fyltist Jónas við ærufrykt. Eingin ivi var um, at tað var Jehova Gud, sum hevði 'latið stóran fisk koma og gloypa Jónasi'.* — Jón. 2:1.

20 Minuttirnir gingu, og teir gjørdust tímar. Í hesum djúpa myrkrinum hevði Jónas tíð at hugsa og biðja til Jehova. Vit kunnu læra nógv um Jónas í bønini hjá honum. Hon stendur, øll sum hon er, at lesa í kapittul tvey í Jónasar bók. Hon vísir, at Jónas kendi Skriftirnar væl, tí hann vísti ofta til Sálmarnar. Bønin avdúkar eisini ein fløvandi eginleika, nevniliga takksemi. Jónas endaði bønina við at siga: „Eg skal ofra til Tín við takkarrødd; tað, ið eg havi lovað, skal eg halda. — Hjá [Jehova] er frelsa.“ — Jón. 2:10.

21 Har, tað mest óhugsandi staðið, „í búki fisksins“, skilti Jónas, at Jehova er førur fyri at frelsa, hvønn hann vil, har hann vil, og tá ið hann vil. Sjálvt har fann Jehova hugtunga tænara sín. (Jón. 2:1) Bert Jehova kundi í samfullar tríggjar dagar halda einum manni á lívi í búkinum á einum stórum fiski. Tað er gott hjá okkum í dag at minnast, at Jehova er „tann Gud, sum hevur lívsanda tín í hondini“. (Dán. 5:23) Tað er honum fyri at takka, at vit liva! Eru vit takksom? Eiga vit so ikki at vera Jehova lýðin?

* Hebraiska orðið fyri „fisk“ varð umsett til „sjóskrímsl“ ella „stórur fiskur“ á grikskum. Hóast tað ikki ber til at staðfesta nágreiniliga, hvat slag av skapningi tað var, eru hávar sæddir í Miðjarðarhavinum, sum eru so stórir, at teir fáa svølgt ein mann í einum. Aðrastaðni eru enn størri hávar; hvalhávurin kann verða upp í 15 metrar langur — kanska enntá longri!

18, 19. Hvat hendi Jónasi á havsins dýpi, hvat var tað fyri ein skapningur, sum var har, og hvør stýrdi hendingunum? (Sí eisini undirgreinina.)

20. Hvat kunnu vit læra um Jónas í bønini, hann bað, meðan hann var inni í stóra fiskinum?

21. Hvat lærdi Jónas um frelsu, og hvørja týdningarmikla læru mugu vit minnast?

22 Hvussu við Jónasi? Hevði hann lært at vísa Jehova takksemi við at vera lýðin? Tað hevði hann. Eftir tríggjar dagar og tríggjar nætur svam fiskurin inn ímóti landi, og 'spýði Jónas upp á turt'. (Jón. 2:11) Hugsa tær — eftir alt hetta skuldi Jónas ikki so mikið sum sjálvur svimja í land! Men hann skuldi sjálvur finna leið sína frá hesi strondini, hvar hon so var. Áðrenn long tíð var liðin, skuldi hansara takksemi kortini standa sína roynd. Í Jónas 3:1, 2 stendur: „Nú kom orð [Jehova] aðru ferð til Jónas; Hann segði: 'Halt avstað, far til Nineve, hin stóra stað, og ber hagar boðskapin, ið Eg gevi tær boð um!' " Og hvat gjørdi Jónas?

23 Hann drálaði ikki. Vit lesa: „Tá helt Jónas avstað og fór til Nineve, eins og [Jehova] hevði sagt við hann." (Jón. 3:3) So hann aktaði. Hann hevði heilt greitt lært av sínum mistøkum. Í hesum sambandi mugu vit eisini taka eftir trúnni hjá Jónasi. Vit synda øll og gera mistøk. (Róm. 3:23) Geva vit uppat, ella læra vit av okkara mistøkum og koma á røttu kós aftur og tæna Gudi lýðin?

24 Varð Jónas signaður afturfyri, at hann aktaði Jehova? Ja, tað kanst tú ætla! Til dømis frætti Jónas eftir øllum at døma seinni, at skipsmenninir vóru komnir undan við lívinum. Tí so skjótt sum Jónas var ósjálvsøkin og læt seg blaka fyri borð, slætnaði sjógvurin, og „stórur ótti fyri [Jehova]" fall á skipsmenninar, og teir ofraðu honum sláturoffur heldur enn sínum egnu følsku gudum. — Jón. 1:15, 16.

25 Ein enn størri signing kom nógv seinni. Jesus nýtti tíðina, Jónas var inni í stóra fiskinum, sum eina profetiska lýsing av síni egnu tíð í grøvini, ella deyðaríkinum. (***Les Matteus 12:38-40.***) Jónas verður helst ovurfegin um at hoyra um hesa signingina, tá ið hann fær lívið aftur á jørðini. (Jóh. 5:28, 29) Jehova vil eisini fegin signa teg. Fert tú, eins og Jónas, at læra av tínum mistøkum og verða lýðin og ósjálvsøkin?

HUGSA UM HETTA . . .

- Hevur tú nakrantíð, eins og Jónas, borið ótta fyri eini uppgávu, sum Jehova hevur givið tær?
- Hvussu vísti Jehova tol og miskunnsemi, tá ið hann lærdi Jónas lýdni?
- Hvussu vísti Jónas, at hann hevði lært av sínum mistøkum?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Jónasi?

22, 23. (a) Hvussu kom takksemi Jónasar at standa sína roynd? (b) Hvat kunnu vit læra av frásøguni um Jónas, tá ið vit gera mistøk?

24, 25. (a) Hvørja signing fekk Jónas, meðan hann enn livdi? (b) Hvørjar signingar bíða Jónasi í framtíðini?

Jehova „læt stóran fisk koma og gloypa Jónasi“

KAPITTUL FJÚRTAN

Hann lærdi miskunn

JÓNAS fór at hava ovmikið av tíð at hugsa. Fyri sær hevði hann eina gott og væl 800 kilometrar langa ferð. Tað fór at taka honum umleið ein mánað, ella kanska meira, at ganga so langt. Fyrst skuldi hann velja, um hann vildi fara stytstu ella tryggastu leiðina, og síðani skuldi hann fet fyri fet ganga um óteljandi dalar og fjøll. Hann noyddist helst at ganga fram við Sýriaoyðimørkini, fara tvørtur um stórar áir, sum til dømis Eufratánna, og leita sær innivist millum fremmand fólk í Áram, Mesopotamia og Assýria. Sum dagarnir gingu, hugsaði hann óttafullur um býin, sum nú nærkaðist fyri hvørt fótafet — Nineve.

2 Eitt visti Jónas fyri vist: Hann kundi ikki venda við og rýma undan hesi uppgávuni. Tað hevði hann longu roynt. Sum vit lósu í undanfarna kapitlinum, hevði Jehova tolin lært Jónas nakað týdningarmikið við fyrst at senda illveður og síðani bjarga honum á undursaman hátt við einum stórum fiski. Tríggjar dagar seinni spýði fiskurin Jónas upp á turt, og tá var hann ein meiri gudrøkin og lýðin maður. — Jónas, kapitlarnir 1 og 2.

3 Tá ið Jehova aðru ferð bað Jónas fara til Nineve, aktaði profeturin og fór longu leiðina eystureftir. (***Les Jónas 3:1-3.***) Men hevði hann latið rættleiðingina frá Jehova



1. Hvørja ferð hevði Jónas fyri sær, og hvussu dámdi honum at fara hagar?

2. Hvussu hevði Jónas lært, at hann ikki kundi rýma undan uppgávu síni?

3. Hvønn eginleika hevði Jehova víst Jónasi, men hvør spurningur stingur seg upp?

festa seg í hjartað? Jehova hevði eitt nú víst honum miskunn, bjargað honum undan at drukna, latið vera við at revsa hann fyri uppreisturin og eina ferð aftrat givið honum høvi at útinna uppgávu sína. Hevði Jónas eftir alt hetta lært at vísa øðrum miskunn? At læra at vísa miskunn er ofta trupult hjá ófullkomnum menniskjum. Latið okkum vita, hvat vit kunnu læra av tí, sum hendi Jónasi.

Ein dómsboðskapur og ein óvæntað umvending

4 Jónas hevði ikki somu áskoðan á Nineve, sum Jehova hevði. Vit lesa: „Nineve var stórur staður fyri Gudi.“ (Jón. 3:3) Tríggjar ferðir í frásøguni um Jónas stendur at lesa, at Jehova nevndi Nineve „hin stóra stað“. (Jón. 1:2; 3:2; 4:11) Hví helt Jehova staðin vera stóran, ella týðandi?

5 Nineve var ein gamal býur og ein av teimum fyrstu býunum, sum Nimrod bygdi eftir Vatnflóðina. Hann var sera

4, 5. Hví nevndi Jehova Nineve „hin stóra stað“, og hvat lærir tað okkum um Jehova?

Nineve var ein stórur býur, fullur av óndskapi

Jónas mátti hava bæði trúgv og dirvi, tá ið hann skuldi boða í Nineve

stórur og fevndi helst um fleiri aðrar býir. Tað tók tríggjar dagar at ganga úr einum enda í annan. (1 Mós. 10:11; Jón. 3:3) Nineve var eisini stórfingin við prýðiligum templum, veldigum múrum og øðrum áhugaverdum bygningum. Men tað var ikki hetta, sum var týðandi í eygum Jehova. Tað, sum hevði týdning fyri hann, vóru fólkini í býnum. Í Nineve vóru sera nógvir íbúgvar sammett við aðrar býir. Jehova var góður við fólkini, hóast alt tað ónda tey gjørdu. Hann er góður við øll menniskju og vil, at tey skulu umvenda seg og læra at gera tað, sum er rætt.

6 Tá ið Jónas endiliga fór inn í Nineve, kann stóra íbúgvaratalið, sum var meira enn 120.000, hava gjørt staðið enn meira ræðandi.* Hann gekk í ein dag og kom longri og longri inn í henda stórbýin, sum var stúgvandi fullur av fólki. Kanska leitaði hann eftir einum hóskandi staði at kunngera boðskapin. Men hvussu fekk hann tosað við hesi fólkini? Hevði hann lært seg at tosa assýriskt? Ella hevði Jehova við einum undri gjørt hann føran fyri tí? Tað vita vit ikki. Møguliga bar Jónas boðskapin fram á sínum egna tungumáli, hebraiskum, og fekk ein tolk at umseta fyri seg. Í øllum førum var boðskapurin hjá honum einfaldur og mundi ikki vinna honum nakran tokka: „Um fjøruti dagar skal Nineve verða lagdur í oyði!“ (Jón. 3:4) Hann kunngjørdi boðskapin við dirvi og endurtók hann fleiri ferðir. Við hesum vísti hann einastandandi dirvi og trúgv, eginleikar, sum kristnum í dag tørvar meira enn nakrantíð.

Boðskapurin hjá Jónasi var einfaldur og mundi ikki vinna honum nakran tokka

7 Fólkini í Nineve steðgaðu á fyri at hoyra boðskapin hjá Jónasi. Hann hevði allarhelst væntað eitt bæði fíggindaligt og ógvusligt aftursvar frá fólki. Men nakað merkisvert hendi. Fólk lurtaðu! Orðini hjá Jónasi gingu sum rótasúpan um allan býin. Skjótt tosaðu øll um dómsprofetiina hjá Jónasi. (***Les Jónas 3:5.***)

* Mett verður, at Samaria, høvuðsstaðurin í tíggjuættaríkinum Ísrael, hevði millum 20.000 og 30.000 íbúgvar á Jónasar døgum — tað er minni enn ein fjórðingur av íbúgvunum í Nineve. Á veldisdøgum sínum kann Nineve hava verið størsti býurin í heiminum.

6. (a) Hví kann Jónas hava hildið, at Nineve var ræðandi? (Sí eisini undirgreinina.) (b) Hvat lærir tað okkum um Jónas, at hann boðaði?

7, 8. (a) Hvussu tók fólkið í Nineve ímóti boðskapinum hjá Jónasi? (b) Hvat gjørdi kongurin í Nineve, tá ið hann hoyrdi boðskapin hjá Jónasi?

Rík og fátæk, sterk og veik, ung og gomul angraðu øll við sama lag og góvust at eta. Tíðindini um hetta komu skjótt konginum fyri oyra.

8 Kongurin angraði eisini, tá ið hann hoyrdi boðskapin hjá Jónasi. Fullur av gudsótta reistist hann úr trúnuni, læt seg úr sínum stásiligu klæðum og læt seg í einføld klæði eins og fólkið og „settist í øsku“. Saman við ’stórmonnum’ sínum gjørdi hann av við lóg, at føstan, sum fólkið longu av sínum eintingum var farið undir, skuldi halda fram. Hann gav boð um, at øll skuldu latast í syrgibúna, eisini kríatúrini.* Eyðmjúkur ásannaði hann, at hansara tegnar vóru sekir í óndskapi og harðskapi. Hann hevði ta vón, at Gud fór at vísa miskunn, tá ið hann sá, at tey angraðu. Hann segði: „Tað kundi borið á, at Gud . . . vendi Sær frá brennandi vreiði Síni, so vit gingu ikki til grundar!“ — Jón. 3:6-9.

Gud vil so fegin, at tey óndu angra og broyta kós eins og ninevemenn

9 Nakrir atfinnarar ivast í, at fólkini í Nineve kundu vera so skjót at broyta hugburð. Men bíbliugranskarar hava viðmerkt, at ein slík broyting samsvarar væl við, at fólk í slíkum mentanum í fornøldini ofta vóru pátrúgvin og vinglut. Haraftrat vita vit, at hesir atfinnarar fara skeivir, tí sjálvur Jesus Kristus vísti seinni til, at ninevemenn angraðu. (***Les Matteus 12:41.***) Jesus visti, hvat hann tosaði um, tí hann var í himli tá og sá tað, sum hendi. (Jóh. 8:57, 58) Sannleikin er tann, at vit ongantíð skulu halda, at tað er ógjørligt hjá fólki at angra — hvussu illa tey so skikka sær. Bara Jehova veit, hvat hjørtuni goyma.

Miskunnsemi Guds mótvegis menniskjans strangleika

10 Hvussu ávirkaði tað Jehova, at fólkið í Nineve angraði? Jónas skrivaði seinni: „Táið nú Gud sá hetta, sum tey gjørdu, at tey vendu við, hvør av ónda vegi sínum, angraði Hann tað illa,

* Tað kann tykjast løgið, at hetta boðið eisini fevndi um kríatúr, men nakað líknandi var komið fyri áður. Grikski søguskrivarin Herodot skrivaði, at persarar í fornøldini einaferð høvdu kríatúr við í syrgisiðunum, tá ið ein væl dámdur herovasti var deyður.

9. Hvønn iva hava atfinnarar sáað viðvíkjandi ninevemonnum, men hvussu vita vit, at teir fara skeivir?

10, 11. (a) Hvussu ávirkaði tað Jehova, at ninevemenn angraðu? (b) Hví kunnu vit vera vís í, at dómurin, Jehova feldi, ikki var eitt mistak?

ið Hann hevði hótt at lata koma yvir tey, og Hann gjørdi tað ikki.“ — Jón. 3:10.

11 Vil tað siga, at Jehova helt, at dómurin yvir Nineve var eitt mistak? Nei. Bíblian greiðir frá, at Jehova er fullkomiliga rættvísur. (***Les Fimtu Mósebók 32:4.***) Jehova hevði rætt og slætt ikki fyri neyðini at vera illur inn á ninevemenn longur. Hann sá, at teir broyttu seg og sannaði, at tað ikki longur var neyðugt at revsa teir. Jehova gjørdi av at vísa teimum miskunn.

12 Jehova er als eingin strangur, kensluleysur og harður Gud, sum trúarleiðarar ofta lýsa hann. Nei, hann er tvørturímóti rímiligur, lagaligur og miskunnsamur. Tá ið hann ger av at revsa tey óndu, letur hann altíð síni vitni á jørðini ávara fólk frammanundan, tí hann vil so fegin, at tey óndu skulu gera sum ninevemenn — angra og broyta kós. (Ez. 33:11) Jehova segði við profet sín, Jeremias: „Stundum tali Eg um tjóð og ríki, at Eg skal rykkja upp, ríva niður og forkoma; men um tá tjóðin, ið Eg havi talað um, vendir við frá óndskapi sínum, so angri Eg tað ringa, ið Eg hevði ætlað at gera henni.“ — Jer. 18:7, 8.

13 Var profetiin hjá Jónasi følsk? Nei, hon ávaraði fólkini um, hvat fór at henda, um tey ikki angraðu. Ávaringin var grundað á óndskapin hjá ninevemonnum. Men teir broyttu seg. Skuldu teir seinni farið aftur til sínar óndu leiðir, fór Gud at útinna sama dóm yvir teir. Og tað er júst tað, sum hendi. — Zef. 2:13-15.

14 Hvussu ávirkaði tað Jónas, at oyðingin ikki kom, tá ið hann væntaði tað? Vit lesa: „Hetta dámdi Jónasi ógvuliga illa, og ilt kom í hann.“ (Jón. 4:1) Hann bað enntá eina bøn, ið ljóðar sum ein ábreiðsla ímóti hinum Alvalda. Hann segði óbeinleiðis, at hann ongantíð skuldi verið farin heimaníframá. Hann helt uppá, at hann alla tíðina visti, at Jehova ikki fór at leggja Nineve í oyði, og brúkti tað enntá sum umbering fyri, at hann at byrja við rýmdi til Tarsis. Síðani bað hann um at sleppa at doyggja og segði, at deyðin var betri enn lívið. — ***Les Jónas 4:2, 3.***

15 Hvat var tað, sum Jónas hevði sovorðnan ampa av? Vit vita ikki alt um, hvat hann hugsaði, men vit vita, at hann hevði

---

12, 13. (a) Hvussu vísir Jehova, at hann er rímiligur, lagaligur og miskunnsamur? (b) Hví var profetiin hjá Jónasi ikki følsk?

14. Hvussu ávirkaði tað Jónas, at Jehova vísti Nineve miskunn?

15. (a) Hvør kann orsøkin vera til, at Jónas gjørdist illur og harmur? (b) Hvussu fór Jehova við harma profeti sínum?

boðað dóm yvir Nineve, og at øll fólkini har høvdu hoyrt tað. Tey høvdu trúð honum. Og nú varð býurin ikki lagdur í oyði kortini. Var hann bangin fyri, at tey fóru at halda hann fyri gjøldur ella at seta hann í bás við følskum profetum? Í øllum førum gleddist hann ikki um, at fólkið angraði, og heldur ikki um, at Jehova vísti miskunn. Tað tykist heldur, sum hann gjørdist meira og meira beiskur, tók synd í sær sjálvum og var bangin fyri, at hansara umdømi var dálkað. Men miskunnsami Gud Jónasar sá, at í hesum harma profetinum búði enn nakað gott. Heldur enn at revsa Jónas fyri hansara manglandi virðing, setti Jehova honum bert henda vinaliga og sjálvrannsakandi spurningin: „Er tað beint av tær at vera so illur?“ (Jón. 4:4) Svaraði Jónas yvirhøvur? Bíblian sigur einki um tað.

16 Lætt er at kolldøma atburðin hjá Jónasi, men vit mugu minnast til, at tað ikki er óvanligt, at ófullkomin menniskju eru ósamd við Gud. Summi halda kanska, at Jehova skuldi havt forðað onkrari vanlukku, at hann alt fyri eitt skuldi havt dømt tey óndu, ella at hann langt síðani skuldi havt beint fyri hesi óndu heimsskipanini. Dømið við Jónasi er ein áminning um, at tá ið vit eru ósamd við Jehova Gud, er tað altíð vit, sum fara skeiv og hava tørv á at broyta hugburð — ongantíð Jehova!

Hvussu lærdi Jehova Jónas miskunn?

17 Mótfalni profeturin fór út úr Nineve. Hann legði tó ikki leiðina heimeftir, men fór eystureftir, har nøkur fjøll góvu útsýni yvir býin. Hann bygdi sær eitt lítið skýli og setti seg at bíða eftir at vita, hvussu tað fór at gangast Nineve. Kanska vónaði hann enn at síggja býin verða lagdan í oyði. Hvussu fór Jehova at læra henda harðhjartaða mannin miskunn?

18 Um náttina læt Jehova ein risinusrunn vaksa upp. Jónas vaknaði og sá henda gróðrarmikla runnin við stórum bløðum, sum góvu nógv betri skugga enn tað ússaliga skýlið, hann sjálvur hevði bygt. Nú varð lagið betri. „Jónas var ógvuliga glaður“ um runnin og metti kanska hetta undrið sum eitt tekin um Guds signing og tokka. Men Jehova vildi ikki bara verja Jónas fyri brennandi sólini og gera hann glaðan aftur. Hann vildi ávirka hansara hjarta. Tí framdi Jehova fleiri undur. Hann

16. Hví eru summi kanska ósamd við Gud, og hvat kann dømið við Jónasi læra okkum?

17, 18. (a) Hvat gjørdi Jónas, tá ið hann var farin úr Nineve? (b) Hvussu ávirkaðu undrini hjá Jehova við risinusrunninum Jónas?

læt ein orm koma og stinga runnin, so hann følnaði. Síðani sendi hann „brennandi heitan eystanvind“, inntil Jónas fekk „maktarloysi“ av hitanum. Nú gjørdist hann enn eina ferð tungur í huga og bað aftur Gud um at sleppa at doyggja. — Jón. 4:6-8.

19 Jehova spurdi aftur Jónas, um tað var av røttum, hann var illur, hesa ferð um, at risinusrunnurin følnaði. Heldur enn at angra, rættvísgjørdi Jónas seg sjálvan og segði: „Ja, eg havi grund at vera illur, og tað til deyða!“ Nú var rætta løtan hjá Jehova at draga fram tað, sum hann vildi læra Jónas. — Jón. 4:9.

20 Gud royndi at fáa Jónas at hugsa, tá ið hann nevndi, at profeturin harmaðist um følnaða runnin, ið vaks upp eftir eini nátt, og sum Jónas hvørki hevði plantað ella fingið at vaksa. At enda segði Gud: „Skuldi [Mær] ikki tykst synd í Nineve, hinum stóra staði, har meir enn tólv ferðir tíggju túsund menniskju

19, 20. Hvussu brúkti Jehova risinusrunnin til at fáa Jónas at hugsa?

Gud brúkti ein risinusrunn, tá ið hann skuldi læra Jónas miskunn

eru, sum ikki kenna vinstru frá høgru, og nógv kríatúr!“ — Jón. 4:10, 11.*

21 Skilir tú, hvat Jehova vildi læra Jónas við hesi sýnisundirvísingini? Jónas hevði einki stríð havt av plantuni. Men Jehova var hinvegin keldan til lívið hjá ninevemonnum og hevði syrgt fyri teimum, eins og hann syrgir fyri øllum skapningum á jørðini. Hvussu kundi Jónas halda, at ein planta hevði størri virði enn 120.000 menniskju og øll kríatúrini hjá teimum? Var tað ikki tí, hann bert hugsaði um seg sjálvan? Tá ið samanum kom, harmaðist hann bert um plantuna, tí hon hevði verið honum til nyttu. Ilskaðist hann ikki eisini um Nineve av sjálvsøkni — tí hann var stoltur og ikki vildi gera sær fyri skommum? Frásøgan um Jónas kann hjálpa okkum at rannsaka okkum sjálvi. Hvør av okkum kann siga seg undan at hava lyndi til fyrst og fremst at hugsa um seg sjálvan? Sum vit eiga at vera takksom fyri, at Jehova er so tolin og lærir okkum at vera meira ósjálvsøkin, at hava størri samkenslu og at vera meira miskunnsom — eins og hann!

22 Men spurningurin er: Tók Jónas undirvísingina til sín? Bókin, sum ber hansara navn, letur spurningin hjá Jehova standa ósvaraðan. Nakrir atfinnarar fýlast kanska á, at Jónas ikki svaraði spurninginum. Men svarið er har fyri so vítt. Tað er bókin sjálv. Roknað verður við, at Jónas sjálvur skrivaði bókina, ið ber hansara navn. Hugsa tær Jónas sita og skriva hesa frásøguna, eftir at hann var komin aftur til heimland sítt. Vit síggja næstan henda eldra, klókara og eyðmjúkara mannin fyri okkum, sum hann situr har við syrgnum brá og ristir við høvdinum, meðan hann skrivar um síni egnu mistøk, sín uppreistur, og at hann treiskur noktaði at vísa miskunn. Jú, Jónas tók veruliga við hesi týðandi og vísu leiðbeiningini frá Jehova. Hann lærdi miskunn. Hvussu við okkum? — ***Les Matteus 5:7.***

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vísti Jónas trúgv og dirvi, tá ið hann boðaði í Nineve?
- Hvat kunnu vit læra av, at ninevemenn angraðu?
- Hvat kunnu vit læra av hugburðinum hjá Jónasi í sambandi við, at ninevemenn angraðu?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Jónasi, tá ið onkur rættleiðir teg?

* Tá ið Gud segði, at fólkini ikki kendu vinstru frá høgru, sipaði hann til, at tey vóru púra óvitandi um hansara meginreglur.

21. (a) Hvørja sýnisundirvísing gav Jehova Jónasi? (b) Hvussu kann frásøgan um Jónas hjálpa okkum at rannsaka okkum sjálvi?

22. (a) Hvussu man vísa leiðbeiningin frá Jehova um miskunnsemi hava ávirkað Jónas? (b) Hvat mugu vit øll læra?

KAPITTUL FIMTAN

Hon vardi Guds fólk

ESTER royndi at sissa seg sjálva, sum hon nærkaðist forgarðinum í kongsborgini í Susan. Tað var ikki lætt. Alt í og rundan um hesa borgina kveikti virðing — marglittu myndirnar av veingjaðum tarvum, bogaskjúttum og leyvum úr glaraðum tigulsteinum, tær foyrutu steinsúlurnar og tignarligu standmyndirnar, ja, sjálvt staðið har borgin lá nærindis kavakløddu Zagrosfjøllunum við útsýni yvir ta reinu Koaspesánna. Alt hetta var gjørt til at vísa teimum vitjandi, hvussu stórt veldi hesin maðurin hevði, sum Ester var á veg inn til. Hann rópti seg sjálvan „kongin mikla“. Hann var eisini maður hennara.

2 Maður hennara! Stórur munur var á Ahasverusi og tí slagi av manni, sum trúfastar jødiskar gentur vónaðu at gifta seg við.* Ahasverus royndi ikki at taka eftir fyridømum sum eitt nú Ábrahami, ið eyðmjúkur tók við leiðbeining frá Gudi um at lurta eftir konu síni, Sáru. (1 Mós. 21:12) Kongurin visti lítið ella kanska einki um Gudin hjá Ester, Jehova, og um hansara lóg. Men hann kendi persisku lógina, ið millum annað setti forboð fyri júst tí, sum Ester var farin í holt við. Hvat var tað? Jú, lógin segði, at ein og hvør, sum steig fram fyri persarakongin, uttan at hann hevði sent boð eftir viðkomandi, kundi verða dømdur til deyðis. Kongurin hevði ikki sent boð eftir Ester, men hon fór kortini til hansara. Tá ið hon nærkaðist innara forgarðinum, har hon fór at vera sjónlig fyri konginum, hevði hon kanska eina kenslu av, at nú gekk hon beinleiðis í deyðan. — ***Les Ester 4:11; 5:1.***

3 Hví setti hon lívið í váða? Og hvat kunnu vit læra av trúnni hjá hesi einastandandi kvinnuni? Latið okkum fyrst vita, hvussu tað yvirhøvur kundi bera til, at Ester var vorðin drotning í Persia.

* Flestøll eru á einum máli um, at Ahasverus er hin sami sum Xerxes I, sum var kongur í Persararíkinum fyrst í fimtu øld fyri okkara tíðarrokning.

1-3. (a) Hví man tað hava verið ræðandi hjá Ester at stíga fram fyri mann sín? (b) Hvørjar spurningar um Ester fara vit at kanna?

Uppvøksturin hjá Ester

4 Ester var foreldraleys. Vit vita ógvuliga lítið um foreldrini, ið góvu henni navnið Hadassa, eitt hebraiskt orð fyri „myrtu“, sum er ein runnur við vøkrum hvítum blómum. Tá ið foreldrini hjá Ester doyðu, tók blíði skyldmaður hennara, Mordokai, hana til sín. Tey vóru systkinabørn, men hann var nógv eldri enn hon. Mordokai var so góður við Ester, at hann metti hana sum sína egnu dóttur. — Est. 2:5-7, 15.

5 Mordokai og Ester búðu sum útlagnir jødar í høvuðsstaðnum í Persia, har tey helst vóru vanvird fyri sína trúgv og lógina, tey royndu at fylgja. Men Ester kendi seg uttan iva meira og meira knýtta at systkinabarninum, so hvørt sum hann lærdi hana um Jehova, hin miskunnsama Gud, ið so ofta hevði bjargað fólki sínum í forðum — og fór at gera tað aftur. (3 Mós. 26:44, 45) Tað er eyðsæð, at Ester og Mordokai vórðu knýtt at hvør øðrum í kærleika og trúfesti.

Mordokai kundi sanniliga vera errin av fosturdóttur síni

6 Líkt er til, at Mordokai hevði eitt embæti í borgini Susan, tí hann sat javnan í kongsportrinum saman við øðrum tænastumonnum hjá konginum. (Est. 2:19, 21; 3:3) Vit vita ikki, hvussu Ester brúkti sína tíð, meðan hon vaks til, men tað er helst ikki ov nógv at siga, at hon tók sær væl av sínum eldra systkinabarni og heimi hansara, sum allarhelst lá í tí meira fátæka býarpartinum hinumegin ánna. Kanska dámdi henni væl at fara á torgið í Susan, har gull- og silvursmiðir og aðrir handilsmenn vístu vørur sínar fram. Ester hevði onga hóming av, at slíkt marglæti, sum hon sá har, seinni skuldi verða gerandiskostur hjá henni. Hon visti einki um, hvat bíðaði henni í framtíðini.

Hon var vøkur

7 Ein dagin varð teskað í hvørjum króki í Susan um ruðuleika í kongshúsinum.

4. Hvat vita vit um Ester, og hvussu kom hon at vera hjá systkinabarninum Mordokai?

5, 6. (a) Hvussu aldi Mordokai Ester upp?
(b) Hvussu var lívið hjá Ester og Mordokai í Susan?

7. Hví varð Vasti rikin úr embæti sínum sum drotning, og hvat hendi síðani?

Ahasverus hevði hildið eina stóra veitslu fyri stórmonnum sínum, har hann borðreiddi við alskyns fínum mati og víni; og so hevði hann sent boð eftir vøkru drotning síni, Vasti, sum helt veitslu fyri kvinnunum. Men Vasti noktaði at koma. Eyðmýktur og í øðini spurdi Ahasverus ráðgevar sínar, hvussu hann skuldi revsa Vasti. Úrslitið varð, at hon varð rikin úr embæti sínum sum drotning. Tænarar kongsins fóru síðani undir at leita eftir vøkrum ungum moyggjum í øllum landinum. Av teimum skuldi kongurin velja sær eina nýggja drotning. — Est. 1:1–2:4.

8 Vit kunnu helst ímynda okkum, at Mordokai av og á sat og eygleiddi Ester, og at hann var errin og kanska eisini stúrin, tá ið hann varnaðist, at hon nú var vorðin vaksin — og sera vøkur! „Henda unga genta var vælvaksin og vøkur," lesa vit. (Est. 2:7) Vakurleiki er eygunum ein fragd, men sambært Bíbliuni er tað umráðandi, at vísdómur og eyðmjúkleiki fylgja við. Annars kunnu eginleikar sum til dømis sjálvgleði og stoltleiki menna seg. (***Les Orðtøkini 11:22.***) Hevur tú nakrantíð varnast tað? Hvussu mundi tað fara at verða hjá Ester? Fór hennara vakurleiki at vera ein fyrimunur ella ein vansi? Tað skuldi tíðin vísa.

9 Tænarar kongsins varnaðust Ester. Teir tóku hana frá Mordokai og fóru við henni til kongsborgina hinumegin ánna. (Est. 2:8) Tað hevur uttan iva verið ein torfør støða hjá teimum báðum, tí tey vóru sum faðir og dóttir. Mordokai hevði ikki viljað, at fosturdóttir hansara gifti seg við einum heidningi, ei heldur um hann var kongur, men hann fekk einki gjørt.* Ester lurtaði allarhelst væl eftir ráðunum frá Mordokai, áðrenn menninir fóru avstað við henni. Meðan hon varð førd til borgina Susan, runnu nógvir spurningar fram fyri hana. Hvussu mundi lívið hjá henni nú fara at verða?

„Øll, ið sóu Ester, vórðu góð við hana"

10 Ester var førd inn í ein heim, sum var fullkomiliga nýggjur

* Sí rammuna „Spurningar um Ester" í kapittul 16.

8. (a) Hví man Mordokai hava verið eitt sindur stúrin um Ester, so hvørt sum hon vaks til? (b) Hvussu heldur tú, at vit kunnu hava somu áskoðan á vakurleika sum hana, vit finna í Bíbliuni? (Sí eisini Orðtøkini 31:30.)

9. (a) Hvat hendi, tá ið tænarar kongsins varnaðust Ester, og hví var tað torført hjá henni at verða tikin frá Mordokai? (b) Hví loyvdi Mordokai Ester at gifta seg við einum heidningi? (Sí eisini rammuna.)

10, 11. (a) Hvussu kundi Ester lætt verið ávirkað av nýggja umhvørvinum? (b) Hvussu vita vit, at Mordokai hugsaði um Ester?

og fremmandur fyri hana. Hon var ein av ’nógvum ungum gentum’, sum vóru savnaðar saman úr øllum Persararíkinum. Tær hava allarhelst havt sera ymiskar siðir, ymiskan persónleika og tosað ymisk mál. Embætismaðurin Hegai var settur at ansa eftir hesum ungu kvinnunum, sum skuldu hava eina umfatandi vakurleikaviðgerð, ið vardi eitt heilt ár, har tær millum annað skuldu hava kropsmýking við angandi oljum. (Est. 2:8, 12) Eitt slíkt umhvørvi kundi lættliga gjørt hesar genturnar alt ov upptiknar av útsjóndini, sjálvglaðar og kappingarhugaðar. Hvussu ávirkaði hetta umhvørvið Ester?

11 Eingin kundi verið meiri bangin um Ester enn Mordokai. Vit lesa, at hann hvønn einasta dag royndi at koma so nær at kvinnuhúsinum sum gjørligt, tí hann vildi vita, hvussu Ester hevði tað. (Est. 2:11) So hvørt sum hann fekk okkurt at vita um

Ester visti, at eyðmjúkleiki og vísdómur høvdu nógv størri týdning enn útsjónd

Ester, kanska gjøgnum ein tænara í húsinum, gjørdist hann sera errin. Hví?

12 Hegai dámdi Ester so væl, at hann læt hana fáa sjey tænastugentur og tey bestu rúmini í kvinnuhúsinum. Í frásøguni stendur enntá, at „øll, ið sóu Ester, vórðu góð við hana“. (Est. 2:9, 15) Vórðu tey góð við hana, bert tí hon var vøkur? Nei, tað var ikki bert vegna hennara vakurleika.

13 Vit lesa eitt nú: „Ester hevði einki sagt um fólk sítt og ætt sína; tí Mordokai hevði álagt henni einki at siga um hetta.“ (Est. 2:10) Mordokai hevði sagt við Ester, at hon ikki skuldi fortelja nøkrum, at hon var jødi, tí hann visti uttan iva, at fólk í kongsborgini høvdu sera nógvar fordómar ímóti jødum. Sum tað man

12, 13. (a) Hvat hildu fólk um Ester? (b) Hví mundi tað gleða Mordokai at fáa at vita, at Ester einki hevði sagt um, at hon var jødi?

hava glett hann at hoyra, at Ester, hóast hann ikki longur hevði hana hjá sær, enn var líka skilagóð og lýðin sum áður!

14 Ungfólk í dag kunnu á líknandi hátt gleða síni foreldur ella fosturforeldur, tá ið tey standa ímóti ósiðiligari og óreinari ávirkan og gera tað, sum tey vita er rætt — eisini hóast foreldrini ikki eru í námind. Tá ið tey soleiðis gera sum Ester, gleða tey himmalska Faðir sín. — ***Les Orðtøkini 27:11.***

15 Tá ið tíðin kom til, at Ester skuldi fara inn til kongin, slapp hon at taka tað við sær, sum hon møguliga fekk brúk fyri, kanska okkurt sum gjørdi hana enn vakrari. Men eyðmjúk sum hon var, bað hon ikki um annað enn tað, Hegai mælti henni til. (Est. 2:15) Hon skilti ivaleyst, at vakurleiki ikki í sjálvum sær kundi vinna hjarta kongsins. Lítillæti og eyðmjúkleiki mundu vera nógv sjáldsamari eginleikar á hesi borgini. Hevði hon rætt?

16 Frásøgan svarar: „Kongurin varð betri við Ester enn við allar hinar kvinnurnar; hon vann náði og yndi hjá honum meir enn allar hinar moyggjarnar. Hann setti tí kongliga krúnu á høvd hennara og gjørdi hana til drotning í staðin fyri Vasti.“ (Est. 2:17) Tað hevur allarhelst ikki verið lætt hjá hesi eyðmjúku jødisku gentuni at venja seg við tær stóru broytingarnar í hennara lívi — at hon var nýggja drotningin, kona máttmiklasta kongin í heiminum tá! Gjørdist hon stolt og hástór av hesum nýggja embætinum? Nei, als ikki!

17 Ester var framvegis Mordokai, fosturpápanum, lýðin. Hon varðveitti sín jødiska uppruna sum eitt loyndarmál. Og tá ið Mordokai fann út av, at onkur ætlaði at drepa Ahasverus, var Ester lýðin og bar konginum ávaringarboðini frá Mordokai, so teir samansvornu vórðu steðgaðir. (Est. 2:20-23) Hon vísti, at hon enn trúði á Gud, við tað at hon var eyðmjúk og lýðin. Okkum tørvar veruliga at taka eftir Ester í dag, tí lýdni verður vanliga ikki virðismett, nei, ólýdni og uppreistur eru gerandiskosturin. Men fólk, sum hava sanna trúgv, virðismeta lýdni, eins og Ester gjørdi.

Trúgvin hjá Ester verður roynd

18 Ein maður, ið æt Haman, fekk stórt vald í borgini hjá Ahas-

---

14. Hvussu kunnu ungfólk í dag taka eftir Ester?

15, 16. (a) Hvussu vann Ester tokka kongsins? (b) Hví munnu broytingarnar í lívinum hjá Ester hava verið torførar?

17. (a) Hvussu helt Ester fram at vera fosturpápa sínum lýðin? (b) Hví er Ester ein týðandi fyrimynd hjá okkum í dag?

18. (a) Hví mundi Mordokai nokta at boyggja seg fyri Hamani? (Sí eisini undirgreinina.) (b) Hvussu taka trúfastir menn og trúfastar kvinnur í dag eftir Mordokai?

verusi. Kongurin setti hann í starv sum aðalráðharra, læt hann vera høvuðsráðgeva sín og gav honum næstovasta myndugleika í ríkinum. Kongurin gav enntá tað boð, at øll, sum sóu henda embætismannin, skuldu boyggja seg fyri honum. (Est. 3:1-4) Henda lógin var ein trupulleiki hjá Mordokai. Hann vildi fegin gera eftir boðum kongsins, men ikki um hann varð biðin at gera nakað, sum vanvirdi Gud. Tí sært tú, Haman var agagitur, og hann var eyðsýniliga ein eftirkomari hjá amalekitakonginum Agag, sum profeturin Sámuel drap. (1 Sám. 15:33) Amalekitar vóru so óndir, at teir høvdu gjørt seg sjálvar til fíggindar Jehova og Ísraels. Gud hevði dømt amalekitiska fólkið til deyðis.* (5 Mós. 25:19) Hvussu kundi ein trúfastur jødi boyggja seg fyri einum amalekiti? Tað kundi Mordokai í hvussu er ikki! Hann varð standandi. Fram til henda dag hava trúfastir menn og trúfastar kvinnur sett lívið í váða fyri at fylgja hesi meginregluni: „Ein eigur at lýða Gud meir enn menniskju!“ — Áps. 5:29.

19 Haman var í øðini. Men tað var ikki nóg mikið hjá honum at drepa Mordokai. Hann vildi beina fyri øllum fólkinum hjá Mordokai. Haman fekk kongin upp í sín part við at mála eina sera ódámliga mynd av jødunum. Uttan at siga hvørji hesi fólkini vóru, segði hann óbeinleiðis, at tey ongan týdning høvdu í eygum kongsins, at tey vóru ’eitt fólk, ið búði spjatt og fyri seg sjálvt millum hini fólkini’. Og tað, sum verri var — hann segði, at tey ikki fylgdu lógum kongsins. Harvið segði hann í royndum, at tey vóru eitt vandamikið og uppreistrarhugað fólk. Hann bjóðaði seg fram at lata eina rúgvu av pengum, sum skuldu leggjast í skattkømur kongsins til at rinda útreiðslurnar, ið stóðust av at týna allar jødar í ríkinum.# Ahasverus gav Hamani innsiglisring sín til at innsigla øll tey boð, hann hevði í huga. — Est. 3:5-10.

20 Skjótt fóru boðberar ríðandi á hestum sínum út í øll heraðshorn í stóra ríkinum við boðum um, at allir jødar skuldu

* Haman kann hava verið uppi í teimum allarsíðstu, sum eftir vóru av amalekitunum, tí ein leivd av teimum var dripin longu á døgum Ezekiasar kongs. — 1 Krøn. 4:43.

Haman bjóðaði sær at lata 10.000 talentir av silvuri, sum svara til einar tvær milliardir krónur í dag. Um Ahasverus var Xerxes I, komu pengarnir hjá Hamani sera væl við. Xerxes hevði tørv á nógvum pengum, tí hann hevði leingi ætlað at fara í kríggj við Grikkaland — eitt kríggj, sum hann so dyggiliga tapti.

19. Hvat hevði Haman í hyggju at gera, og hvussu fekk hann kongin upp í sín part?

20, 21. (a) Hvussu ávirkaðu boðini hjá Hamani jødarnar í øllum Persararíkinum, harímillum Mordokai? (b) Hvat bað Mordokai Ester gera?

Ester setti lívið í váða fyri at verja Guds fólk

drepast. Hugsa tær, hvørja ávirkan hetta hevði, tá ið boðini komu heilt til Jerusalem, har ein leivd av jødum, sum vóru afturkomnir úr útlegd í Bábylon, stríddist við at endurreisa býin, ið enn ongar múrar hevði at verja seg. Møguliga hugsaði Mordokai um tey og eisini um sínar egnu vinir og skyldfólk í Susan, tá ið hann hoyrdi hesi ræðuligu tíðindini. Ørkymlaður skræddi hann klæðini hjá sær, læt seg í sekk og øsku og rópti hart mitt í býnum. Men Haman sat bara og drakk saman við konginum og legði líka í alla sorgina, hann hevði volt teimum mongu jødunum og vinum teirra í Susan. — ***Les Ester 3:12–4:1.***

21 Mordokai visti, at her mátti okkurt gerast. Men hvat fekk hann gjørt? Tað kom Ester fyri oyra, hvussu ørkymlaður Mordokai var, og hon sendi honum klæði, men hann vildi ikki lata seg ugga. Kanska hevði hann leingi undrast á, hví Jehova hevði loyvt, at elskaða fosturdóttir hansara, Ester, var tikin frá honum og var vorðin drotning hjá einum heidnum stjórnara. Men nú tóktist tað, sum svarið var um at koma í ljósmála. Mordokai sendi boð til drotningina og bað hana fara inn fyri kongin og bøna hann um at vísa teimum miskunn. Ja, hann bað hana verja sítt egna fólk. — Est. 4:4-8.

22 Eingin ivi er um, at Ester gjørdist fjálturstungin, tá ið hon fekk boðini. Nú skuldi hennara trúgv av álvara standa sína roynd. Hon var bangin, sum vit síggja í svarinum, hon gav Mordokai. Hon minti hann á lóg kongsins um, at steig onkur fram fyri kong uttan at verða boðsendur, hevði tað deyðarevsing við sær. Bert um kongurin rætti út gullstav sín, varð lógbrótarin spardur. Og kundi Ester vænta at verða spard, serliga tá ið hugsað varð um, hvat hendi Vasti, tí hon noktaði at stíga fram fyri kong, tá ið hon varð boðsend? Ester segði við Mordokai, at kongurin ikki hevði sent boð eftir henni í heilar tretivu dagar. Tí var tað ikki løgið, um hon hugsaði, at hesin lúnuti kongurin einki legði í hana longur.* — Est. 4:9-11.

23 Fyri at styrkja Ester í trúnni var Mordokai sera avgjørdur á málinum. Hann sannførdi hana um, at um hon einki gjørdi, fór frelsan hjá jødunum at koma aðrastaðni frá. Men hvussu kundi hon so vænta at verða spard, tá ið atsóknin av álvara var byrjað? Hetta var eitt dømi um, at Mordokai hevði sera sterka trúgv á Jehova, sum ongantíð hevði loyvt, at fólk hansara varð fyribeint, og at lyfti hansara ikki vórðu uppfylt. (Jos. 23:14) Síðani spurdi Mordokai Ester: „Hvør veit, um tað ikki júst var fyri slíka tíð sum hesa, tú komst at sita sum drotning?“ (Est. 4:12-14) Mordokai er av sonnum verdur at taka eftir. Hann hevði fullkomiligt álit á Jehova Gudi. Hava vit tað? — Orðt. 3:5, 6.

* Xerxes I var kendur fyri at hava skiftandi og illsint sinnalag. Grikski søguskrivarin Herodot nevnir nøkur dømi úr kríggi Xerxesar við Grikkaland. Kongurin gav boð um, at ein flotbrúgv skuldi gerast av skipum, sum lógu lið um lið tvørtur um Hellespontsundið. Tá ið ein stormur oyðilegði brúnna, gav Xerxes boð um, at verkfrøðingarnir skuldu verða hálshøgdir, og hann bað enntá menn sínar „revsa“ Hellespont við at sláa vatnið við píski, meðan ein æruskemmandi yvirlýsing varð lisin upp. Tá ið ein ríkur maður undir somu herferð bað og bønaði um, at sonur hansara skuldi sleppa undan hertænastu, læt Xerxes sonin skera í tvíningar og vísti líkið fram sum ávaring.

22. Hví var Ester bangin fyri at stíga fram fyri mann sín kongin? (Sí eisini undirgreinina.)

23. (a) Hvat segði Mordokai fyri at styrkja Ester í trúnni? (b) Hví er Mordokai verdur at taka eftir?

Trúgvin hjá Ester var sterkari enn óttin fyri deyðanum

24 Nú var avgerandi løtan hjá Ester komin. Hon bað Mordokai kalla saman landsmenn sínar, so teir saman við henni kundu halda føstu í tríggjar dagar, og hon endaði boðini við at siga hesi kendu og einføldu orðini, sum vísa hennara trúgv og dirvi: „Skal eg so farast, so lat meg farast!“ (Est. 4:15-17) Hon man hava biðið meiri inniliga hesar tríggjar dagarnar, enn nakrantíð áður í sínum lívi. At enda kom løtan. Hon læt seg í sítt fínasta skrúð og gjørdi alt fyri, at kongurin skuldi fáa tokka til hennara. Og so fór hon avstað.

25 Sum lýst fyrst í hesum kapitlinum, fór Ester til kongshøllina. Vit kunnu bert ímynda okkum, hvussu fjálturstungin hon var, og hvussu inniliga hon bað. Hon fór inn í forgarðin, haðani hon sá Ahasverus sita í hásæti sínum. Kanska royndi hon at lesa hansara andlitsbrá. Skuldi hon bíða, kendist tað helst sum ein ævi. Men løtan gekk — maður hennara sá hana. Hann var uttan iva ovfarin, men andlitið blíðkaðist, og hann rætti út gullstavin hjá sær. — Est. 5:1, 2.

26 Kongurin var fúsur at lurta eftir Ester. Hon var trúføst ímóti Gudi og setti lívið í váða fyri at verja Guds fólk, og harvið gjørdist hon ein sera góð trúarfyrimynd hjá øllum Guds tænarum fram til okkara tíð. Sonn kristin í dag virðismeta slíkar fyrimyndir. Jesus segði, at ósjálvsøkin kærleiki skuldi eyðkenna hansara sonnu lærisveinar. (***Les Jóhannes 13:34, 35.***) At vísa slíkan kærleika krevur ofta dirvi sum tað, Ester hevði. Men í roynd og veru var tað, sum Ester hevði gjørt henda dagin, bert fyrsta stigið í eini ætlan, sum hevði til endamáls at bjarga Guds fólki. Hvussu skuldi hon sannføra kongin um, at høvuðsráðgevi hansara, Haman, var ein óndur svíkjari? Hvat kundi hon gera fyri at bjarga fólki sínum? Vit fara at kanna hesar spurningar í næsta kapitlinum.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vísti Ester, at hon var eyðmjúk og lýðin?
- Hvussu hjálpti Mordokai Ester at vera trúføst?
- Hvat gjørdi Ester, sum vísti, at hon var djørv?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Ester?

24. Hvussu vísti Ester trúgv og dirvi?

25. Lýs støðuna, so hvørt sum Ester nærkaðist manni sínum.

26. Hví hava sonn kristin tørv á dirvi eins og Ester, og hví var tað, sum hon gjørdi, bert fyrsta stigið í eini ætlan at bjarga Guds fólki?

KAPITTUL SEKSTAN

Hon var vís, djørv og ósjálvsøkin

ESTER nærkaðist spakuliga hásætinum. Hennara hjarta sló hart og bangið. Royn at ímynda tær, hvussu kvirt tað gjørdist í stóru kongshøllini í Susan, so kvirt, at Ester hoyrdi síni egnu løttu fótafet og ljóðið av kongliga stásinum, sum hon var í. Hon kundi ikki lata seg órógva av stórleikanum í kongshøllini, teimum glæsiligu steinsúlunum og útskorna loftinum úr sedrisviði líka úr Libanon. Hon festi eyguni á mannin, sum sat í hásætinum — mannin, ið skuldi gera av, um hon skuldi liva ella doyggja.

2 Eygu kongsins litu fast at Ester, sum hon kom nærri, og hann rætti út gullstav sín ímóti henni. Tað var ein einføld handarørsla, men hon var lívið um at gera hjá Ester, tí við henni frídømdi kongurin hana fyri misbrotið, hon júst hevði framt — at hon steig fram fyri kong, uttan at hann hevði sent boð eftir henni. Tá ið Ester kom fram til hásætið, rætti hon takksom hondina fram og nam við endan á gullstavinum. — Est. 5:1, 2.

3 Alt rundan um Ahasverus kong var stórsligið og vitnaði um hansara ómetaliga stóra ríkidømi og veldi. Tað sigst, at klæðini hjá persarakongum tá í tíðini kostaðu tað, sum svarar til knappar tvær milliardir krónur. Men Ester sá kortini eitt lítið bros í eygunum á manni sínum; hann elskaði hana upp á sín egna máta. Hann segði: „Hvat bagir, og hvat vilt tú hava, Ester drotning? — Um tað so var hálvt ríkið, skuldi tú fingið tað!“ — Est. 5:3.

4 Ester hevði longu víst merkisverda trúgv og dirvi. Hon var farin fram fyri kong, tí hon vildi verja fólk sítt fyri eini samansvørjing, ið hevði til endamáls at beina fyri øllum jødum. Higartil hevði hon havt eydnuna við sær, men fleiri avbjóðingar lógu fyri framman. Hon skuldi sannføra henda stolta kongin um, at tann ráðgevin, sum hann hevði størst álit á, var ein óndur maður, ið hevði lumpað hann til at døma fólkið hjá Ester til deyðis.

1-3. (a) Hvussu kendist tað hjá Ester at nærkast hásætinum hjá manni sínum? (b) Hvussu tók kongurin ímóti Ester?

4. Hvørjar avbjóðingar hevði Ester fyri sær?

Hvussu skuldi hon sannføra hann, og hvat kunnu vit læra av hennara trúgv?

Við vísdómi valdi hon eina 'tíð at tala'

5 Skuldi Ester sagt konginum allan trupulleikan, sum hann var, meðan øll tey hjástøddu hoyrdu? Gjørdi hon tað, kundi hon eyðmýkt hann og givið ráðgeva hansara, Hamani, tíð at reka ákærurnar aftur. Hvat gjørdi Ester meðni? Øldir frammanundan skrivaði hin vísi Sálomon kongur: „Alt hevur stund sína, . . . at tiga hevur tíð sína, og at tala hevur tíð sína." (Præd. 3:1, 7) Vit kunnu helst ímynda okkum, at fosturpápi Ester, trúfasti maðurin, Mordokai, lærdi hana slíkar meginreglur, meðan hon vaks upp. Ester skilti veruliga, hvussu stóran týdning tað hevði at velja ta røttu 'tíðina at tala'.

6 Hon segði: „Um tað líkar konginum, vildi eg fegin, at kongurin og Haman í dag høvdu komið í veitslu, sum eg havi gjørt

5, 6. (a) Hvussu tók Ester meginregluna í Prædikaranum 3:1, 7 til sín?
(b) Á hvønn hátt var Ester vís, táið hon talaði við mann sín?

Ester var takksom fyri, at kongurin vísti henni miskunn

honum til.“ (Est. 5:4) Kongurin tók av og sendi boð eftir Hamani. Sært tú, hvussu vís Ester var? Hon vísti virðing fyri tign kongsins og syrgdi fyri meiri hóskandi umstøðum at siga honum, hvat hon hevði í huga. — ***Les Orðtøkini 10:19.***

7 Eingin ivi er um, at Ester fyrireikaði veitsluna væl og legði seg eftir at borðreiða við øllum tí, sum manni hennara dámdi. Gott vín var aftur við matinum, til tess at hýrurin skuldi vera góður. (Sl. 104:15) Ahasverus hugnaði sær, og hann spurdi aftur Ester, hvat hon vildi hava. Mundi hetta vera tíðin at tala?

8 Tað helt Ester ikki. Nei, hon bjóðaði heldur konginum og Hamani at koma í eina aðra veitslu dagin eftir. (Est. 5:7, 8) Hví drálaði hon? Minst til, at alt fólkið hjá Ester hevði fingið deyðadóm eftir kongsins boðum. Tað stóð altso um lív, og tí mátti Ester vera vís í, at løtan var tann rætta. Hon bíðaði, og syrgdi fyri enn einum høvi at vísa manni sínum, hvussu stóra virðing hon hevði fyri honum.

7, 8. Hvussu var fyrra veitslan hjá Ester, men hví segði hon ikki konginum, hvat hon hevði í huga?

9 Tol er ein sjáldsamur og virðismikil eginleiki. Hóast Ester var sera stúrin og spent at siga konginum, hvat var á vási, bíðaði hon tolin eftir røttu løtuni. Vit kunnu læra nógv av henni, tí vit síggja helst øll av og á, at okkurt órættvíst fer fram, sum má rættast. Skulu vit til dømis royna at sannføra ein, ið hevur ávísan myndugleika, um at taka sær av einum trupulleika, mugu vit vera tolin eins og Ester. Í Orðtøkunum 25:15 stendur: „Við spakføri verður høvdingi yvirtalaður, og mild tunga brýtur sundur bein.“ Bíða vit tolin eftir røttu løtuni og eru mild sum Ester, tá ið vit tala, kunnu vit bróta niður mótstøðu, hóast hon er hørð sum bein. Signaði Jehova Ester, tí hon var tolin og vís?

Tol slóðar vegin fyri rættvísi

10 Tolið hjá Ester slóðaði vegin fyri eini merkisverdari rød av

9. Hví er tað gott at vera tolin, og hvussu kunnu vit taka eftir Ester í tí sambandi?

10, 11. Hví broyttist lagið á Hamani, tá ið hann var farin úr fyrru veitsluni, og hvat bóðu kona og vinir hansara hann gera?

Spurningar um Ester

Hví loyvdi Mordokai Ester at gifta seg við einum heidningi?
Nakrir granskarar rógva fram undir, at Mordokai gjørdi sær dælt av støðuni og læt Ester gifta seg við konginum fyri at fáa viðurkenning, men teir hava einki at grunda sína áskoðan á. Mordokai var trúfastur jødi, og tí hevði honum illa dámt eitt slíkt hjúnaband. (5 Mós. 7:3) Sambært gamlari jødiskari søgn royndi Mordokai at forða fyri, at hjúnabandið kom í lag. Tað tykist ikki sannlíkt, at Mordokai og Ester høvdu nakað at siga í hesum málinum, tí tey vóru fremmand í einum landi við einum einaræðisharra, ið varð mettur sum ein gudur. Við tíðini gjørdist greitt, at Jehova brúkti hjúnabandið hjá Ester til at verja sítt fólk. — Est. 4:14.

Hví stendur Guds navn, Jehova, ikki í bókini Ester?
Líkt er til, at Mordokai fekk íblástur frá Gudi til at skriva bókina. Í fyrstuni var bókin kanska goymd saman við persiskum skjølum og síðani flutt til Jerusalem. Tey, sum tilbóðu persiskar gudar, høvdu møguliga beint fyri bókini, um navn Jehova stóð í henni. Í øllum førum er eingin ivi um, at Jehova hevði sín leiklut í frásøguni. Tað er áhugavert, at Guds persónliga navn í roynd og veru kemur fyri í teimum upprunaligu hebraisku handritunum, við tað at eitt akrostikon er nýtt. Tað vil siga, at ein orðing er skipað soleiðis, at fyrsti stavur í fýra orðum á rað mynda Guds navn, um lisið verður í øvutari raðfylgju. — Est. 1:20, undirgr., *NW.*

Er bókin Ester ikki søguliga eftirfarandi?
Atfinnarar vilja vera við, at bókin ikki er søguliga eftirfarandi. Men nakrir granskarar hava viðmerkt, at tann, sum skrivaði bókina, hevði óvanliga stórt innlit í persisku siðirnar, byggilistina og kongshúsið. Tað er rætt, at Ester drotning ikki er umrødd í varðveittum verðsligum skjølum, men hon er helst ikki tann einasti kongaligi persónurin, hvørs navn er strikað úr almennum skjølum. Eitt annað er, at verðslig skjøl vísa, at ein maður, ið æt *Mardukâ,* var embætismaður í borgini Susan tað tíðarskeiðið, sum er umrøtt í bókini. *Mardukâ* er persiska navnið fyri Mordokai.

hendingum. Haman fór lívgaður heim úr fyrru veitsluni, „glaður og í góðum lagi“ um, at kongurin og drotningin vístu honum slíka vælvild. Men tá ið Haman fór gjøgnum kongsportrið, bar hann eyga við Mordokai, handa jødan, sum framvegis noktaði at boyggja seg fyri honum. Sum vit fingu at vita í undanfarna kapitlinum, høvdu orsøkirnar hjá Mordokai einki við vanvirðing at gera, men heldur at hann vildi varðveita eina góða samvitsku og sítt góða samband við Jehova Gud. Kortini varð Haman „fullur av vreiði“. — Est. 5:9.

11 Tá ið Haman segði konu síni og vinum sínum frá hesi háðanini, bóðu tey hann reisa ein stóran gálga, umleið 22 metrar til hæddar, og síðani biðja kong um loyvi til at heingja Mordokai í hann. Hetta dámdi Hamani sera væl, og hann setti tað alt fyri eitt í verk. — Est. 5:12-14.

12 Somu nátt hendi nakað løgið. Bíblian sigur, at ’kongurin legðist í andvekur’, og tí bað hann um at fáa lisið almennu skjølini upp fyri sær. Millum tað, ið lisið var, kom frásøgan um samansvørjingina um at drepa Ahasverus. Hann mintist málið; teir, sum høvdu ætlað at dripið hann, vórðu handtiknir og fyribeindir. Men hvussu við manninum, sum hevði avdúkað samansvørjingina — Mordokai? Knappliga varð kongurin klárvakin og spurdi, hvussu Mordokai varð løntur afturfyri. Svarið? Als einki var gjørt fyri henda mannin. — ***Les Ester 6:1-3.***

13 Skelkaður spurdi kongurin, hvørjir embætismenn vóru tøkir at hjálpa honum við at fáa hetta málið í rættlag. Og hvør stóð í ytra forgarðinum, sum hoyrdi til kongsborgina? Tað var eingin annar enn Haman! Hann var eyðsýniliga komin tíðliga á morgni, tí hann var so spentur at fáa loyvi frá kongi til at drepa Mordokai. Men áðrenn Haman fekk orðið fyri seg, spurdi kongurin hann, hvussu mann best kundi æra ein mann, sum hevði vunnið tokka kongs. Haman hugsaði, at tað mundi vera hann, kongurin hevði í huga, og tí gjørdi hann nógv burturúr, tá ið hann segði, hvussu maðurin skuldi ærast: Lat mannin í kongligan klædning og lat ein týðandi embætismann leiða hann runt í Susan á kongsins egna hesti, meðan rópt verður fyri honum, so øll hoyra: „Soleiðis verður gjørt við tann mann, ið kongur hevur hug at heiðra!“ Hugsa tær, hvussu Haman sá út, tá ið hann fann út av, at maðurin, sum skuldi heiðrast, var Mordokai! Og hvønn bað kongurin gera alt hetta fyri Mordokai? Haman! — Est. 6:4-10.

---

12. Hví bað kongurin um at fáa lisið tey almennu skjølini upp fyri sær, og hvat varnaðist hann?

13, 14. (a) Hvussu broyttist støðan hjá Hamani? (b) Hvat søgdu kona og vinir Hamans við hann?

Ester var djørv og avdúkaði óndskap Hamans

14 Haman gjørdi, sum hann var biðin, men við sera ringum tannabiti. Síðani skundaði hann sær heim, harmur og hugtungur. Bæði kona og vinir hansara søgdu, at hetta bert kundi boða frá illum. Hann fór uttan iva at falla í stríðnum ímóti jødanum Mordokai. — Est. 6:12, 13.

15 Meðan Ester tolin bíðaði, legði Haman lunnar undir sín egna undirgang. Og mundi tað ikki vera Jehova Gud, sum fekk kongin at liggja í andvekri? (Orðt. 21:1) Ikki løgið, at Guds orð eggjar okkum til at „bíða eftir Gudi“. (***Les Mika 7:7.***) Tá ið vit bíða eftir Gudi, skilja vit kanska, at hansara máti at loysa okkara trupulleikar er nógv betri, enn nøkur loysn vit sjálvi kundu funnið uppá.

Hon talaði við dirvi

16 Ester tordi ikki at lata kongin bíða longur. Tá ið hann kom í seinnu veitsluna, noyddist hon at siga honum alt. Men hvussu? Jú, kongur gav henni høvi at siga, hvat hon hevði upp á hjarta, tá ið hann enn einaferð spurdi, hvørja bøn hon hevði. (Est. 7:2) Nú var ’tíð at tala’ hjá Ester.

17 Vit kunnu helst ímynda okkum, at Ester bað til Gud innantanna, áðrenn hon segði hesi orð: „Havi eg funnið náði fyri eygum tínum, kongurin, og líkar tað konginum, so lat lív mítt verða mær givið eftir bøn míni, og fólk mítt eftir ynski mínum!“ (Est. 7:3) Legg til merkis, at hon vissaði kongin um, at hon hevði

15. (a) Hví var tað gott, at Ester var tolin? (b) Hví er tað skilagott at „bíða eftir Gudi“?

16, 17. (a) Nær kom ’tíðin at tala’ hjá Ester? (b) Hvussu var Ester øðrvísi enn Vasti, fyrrverandi kona kongs?

virðing fyri hansara meting um, hvat var gott. Ester var sanniliga øðrvísi enn Vasti, fyrrverandi kona kongs, sum við vilja hevði eyðmýkt mann sín. (Est. 1:10-12) Haraftrat lastaði Ester ikki kongin fyri at líta á Haman. Hon bað og bønaði hinvegin kongin um at verja seg, tí hennara lív var í vanda.

18 Henda umbønin nam allarhelst hjarta kongsins. Hvør vágaði sær at hótta drotningina? Ester helt fram: „Vit eru seld, bæði eg og fólk mítt, til at verða týnd, dripin og fyribeind. Høvdu vit so bert verið seld at verðið trælir og trælkvinnur, skuldi eg tagt, men nú er fíggindi okkara ikki førur fyri at bøta konginum skaðan.“ (Est. 7:4) Legg til merkis, at Ester bart út segði, hvør trupulleikin var, men legði aftrat, at hon hevði tagt, um talan bert hevði verið um trældóm. Men hetta fólkadrápið fór at vera so kostnaðarmikið hjá konginum sjálvum, at hon fekk ikki tagt um tað.

19 Frásøgan um Ester lærir okkum nógv um kynstrið at sannføra onnur. Um tú nakrantíð hevur fyri neyðini at gera ein, tú ert góður við ella kanska enntá ein, ið hevur ávísan myndugleika, varan við ein álvarsaman trupulleika, er tað gott at gera tað við toli, virðing og opinleika. — Orðt. 16:21, 23.

20 Ahasverus spurdi: „Hvør er hann, og hvar er hann, ið hevur vágað sær at gera hetta?“ Royn at síggja Ester fyri tær, sum hon peikar og sigur: „Ein mótstøðumaður og fíggindi — illi Haman, ið har situr!“ Ákæran hekk í luftini. Haman varð ræðslusligin. Ímynda

18. Hvussu segði Ester konginum frá trupulleikanum?

19. Hvat kann frásøgan um Ester læra okkum um kynstrið at sannføra onnur?

20, 21. (a) Hvussu avdúkaði Ester Haman, og hvat fekk tað kongin at gera?
(b) Hvat gjørdi Haman, tá ið hann varð avdúkaður?

Ein profeti gongur út

Tá ið Ester og Mordokai stríddust fyri Guds fólki, gekk ein gomul bíbliuprofeti út. Meira enn 1200 ár frammanundan hevði Jehova latið ættarfaðirin Jákup boða frá hesum viðvíkjandi einum av synum sínum: „Benjamin er úlvur, ið skræðir sundur; um morgunin etur hann tað, ið hann hevur tikið, um kvøldið skiftir hann út fong.“ (1 Mós. 49:27) „Um morgunin“, ella tíðliga í kongasøgu Ísraels, bardust Saul kongur og aðrir veldigir stríðsmenn av ætt Benjamins fyri fólki Jehova. „Um kvøldið“, ella seint í hesi kongasøguni, eftir at sólin hevði sett yvir kongaætt Ísraels, stríddust Ester og Mordokai, sum bæði vóru av ætt Benjamins, og vunnu sigur á fíggindum Jehova. Tey ’skiftu’ so at siga eisini „út fong“, við tað at tey fingu alt ríkidømi Hamans.

tær, hvussu tann lúnuti kongurin rodnaði av illsinni, tá ið hann skilti, at trúnaðarráðgevi hansara hevði lumpað hann at skriva undir eini boð, sum høvdu við sær, at elskaða kona hansara skuldi fyribeinast. Kongurin leyp á føtur og út í garðin fyri at fáa tamarhald á sær sjálvum. — Est. 7:5-7.

21 Tá ið tað varð avdúkað, hvussu lúnskur og ómansligur Haman var, kastaði hann seg niður fyri føturnar á drotningini. Tá ið kongurin kom inn aftur í rúmið og sá, at Haman lá á beinkinum hjá Ester og bað og bønaði hana, ákærdi hann í vreiði Haman fyri at royna at neyðtaka drotningina í kongsins egna heimi. Hetta var deyðadómurin hjá Hamani. Andlit hansara varð sveipað og farið varð avstað við honum. Tá tók ein av embætismonnum kongsins til orða og fortaldi honum um stóra gálgan, sum Haman hevði ætlað, at Mordokai skuldi heingjast í. Ahasverus gav alt fyri eitt boð um, at Haman sjálvur skuldi heingjast í hann. — Est. 7:8-10.

22 Í hesum órættvísa heimi er tað lætt at ímynda sær, at vit ongantíð fara at síggja rættvísi framt. Hevur tú nakrantíð hugsað so? Ester slepti ongantíð vónini og misti ongantíð trúnna. Tá ið tíðin kom, tók Ester djørv til orða og vardi tað, sum var rætt, og hon leit á, at Jehova fór at gera tað, sum var neyðugt. Latið okkum gera sum hon! Jehova er hin sami sum tá. Hann er enn førur fyri at lata tey óndu og svikaligu falla í sínar egnu snerrur, eins og hann gjørdi í døminum við Hamani. — ***Les Sálm 7:12-17.***

Hon hugsaði meira um Jehova og hansara fólk enn um seg sjálva

23 Endiliga fann kongurin út av, hvør Mordokai var. Hann var ikki bara tann trúfasti maðurin, sum hevði forðað fyri, at kongurin varð dripin, hann var eisini fosturpápi Ester. Ahasverus gjørdi Mordokai til aðalráðharra í staðin fyri Haman. Kongurin gav Ester

22. Hvussu kann frásøgan um Ester læra okkum, at vit ongantíð skulu sleppa vónini ella missa trúnna?

23. (a) Hvussu lønti kongurin Mordokai og Ester? (b) Hvussu gekk profetiin um Benjamin út, sum Jákup bar fram, tá ið hann lá fyri deyðanum? (Sí rammuna „Ein profeti gongur út“.)

húsið hjá Hamani — við øllum ríkidømi hansara — og hon setti Mordokai at hava umsjón við tí. — Est. 8:1, 2.

24 Kundi Ester taka sær av løttum, nú hon og Mordokai vóru trygg? Bert um hon var sjálvsøkin. Tí í somu løtu vórðu boðini hjá Hamani, um at beina fyri øllum jødum, borin út í hvørt heraðshorn í ríkinum. Haman hevði kastað lut, ella *pur* — eyðsýniliga eitt slag av spiritismu — fyri at vita, nær tað var best at fremja hetta óreina álopið. (Est. 9:24-26) Enn vóru nakrir mánaðir eftir til dagurin kom, men hann nærkaðist við ferð. Bar tað enn til at forða vanlukkuni?

25 Ester var ósjálvsøkin og setti aftur lív sítt í váða. Hon steig fram fyri kong enn eina ferð uttan at vera boðsend. Hesa ferð græt hon um fólk sítt og bønaði mann sín um at taka ræðuligu boðini aftur. Men lógir, sum vóru gjørdar í navni persarakongsins, kundu ikki takast aftur. (Dán. 6:13, 16) So kongurin gav Ester og Mordokai heimild til at gera eina nýggja lóg. Ein onnur kunngerð varð send avstað, sum gav jødunum loyvi at verja seg sjálvar. Reiðmenn skundaðu sær út í allar partar av ríkinum at geva jødunum hesi góðu tíðindi. Nú birtist aftur vón í nógvum hjørtum. (Est. 8:3-16) Vit kunnu ímynda okkum, at jødarnir í øllum tí stóra ríkinum vápnaðu seg og fyrireikaðu seg til bardaga. Tað høvdu teir ikki

24, 25. (a) Hví kundi Ester ikki taka sær av løttum, eftir at Haman var avdúkaður? (b) Hvussu setti Ester aftur lív sítt í váða?

Ester og Mordokai sendu út kunngerðir til jødarnar í Persararíkinum

kunnað gjørt uttan hesa nýggju lógina. Men eitt var kortini av størri týdningi: Fór '[Jehova] Gud herskaranna', at vera við sínum fólki? — 1 Sám. 17:45.

26 Tá ið dagurin endiliga kom, var Guds fólk til reiðar. Sjálvt fleiri persiskir embætismenn hildu við teimum nú, tí tíðindini gingu skjótt um, at jødin Mordokai var tann nýggi aðalráðharrin. Jehova læt fólk sítt vinna stórsigur. Eingin ivi er um, at tað var hann, sum syrgdi fyri, at fíggindarnir hjá jødunum taptu so dyggiliga, at teir ikki fingu hevnt seg.* — Est. 9:1-6

27 Haraftrat kundi Mordokai ikki kenna seg tryggan sum fyristøðumann í húsi Hamans, meðan teir tíggju synirnir hjá hasum ónda manninum framvegis vóru á lívi. Tí vórðu teir eisini dripnir. (Est. 9:7-10) Ein bíbliuprofeti gekk sostatt út, tí Gud hevði áður boðað frá, at amalekitarnir, sum høvdu víst seg at vera óreinir fíggindar hjá hansara fólki, skuldu verða fyribeindir. (5 Mós. 25:17-19) Synir Hamans kunnu væl hava verið millum teir allarsíðstu eftirkomararnar av hesi bannaðu tjóðini.

28 Ester mátti taka sera tungar byrður á sínar ungu herðar — eitt nú at senda út kongalig boð um kríggj og avrætting. Tað kann ikki hava verið lætt. Men vilji Jehova var, at hansara fólk skuldi verjast fyri týning. Hin lovaði Messias, tann einasti sum kundi bjarga mannaættini, skuldi jú koma í tjóðini Ísrael. (1 Mós. 22:18) Tænarar Guds í dag fegnast um, at Messias, Jesus, tá ið hann kom niður á jørðina, forbjóðaði sínum lærisveinum at taka lut í bókstaviligum kríggi. — Matt. 26:52.

29 Men kristin taka hinvegin lut í einum andaligum kríggi. Satan er meira ágrýtin enn nakrantíð í síni roynd at oyðileggja okkara trúgv á Jehova Gud. (***Les Seinna Korintbræv 10:3, 4.***) Sum tað er gott, at vit hava Ester til fyrimynd! Latið okkum, eins og hon, vísa okkara trúgv við at vera vís og tolin, tá ið vit sannføra onnur, og við djørv og ósjálvsøkin at verja Guds fólk.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu var Ester vís, tá ið hon valdi 'tíðina at tala'?
- Hví var tað gott, at Ester var tolin?
- Hvussu var Ester djørv og ósjálvsøkin, tá ið hon vardi fólk sítt?
- Hvussu hevur tú sett tær fyri at taka eftir trúnni hjá Ester?

* Kongurin gav jødunum ein eyka dag til at fullføra sigurin á fíggindum sínum. (Est. 9:12-14) Enn í dag minnast jødar á hvørjum vári henda sigurin. Veitslan verður ropt purim, tí Haman kastaði pur, ella lut, tá ið hann vildi drepa jødarnar.

26, 27. (a) Hvussu stóran sigur læt Jehova jødarnar vinna á fíggindum sínum? (b) Hvør profeti gekk út, tá ið synir Hamans vórðu dripnir?

28, 29. (a) Hví var tað vilji Jehova, at Ester og fólk hennara tóku lut í kríggi? (b) Hví er Ester ein góð fyrimynd hjá okkum í dag?

KAPITTUL SEYTJAN

Eg eri tænastukvinna Jehova

MARIA hugdi við víðopnum eygum at gestinum, ið kom á gátt hjá henni. Hann spurdi ikki eftir pápa ella mammu hennara. Hann var komin at vitja hana! Hann kundi ikki vera úr Nazaret, tað var hon vís í. Í einum lítlum býi sum hennara sást, tá ið fremmand vitjaðu. Hesin hevði líkst burturúr, líkamikið hvar hann fór. Mátin, hann heilsaði upp á Mariu, var púra fremmandur fyri hana. Hann segði: „Heil, tú náðaða! [Jehova] er við tær!“ — ***Les Lukas 1:26-28.***

2 Soleiðis byrjar bíbilska frásøgan um Mariu, dóttur Eli, úr býnum Nazaret í Galilea. Tá ið vit hitta Mariu, stendur hon so at siga við eitt vegamót. Hon var trúlovað og skuldi giftast við Jósefi, træsmiðinum. Hann var eingin ríkur maður, men ein maður, sum hevði sterka trúgv á Gud. So tað tóktist, sum hennara lívsleið longu var løgd til rættis — hon skuldi liva eitt einfalt lív, har hon fór at stuðla manni sínum, Jósefi, og saman við honum uppala børnini, ið tey fóru at fáa. Men knappliga stóð hon har við einum gesti, sum bar henni eina uppgávu frá Gudi, eina ábyrgd, ið fór at broyta lívið hjá henni.

3 Tað kemur óvart á nógv, at Bíblian ikki fortelur okkum so nógv um Mariu. Hon fortelur okkum lítið um hennara uppvøkst, minni um hennara persónleika og als einki um hennara útsjónd. Men vit kunnu kortini fáa nógv burtur úr tí lítla, sum Guds orð sigur um hana.

4 Skulu vit læra Mariu at kenna, mugu vit skúgva til viks nógvar av teimum áskoðanunum, sum átrúnaðir hava borið fram um hana. Latið okkum gloyma tær óteljandi myndirnar, ið eru gjørdar av henni, sum til dømis málningar og standmyndir. Latið okkum eisini gloyma átrúnaðarligu lærurnar, sum hevja hesa eyðmjúku kvinnuna upp og geva henni so tignarlig heiti sum „Móðir Guds“ og „Himmaldrotning“. Latið okkum heldur kanna tað, sum Bíblian

1, 2. (a) Hvørja heilsan fekk Maria frá einum fremmandum? (b) Hvussu stóð Maria við eitt vegamót?

3, 4. Hvat mugu vit skúgva til viks, tá ið vit skulu læra Mariu at kenna, og hvat skulu vit heldur leggja okkum eftir at kanna?

í roynd og veru sigur um hana. Hon gevur okkum dýrabart innlit í hennara trúgv og vísir, hvussu vit kunnu taka eftir henni.

Ein eingil vitjar

5 Gesturin hjá Mariu var ikki nakað menniskja. Tað var eingilin Gabriel. Tá ið hann rópti Mariu „tú náðaða“, ’fall ræðsla á hana av orðum hansara, og hon hugsaði um, hvat henda heilsanin mundi hava at týða’. (Luk. 1:29) Hjá hvørjum hevði hon funnið náði? Maria væntaði ikki, at menniskju skuldu vísa henni nakran serligan heiður. Men eingilin tosaði um, at Jehova Gud hevði tokka til hennara, og tað hevði týdning fyri hana. Kortini var hon ikki stolt og helt seg hava tokka Guds. Frásøgan um Mariu lærir okkum, at vit eiga at stremba eftir at fáa tokka Guds og ongantíð stolt ganga út frá, at vit longu hava hann. Gud stendur teimum stoltu ímóti, men hann elskar og stuðlar teimum eyðmjúku. — Ják. 4:6.

6 Mariu fór at tørva ein slíkan eyðmjúkleika, tí eingilin bjóðaði henni ein so stóran framíhjárætt, at tað næstan var óskiljandi. Hann greiddi henni frá, at hon skuldi eiga eitt barn, sum fór at verða tað týdningarmesta menniskjað nakrantíð. Gabriel segði: „Gud [Jehova] skal geva Honum hásæti Dávids, faðirs Hansara. Hann skal vera kongur yvir húsi Jákups allar ævir, og ikki skal vera endi á kongadømi Hansara.“ (Luk. 1:32, 33) Maria hevði ivaleyst hoyrt um lyftið, sum Gud hevði givið Dávidi meira enn túsund ár frammanundan — nevniliga tað, at ein av hansara eftirkomarum skuldi stjórna um ævir. (2 Sám. 7:12, 13) So sonur hennara skuldi verða tann Messias, sum Guds fólk í øldir hevði bíðað eftir.

Maria var ikki stolt og helt seg hava tokka Guds

7 Haraftrat segði eingilin, at sonur hennara skuldi „kallast Sonur hins Hægsta“. Hvussu kundi ein kvinna, eitt menniskja, bera Guds son undir belti? Hvussu kundi Maria yvirhøvur verða við barn? Hon var trúlovað Jósefi, gaman í, men tey vóru ikki gift enn. Tað fekk hana at spyrja: „Hvussu kann hetta verða, við tað at eg veit ikki av manni?“ (Luk. 1:34) Legg til merkis, at eingin feril av

5. (a) Hvat kunnu vit læra um Mariu, tá ið vit hugsa um, hvussu heilsanin hjá Gabrieli ávirkaði hana? (b) Hvat týdningarmikið kann frásøgan um Mariu læra okkum?

6. Hvønn framíhjárætt bjóðaði eingilin Mariu?

7. (a) Hvat avdúkaði Maria um seg sjálva við spurninginum, hon setti einglinum? (b) Hvat kann frásøgan um Mariu læra ungfólk í dag?

Eingilin Gabriel bjóðaði Mariu ein einastandandi framíhjárætt

skomm var at hóma hjá Mariu, tá ið hon nevndi, at hon var moyggj. Hon virðismetti tvørturímóti sín reinleika. Í dag hava nógv ung ongan hug at bíða við at fara í song við onkrum fyrstu ferð og eru skjót at halda tey fyri gjøldur, sum velja at bíða. Heimurin er sanniliga nógv broyttur. Men Jehova er ikki broyttur. (Mal. 3:6) Eins og á døgum Mariu virðismetir hann tey, sum fylgja hansara siðareglum. — ***Les Hebrearabrævið 13:4.***

8 Hóast Maria var ein trúfastur tænari hjá Gudi, var hon eitt ófullkomið menniskja. So hvussu kundi hon fáa eitt fullkomið barn, son Guds? Gabriel greiddi frá: „Heilagi Andin skal koma yvir teg, og kraft hins Hægsta skal skugga yvir teg; tí skal eisini hitt heilaga, ið føtt verður, kallast Sonur Guds.“ (Luk. 1:35) At nakað er heilagt, vil siga, at tað er reint og ódálkað. Vanliga arva børn ófullkomileikan hjá foreldrunum. Men í hesum førinum fór Jehova at gera eitt einastandandi undur. Hann fór at flyta lívið hjá soni sínum úr himli til lívmóðurina hjá Mariu og síðani brúka sína virksomu kraft, ella heilaga anda, til at „skugga yvir“ Mariu, og harvið verja barnið fyri at verða dálkað av synd. Trúði Maria lyftinum, sum eingilin bar henni? Hvussu svaraði hon?

Maria svarar Gabrieli

9 Nógv, harímillum nakrir gudfrøðingar í kristinheiminum, hava ilt við at trúgva, at ein moyggj kundi eiga eitt barn. Hóast teirra longu útbúgving skilja teir ikki tann einfalda sannleikan, sum Gabriel bar fram: „Einki er Gudi ómøguligt.“ (Luk. 1:37) Maria trúði tí, Gabriel segði, tí hon var ein ung kvinna við sterkari trúgv. Men hon var kortini ikki góðtrúgvin. Eins og øll skilagóð menniskju tørvaði Mariu prógv at grunda sína trúgv á. Gabriel var fúsur at geva henni fleiri prógv. Hann fortaldi henni um ta eldru skyldkonuna Elisabet, ið leingi hevði verið kend sum ein ófruktbør kvinna. Gud hevði á undursaman hátt latið hana verða við barn.

10 Hvat fór Maria at gera? Hon hevði fingið eina uppgávu og prógv um, at Gud fór at gera alt, sum Gabriel hevði sagt. Hóast tað var ein stór æra at bera Guds son í heim, var støðan ikki løtt hjá Mariu. Hon var jú trúlovað Jósefi. Mundi hann vilja gifta seg við henni, tá ið hann fann út av, at hon var við barn? Og uppgávan í sjálvum sær kendist helst sum ein ræðandi ábyrgd. Hon skuldi hava lívið hjá tí dýrabarasta av øllum Guds skapningum undir

8. Hvussu kundi Maria, hóast hon var ófullkomin, eiga eitt fullkomið barn?

9. (a) Hví fara nógv skeiv, tá ið tey ikki vilja trúgva frásøguni um Mariu?
(b) Hvussu styrkti Gabriel Mariu í trúnni?

10. Hví var støðan hjá Mariu ikki løtt, hóast tað var ein stór æra at bera Guds son í heim?

belti — hansara egna elskaða son! Hon skuldi taka sær av honum, meðan hann var eitt hjálparleyst pinkubarn og ansa eftir honum í einum óndum heimi. Sanniliga ein stór ábyrgd!

11 Í Bíbliuni eru dømi um, at sjálvt sterkir, trúfastir menn av og á aftraðu seg við at átaka sær avbjóðandi uppgávur frá Gudi. Móses bar seg undan við, at hann ikki var nakar orðkringur maður og tí ikki kundi vera talsmaður Guds. (2 Mós. 4:10) Jeremias segði, at hann var „so ungur“, ov ungur at taka á seg uppgávuna frá Gudi. (Jer. 1:6) Og Jónas rýmdi undan síni uppgávu! (Jón. 1:3) Hvussu við Mariu?

12 Sjálvt í dag kenna nógv fólk hennara eyðmjúka og lýdna svar. Hon segði við Gabriel: „Eg eri tænastukvinna [Jehova] — mær verði, sum tú hevur sagt!“ (Luk. 1:38) Ein tænastukvinna hevði minst at týða millum tænastufólkini; harri hennara ráddi fullkomiliga yvir lívi hennara. Soleiðis metti Maria Harra sín, Jehova. Hon visti, at hon var trygg í hansara hondum, at hann er trúfastur ímóti teimum, sum eru trúføst ímóti honum, og at hann fór at signa hana, um hon legði alla orku í hesa avbjóðandi uppgávuna. — Sl. 18:26.

Maria visti, at hon kundi kenna seg trygga í hondum Jehova

13 Av og á biður Gud okkum gera nakað, sum í okkara eygum kann tykjast torført ella enntá ógjørligt. Men í sínum orði gevur hann okkum nógvar orsøkir til at líta á hann og leggja okkara lív í hansara hendur eins og Maria. (Orðt. 3:5, 6) Gera vit tað, lønir hann okkum, og okkara trúgv verður sterkari.

Maria vitjar Elisabet

14 Tað, sum Gabriel segði um Elisabet, hevði stóran týdning fyri Mariu. Hvør kvinna í heiminum mundi skilja støðuna hjá Mariu betur enn Elisabet? Maria skundaði sær avstað til fjallalendið í Juda, ein ferð, sum helst vardi tríggjar ella fýra dagar. Tá ið Maria kom inn um gáttina hjá Elisabet og prestinum Zakariasi, gav Jehova henni enn eitt prógv til tess at styrkja hennara trúgv. Beint sum Elisabet hoyrdi heilsanina hjá Mariu, føldi hon fostrið spæla

11, 12. (a) Hví aftraðu sjálvt sterkir, trúfastir menn seg av og á við at átaka sær avbjóðandi uppgávur frá Gudi? (b) Hvat avdúkaði Maria um seg sjálva við svarinum, hon gav Gabrieli?

13. Hvussu kann frásøgan um Mariu gagna okkum, um tað, sum Gud biður okkum gera, tykist torført ella enntá ógjørligt?

14, 15. (a) Hvussu signaði Jehova Mariu, tá ið hon vitjaði Elisabet og Zakarias? (b) Hvat vísa orðini hjá Mariu í Lukas 1:46-55 um hana?

av frøi í lívi sínum. Hon fyltist av heilagum anda og umrøddi Mariu sum „móðir Harra míns“. Gud hevði opinberað fyri Elisabet, at sonur Mariu skuldi gerast Harri hennara, Messias. Við íblástri frá Jehova rósti hon eisini Mariu fyri trúfesti og lýdni, tá ið hon segði: „Sæl er hon, ið trúði.“ (Luk. 1:39-45) Ja, alt, sum Jehova hevði lovað Mariu, fór at ganga út!

15 Nú tók Maria til orða. Tað, sum hon segði, er væl varðveitt í Guds orði. (***Les Lukas 1:46-55.***) Hetta er avgjørt longsta røðan hjá Mariu í bíbilsku frásøguni, og hon sigur okkum nógv um hana. Við orðum sínum vísti Maria, hvussu takksom hon var fyri, at Jehova hevði signað hana, so hon slapp at verða mamma at Messiasi.

Vinalagið hjá Mariu og Elisabet gagnaði teimum báðum

Vit síggja eisini, hvussu sterka trúgv hon hevði, tá ið hon nevndi, at Jehova eyðmýkir tey stoltu og mætu, men hinvegin hjálpir fátækum og lítið virdum, ið royna at tæna honum. Vit fáa eisini eina ábending um, hvussu stóran kunnleika hon hevði. Sambært eini meting vísti hon meira enn 20 ferðir til Hebraisku skriftirnar.*

16 Tað sæst týðiliga, at Maria hugsaði nógv um Guds orð. Men hon var kortini eyðmjúk og vildi heldur lata Skriftirnar tala, enn at bera sínar egnu hugsanir fram. Sonurin, sum hon bar undir belti, fór at hava sama eyðmjúka hugburð. Hann segði: „Læra Mín er ikki Mín, men Hansara, sum hevur sent Meg.“ (Jóh. 7:16) Vit mugu spyrja okkum sjálvi: ’Vísi eg somu virðing fyri Guds orði, ella taki eg míni egnu hugskot og áskoðanir framum?’ Maria hevði avgjørt tann rætta hugburðin.

17 Maria varð hjá Elisabet í umleið tríggjar mánaðir, og tær vórðu ivaleyst báðar sera lívgaðar av samveruni. (Luk. 1:56) Henda hjartanemandi frásøgan í Bíbliuni minnir okkum á, hvussu gott tað er at eiga góðar vinir. Royna vit at finna vinir, sum veruliga elska Jehova, verður okkara trúgv sterkari, og vit fáa tættari samband við Gud. (Orðt. 13:20) Tíðin var nú komin, tá ið Maria mátti fara heimaftur. Hvat fór Jósef at siga, tá ið hann fann út av, at hon var við barn?

Maria og Jósef

18 Maria bíðaði helst ikki við fortelja, at hon var við barn, til tað sást á henni. Hon mátti tosa við Jósef um tað. Áðrenn hon tosaði við hann, hugsaði hon helst um, hvussu hesin rættvísi og gudsóttandi maðurin fór at taka tað, sum hon mátti siga honum. Kortini fór hon til hansara og segði honum alt, ið var hent henni. Sum vit helst kunnu ímynda okkum, varð Jósef sera ørkymlaður. Hann vildi fegin trúgva gentuni, sum hann var so góður við, men eftir øllum at døma hevði hon verið honum ótrúgv. Bíblian sigur okkum ikki, hvørjir tankar runnu fram fyri hann. Men vit fáa at vita, at hann ætlaði at skiljast frá henni, tí tá í tíðini var ein trúloving líka bindandi sum eitt hjúnaband. Hann vildi tó ikki gera hana til skammar fyri almenninginum, so gøla gjørdist burturúr. Tí valdi

* Millum annað vísti Maria eyðsýniliga til orðini hjá tí trúføstu kvinnuni Hannu, sum Jehova eisini hevði signað við at geva henni ein son. — Sí rammuna „Tvær merkisverdar bønir“ í kapittul 6.

16, 17. (a) Hvussu vístu bæði Maria og sonur hennara ein hugburð, sum vit eiga at taka eftir? (b) Hvat læra vit um vinaløg í sambandi við, at Maria vitjaði Elisabet?

18. Hvat fortaldi Maria Jósefi, og hvussu tók hann tað?

hann at skiljast frá henni í loyndum. (Matt. 1:18, 19) Tað er einki at ivast í, at Maria var kedd um at síggja Jósef vera so illa við av hesi óvanligu støðuni. Men Maria lastaði ikki Jósef fyri, at hann ikki trúði henni.

19 Jehova hjálpti Jósefi at gera tað rætta. Í einum dreymi segði eingil Guds fyri honum, at tað veruliga var við einum undri, at Maria var vorðin við barn. Tað má hava verið ein lætti! Nú gjørdi Jósef tað, sum Maria hevði gjørt frá byrjan — hann gjørdi, sum Jehova vildi hava hann at gera. Hann gifti seg við Mariu, og hann gjørdi seg til reiðar at átaka sær ta einastandandi ábyrgdina at ala upp son Jehova. — Matt. 1:20-24.

20 Tey, sum eru gift — og tey, sum ætla sær at giftast — kunnu læra nógv av hesum unga parinum, sum livdi fyri 2000 árum síðani. Tá ið Jósef við tíðini sá, hvussu dugnalig Maria var sum kona og mamma, frøddist hann uttan iva um, at eingil Jehova hevði leiðbeint hann. Jósef man hava skilt, hvussu týdningarmikið tað er at leita sær hjálp hjá Jehova, tá ið stórar avgerðir skulu takast. (Sl. 37:5; Orðt. 18:13) Hann var ivaleyst nærlagdur og vinaligur, tá ið hann framyvir, sum høvdið í familjuni, skuldi taka avgerðir.

21 Men hvat kunnu vit so læra av, at Maria var fús at gifta seg við Jósefi? Hóast Jósef kanska í fyrstuni hevði ilt við at trúgva Mariu, bíðaði hon eftir, at hann skuldi taka eina avgerð, tí hon viðurkendi, at hann fór at verða høvdið í familjuni. Maria hevur ivaleyst lært av hesum, og tað kunnu kristnar kvinnur í dag eisini. Hesar hendingar hava helst lært Jósef og Mariu nógv um, hvussu týðandi tað er at tosa opið og ærliga saman. — ***Les Orðtøkini 15:22.***

22 Hetta unga parið gekk í hjúnalag við teimum bestu fyritreytunum. Bæði tvey elskaðu Jehova Gud meir enn nakað annað og vildu fegin toknast honum og vera góð foreldur. Men tey høvdu sjálvsagt fleiri signingar í væntu — og eisini fleiri avbjóðingar. Tey skuldu uppala Jesus, sum fór at verða tað størsta menniskjað, ið nakrantíð hevur livað.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvat kann Maria læra okkum um eyðmjúkleika?
- Á hvønn hátt var lýdnið hjá Mariu einastandandi?
- Hvussu styrkti Maria sína trúgv?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Mariu?

19. Hvussu hjálpti Jehova Jósefi at gera tað rætta?

20, 21. Hvat kunnu tey, sum eru gift, og tey, sum ætla sær at giftast, læra av Mariu og Jósefi?

22. Við hvørjum fyritreytum gingu Jósef og Maria í hjúnalag, og hvat høvdu tey í væntu?

KAPITTUL ÁTJAN

Hon ’grundaði í hjarta sínum’

MARIA førkaði seg aftur og fram fyri at finna eina støðu, so hon kom at sita væl á eslinum. Hon hevði sitið har í fleiri tímar. Beint framman fyri hana gekk Jósef og leiddi eslið eftir vegnum til fjarskotna Betlehem. Maria føldi aftur, at barnið rørdi seg.

2 Sambært frásøguni var Maria fleiri mánaðir við barn. (Luk. 2:5, 6) So hvørt sum Jósef og Maria komu fram við einum akri fyri og øðrum eftir, hugdu nakrir bøndur, sum vóru í holt við at pløga ella sáa, helst at teimum og undraðust á, at ein kvinna, ið var komin so tætt at eiga, var farin eina slíka ferð. Hví var Maria, sum búði í Nazaret, farin so langt heimanífrá?

3 Nógvar mánaðir frammanundan hevði henda unga jødiska kvinnan fingið eina uppgávu, sum ikki hevði sín líka í allari mannasøguni. Hon skuldi bera barnið í heim, sum fór at verða Messias, sonur Guds! (Luk. 1:35) Tá ið tíðin nærkaðist, at hon skuldi eiga, bar tað so á, at tey noyddust at fara hesa ferðina, og í hesum sambandi varð trúgvin hjá Mariu roynd. Latið okkum vita, hvat hjálpti henni at verða sterk í trúnni.

Ferðin til Betlehem

4 Jósef og Maria vóru ikki tey einastu, sum ferðaðust. Augustus keisari hevði nýliga givið boð um, at fólk um alt landið skuldu skrivast í manntal og tí skuldu fara til tann býin, tey vóru fødd í. Hvat gjørdi Jósef? Í frásøguni stendur: „Eisini Jósef fór úr Galilea, úr býnum Nazaret, til Judea, til bý Dávids, sum eitur Betlehem — tí hann var av húsi og ætt Dávids.“ — Luk. 2:1-4.

5 Tað var ikki av tilvild, at keisarin gav hesi boð júst um hetta mundið. Ein profeti, sum var skrivað umleið 700 ár frammanundan, boðaði frá, at Messias skuldi verða føddur í Betlehem.

1, 2. Lýs ferðina hjá Mariu, og greið frá, hví tað var strævið hjá henni at ferðast.

3. Hvørja uppgávu hevði Maria fingið, og hvat fara vit at læra um Mariu?

4, 5. (a) Hví vóru Jósef og Maria á veg til Betlehem? (b) Hvør profeti gekk út við boðnum, sum keisarin gav?

Í roynd og veru lá ein býur, sum æt Betlehem, bert 11 kilometrar frá Nazaret. Men í profetiini stóð heilt nágreiniliga, at Messias fór at verða føddur í „Betlehem, Efrata“. (***Les Mika 5:1.***) Fyri at koma til hesa lítlu bygdina máttu ferðafólk úr Nazaret leggja okkurt um 130 kilometrar av fjallalendi aftur um seg, tá ið farið varð um Samaria. Tað var í hesum Betlehem, at Jósef skuldi lata seg skriva, tí hetta var heimbygdin hjá forfedrum hansara í ætt Dávids kongs. Bæði Jósef og Maria vóru av hesi ætt.

6 Mundi Maria fara at stuðla avgerðini, sum Jósef hevði tikið um at lýða boð keisarans? Tað fór jú at vera ein trupul ferð hjá henni. Hetta var helst tíðliga á heysti, so møguleiki var fyri nakað av regni, nú turra árstíðin var um at vera av. Og haraftrat lá Betlehem sera høgt — í 760 metra hædd — so tað fór at vera strævið at ganga tann síðsta teinin á tí fleiri daga longu ferðini. Møguliga fór ferðin at vara longur enn vanligt, tí Maria var jú við barn og hevði kanska javnan tørv á at hvíla seg. Í eini tílíkari støðu mundi ein ung kvinna allarhelst viljað verið heima hjá familju og vinfólki, sum vóru til reiðar at hjálpa henni, tá ið hon fekk verkir. Tað hevur uttan iva kravt dirvi at fara undir hesa ferðina.

6, 7. (a) Hví kann tað hava verið ein avbjóðing hjá Mariu at fara til Betlehem? (b) Hvørja ávirkan hevði tað á avgerðirnar hjá Mariu, at hon var kona Jósefs? (Sí eisini undirgreinina.)

7 Kortini skrivar Lukas, at Jósef fór „at verða skrásettur við Mariu“. Hann nevnir eisini, at Maria „sum lovað var givin [Jósefi] til konu“. (Luk. 2:4, 5, *NW*) At Maria nú var kona Jósefs, hevði stóra ávirkan á hennara avgerðir. Hon metti mann sín sum høvdið í familjuni og vildi fegin átaka sær tann leiklut, sum Gud hevði givið henni, við at stuðla hansara avgerðum.* Tí var hon fús at akta mann sín, hóast tað kundi hava avbjóðingar við sær, og vísti soleiðis eina sterka trúgv.

8 Hvat annað kann hava fingið Mariu at vera lýdna? Kendi hon profetiina um, at Messias skuldi verða føddur í Betlehem? Tað sigur Bíblian einki um. Men kanska kendi hon profetiina, tí sum skilst var tað almenn vitan millum trúarleiðarar og fólk sum heild. (Matt. 2:1-7; Jóh. 7:40-42) Og Maria kendi Skriftirnar væl. (Luk. 1:46-55) Tá ið Maria gjørdi av at fara, um tað nú var fyri at akta mann sín, fyri at fylgja boðunum frá keisaranum, ella tí hon kendi profetiina hjá Jehova — ella ein samanseting av hesum — so var hon ein sera góð fyrimynd. Jehova virðismetir

* Legg til merkis, hvussu henda ferðin verður lýst í mun til eina undanfarna ferð: 'Maria fór við skundi avstað' at vitja Elisabet. (Luk. 1:39) Tá var Maria trúlovað, men ikki gift, og tí fór hon kanska avstað uttan at tosa við Jósef. Men tá ið tey vóru gift, verður sagt, at tað var Jósef, og ikki Maria, sum skipaði fyri ferðini.

8. (a) Hvat annað kann hava fingið Mariu at fara við Jósefi til Betlehem?
(b) Hvussu er Maria ein fyrimynd hjá okkum í dag?

Ferðin til Betlehem var ikki løtt

veruliga menn og kvinnur, sum eru eyðmjúk og lýðin. Flestøll menniskju í dag halda ikki, at tað er neyðugt at vera eyðmjúkur, og tí er Maria ein serliga góð fyrimynd hjá okkum.

Kristus verður føddur

9 Maria lætnaði helst um hjartað, tá ið hon fekk Betlehem í eygsjón. Sum tey gingu niðan eftir líðunum og komu fram við oljuberjalundum — oljuber vóru ein tann síðsta grøðin, ið varð heystað — hava Maria og Jósef kanska hugsað um søguna hjá hesi bygdini. Hon hevði ov lítið at týða til at verða tald millum býirnar í Juda, júst sum Mika profetur hevði boðað frá, men tað var kortini her, at Boaz, No'omi og seinni Dávid vórðu fødd meira enn túsund ár frammanundan.

10 Fult av fólki var í Betlehem. Nógv fólk vóru longu komin at lata seg skriva, og tí var ikki rúm fyri Jósefi og Mariu í gistihúsinum.* Tey høvdu einki annað í at velja enn at gista í einum fjósi. Vit kunnu helst ímynda okkum, hvussu stúrin Jósef varð, tá ið Maria fór at kenna eina pínu, sum hon ongantíð áður hevði havt, og pínan gjørdist verri og verri. At hugsa sær, at hon skuldi fáa verkir her — í einum fjósi!

11 Kvinnur um allan heimin kunnu ímynda sær, hvussu Maria hevði tað. Eini 4000 ár frammanundan hevði Jehova boðað frá, at kvinnur skuldu eiga børn við pínu vegna arvasyndina. (1 Mós. 3:16) Einki bendir á, at Maria var nakað undantak. Frásøgan hjá Lukasi nevnir ikki nakað serstakt um barnsburðin, men sigur bert: „Hon átti son sín, hin frumborna." (Luk. 2:7) Ja, nú var hennara „frumborna" barn føtt — tað fyrsta av teimum í minsta lagi sjey børnunum hjá Mariu. (Mark. 6:3) Men hesin sonurin fór altíð at líkjast burturúr. Hann var ikki bert *hennara* frumborni, hann var eisini frumborni sonur Jehova Guds, nevniliga „hin frumborni als skapnings". — Kol. 1:15.

12 Nú leggur frásøgan henda víðagitna smálutin aftrat: „[Hon] sveipaði Hann og legði Hann í krubbu." (Luk. 2:7) Jólaleikir, málningar og jólakrubbur um allan heimin lýsa umstøðurnar á ein alt ov kenslubornan og veruleikafjaran hátt. Hugsa

* Tað var vanligt tá í tíðini, at býir høvdu eitt stað, har ferðafólk kundu gista.

9, 10. (a) Hvat kunnu Maria og Jósef hava hugsað um, sum tey nærkaðust Betlehem? (b) Hvar gistu Jósef og Maria, og hví?

11. (a) Hví kunnu kvinnur um allan heimin ímynda sær, hvussu Maria hevði tað? (b) Á hvønn hátt var Jesus 'frumborin'?

12. Hvar legði Maria pinkubarnið, og hvussu var veruleikin í mun til jólaleikir, málningar og jólakrubbur?

kortini um, hvat veruliga hendi. Ein krubba er eitt trog, ella eitt ílat, sum djór eta úr. Minst til, at familjan gisti í einum fjósi, neyvan eitt stað við góðari inniluft ella góðum reinføri — hvørki tá ella nú. Mundu nøkur foreldur valt sær eitt slíkt stað at bera eitt barn í heim, um tey høvdu nakað í at velja? Flestøll foreldur ynskja tað besta fyri síni børn. Hvussu mikið meira vildu Maria og Jósef ikki geva soni Guds tað allarbesta!

13 Teir fáu møguleikarnir gjørdu tey kortini ikki beisk, tey royndu at fáa sum best burtur úr støðuni. Hugsa til dømis um, at Maria sjálv tók sær av barninum. Hon ballaði tað væl, áðrenn hon varisliga legði tað niður í krubbuna, har tað kundi sova trygt og gott. Maria fór ikki at lata stúranir um verandi støðuna forða sær í at syrgja væl fyri nýborna soni sínum. Hon og Jósef vistu bæði tvey, at tað, sum hevði størstan týdning, var at læra barnið at elska Jehova. (***Les Fimtu Mósebók 6:6-8.***) Í dag hava skilagóð foreldur somu raðfesting, tey læra eisini síni børn um Jehova í hesum andaliga fátæka heiminum.

Ein lívgandi vitjan

14 Knappliga kom onkur á gátt í friðarliga fjósinum. Tað vóru hirðar, sum komu at vitja, tí teir vóru so spentir at síggja ta lítlu familjuna og serliga nýborna barnið. Menninir vóru sera eldhugaðir, og gleðin lýsti av teimum. Teir høvdu skundað sær oman úr líðunum, har teir hildu til við fylgjum sínum.* Teir søgdu teimum bilsnu foreldrunum frá eini frálíkari hending, sum teir júst høvdu verið vitni til. Ein eingil hevði brádliga víst seg fyri teimum, meðan teir hildu náttarvakt í líðini. Dýrd Jehova hevði lýst rundan um teir, og eingilin hevði sagt teimum, at Kristus, ella Messias, júst var føddur í Betlehem. Teimum varð eisini sagt, at teir skuldu finna pinkubarnið sveipað og liggjandi í eini krubbu. Síðani hendi nakað enn meiri undurfult — ein stórur skari av einglum, sum prísaðu Gudi, kom til sjóndar! — Luk. 2:8-14.

15 Einki løgið, at hesir eyðmjúku menninir skundaðu sær til Betlehem. Teir gjørdust uttan iva sera glaðir um at síggja eitt

* At hirðarnir um hesa tíðina hildu til uttandura við fylgjum sínum tíðarfestir hendingarøðina í Bíbliuni: Jesus varð ikki føddur í desember, tá ið fylgini høvdu verið undir taki, men heldur einaferð fyrst í oktober.

13. (a) Á hvønn hátt fingu Maria og Jósef sum best burtur úr støðuni?
(b) Hvussu kunnu skilagóð foreldur í dag raðfesta sum Jósef og Maria?

14, 15. (a) Hví vóru hirðarnir spentir at síggja barnið? (b) Hvat gjørdu hirðarnir eftir at hava sað barnið í fjósinum?

nýborið pinkubarn liggja har, júst sum eingilin hevði sagt teimum. Teir fingu ikki tagt um hesi góðu tíðindi. 'Teir søgdu frá tí, og øll, sum hoyrdu tað, undraðust á tað, ið teimum varð sagt av hirðunum.' (Luk. 2:17, 18) Hirðar tá á døgum vóru helst ikki høgt í metum hjá trúarleiðarunum. Eingin ivi er tó um, at Jehova virðismetti hesar eyðmjúku og trúføstu menninar. Men hvussu ávirkaði henda vitjanin Mariu?

16 Maria var óivað móð eftir barnsburðin, men hon sat kortini undir hvørjum orði, ið varð sagt. Og hon gjørdi meira enn tað: „Maria legði sær øll hesi orð í minni og grundaði á tey í hjarta sínum." (Luk. 2:19) Henda unga kvinna grundaði veruliga á tað, hon sá og hoyrdi. Hon visti, at boðskapurin frá einglinum hevði stóran týdning. Jehova vildi, at hon skuldi vita, hvør sonur hennara var, og hvussu stóran týdning hann hevði. So hon gjørdi meira enn bara at lurta. Hon goymdi orðini í hjarta sínum, so hon kundi grunda á tey aftur og aftur, sum mánaðirnir og árini gingu. Hetta er ein týðandi orsøk til, at Maria var før fyri at halda seg sterka í trúnni alt sítt lív. — ***Les Hebrearabrævið 11:1.***

Jehova virðismetti av sonnum teir eyðmjúku og trúføstu hirðarnar

17 Fert tú at taka eftir Mariu? Jehova hevur syrgt fyri, at hvør einasta síða í hansara orði, Bíbliuni, er full av týðandi sannleikum. Men hesir sannleikarnir gagna okkum lítið, um vit ikki geva teimum gætur. Tað gera vit, um vit lesa í Bíbliuni regluliga — ikki bara sum eina góða bók, men sum innblásta orð Guds. (2 Tim. 3:16) Síðani mugu vit eins og Maria goyma orðini í okkara hjørtum og grunda á tey. Hugsa vit djúpt um tað, vit lesa í Bíbliuni, og hugleiða um, hvussu vit kunnu fylgja ráðum Jehova enn neyvari, geva vit trúnni tað, sum henni tørvar fyri at vaksa.

Fleiri orð at grunda á

18 Tá ið lítla barnið var átta dagar gamalt, lótu Maria og Jósef

16. Hvussu vísti Maria, at hon veruliga grundaði á tað, hon hoyrdi, og hvat var ein týðandi orsøk til, at hon kundi halda seg sterka í trúnni?

17. Hvussu kunnu vit taka eftir Mariu, tá ið talan er um sannleikarnar í Bíbliuni?

18. (a) Hvussu aktaðu Maria og Jósef Móselógina, tá ið Jesus var pinkalítil? (b) Hvat vísti ofrið hjá Jósefi og Mariu í templinum um fíggjarstøðuna hjá teimum?

Maria lurtaði væl eftir tí, hirðarnir søgdu, og goymdi tað í hjarta sínum

hann umskera, eins og Móselógin ásetti, og góvu honum navnið Jesus, sum tey høvdu fingið boð um. (Luk. 1:31) Tá ið hann var 40 dagar gamal, fóru tey við honum úr Betlehem til templið í Jerusalem, sum lá einar 10 kilometrar haðani, og har lótu tey reinsanarofrið, ið Lógin loyvdi teimum fátæku at geva — tvær turtildúvur ella tveir dúvuungar. Kendu tey eina vissa skomm av at ofra minni enn veðurlambið og turtildúvuna, sum onnur foreldur høvdu ráð til, skúgvaðu tey slíkar kenslur til viks. Tey kendu seg í øllum førum sera lívgað av at vera har. — Luk. 2:21-24.

19 Ein gamal maður, ið æt Símeon, kom til teirra, og hann gav Mariu enn fleiri orð at goyma í hjarta sínum. Honum var lovað, at hann skuldi ikki síggja deyðan, fyrr enn hann hevði sæð Messias, og heilagi andi Jehova vísti honum á, at lítli Jesus var frelsarin, ið koma skuldi. Símeon ávaraði eisini Mariu um pínuna, hon ein dag skuldi kenna. Hann segði, at hon fór at kenna tað sum varð eitt langt svørð stungið ígjøgnum hana. (Luk. 2:25-35) Hóast hesi orðini ávaraðu hana um nakað ræðuligt, hava tey kanska hjálpt henni at tola sorgina, tá ið hon kom 33 ár seinni. Eftir at Símeon hevði tosað við Mariu, sá ein profet-

19. (a) Hvussu gav Símeon Mariu enn fleiri orð at goyma í hjarta sínum?
(b) Hvat gjørdi Anna, tá ið hon sá Jesus?

Maria og Jósef vórðu sera lívgað í templi Jehova í Jerusalem

inna, ið æt Anna, lítla Jesus og fór at tosa um hann við øll, sum longdust eftir, at Jerusalem skuldi verða endurloyst. — ***Les Lukas 2:36-38.***

20 Sum tað var gott, at Jósef og Maria gjørdu av at fara við barni sínum í tempul Jehova í Jerusalem! Soleiðis løgdu tey lunnar undir, at Jesus alt lív sítt trúfastur fór at koma í templið. Meðan tey vóru har, góvu tey Jehova sítt allarbesta og fingu sjálvi góð ráð og vórðu lívgað. Tá ið Maria fór úr templinum henda dagin, var trúgv hennara uttan iva sterkari og hjarta hennara fult av týðandi sannleikum, sum hon kundi grunda á og fortelja øðrum.

21 Tað er ein fragd at síggja, at foreldur í dag taka eftir hesi fyrimynd. Foreldur, sum eru Jehova vitni, hava trúføst børnini við á kristin møti. Slík foreldur geva sítt besta, og lívga trúarfelagar sínar við tí, sum tey siga. Og tá ið tey fara heim eftir eitt møti, eru tey sterkari í trúnni, glaðari og hava nógv gott at tosa við onnur um. Tað er ein gleði at vera saman við teimum! Tá sanna vit, eins og Maria, at vit verða styrkt í trúnni.

20. Hví var tað gott, at Jósef og Maria gjørdu av at fara við Jesusi í templið í Jerusalem?

21. Hvussu kunnu vit tryggja okkum, at vit, eins og Maria, verða styrkt í trúnni?

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu var Maria ein fyrimynd í lýdni?
- Hvat kunnu vit læra av, at Maria fekk sum best burtur úr tí, hon hevði?
- Hvussu vísti Maria, at hon grundaði á orðini frá Gudi?
- Hvussu hevur tú sett tær fyri at taka eftir Mariu?

KAPITTUL NÍTJAN

Hann vardi, hann uppihelt, hann helt á

JÓSEF bant enn eina byrðu upp á eslið. Ímynda tær hann, sum hann hugdi út í ta myrku náttina í bygdini Betlehem og klappaði tí lítla, men sterka klyvjadjórinum. Hann hugsaði allarhelst um ta longu ferðina, tey høvdu fyri sær. Egyptaland! Eitt fremmant fólk, eitt fremmant mál, fremmandir siðir — hvussu skuldi hansara lítla familja klára so stórar broytingar?

2 Tað var ikki lætt hjá Jósefi at siga elskaðu konu síni, Mariu, frá teimum ringu tíðindunum, men hann mannaði seg upp og gjørdi tað. Hann segði henni frá dreyminum, har ein eingil hevði givið honum henda boðskapin frá Gudi: Heródes kongur vildi drepa lítla son teirra! Tey noyddust at rýma alt fyri eitt. (***Les Matteus 2:13, 14.***) Maria var sera stúrin. Hvussu kundi nakar vilja drepa hennara lítla óseka barn, sum ikki kundi gera nøkrum nakað ilt? Hvørki Maria ella Jósef skiltu tað. Men tey litu á Jehova og gjørdu seg til reiðar at fara.

3 Á myrkari nátt, meðan øll bygdin svav og einki visti um tað, sum var í umbúna, rýmdu Jósef, Maria og Jesus úr Betlehem. Sum tey gingu suðureftir, og tað tók at lýsa í eystri, hugsaði Jósef ivaleyst um, hvat mundi liggja fyri framman. Hvussu kundi ein fátækur træsmiður verja sína familju fyri so óndum kreftum? Mundi hann altíð fara at vera mentur at uppihalda familjuni? Fór hann at vera førur fyri at halda á og røkja ta stóru uppgávuna, hann hevði fingið frá Jehova, nevniliga at ansa eftir og uppala hetta heilt serliga barnið? Avbjóðingarnar vóru ræðandi. Meðan vit kanna, hvussu hann kláraði tær, fara vit at læra, hví pápar í dag, ja, vit øll, eiga at taka eftir trúnni hjá Jósefi.

Jósef vardi sína familju

4 Eina tíð frammanundan broyttist lívið hjá Jósefi fullkomiliga.

1, 2. (a) Hvørjar broytingar høvdu Jósef og familjan fyri sær? (b) Hvørji ring tíðindi mátti Jósef bera konu síni?

3. Lýs fráferðina hjá Jósefi og familjuni úr Betlehem. (Sí eisini myndina.)

4, 5. (a) Hvussu broyttist lívið hjá Jósefi fullkomiliga? (b) Hvussu eggjaði eingilin Jósefi til at átaka sær eina ómetaliga stóra uppgávu?

Jósef var ósjálvsøkin og gjørdi sítt ítasta fyri at verja son sín

Tað var eftir, at hann varð trúlovaður dóttir Eli heima í Nazaret. Jósef visti, at Maria elskaði Jehova og hansara siðareglur. Men so fann hann út av, at hon var við barn! Hann ætlaði at skiljast frá henni í loyndum, so eingin gøla skuldi verða.* Men so vísti ein eingil seg fyri honum í dreymi og greiddi honum frá, at Maria var við barn av heilaga anda Jehova. Eingilin legði aftrat, at sonurin, hon bar, 'skuldi frelsa fólk sítt frá syndum teirra'. Hann segði eisini við Jósef: „Óttast ikki at taka til tín Mariu, konu tína!" — Matt. 1:18-21.

5 Jósef, sum var ein rættvísur og lýðin maður, gjørdi sum eingilin hevði sagt. Hann tók á seg ta ómetaliga stóru ábyrgdina at uppala og ansa eftir einum soni, ið ikki var hansara egni, men dýrabarasti sonur Guds. Seinni fóru Jósef og kona hansara, sum var við barn, til Betlehem at lata seg skriva í manntal eftir boðum frá keisaranum. Har varð barnið føtt.

6 Jósef og familjan fóru ikki aftur til Nazaret, men vórðu verandi í Betlehem, sum lá einar tíggju kilometrar frá Jerusalem. Tey vóru fátæk, men Jósef gjørdi alt, hann var mentur, fyri at verja og ansa eftir Mariu og Jesusi. Skjótt búsettust tey í einum lítlum húsi. Jesus var ikki longur eitt pinkubarn, men kanska gott og væl ársgamal, tá ið lív teirra knappliga broyttist aftur.

7 Nakrir stjørnuspámenn komu at vitja. Teir komu úr Eysturlondum, helst líka úr Bábylon. Teir høvdu fylgt eini „stjørnu" til húsið hjá Jósefi og Mariu og leitaðu eftir einum barni, sum skuldi verða kongur jødanna. Menninir vístu stóra virðing.

8 Hvørt stjørnuspámenninir vistu tað ella ikki, høvdu teir komið lítla Jesusi í lívsvanda. „Stjørnan", sum teir høvdu sæð, hevði fyrst leitt teir til Jerusalem og ikki til Betlehem.# Har søgdu teir tí ónda konginum, Heródesi, at teir leitaðu eftir einum barni, sum skuldi verða kongur jødanna. Heródes varð frá sær sjálvum av øvundsjúku, tá ið hann frætti hetta.

9 Tíbetur vóru størri kreftir enn Heródes og Satan í umbúna. Hvussu tá? Jú, tá ið menninir komu til húsið og sóu Jesus saman við mammu síni, góvu teir honum gávur og vildu einki hava aftur-

* Tá á døgum varð trúloving mett at vera næstan líka bindandi sum hjúnaband.

Henda „stjørnan" var einki vanligt stjørnufrøðiligt fyribrigdi, og tað var heldur ikki Gud, sum hevði sett hana á himmalin. Tað er eyðsæð, at tað var Satan, sum brúkti hetta yvirnatúrliga fyribrigdið til at fremja sína óndu ætlan um at drepa Jesus.

6-8. (a) Hvørjar hendingar høvdu enn eina broyting við sær fyri Jósef og familjuna? (b) Hvussu vita vit, at tað var Satan, sum setti „stjørnuna" á himmalin? (Sí eisini undirgreinina.)

9-11. (a) Á hvønn hátt vóru størri kreftir enn Heródes og Satan í umbúna? (b) Hvussu var ferðin til Egyptalands øðrvísi, enn hon verður lýst í apokrýfiskum mýtum?

fyri. Tað man hava verið heilt løgið hjá Jósefi og Mariu, at tey nú áttu so stór virði sum „gull, roykilsi og myrra“. Stjørnuspámenninir ætlaðu sær at fara aftur til Heródes kong at siga honum, hvar teir høvdu funnið barnið. Men so legði Jehova upp í leikin. Í einum dreymi gav hann teimum boð um at fara eina aðra leið heimaftur. — ***Les Matteus 2:1-12.***

10 Stutt eftir at stjørnuspámenninir vóru farnir, fekk Jósef hesa ávaring frá eingli Jehova: „Reis teg, tak barnið og móður tess við tær og flýggja til Egyptalands, og verð har, inntil eg sigi tær til! Tí Heródes fer at leita eftir barninum at drepa tað.“ (Matt. 2:13) Og sum vit fingu at vita fyrst í kapitlinum, gjørdi Jósef alt fyri eitt, sum hann varð biðin. Hann setti trygdina hjá barninum fram um alt annað og fór til Egyptalands við familju síni. Dýrabaru gávurnar, sum teir heidnu stjørnuspámenninir høvdu givið teimum, hjálptu Jósefi at rinda útreiðslurnar í sambandi við ferðina og uppihaldið í Egyptalandi.

Jósef hugsaði meira um familjuna hjá sær enn um seg sjálvan

11 Apokrýfiskar mýtur og halgisøgur romantiseraðu seinni ferðina til Egyptalands og róðu fram undir, at lítli Jesus við undrum stytti teimum ferðina, gjørdi brotsmenn óskaðiligar og enntá fekk dadlupálmar at benda seg niður fyri mammuni, so hon kundi henta fruktirnar.* Men í veruleikanum var tað bert ein long og strævin ferð inn í tað ókenda.

12 Foreldur kunnu læra nógv av Jósefi. Hann var fúsur at skúgva bæði arbeiði og vælveru til viks fyri at verja familjuna ímóti vanda. Tað er eyðsæð, at hann metti sína familju sum eina dýrabara gávu frá Jehova. Foreldur í dag uppala síni børn í einum vandamiklum heimi, har nógvar kreftir hótta við at skaða ella púra oyðileggja børn og ung. Mammur og pápar, sum taka eftir Jósefi og gera sítt ítasta fyri at verja síni børn fyri hesi ávirkanini, hava nógv rós uppiborið.

Jósef uppihelt familju síni

13 Tað tykist, sum familjan ikki varð verandi leingi í Egyptalandi, tí áðrenn long tíð var liðin, segði eingilin Jósefi, at Heródes

* Bíblian vísir týðiliga, at Jesus ikki gjørdi „fyrsta tekin Sítt“ fyrr enn eftir dóp sín. — Jóh. 2:1-11.

12. Hvat kunnu foreldur, sum uppala børn í hesum vandamikla heimi, læra av Jósefi?

13, 14. Hví fóru Jósef og Maria aftur til Nazaret at ala upp børn síni?

Jósef lærdi son sín upp sum træsmið

var deyður. Jósef fór við familjuni heimaftur til land sítt. Ein gomul profeti hevði boðað frá, at Jehova skuldi kalla son sín „úr Egyptalandi“. (Matt. 2:15) Jósef hevði ein leiklut í uppfyllingini av hesi profetiini. Men hvar skuldi hann nú fara við familjuni?

14 Jósef var varin. Hann bar av røttum ótta fyri eftirmanni Heródesar, Arkelaus, sum eisini var óndur og drápshugaður. Við Guds leiðslu fór Jósef við familju síni norðureftir, burtur frá Jerusalem og øllum svikaráðunum har, aftur til heimbygdina Nazaret í Galilea. Har búsettust hann og Maria og aldu upp børn síni. — ***Les Matteus 2:19-23.***

15 Lívið hjá teimum var einfalt, men ikki lætt. Bíblian sigur, at Jósef var træsmiður, og nýtir eitt orð, sum fevnir um nógvar mátar at arbeiða við viði, eitt nú at fella trø og fáa tey heim til hús, leggja tey at turka og gera viðin til reiðar at byggja hús, bátar, brýr, vagnar, hjól, ok og ymisk landbúnaðaramboð. (Matt. 13:55) Tað var strævið arbeiði. Ein træsmiður á Bíbliunnar døgum arbeiddi ofta í túninum beint við dyrnar ella í eini smiðju nærindis húsinum.

16 Jósef nýtti nógv ymisk amboð, nøkur hevði hann helst fingið eftir pápa sín. Hann hevur møguliga nýtt vinkul, lodd, kritsnór, sag, øks, skarøks, hamara, træhamara, meitil og ymisk sløg av límí. Hann hevur kanska eisini brúkt ein bor, sum varð snaraður við snórinum á einum boga, ið varð hálaður aftur og fram. Møguliga nýtti hann eisini seym av og á, men teir vóru dýrir.

17 Ímynda tær, hvussu smádrongurin Jesus stóð og eygleiddi fosturpápa sín, meðan hann arbeiddi. Við víðopnum eygum fylgdi hann hvørji einastu rørslu hjá Jósefi og var uttan iva hugtikin av teimum sterku, breiðu herðunum, teimum vøddamiklu ørmunum, teimum dugnaligu hondunum og teimum klóku eygunum. Kanska lærdi Jósef lítla sonin einfaldar uppgávur, sum til dømis at pussa

15, 16. Hvussu var arbeiðið hjá Jósefi, og hvørji amboð hevur hann møguliga nýtt?

17, 18. (a) Hvat lærdi Jósef Jesus? (b) Hví noyddist Jósef at stríðast meira og meira í yrki sínum?

tann rísna viðin við turrari fiskaskræðu. Hann lærdi helst eisini Jesus at síggja mun á teimum ymisku sløgunum av viði, sum hann arbeiddi við — til dømis á morberjafikutræi, eikitræi og oljuberjatræi.

18 Jesus lærdi eisini, at tær sterku hendurnar, ið kundu fella trø, høgga út bjálkar og buka skoyti saman, eisini kundu vera eymar hendur, sum kíndu og uggaðu hann, mammu hansara og systkin hansara. Ja, familjan hjá Jósefi og Mariu vaks, og at enda hevði Jesus í minsta lagi seks systkin. (Matt. 13:55, 56) Jósef mátti stríðast meira og meira fyri taka sær av teimum og breyðføða tey.

19 Men Jósef visti, at tað, sum hevði størstan týdning, var at taka sær av andaliga tørvinum hjá familjuni. Tí gav hann sær stundir til at læra síni børn um Jehova Gud og hansara lógir. Hann og Maria høvdu regluliga børnini við sær í sýnagoguna, har Lógin varð lisin upp og útløgd. Aftaná hevði Jesus kanska nógvar spurningar, og Jósef gjørdi sær ómak at svara teimum. Jósef hevði eisini familjuna við sær á tær stóru høgtíðirnar í Jerusalem. Hann hevði kanska fyri neyðini at seta tvær vikur av til ta árligu páskahøgtíðina, tí ferðin var meira enn 120 kilometrar long hvønn vegin.

Jósef visti, at tað, sum hevði størstan týdning, var at taka sær av andaliga tørvinum hjá familjuni

20 Kristin familjuhøvd í dag gera nakað líknandi. Teir eru ósjálvsøknir og lata andaligu upplæringina hjá børnunum koma fram um alt annað, eisini materiellar ágóðar. Teir gera sær stóran ómak at læra børnini um Jehova heima við hús og at hava tey við á møti og stevnur. Eins og Jósef vita teir, at hetta er besta íløgan, teir kunnu leggja í síni børn.

„Sorgarfull“

21 Tá ið Jesus var 12 ára gamal, fór Jósef við familjuni til Jerusalem, sum hann var vanur. Nú vóru páskir, ein veitslukend tíð, og stórar familjur ferðaðust saman eftir fruktbara og várgrøna landslagnum. Sum tey nærkaðust tí heldur bera lendinum rundan um Jerusalem, ið lá høgt, fóru nógv at syngja teir kendu hátíðarferðasálmarnar. (Sl. 120–134) Býurin uddi helst í hundraðtúsundtals

19. Hvussu tók Jósef sær av andaliga tørvinum hjá familjuni?

20. Hvussu kunnu kristin familjuhøvd gera eins og Jósef?

21. Hvussu var tíðin um páskirnar hjá Jósefi og familjuni, og nær varnaðust Jósef og Maria, at Jesus var burtur?

Jósef fór regluliga saman við familju síni til Jerusalem at tilbiðja í templinum

menniskjum. Eftir høgtíðina fóru familjurnar heimaftur. Jósef og Maria, sum helst høvdu úr at gera, hugsaðu kanska, at Jesus fylgdist við onkrum øðrum, møguliga skyldfólki. Ikki fyrr enn tey vóru komin eina heila dagsferð úr Jerusalem, varnaðust tey nakað ræðuligt — Jesus var burtur! — Luk. 2:41-44.

22 Frá sær sjálvum av ótta gingu tey allan vegin aftur til Jerusalem. Ímynda tær, hvussu tómur og fremmandur býurin mundi tykjast teimum nú, meðan tey gingu oman og niðan eftir gøtunum og róptu navnið á soni sínum. Hvar kundi drongurin vera? Mundi Jósef, tá ið tey høvdu leitað í tríggjar dagar, hugsa, at hann hevði

22, 23. Hvat gjørdu Jósef og Maria, tá ið tey varnaðust, at sonur teirra var burtur, og hvat segði Maria, tá ið tey endiliga funnu hann?

svikið í sambandi við heilagu uppgávuna, sum Jehova hevði givið honum? At enda fóru tey í templið. Har leitaðu tey, inntil tey komu fram á eitt stórt rúm, har nógvir lógkønir menn vóru — og mitt ímillum teirra sat Jesus! Hugsa tær, hvussu stóran lætta Jósef og Maria kendu. — Luk. 2:45, 46.

23 Jesus lurtaði eftir lógkønu monnunum og tráspurdi teir við stórum áhuga. Menninir vóru ovfarnir av, at drongurin visti so væl og dugdi so væl at svara. Men Maria og Jósef vóru skelkað. Sambært bíbilsku frásøguni segði Jósef einki. Men Maria segði tað, sum tey bæði hugsaðu: „Barn, hví gjørdi Tú okkum hetta! Faðir Tín og eg hava sorgarfull leitað eftir Tær.“ — Luk. 2:47, 48.

Nær doyði Jósef?

Vit vita, at Jósef var á lívi, tá ið Jesus var 12 ára gamal. Um henda aldur fóru nógvir ungir jødar í holt við at læra yrkið hjá pápa sínum, og 15 ára gamlir komu teir í læru. Líkt er til, at Jósef livdi so mikið leingi, at hann lærdi Jesus upp sum træsmið. Men livdi Jósef enn, tá ið Jesus fór undir sína tænastu um 30 ára aldurin? Tað er ikki sannlíkt. Móðir, brøður og systrar Jesusar verða øll umrødd sum verandi á lívi um tað mundið, men ikki Jósef. Einaferð varð Jesus enntá róptur „sonur Mariu“, ikki sonur Jósefs. (Mark. 6:3) Skrivað verður um Mariu, at hon av sínum eintingum gjørdi ymiskt og tók avgerðir, uttan at tosa við mann sín. (Jóh. 2:1-5) Tað hevði verið óvanligt á Bíbliunnar døgum, uttan so at hon var einkja. Og beint áðrenn Jesus doyði, bað hann Jóhannes ápostul taka sær av Mariu, móður síni. (Jóh. 19:26, 27) Hetta hevði ikki verið neyðugt, um Jósef enn var á lívi. Eftir øllum at døma doyði Jósef tí, meðan Jesus var lutfalsliga ungur. Av tí at Jesus var tann elsti sonurin, helt hann uttan iva fram í træsmiðjuni eftir pápa sín og tók sær av familjuni, inntil hann varð doyptur.

24 Við nøkrum fáum, vælvaldum penslastrokum málar Guds orð soleiðis eina beinrakna mynd av lívinum sum foreldur. Tað kann hava nógvar stúranir við sær, eisini sjálvt um barnið er fullkomið! At vera foreldur í hesum vandamikla heimi kann vera sera ’sorgarfult’, men tað kann ugga mammur og pápar at vita, at Bíblian viðurkennir, at tað er ein avbjóðing at hava børn.

25 Av øllum støðum í heiminum hevði Jesus verið har, sum hann kendi seg allarnærmast himmalska Faðir sínum, Jehova, og hann royndi at fáa so nógv at vita um hann, sum hann kundi. Hann svaraði foreldrum sínum opið og ærliga: „Hví leitaðu tit eftir Mær? Vitstu tit ikki, at Eg eigi at vera í verki Faðirs Míns?“ — Luk. 2:49.

26 Jósef hugsaði ivaleyst ofta um hetta. Kanska var hann sera errin av, at Jesus hevði sagt so. Hann hevði jú gjørt sær stóran ómak at læra fostursonin at hava hetta tætta sambandið við Jehova Gud. Um hetta mundið var Jesus longu vorðin góður við orðið „Faðir“ — uttan iva tí hann í Jósefi hevði ein góðan pápa.

27 Um tú ert pápi, veitst tú so, hvussu stórur framíhjárættur tað er, at tú kanst læra børnini hjá tær, hvat ein góður og umhyggin pápi er? Eisini um tú hevur stjúkbørn ella ættleidd børn, mást tú minnast til Jósef og vera líka góður við øll børnini, dýrabar sum tey eru. Hjálp teimum at fáa tætt samband við sín himmalska Faðir, Jehova Gud. — ***Les Efesusbrævið 6:4.***

Jósef helt trúfastur á

28 Bíblian sigur okkum ógvuliga lítið um restina av lívinum hjá

24. Hvussu málar Bíblian eina beinrakna mynd av at vera foreldur?

25, 26. Hvussu svaraði Jesus foreldrum sínum, og hvussu ávirkaði tað, sum hann segði, Jósef?

27. Hvønn framíhjárætt hevur tú sum pápi, og hví skalt tú minnast til Jósef?

28, 29. (a) Hvat vísa orðini í Lukas 2:51, 52 um Jósef? (b) Hvussu hjálpti Jósef soni sínum at taka til í vísdómi?

Jósefi, men tað er vert at kanna tað væl, sum hon sigur. Vit lesa, at Jesus fór við Jósefi og Mariu heimaftur og „var teimum lýðin“. Vit lesa eisini, at „Jesus tók til í vísdómi og aldri og yndi hjá Gudi og menniskjum“. (***Les Lukas 2:51, 52.***) Hvat siga hesi orðini okkum um Jósef? Jú, vit læra millum annað, at hann framhaldandi gekk á odda í familjuni, tí fullkomni sonur hansara hevði virðing fyri hansara myndugleika og helt fram at lýða hann.

29 Vit læra eisini, at Jesus tók til í vísdómi. Jósef hjálpti honum eyðsæð at gera framstig í hesum sambandi. Tá á døgum var eitt gamalt orðtak kent millum jødarnar. Tað ber enn til at finna og lesa tað í dag. Tað snúði seg um, at bert menn, sum ikki høvdu fyri neyðini at arbeiða, kundu gerast veruliga vísir. Handverkarar sum træsmiðir, jarnsmiðir og bøndur „kunnu ikki tosa við um rættvísi og dóm, og teir eru ikki at finna, har talað verður í líknilsum“. Seinni avdúkaði Jesus, hvussu skeivt hetta orðtakið var. Tá ið Jesus var drongur, hevði hann ofta hoyrt fosturpápa sín greiða væl og virðiliga frá um „rættvísi og dóm“ Jehova, hóast hann bert var ein fátækur træsmiður.

30 Jósef hevði helst eisini ávirkan á kropsligu menningina hjá Jesusi. Foreldrini tóku sær væl av Jesusi, so hann gjørdist ein sunnur og sterkur maður. Jósef lærdi son sín at gera handaligt arbeiði til lítar. Tí var Jesus ikki bert kendur sum sonur træsmiðin, men eisini sum „træsmiðurin“. (Mark. 6:3) So upplæringin hjá Jósefi var væleydnað. Tað er gott, um familjuhøvd taka eftir Jósefi, syrgja væl fyri børnum sínum og tryggja sær, at tey verða før fyri at uppihalda sær sjálvum.

31 Tá ið vit í bíbilsku frásøguni koma fram til tíðina, tá ið Jesus um 30 ára aldur verður doyptur, hoyra vit ikki meira um Jósef. Alt bendir á, at Maria var einkja, tá ið Jesus fór undir sína tænastu. (Sí rammuna „Nær doyði Jósef?“) Men Jósef læt eitt týðiligt spor eftir seg. Hann gjørdist eitt frálíkt dømi um ein pápa, sum vardi sína familju, uppihelt henni og trúfastur helt á líka til endan. Tað hevði verið gott, um allir pápar, øll familjuhøvd, ja, øll kristin tóku eftir trúnni hjá Jósefi.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vardi Jósef sína familju?
- Hvussu uppihelt Jósef síni familju?
- Hvat vísir, at Jósef helt á í uppgávuni, sum Jehova hevði givið honum?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir Jósefi?

30. Hvussu gjørdist Jósef ein góð fyrimynd hjá familjuhøvdum í dag?

31. (a) Hvat fáa vit at vita í frásøguni, sum gevur eina ábending um, nær Jósef doyði? (Sí eisini rammuna.) (b) Á hvønn hátt er Jósef ein fyrimynd hjá okkum?

KAPITTUL TJÚGU

„Eg trúgvi“

MARTA hugsaði um grøvina hjá beiggja sínum, eitt helli við einum steini fyri munnan. Sorgin, hon bar, var eins tung og køld sum hesin steinurin. Hon hevði ilt við at skilja, at hennara elskaði beiggi, Lazarus, var farin. Teir fýra dagarnir, hann hevði verið deyður, tóktust sum eitt langt tám av sorg og av vitjandi, sum komu at vísa sína samkenslu.

2 Og nú stóð besti vinurin hjá Lazarusi framman fyri hana. At síggja Jesus gjørdi helst ilt verri, tí hann var tann einasti í øllum heiminum, ið hevði kunnað forðað fyri, at beiggi hennara doyði. Kortini kendi Marta ein ávísan ugga av at vera saman við Jesusi, her uttan fyri lítlu fjallabygdina Betania, hóast tað bert var eina lítla løtu. Tí nú kendi hon aftur, hvussu tað fløvaði at síggja hansara vinaliga andlit og at kenna hansara djúpu samkenslu, sum altíð var so lívgandi. Hann setti henni spurningar, ið fingu hana at hugsa um sína trúgv og um uppreisnina. Samrøðan fekk Martu at siga nøkur av teimum mest týðandi orðunum, ið nakrantíð skuldu fara um hennara varrar: „Eg trúgvi, at Tú ert Kristus, Sonur Guds, Hann, sum skal koma í heimin!“ — Jóh. 11:27.

3 Sum hesi orðini vísa, hevði Marta eina merkisverda trúgv. Tað sindrið, Bíblian sigur okkum um hana, kann veruliga styrkja okkara trúgv. Latið okkum tí fara at kanna fyrstu frásøguna um Martu í Bíbliuni.

Hon gjørdi sær „stríð og órógv“

4 Nakrar mánaðar frammanundan, tá ið Lazarus enn var á lívi og hevði tað gott, skuldi ein sera týðandi gestur koma at vitja

1. Lýs, hvussu Marta hevði tað og hví.

2, 3. (a) Hvussu ávirkaði tað helst Martu at síggja Jesus? (b) Hvat vístu týðandi orðini hjá Martu um hana?

4. Á hvønn hátt var familjan hjá Martu heldur óvanlig, og hvussu var teirra samband við Jesus?

hann í Betania, nevniliga Jesus Kristus. Lazarus, Marta og Maria vóru ein heldur óvanlig familja — trý vaksin systkin, sum eyðsýniliga búðu saman. Nakrir granskarar rógva framundir, at Marta møguliga var elst av teimum trimum, av tí at hon tóktist at vera matmóðirin og stundum verður nevnd fyrst. (Jóh. 11:5) Tað ber ikki til at siga, um nakar av teimum nakrantíð giftist. Men í øllum førum gjørdust tey góðir vinir hjá Jesusi. Meðan Jesus boðaði í Judea, har hann fekk nógva mótstøðu og varð illa viðfarin, valdi hann at gista hjá teimum. Eingin ivi er um, at honum dámdi sera væl at koma í hetta friðsæla heimið.

5 Marta var sera gestablíð, og tað var serliga hon, sum hugnaði um heimið. Arbeiðssom og íðin sum hon var, tóktist hon ofta at hava úr at gera. Og tað var eisini galdandi nú, táið Jesus kom at vitja. Hon fór undir at fyrireika eina serliga máltíð við fleiri ymiskum rættum til tann týðandi gestin og teir, hann møguliga hevði við sær. Tá í tíðini hevði blíðskapur sera stóran týdning. Táið ein gestur kom at vitja, varð hann bjóðaður vælkomin við einum kossi, latin úr sandalunum, vaskaður um føturnar og høvd hansara gníggjað við frískligari og angandi olju. (***Les Lukas 7:44-47.***) Tað var siður at syrgja fyri, at ein gestur hevði góðar umstøður at hvíla seg og fekk okkurt gott at eta.

6 Marta og Maria høvdu úr at gera. Maria, sum av og á verður mett at vera tann meira kensluborna og hugsanarsama av teimum báðum, hjálpti uttan iva systur síni at byrja við. Men táið Jesus var komin, legði hon frá sær. Jesus metti vitjanina sum eitt høvi at undirvísa — og tað gjørdi hann! Í mun til trúarleiðararnar tá, hevði Jesus virðing fyri kvinnum og vildi fegin læra tær um Guds ríki, sum var høvuðsevnið í hansara boðan. Ovurfegin um henda møguleikan sat Maria við føtur hansara og tók hvørt orð til sín.

7 Vit kunnu helst ímynda okkum, at Marta so líðandi østi seg sjálva upp. Hon gjørdist meira og meira órólig og ørkymlað um allan matin, hon skuldi borðreiða við, og um alt tað, hon annars skuldi gera fyri gestirnar. Mundi hon rodna, suffa hart og seta knyklar í brýr, sum hon rann aftur og fram, meðan systir hennara bara sat har uttan at hjálpa til? Tað hevði ikki verið løgið, um so var. Hon fekk jú ikki gjørt alt einsamøll!

5, 6. (a) Hví hevði Marta serliga nógv at gera, nú meðan Jesus vitjaði tey?
(b) Hvat gjørdi Maria, meðan Jesus var inni hjá teimum?

7, 8. Hví østi Marta seg upp, og hvussu kom tað at enda til sjóndar?

8 At enda fekk Marta ikki tagt. Hon breyt Jesus av, og tað brast út úr henni: „Harri, hugsar Tú ikki um tað, at systir letur meg vera einsamalla um at tæna Tær? Sig tó við hana, at hon skal hjálpa mær!“ (Luk. 10:40) Hetta vóru sterk orð. Fleiri bíbliutýðingar endurgeva henda spurningin hjá henni nakað soleiðis: „Harri, leggur tú einki í . . .?“ Síðani bað hon Jesus hava at Mariu og biðja hana koma og hjálpa til.

9 Møguliga kom svarið hjá Jesusi óvart á Martu, eins og tað seinni er komið óvart á nógvar bíbliulesarar. Vinaliga segði hann: „Marta, Marta! Tú gert tær stríð og órógv av mongum; men eitt er fyri neyðini. Maria hevur valt hin góða lut, og hann skal ikki verða frá henni tikin.“ (Luk. 10:41, 42) Hvat meinti Jesus við? Segði hann, at Marta hugsaði meira um tað materiella enn um Gud? Lítilsvirdi hann stríðið, hon hevði við at gera allan matin?

10 Nei. Eingin ivi er um, at Jesus visti, at Marta gjørdi alt hetta av kærleika og reinum hjarta. Hann helt ikki endiliga, at tað var skeivt at vísa blíðskap, heldur ikki óvanliga stóran blíðskap. Hann hevði sjálvur verið við í eini 'stórari veitslu' hjá Matteusi eina tíð frammanundan. (Luk. 5:29) Málið snúði seg ikki um máltíðina, sum Marta gjørdi, men um hvat hon raðfesti fremst. Hon var so upptikin av hesi marglætismáltíðini, at hon gloymdi tað, sum hevði mest at týða. Hvat var tað?

Jesus virðismetti blíðskapin hjá Martu og visti, at hon vísti hann av kærleika og reinum hjarta

11 Jesus, sum var einborni sonur Jehova Guds, var í heiminum hjá Martu fyri at undirvísa. Einki hevði størri týdning, heldur ikki hennara frálíka máltíð og allar fyrireikingarnar. Tað harmaði helst Jesus, at Marta læt henda einastandandi møguleikan at styrkja sína trúgv gleppa sær av hondum, men hann læt hana velja sjálva.* Tað var kortini nakað heilt annað, at Marta bað Jesus noyða Mariu at hjálpa sær, so eisini hon misti henda møguleikan.

* Í jødiska samfelagnum í fyrstu øld sluppu kvinnur vanliga ikki at vera hjástaddar, tá ið lærdir menn talaðu. Tann upplæringin, sum tær fingu, hevði aloftast við tað húsliga at gera. Tí man Marta hava hildið tað vera sera óvanligt, at ein kvinna sat og lurtaði við føturnar á einum lærdum manni.

9, 10. (a) Hvussu svaraði Jesus Martu? (b) Hvussu vita vit, at Jesus ikki lítilsvirdi alt stríðið hjá Martu?

11, 12. Hvussu hevði Jesus vinaliga at Martu?

12 Tí hevði Jesus vinaliga at Martu, sissaði hana við blídliga at endurtaka navnið á henni og vissaði hana um, at tað ikki var neyðugt, at hon gjørdi sær „stríð og órógv av mongum“. Ein einfaldur rættur ella tveir høvdu verið nóg mikið, serliga tá ið ein andalig veitslumáltíð eisini var at fáa. 'Hin góði luturin' skuldi als ikki takast frá Mariu — nevniliga at fáa undirvísing frá Jesusi.

13 Vit kunnu læra nógv av tí, sum hendi í heiminum hjá Martu. Vit mugu ongantíð lata nakað forða okkum í at nøkta okkara andaliga tørv. (Matt. 5:3) Vit vilja fegin taka eftir Martu í sambandi við hennara gestablídni og arbeiðssemi. Tó mugu vit ongantíð gera okkum so nógv „stríð og órógv“ av tí minni

13. Hvat kunnu vit læra av tí, sum Jesus segði við Martu?

Hóast Marta gjørdi sær „stríð og órógv av mongum“, var hon eyðmjúk og tók við rættleiðing

týðandi síðuni av blíðskapi, at vit lata tað, sum hevur mest at siga, gleppa okkum av hondum. Vit koma ikki fyrst og fremst saman við trúarfelagum fyri at borðreiða við ella fáa eina góða máltíð, men tí vit vilja lívga hvør annan og geva hvør øðrum andaligar gávur. (***Les Rómbrævið 1:11, 12.***) Sjálvt tá ið vit bjóða eina einfalda máltíð, kann samveran vera sera lívgandi.

Ein elskaður beiggi doyr — og rísur upp

14 Tók Marta við vinaligu ábreiðsluni frá Jesusi, og lærdi hon av henni? Okkum nýtist ikki at gita. Jóhannes ápostul fer undir áhugaverdu frásøguna um beiggja Martu við at siga: „Jesus elskaði Martu og systur hennara og Lazarus.“ (Jóh. 11:5) Fleiri mánaðir vóru lidnir, síðan Jesus hevði vitjað í Betania, sum áður umrøtt. Tað er eyðsæð, at Marta ikki hevði tikið vælmeintu leiðbeiningina frá Jesusi illa upp ella bar agg. Hon hevði tikið hana til sín. Eisini í hesum førinum gjørdist hon ein sera góð fyrimynd, tí hvør av okkum hevur ikki tørv á at fáa rættleiðing viðhvørt?

15 Tá ið beiggi Martu gjørdist sjúkur, er eingin ivi um, at hon var røsk at taka sær av honum. Hon gjørdi alt, hon var ment, fyri at linna hansara pínu og hjálpa honum at koma fyri seg aftur. Og kortini versnaði Lazarus. Systrar hansara vóru um hann í heilum og tóku sær av honum. Hvussu ofta man Marta ikki hava hugt at pínda andlitinum á beiggja sínum og minst aftur á tey nógvu árini, tey høvdu havt saman, bæði í gleði og sorg?

16 Tá ið Marta og Maria hildu, at tær ikki fingu gjørt meira fyri Lazarus, sendu tær boð til Jesus. Hann tókst við at boða einar tvær dagsferðir haðani. Boðini frá teimum vóru stutt: „Harri! Hann, ið Tú elskar, er sjúkur.“ (Jóh. 11:1, 3) Tær vistu, at Jesus elskaði Lazarus, og tær vóru vísar í, at hann fór at gera sítt ítasta fyri at hjálpa vini sínum. Høvdu tær vónað, at Jesus fór at koma, áðrenn tað var ov seint, so brustu vónirnar hjá teimum — tí Lazarus doyði.

17 Saman syrgdu Marta og Maria beiggja sín, skipaðu fyri jarðarferðini og tóku ímóti nógvum gestum úr Betania og har um vegir. Men enn høvdu tær einki frætt frá Jesusi. Tað undraði

---

14. Hví kunnu vit vera vís í, at Marta var ein góð fyrimynd í at taka við rættleiðing?

15, 16. (a) Hvat gjørdi Marta helst, tá ið beiggi hennara gjørdist sjúkur? (b) Hví brustu vónirnar hjá Martu og Mariu?

17. Hvat undraði Martu, og hvat gjørdi hon, tá ið hon frætti, at Jesus nærkaðist bygdini?

Marta fekk løn fyri sína trúgv á Jesus, tá ið hon og Maria sóu beiggja sín vakna aftur til lívs

helst Martu meira og meira, sum tíðin gekk. Tá ið Lazarus hevði verið deyður í fýra dagar, frætti hon endiliga, at Jesus nærkaðist bygdini. Heldur ikki í hesi døpru stund var friður á Martu. Uttan at siga Mariu frá leyp hon á føtur og rann út at hitta Jesus. — ***Les Jóhannes 11:18-20.***

18 Tá ið Marta bar eyga við Meistaran, setti hon orð á tankan, sum hevði plágað hana og Mariu í fleiri dagar: „Harri! Hevði Tú verið her, so hevði bróðir ikki doyð!“ Men Marta hevði ikki mist trúnna og vónina. Hon legði aftrat: „Men eisini nú veit eg, at hvat Tú so biður Gud um, gevur Gud Tær.“ Alt fyri eitt styrkti Jesus trúgv hennara og segði: „Bróðir tín skal rísa upp aftur!“ — Jóh. 11:21-23.

19 Marta helt, at Jesus tosaði um uppreisnina, sum skuldi vera í framtíðini, og tí svaraði hon: „Eg veit, at hann skal rísa

18, 19. Hvørja vón hevði Marta, og hví var hennara trúgv merkisverd?

upp í uppreisnini síðsta dag.“ (Jóh. 11:24) Hennara trúgv á hesa læruna var merkisverd. Nakrir jødiskir trúarleiðarar, teir sonevndu saddukeararnir, noktaðu at trúgva á eina uppreisn, hóast tað var ein greið læra í innblástu Skriftunum. (Dán. 12:13; Mark. 12:18) Men Marta visti, at Jesus lærdi fólk um uppreisnarvónina og enntá sjálvur hevði reist fólk upp — tó ongan, ið hevði verið deyður líka leingi sum Lazarus. Lítið visti hon um, hvat nú fór at henda.

20 Síðani segði Jesus tey ógloymandi orðini: „Eg eri uppreisnin og lívið.“ Ja, Jehova Gud hevur givið soni sínum myndugleika til í framtíðini at reisa upp deyð um allan heimin. Jesus spurdi Martu: „Trýrt tú hesum?“ Hon svaraði honum tað, sum varð umrøtt fyrst í hesum kapitlinum. Hon trúði, at Jesus var Kristus, ella Messias, at hann var sonur Jehova Guds, og at hann var tann, sum profetarnir høvdu boðað frá skuldi koma í heimin. — Jóh. 5:28, 29; ***les Jóhannes 11:25-27.***

21 Virðismeta Jehova Gud og sonur hansara, Jesus Kristus, slíka trúgv, sum Marta hevði? Tað, sum nú hendi fyri eygunum á Martu, gevur okkum eitt greitt svar. Hon skundaði sær eftir systur síni. Síðani sá hon, at Jesus var ógvuliga rørdur, meðan hann tosaði við Mariu og øll tey, sum syrgdu saman við henni. Hon sá tárini vella fram í eygunum á honum, tá ið hann opið vísti sína djúpu sorg um pínuna, sum deyðin hevur við sær. Hon hoyrdi Jesus geva boð um, at steinurin skuldi takast burtur frá hellinum, har beiggi hennara lá. — Jóh. 11:28-39.

22 Skilagóð sum hon var, gjørdi Marta vart við, at líkið longu mundi dampa, nú fýra dagar vóru lidnir. Men Jesus segði við hana: „Segði Eg tær ikki, at um tú trýrt, skalt tú síggja dýrd Guds!“ Hon trúði, og hon sá dýrd Jehova Guds. Í somu løtu gav Jehova soni sínum vald at vekja Lazarus aftur til lívs! Tað, sum nú hendi, man hava brent seg fast í minnið hjá Martu: Harða róp Jesusar: „Lazarus, kom út!“; veika ljóðið úr hellinum, sum hoyrdist, tá ið Lazarus reisti seg á føtur og kom stetlandi út til hellismunnan, enn við líkverjuni um føtur og hendur; boðini hjá Jesusi: „Loysið hann og latið hann fara!“; og at enda, at hon og Maria findarglaðar lupu um hálsin á beiggja sínum. (***Les Jóhannes 11:40-44.***) Sorgin var horvin úr hjartanum á Martu!

---

20. Greið frá týdninginum av ógloymandi orðunum hjá Jesusi, sum standa at lesa í Jóhannes 11:25-27, og svarinum hjá Martu.

21, 22. (a) Hvussu vísti Jesus sínar kenslur fyri teimum, sum syrgja? (b) Lýs uppreisn Lazarusar.

23 Frásøgan vísir, at uppreisnin av teimum deyðu ikki bert er ynskishugsan, men ein hjartanemandi bíbilsk læra, sum eisini er ein søguligur veruleiki. (Job 14:14, 15) Jehova og sonur hansara frøast um at løna teimum, ið hava sterka trúgv, eins og teir gjørdu í førinum við Martu, Mariu og Lazarusi. Teir fara eisini at løna tær, um tú mennir eina sterka trúgv.

„Marta kokkaðist“

24 Marta verður bert nevnd eina ferð aftrat í bíbilsku frásøguni, og tað var í byrjanini av seinastu vikuni, Jesus var her á jørðini. Jesus visti, at hann skuldi líða seinni í vikuni, og tí valdi hann aftur at gista hjá vinum sínum í Betania. Haðani kundi hann ganga teir tríggjar kilometrarnar til Jerusalem. Jesus og Lazarus ótu hjá spitalska Símuni, og har fáa vit hesa seinastu lýsingina av Martu: „Marta kokkaðist.“ — Jóh. 12:2.

25 Soleiðis kenna vit hesa røsku kvinnuna! Fyrstu ferð vit hoyra um hana í Bíbliuni, stríðist hon. Og seinastu ferð vit hoyra um hana, stríðist hon enn og ger sítt ítasta fyri at hjálpa øðrum. Kristnar samkomur í dag eru eisini signaðar við kvinnum sum Martu, ið eru raskar og gestablíðar, og sum altíð vísa trúnna í verki og geva av sær sjálvum. Marta mundi helst halda fram at gera so. Um so var, var hon skilagóð, tí fleiri royndir lógu fyri framman.

26 Fáar dagar seinni leið Jesus, elskaði Meistarin hjá Martu, ein ræðuliga deyða. Haraftrat ætlaðu teir drápshugaðu hyklararnir, sum drópu hann, eisini at drepa Lazarus, av tí at nógv vóru komin til trúgv vegna hansara uppreisn. (***Les Jóhannes 12:9-11.***) Og við tíðini sleit deyðin sjálvsagt tað kærleiksbandið, sum knýtti Martu og systkin hennara saman. Vit vita ikki, hvussu ella nær tað hendi, men vit kunnu vera rættiliga vís í, at dýrabara trúgvin hjá Martu hjálpti henni at halda út líka til endan. Tí eiga kristin í dag at taka eftir trúnni hjá Martu.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvat kann leiðbeiningin, Jesus gav Martu, læra okkum?
- Á hvønn hátt var Marta gávumild og arbeiðssom?
- Hvussu vísti Marta, at hon hevði eina merkisverda trúgv?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Martu?

---

23. Hvat vilja Jehova og Jesus fegnir gera fyri teg, og hvat skalt tú gera?

24. Hvørja seinastu lýsing av Martu fáa vit í bíbilsku frásøguni?

25. Hví eru samkomur, ið hava kvinnur sum Martu sína millum, signaðar?

26. Hvat hjálpti trúgvin hjá Martu henni at gera?

Hann stríddist ímóti ótta og iva

PÆTUR róði, alt hann var mentur, meðan hann skimaðist út í náttina. Var tað eitt veikt ljós, hann hómaði í eystri? Var tað umsíðir dagurin, ið gjørdi vart við seg? Hann hevði pínu í ryggi og herðum, tí hann hevði róð í nógvar tímar. Vindurin, sum skrykti í hárið á honum, hevði øst upp Galileavatn. Aldurnar brutu inn yvir stavnin á útróðrarbátinum, so Pætur gjørdist dýggjvátur. Men hann helt fram at rógva.

2 Pætur og felagar hansara høvdu latið Jesus verða einsamallan eftir inni á landi. Tann dagin høvdu teir sæð Jesus metta eina svanga mannamúgvu — fleiri túsund menniskju — bert við nøkrum fáum breyðum og fiskum. Fólkini vildu gera Jesus til kong afturfyri, men hann vildi einki hava við politikk at gera. Hann vildi heldur ikki hava lærisveinarnar at blanda seg upp í politikk. Fyri at sleppa undan mannamúgvuni bað Jesus lærisveinarnar fara í bátin og rógva yvir um vatnið, meðan hann sjálvur fór niðan á fjallið at biðja. — Mark. 6:35-45; ***les Jóhannes 6:14-17.***

Í tvey ár hevði Jesus lært Pætur eina rúgvu, men hann hevði enn nógv at læra

3 Mánin, sum næstan var fullur, stóð høgt á himli, tá ið lærisveinarnir fóru avstað. Nú hvarv hann so líðandi úr eygsjón har vesturi. Og kortini høvdu teir bert róð nakrar fáar fjórðingar. Tann tungi róðurin saman við ganginum av vindinum og aldunum forðaði fyri stórvegis práti millum menninar. Pætur sat helst og hugsaði fyri seg sjálvan.

4 Har var eisini nógv at hugsa um! Pætur hevði fylgst við Jesusi úr Nazaret í meira enn tvey hendingarík ár. Hann hevði

1-3. Hvat hevði Pætur upplivað ein hendingaríkan dag, og hvat hendi um náttina?

4. Hví er Pætur ein frálík fyrimynd hjá okkum at taka eftir?

lært nógv, men hevði enn nógv at læra. Hann var lærufúsur og stríddist ímóti forðingum sum iva og ótta, og tí er hann ein frálík fyrimynd hjá okkum at taka eftir. Latið okkum vita hví.

„Vit hava funnið Messias“!

5 Pætur fór ongantíð at gloyma dagin, tá ið hann hitti Jesus úr Nazaret. Beiggi hansara, Andrias, var tann fyrsti, sum bar honum hesi einastandandi tíðindini: „Vit hava funnið Messias.“ Tey orðini broyttu lívið hjá Pæturi. Tað fór ongantíð at verða sum fyrr. — Jóh. 1:42.

6 Pætur búði í Kapernaum, einum býi norðarumegin eitt vatn, sum varð rópt Galileavatn. Hann og Andrias høvdu eitt útróðravirki saman við Jákupi og Jóhannesi, synum Zebedeusar. Heima hjá Pæturi búðu bæði kona hansara, vermamma hansara og beiggi hansara, Andrias. At uppihalda einum slíkum húski við fiskiskapi kravdi uttan iva stríð, orku og dugnaskap. Vit kunnu ímynda okkum tær óteljandi næturnar, har menninir róðu út at seta gørnini út millum tveir bátar og síðani draga veiðuna um borð. Vit síggja eisini fyri okkum strævnar arbeiðsdagar, har fiskurin varð hagreiddur og seldur, og gørnini vórðu bøtt og skolað.

7 Bíblian sigur, at Andrias var lærisveinur hjá Jóhannesi doypara. Pætur lurtaði uttan iva væl eftir, tá ið beiggi hansara segði honum frá boðskapinum hjá Jóhannesi. Ein dagin sá Andrias, at Jóhannes vísti á Jesus úr Nazaret og segði: „Hygg lamb Guds!“ Andrias gjørdist alt fyri eitt lærisveinur hjá Jesusi og bar eldhugaður Pæturi hesi spennandi tíðindi: Messias er komin! (Jóh. 1:35-42) Eftir uppreisturin í Eden umleið 4000 ár frammanundan hevði Jehova Gud lovað, at ein serligur persónur skuldi stíga fram og geva mannaættini sanna vón. (1 Mós. 3:15) Nú hevði Andrias hitt henda Frelsaran, Messias! Pætur skundaði sær avstað, so hann eisini kundi hitta Jesus.

8 Fram til henda dagin varð Pætur róptur Símun. Men Jesus hugdi at honum og segði: „’Tú ert Símun, sonur Jóhannes; tú skalt eita Kefas’ (tað er útlagt: Petrus).“ (Jóh. 1:43) „Kefas“ er eitt vanligt navnorð, sum merkir „steinur“, ella „klettur“. Orð Jesusar vóru eyðsýniliga profetisk. Hann sá frammanundan, at Pætur fór at verða sum ein klettur — ein støðufastur og álítandi stuðul

5, 6. Hvussu var lívið hjá Pæturi?

7. Hvat hoyrdi Pætur um Jesus, og hví vóru hetta spennandi tíðindi?

8. Hvat merkir navnið, sum Jesus gav Pæturi, og hví seta nøkur enn spurnartekn við hetta navnavalið?

hjá lærisveinum Kristusar. Hevði Pætur ta somu myndina av sær sjálvum? Tað er ivasamt. Sjálvt nøkur, sum lesa í evangeliunum í dag, síggja einki støðufast og álítandi í Pæturi, sum líkist kletti. Nøkur siga, at hann, soleiðis sum hann verður lýstur í bíbilsku frásøguni, tykist at vera óstøðugur og vinglutur.

9 Pætur hevði sínar veikleikar, og tað visti Jesus væl. Men eins og Faðir sín, Jehova, leitaði Jesus altíð eftir tí góða í fólki. Hann sá nógvar møguleikar í Pæturi og royndi at hjálpa honum at brúka teir góðu eginleikarnar, hann hevði. Jehova og sonur hansara leita eisini eftir tí góða í okkum í dag. Vit hava kanska ilt við at trúgva, at teir finna nakað gott í okkum. Men vit mugu líta á teirra sjónarmið og vera fús at lata teir upplæra og forma okkum, eins og Pætur var. — ***Les Fyrsta bræv Jóhannesar 3:19, 20.***

„Óttast ikki!“

10 Tá ið Jesus síðani fór út at boða, fór Pætur eftir øllum at døma við honum fyri fyrst. Tí var hann kanska hjástaddur, tá ið Jesus gjørdi sítt fyrsta undur og gjørdi vatn til vín í brúdleypinum í Kana. Men tað týdningarmesta var, at hann hoyrdi einastandandi og vónríka boðskapin hjá Jesusi um Guds ríki. Hann helt kortini ikki fram at ferðast við Jesusi, men fór aftur til fiskiskapin. Nakrar mánaðar seinni hittust teir tó aftur, og hesa ferð bjóðaði Jesus Pæturi at fylgja sær, soleiðis at tað nú gjørdist hansara lívsleið.

11 Pætur var tungur í huga. Náttin hevði ikki roynst væl. Hann og hinir fiskimenninir høvdu ferð eftir ferð sett gørnini út, bert fyri at draga tey tóm innaftur. Pætur nýtti ivaleyst allar sínar royndir og sín dugnaskap til at finna út av, hvar fiskur var at fáa. Tað er einki at ivast í, at hann, eins og so nógvir aðrir fiskimenn, vildi ynskt, at hann fekk hugt ígjøgnum tað grugguta vatnið og sæð, hvar fiskatorvurnar vóru, ella at hann onkursvegna fekk noytt fiskin í gørnini. Men slíkir tankar høvdu bert ørkymlað hann enn meiri. Pætur róði ikki út til stuttleika; hann skuldi breyðføða húskið hjá sær. Til endans kom hann aftur at landi við tómum hondum. Gørnini skuldu skolast. Tí hevði hann úr at gera, tá ið Jesus kom til hansara.

---

9. Hvørjum leita Jehova og sonur hansara eftir, og hví heldur tú, at vit skulu líta á teirra sjónarmið?

10. Hvat upplivdi Pætur helst, men hvat fór hann kortini aftur til?

11, 12. (a) Hvussu var náttin roynst hjá Pæturi? (b) Hvat hugsaði Pætur helst um, meðan hann lurtaði eftir Jesusi?

12 Ein mannamúgva trokaði seg fram at Jesusi og sat undir hvørjum orði, hann segði. Av tí at har vóru so nógv fólk, fór Jesus inn í bátin hjá Pæturi og bað hann leggja eitt sindur frá landi. Røddin hjá Jesusi hoyrdist væl úr bátinum, og hann lærdi mannamúgvuna. Pætur lurtaði væl eftir, og tað gjørdu tey á landi eisini. Hann troyttaðist ongantíð av at hoyra Jesus greiða frá høvuðsevninum í síni boðan — Guds ríki. Sum tað hevði verið ein stórur framíhjárættur at hjálpt Kristusi at bera henda boðskapin út um alt landið! Men fór tað at bera til hjá honum? Hvussu skuldi hann syrgja fyri familju síni? Kanska hugsaði Pætur aftur á ta longu náttina, har teir høvdu stríðst til onga nyttu. — Luk. 5:1-3.

13 Tá ið Jesus var liðugur at tala, segði hann við Pætur: „Legg út á dýpið, og setið út gørn tykkara eina setu!“ Pætur ivaðist stórliga. Hann segði: „Meistari! Vit hava roynt alla nátt og einki fingið. Men eftir orði Tínum skal eg seta út gørnini.“ Pætur hevði júst skolað gørnini, so tað síðsta, hann hevði hug at gera, var at seta tey út enn eina ferð, serliga nú tá ið eingin fiskur var at fáa. Kortini gjørdi hann, sum hann varð biðin, og gav helst felagum sínum í hinum bátinum tekin um at koma aftan á sær. — Luk. 5:4, 5.

Pætur troyttaðist ongantíð av at hoyra Jesus greiða frá høvuðsevninum í síni boðan — Guds ríki

14 Tá ið Pætur fór at draga gørnini, varnaðist hann, at tey vóru sera tung. Vantrúgvin legði hann størri orku í at draga, og innan leingi sá hann, at tað uddi í fiski í gørnunum! Sum eitt ørt veittraði hann til menninar í hinum bátinum, at teir skuldu koma at hjálpa. Tá ið teir komu, gjørdist skjótt greitt, at *ein* bátur ikki fekk havt allan fiskin. Teir fyltu báðar bátarnar, men har var ov nógvur fiskur — bátarnir mundu sokkið! Pætur var púra ovfarin. Hann hevði áður sæð Kristus gera undur, men í hesum førinum vóru tað hann og familja hansara, ið fingu nyttu av tí. Her var ein maður, sum var mentur at noyða fiskin í gørnini! Pætur gjørdist óttafullur. Hann legði seg á knæ og segði: „Harri, far frá mær! Eg eri syndigur maður!“ Hvussu kundi hann nakrantíð verða verdur at fylgjast við einum, sum hevði slíkt vald frá Gudi? — ***Les Lukas 5:6-9.***

15 Blíður segði Jesus við Pætur: „Óttast ikki! Hereftir skalt tú veiða menniskju.“ (Luk. 5:10) Hetta var ikki ein tíð at ivast ella

13, 14. Hvat undur gjørdi Jesus fyri Pætur, og hvussu ávirkaði tað Pætur?

15. Hvussu lærdi Jesus Pætur, at hann onga grund hevði til at ivast og óttast?

óttast. Pætur hevði einki at grunda síni ivamál á, eitt nú um fiskiskapin; og óttin fyri ikki at røkka til var eisini ógrundaður. Eitt stórt arbeiði lá fyri Jesusi, ein boðan, ið fór at broyta framtíðina hjá mannaættini. Hann tænti einum Gudi, sum 'ríkliga fyrigevur'. (Es. 55:7) Jehova fór at taka sær av Pæturi, bæði materielt og andaliga. — Matt. 6:33.

16 Pætur var skjótur at fylgja boðunum, og tað vóru Jákup og Jóhannes eisini. „Teir fóru so at landi við bátunum og fóru frá øllum og fylgdu Honum." (Luk. 5:11) Soleiðis vísti Pætur, at hann hevði álit á Jesusi og á Honum, sum hevði sent hann. Hetta var besta avgerðin, hann kundi taka. Kristin í dag, sum vinna á

16. Hvussu fylgdu Pætur, Jákup og Jóhannes boðum Jesusar, og hví var tað besta avgerðin, teir kundu taka?

'Harri! Eg eri syndigur maður!'

iva og ótta í sambandi við at tæna Gudi, vísa eisini álit. Og Jehova syrgir altíð fyri teimum, sum hava álit á honum. — Sl. 22:5, 6.

„Hví ivaðist tú?“

17 Umleið tvey ár eftir, at hann hevði hitt Jesus, róði Pætur eina náttina á Galileavatni í nógvum vindi, sum umrøtt fyrst í kapitlinum. Vit kunnu sjálvsagt ikki vita, hvørji minni runnu fram fyri hann. Har vóru so nógv at velja í: Jesus hevði grøtt vermammuna hjá Pæturi. Hann hevði hildið fjallaprædikuna. Ferð eftir ferð hevði hann við síni boðan og kraftagerðum víst, at hann var Messias, tann, sum Jehova hevði útvalt. Sum mánaðirnir gingu, fekk Pætur størri tamarhald á sínum ótta og iva. Jesus hevði enntá valt Pætur at vera ein av teimum 12 ápostlunum! Men sum tíðin skjótt fór at vísa, hevði Pætur ikki heilt fingið bilbugt við ótta og iva.

18 Í fjórðu náttarvøku, ella onkustaðni millum klokkan trý um morgunin og sólarris, gavst Pætur knappliga at rógva og rætti seg upp. Fram eftir aldunum sá hann okkurt røra seg! Var tað okkurt sprutt frá aldunum, sum endurspeglaðist í mánalýsinum? Nei, tað var ov støðugt og upprætt. Tað var ein maður! Ja, ein maður, og hann gekk á vatninum! Tá ið maðurin nærkaðist, tóktist tað, sum hann fór at ganga beint fram við bátinum. Lærisveinarnir vórðu ræðsluslignir, tí teir hildu, at tað var eitt spøkilsi, teir sóu. Maðurin segði: „Verið hugreystir, tað eri Eg — óttist ikki!“ Tað var Jesus! — Matt. 14:25-27.

19 Pætur svaraði: „Harri, er tað Tú, so sig við meg, at eg skal koma til Tín á vatninum!“ (Matt. 14:28) Hansara fyrsta innskot vísti, at hann var djarvur. Alspentur um hetta einastandandi undrið, royndi Pætur at styrkja sína trúgv enn meiri. Hann vildi vera uppi í tí, sum hendi. Vinaliga bað Jesus hann koma út til sín. Pætur kleiv um stokkin á bátinum og trein niður á óslætta vatnið. Ímynda tær, hvussu tað kendist hjá Pæturi at fáa fótafesti og síðani standa á vatninum. Hann man hava verið púra ovfarin, meðan hann gekk yvir ímóti Jesusi. Men skjótt fekk hann eina heilt aðra kenslu. — ***Les Matteus 14:29.***

20 Pætur mátti hava eyguni fest á Jesus. Tað var Jesus, sum við kraft frá Jehova helt Pæturi uppi á teimum vindbardu

---

17. Hvørji minni hevði Pætur frá teimum báðum árunum, sum hann hevði kent Jesus?

18, 19. (a) Lýs, hvat Pætur sá á Galileavatni. (b) Hvussu svaraði Jesus Pæturi?

20. (a) Hvussu læt Pætur seg órógva, og hvat varð úrslitið? (b) Hvat týðandi lærdi Jesus Pætur?

aldunum. Og tað gjørdi hann afturfyri, at Pætur trúði. Men Pætur læt seg órógva. Vit lesa: „Táið hann sá hitt ringa veðrið, varð hann ræddur.“ Pætur varnaðist knappliga aldurnar, sum brutu í bógvin á bátinum, so froyðurin stóð frá, og ræðsla kom á hann. Hann ímyndaði sær helst, at hann fór at søkka niður í vatnið og drukna í tí. So hvørt sum óttin vaks í hjarta hansara, minkaði trúgvin. Maðurin, ið hevði fingið navnið Klettur, tí hann einaferð skuldi gerast ein støðufastur og álítandi stuðul, tók nú at søkka sum ein steinur, tí trúgv hansara sveik. Pætur dugdi væl at svimja, men leit ikki á, at tað fór at hjálpa honum nú. Hann rópti: „Harri, frels meg!“ Alt fyri eitt rætti Jesus hondina út, tók í hann og hálaði hann upp. Meðan teir enn vóru úti á vatninum, lærdi Jesus Pætur nakað týðandi við hesum spurninginum: „Tú trúarveiki, hví ivaðist tú?“ — Matt. 14:30, 31.

21 „Ivaðist“ — av sonnum eitt beinrakið orð! Ivi kann vera ein sterk og oyðandi megi. Geva vit eftir fyri iva, kann okkara trúgv vikna so líðandi og verða oyðiløgd. Vit mugu stríðast ímóti ivanum! Men hvussu? Við at savna okkum um tað rætta. Dvølja vit við tað, sum ger okkum óttafull, tekur mótið frá okkum ella dregur okkum burtur frá Jehova og soni hansara, veksur ivin í okkum. Men savna vit okkum um Jehova og son hansara, um tað, teir hava gjørt, gera og fara at gera fyri tey, sum elska teir, vinna vit á ivanum, ið kundi oyðilagt okkum trúnna.

22 Tá ið Pætur fór við Jesusi inn aftur í bátin, minkaði vindurin. Stilli fall á Galileavatn. Saman við hinum lærisveinunum segði Pætur: „Sanniliga ert Tú Sonur Guds!“ (Matt. 14:33) Tá ið dimmið lætti, man Pætur hava verið sera takksamur. Hann hevði lært at vísa iva og ótta frá sær. Gaman í hevði hann nógv eftir at læra, áðrenn hann gjørdist ein klettur hjá teimum kristnu, soleiðis sum Jesus hevði boðað frá. Men hann setti sær fyri at halda fram at læra, at halda fram at vaksa. Ert tú líka miðvísur? So fert tú at sanna, at trúgvin hjá Pæturi er verd at taka eftir.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu vann Pætur á sínum iva í sambandi við at fylgja Jesusi?
- Hvussu vísti Jesus, at hann sá tað góða í Pæturi?
- Hvat lærdi Pætur á Galileavatni um tað at geva eftir fyri iva?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Pæturi?

21. Hví er tað vandamikið at ivast, og hvussu kunnu vit stríðast ímóti iva?

22. Hví er trúgvin hjá Pæturi verd at taka eftir?

„Táið hann sá hitt ringa veðrið, varð hann ræddur“

Hann var trúfastur í royndum

PÆTUR hugdi spentur at andlitunum á áhoyrarum Jesusar. Teir vóru í sýnagoguni í Kapernaum. Pætur búði í hesum býnum; hann hevði sítt fiskivinnuvirksemi her, norðarumegin Galileavatn, og hann hevði eisini nógvar vinir, skyldfólk og viðskiftafólk í býnum. Pætur vónaði sjálvsagt, at fólk í Kapernaum eisini fóru at viðurkenna Jesus sum Messias, og at tey fóru at verða glað um, at størsti lærarin av øllum var komin at læra tey um Guds ríki. Men tað var ikki tað, sum hendi.

2 Nógv vóru givin at lurta. Nøkur stóðu og mutlaðu, tí tey vóru ósamd við Jesus í tí, hann segði. Men tað, sum harmaði Pætur mest, var, hvussu boðskapurin ávirkaði nakrar av Jesu egnu lærisveinum. Andlitsbráið hjá teimum bar ikki longur dám av gleði um at læra nakað nýtt og spennandi, sum tá ið teir fyrstu ferð lærdu um sannleikan. Nú vóru teir skelkaðir, enntá illir. Nakrir talaðu at og søgdu, at talan hjá Jesusi var hørð. Teir noktaðu at hoyra meira, rýmdu úr sýnagoguni — og góvust at fylgja Jesusi. — ***Les Jóhannes 6:60, 66.***

3 Tað var ein trupul tíð hjá Pæturi og hinum ápostlunum. Hann skilti ikki til fulnar tað, sum Jesus segði henda dagin. Men hann skilti uttan iva, at orðini hjá Jesusi kundu tykjast ógvuslig, um tey vórðu tikin bókstaviliga. Hvat fór Pætur at gera? Hetta var ikki fyrstu ferð, at hansara trúfesti móti Jesusi skuldi standa sína roynd, og tað var heldur ikki seinastu ferð. Latið okkum vita, hvussu trúgvin hjá Pæturi hjálpti honum at verða verandi trúfastur, hóast slíkar avbjóðingar.

Trúfastur, tá ið onnur gjørdust trúleys

4 Pætur varð ofta tikin á bóli av Jesusi. Ferð eftir ferð gjørdi

---

1, 2. Hvørja vón hevði Pætur helst, tá ið Jesus talaði í Kapernaum, men hvat hendi í staðin?

3. Hvat hjálpti trúgvin hjá Pæturi honum at gera fleiri ferðir?

4, 5. Á hvønn hátt hevði Jesus gjørt tað øvuta av tí, sum fólk væntaðu av honum?

og segði Jesus tað øvuta av tí, fólk væntaðu av honum. So seint sum dagin fyri hevði hann á undursaman hátt mettað eina mannamúgvu, ið taldi fleiri túsund. Afturfyri høvdu tey roynt at gjørt hann til kong. Men tað kom óvart á nógv, at hann rýmdi undan teimum og bað lærisveinarnar fara í ein bát og leggja leiðina móti Kapernaum. Meðan lærisveinarnir róðu yvir um Galileavatn ta náttina, tók Jesus teir aftur á bóli, tá ið hann kom gangandi á óslætta vatninum og lærdi Pætur nakað týðandi um trúgv.

5 Morgunin eftir varnaðust teir, at mannamúgvan var komin aftan á teimum í bátum. Fólkini vóru eyðsýniliga komin, tí tey aftur vildu síggja Jesus fáa mat til vegar við einum undri, og ikki tí tey hungraðu eftir andaligari føði. Jesus hevði at teimum, tí tey bert hugsaðu um tað, sum forferst. (Jóh. 6:25-27) Hesin orðadrátturin helt fram í sýnagoguni í Kapernaum, har Jesus í síni roynd at læra fólk ein týðandi sannleika, sum tey høvdu ilt við at skilja, aftur segði nakað, sum tey ikki høvdu væntað.

6 Jesus vildi ikki, at fólk bara skuldu meta hann sum ein, ið útvegaði teimum bókstaviligan mat, men sum eina andaliga gávu frá Gudi, ja, tann, hvørs lív og deyði sum menniskja fór at geva øðrum møguleika fyri at fáa ævigt lív. Tí nýtti hann eina mynd, har hann samanbar seg sjálvan við manna, breyðið, ið kom niður av himli á døgum Mósesar. Tá ið nøkur mótmæltu, nýtti hann eina sterka mynd, har hann greiddi frá, at tað var neyðugt at eta hansara hold og drekka hansara blóð fyri at fáa lív. Hesi orðini østu tey enn meira. Summi søgdu: „Hetta er hørð tala; hvør orkar at hoyra hana!“ Nógvir lærisveinar hjá Jesusi gjørdu av at fara frá honum.* — Jóh. 6:48-60, 66.

7 Hvat fór Pætur at gera? Hann gjørdist helst eisini bilsin av talu Jesusar. Enn skilti hann ikki, at Jesus mátti doyggja til tess at fremja Guds vilja. Var tað freistandi hjá Pæturi at sníkja seg burtur saman við teimum svikafullu lærisveinunum, sum fóru frá Jesusi henda dagin? Nei. Pætur hevði ein týðandi eginleika, sum teir ikki høvdu. Hvat var tað fyri ein eginleiki?

8 Jesus vendi sær móti ápostlunum og segði: „Ætla eisini tit at rýma?“ (Jóh. 6:67) Hann spurdi allar 12, men tað var Pætur,

* Tað sæst, hvussu vinglut fólkini í sýnagoguni vóru, tá ið vit samanbera ávirkanina av tí, Jesus segði henda dagin, við tað, at tey so seint sum dagin fyri eldhugað høvdu sagt, at hann var profetur Guds. — Jóh. 6:14.

6. Hvørja mynd nýtti Jesus, og hvussu ávirkaði tað áhoyrararnar?

7, 8. (a) Hvat skilti Pætur ikki enn um leiklut Jesusar? (b) Hvussu svaraði Pætur spurninginum, sum Jesus setti ápostlunum?

sum svaraði. So var ofta. Kanska var hann tann elsti av teimum. Hann var í øllum førum tann mest opinskáraði; tað tykist, at hann sjáldan helt seg undan at siga tað, sum rann honum í hug. Í hesum førinum runnu hesi vøkru og minningarverdu orðini honum í hug: „Harri! Hvønn skulu vit fara til! Tú hevur orð hins æviga lívs.“ — Jóh. 6:68.

9 Verður tú ikki heitur um hjartað av hesum orðunum? Trúgv á Jesus hevði hjálpt Pæturi at ala fram ein týðandi eginleika — trúfesti. Tað var Pæturi greitt, at Jesus var einasti frelsarin, ið Jehova hevði útvegað, og at tað, sum Jesus segði um Guds ríki, kundi frelsa fólk. Hann visti, at hóast okkurt kanska var torført at skilja, so var einki annað stað at fara, um hann vildi toknast Gudi og verða signaður við ævigum lívi.

10 Hevur tú tað eisini so? Í dag eru nógv, sum siga seg elska Jesus, men tíverri ikki eru trúføst móti honum. Satt trúfesti móti Kristusi krevur, at vit hava somu áskoðan á Jesu læru, sum Pætur hevði. Vit mugu kenna hana, skilja týdningin av henni og liva eftir henni — sjálvt um okkurt av tí, vit læra, kemur óvart á okkum, tí vit persónliga høvdu væntað ella ynskt, at tað var øðrvísi. Skulu vit fáa hitt æviga lívið, sum Jesus gav okkum útlit til, mugu vit vera trúføst. — ***Les Sálm 97:10.***

Trúfastur, tá ið hann varð rættleiddur

11 Stutt eftir hesa rokmiklu tíðina fór Jesus við ápostlum sínum og nøkrum lærisveinum eina langa ferð norðureftir. Kavaklæddi tindurin á Hermonsfjalli, sum lá á norðasta landamarkinum í lovaða landinum, var viðhvørt sjónligur líka úr Galileavatni. Fjallið tóktist hægri og hægri, so hvørt sum teir nærkaðust tí og gingu niðan eftir hækkandi lendinum, ið førdi til bygdirnar nærindis Kesarea Filippi.* Í hesi vøkru náttúruni, við útsýni yvir meginpartin av lovaða landinum fyri sunnan, setti Jesus lærisveinunum ein týðandi spurning.

12 „Hvønn sigur fólkið Meg vera?“ vildi hann vita. Vit kunnu helst ímynda okkum Pætur, sum hann hugdi í blíðu eygu Jesusar

* Teir byrjaðu ferð sína frá strondini við Galileavatn, sum liggur umleið 210 metrar undir sjóvarmálanum. Tá ið teir høvdu gingið 50 kilometrar gjøgnum sera vøkur landsløg, vóru teir 350 metrar yvir sjóvarmálanum.

9. Hvussu vísti Pætur trúfesti móti Jesusi?

10. Hvussu kunnu vit taka eftir trúfesti Pæturs í dag?

11. Hvar fór Jesus við lærisveinum sínum? (Sí eisini undirgreinina.)

12, 13. (a) Hví vildi Jesus vita, hvønn fólk hildu hann vera? (b) Hvussu vísti Pætur sanna trúgv við tí, hann segði við Jesus?

og enn eina ferð varnaðist, hvussu góður og sera gløggur Meistari hansara var. Jesus vildi vita, hvørjar niðurstøður fólk komu til av tí, sum tey sóu og hoyrdu. Lærisveinar hansara svaraðu spurninginum við at endurtaka nakrar av teimum vanligu misskiljingunum um, hvør Jesus var. Men Jesus vildi vita meira. Fóru hansara nærmastu lærisveinar eisini skeivir? „Men tit, hvønn siga tit Meg vera?“ spurdi hann. — Luk. 9:18-20.

13 Pætur var aftur skjótur at svara. Djarvur setti hann orð á tað, sum nógvir av teimum hjástøddu hugsaðu innast inni. „Tú ert Kristus, Sonur hins livandi Guds!“ segði hann. Vit kunnu ímynda okkum, at Jesus við einum smíli vísti Pæturi sín tokka og rósti honum fyri svar hansara. Jesus minti Pætur á, at tað var Jehova Gud — og ikki eitt menniskja — sum hevði opinberað henda týðandi sannleikan, soleiðis at hann var lættur at skilja hjá teimum, ið høvdu sanna trúgv. Pætur hevði lært at skilja ein av teimum størstu sannleikunum, sum Jehova hevði opinberað inntil tá — at Jesus var hin lovaði Messias, ella Kristus! — ***Les Matteus 16:16, 17.***

Vit mugu trúføst fylgja læru Jesusar, sjálvt um vit persónliga høvdu væntað ella ynskt, at okkurt var øðrvísi

14 Kristus var tann, sum gomul profeti umrøddi sum ein stein, ið byggimeistararnir fóru at vraka. (Sl. 118:22; Luk. 20:17) Jesus vísti til slíkar profetiir, tá ið hann boðaði frá, at Jehova fór at stovna eina samkomu á hesum sama steini, ella kletti, hvørs samleika Pætur júst hevði eyðmerkt. Síðani gav hann Pæturi nøkur sera týðandi forrættindi í hesi samkomuni. Hann gav ikki Pæturi eina serstøðu fram um hinar ápostlarnar, sum nøkur vilja vera við, men hann gav honum nakrar ábyrgdaruppgávur. Hann gav honum „lyklar Himmiríkis“. (Matt. 16:18, 19) Pætur fekk framíhjárættin at lata dyrnar upp fyri trimum ymiskum bólkum av menniskjum, so tey fingu vón um at sleppa inn í Guds ríki — í fyrsta lagi fyri jødum, síðani fyri samverjum og at enda fyri heidningum, ella ikkijødum.

15 Jesus segði tó seinni, at tey, sum fáa nógv litið upp í hendur, eisini skulu standa til svars fyri nógvum, og Pætur var ein av hesum. (Luk. 12:48) Jesus helt fram at avdúka týðandi sannleikar um Messias, eitt nú at hann við vissu skuldi líða og doyggja

14. Hvørji týðandi forrættindi gav Jesus Pæturi?

15. Hví hevði Pætur at Jesusi, og hvat segði hann við Jesus?

í Jerusalem. Hetta dámdi Pæturi als ikki at hoyra. Hann tók Jesus burturfrá, hevði at honum og segði: „Gud bjargi Tær, Harri! Aldri skal hetta henda Teg!“ — Matt. 16:21, 22.

16 Pætur helt seg hjálpa Jesusi, og tí kom svarið helst óvart á hann. Jesus vendi Pæturi bakið og hugdi at hinum lærisveinunum — sum ivaleyst høvdu hugsað nakað tað sama — og segði: „Vík aftur um Meg, Satan! Tú ert Mær til ástoyt; tí tú hugsar ikki um tað, sum Gudi hoyrir til, men um tað, sum menniskjum hoyrir til!“ (Matt. 16:23; Mark. 8:32, 33) Vit kunnu øll læra av tí, Jesus segði. Tað er bert alt ov lætt at lata menniskjans hugsanir fáa størri týdning enn Guds hugsanir. Gera vit tað, sjálvt um vit meina tað væl, kunnu vit av misgáum koma at ganga ørindi Satans, heldur enn Guds. Men hvussu ávirkaði hetta Pætur?

Vit kunnu bert halda fram at nærkast Jesusi Kristi og Faðir hansara, Jehova Gudi, um vit eyðmjúk taka við leiðbeining og læra av henni

17 Pætur visti uttan iva, at Jesus ikki bókstaviliga meinti, at hann var Satan Djevulin. Jesus segði jú heldur ikki tað sama við Pætur, sum hann hevði sagt við Satan. Við Satan segði hann: „Far burt!“ men við Pætur segði hann: „Vík aftur um Meg!“ (Matt. 4:10) Jesus vrakaði ikki ápostulin, sum hann sá so nógv gott í, men hann hevði rætt og slætt at honum, tí hann í hesum førinum fór skeivur. Tað er ikki torført at skilja, at Pætur, í staðin fyri at vera Meistara sínum ein snávingarsteinur, aftur skuldi fylgja honum sum ein trúfastur lærisveinur.

18 Mutaði Pætur ímóti, gjørdist hann illur ella fekk hann gron? Nei, hann tók eyðmjúkur ímóti rættleiðingini. Soleiðis vísti hann enn einaferð trúfesti. Øll, sum fylgja Kristusi, hava tørv á rættleiðing av og á. Vit kunnu bert halda fram at nærkast Jesusi Kristi og Faðir hansara, Jehova Gudi, um vit eyðmjúk taka við leiðbeining og læra av henni. — ***Les Orðtøkini 4:13.***

Signaður fyri trúfesti

19 Skjótt segði Jesus aftur nakað óvæntað: „Nøkur av teimum, ið her standa, skulu ikki smakka deyðan, fyrrenn tey síggja

16. Hvussu hevði Jesus at Pæturi, og hvat kunnu vit øll læra av tí, Jesus segði?

17. Hvat meinti Jesus, tá ið hann bað Pætur ‘víkja aftur um’ seg?

18. Hvussu vísti Pætur trúfesti, og hvussu kunnu vit taka eftir honum?

19. Hvat óvæntað segði Jesus, og hvat hugsaði Pætur kanska?

Pætur var trúfastur, eisini tá ið hann varð rættleiddur

Menniskjasonin koma í ríki Sínum.“ (Matt. 16:28) Hesi orðini gjørdu uttan iva Pætur forvitnan. Hvat kundi Jesus meina við? Kanska hugsaði Pætur, at hvassa rættleiðingin, hann júst hevði fingið, bar í sær, at hann ikki fór at fáa slík forrættindi.

20 Umleið eina viku seinni tók Jesus kortini Jákup, Jóhannes og Pætur við sær niðan á eitt „høgt fjall“ — møguliga Hermonsfjall, sum bert lá nakrar fáar kilometrar burtur. Tað var helst á náttartíð, tí teir tríggir menninir stríddust fyri ikki at sovna. Men meðan Jesus bað, hendi nakað, sum gjørdi teir klárvaknar. — Matt. 17:1; Luk. 9:28, 29, 32.

21 Jesus umbroyttist fyri eygum teirra. Andlit hansara tók at skína, at glógva, og gjørdist so bjart sum sólin. Klæði hansara vórðu eisini hvít og skyggjandi. Síðani komu tveir menn til

20, 21. (a) Lýs sjónina, sum Pætur sá. (b) Hvussu var samrøðan í sjónini við til at rættleiða Pætur?

sjóndar saman við Jesusi, annar líktist Mósesi og hin Eliasi. Teir talaðu við Jesus um „burturferð Hansara, sum Hann skuldi fullføra í Jerúsalem“ — eyðsæð um deyða og uppreisn hansara. Nú var púra greitt, at Pætur var farin skeivur, tá ið hann noktaði at trúgva, at Jesus skuldi líða og doyggja. — Luk. 9:30, 31.

22 Pætur kendi seg onkursvegna eggjaðan til at taka lut í hesi einastandandi sjónini — og kanska leingja hana. Tað tóktist, sum Móses og Elias vóru um at fara frá Jesusi. Tí segði Pætur: „Meistari! Her er okkum gott at vera; lat okkum gera tríggjar bústaðir, Tær ein, Mósesi ein og Eliasi ein!“ Hesir menninir í sjónini, sum líktust tveimum av tænarum Jehova, ið fyri langari tíð síðani vóru deyðir, høvdu sjálvsagt ikki tørv á nøkrum bústøðum. Pætur hugsaði seg ikki um, áðrenn hann talaði. Men dámar tær kortini ikki henda eldhugaða og hjartagóða mannin? — Luk. 9:33.

23 Pætur, Jákup og Jóhannes fingu eina signing aftrat hesa náttina. Eitt skýggj skuggaði yvir teir á fjallinum. Úr tí hoyrdist ein rødd — røddin á Jehova Gudi! Hann segði: „Hesin er Sonur Mín, hin útvaldi — hoyrið Hann!“ Síðani var sjónin av, og teir vóru einsamallir eftir á fjallinum saman við Jesusi. — Luk. 9:34-36.

24 Henda sjónin var av sonnum ein dýrabar gáva til Pætur — og til okkara! Áratíggju seinni skrivaði hann um heiðurin,ið varð vístur honum ta náttina, hann slapp at síggja Jesus sum ein dýrdarmiklan himmalskan kong og vera „eygnavitni til hátign Hansara“. Sjónin staðfesti nógvar profetiir í Guds orði og styrkti Pætur í trúnni, so hann varð førur fyri at klára tær royndirnar, sum lógu fyri framman. (***Les Seinna bræv Pæturs 1:16-19.***) Hon kann hava somu ávirkan á okkum, um vit, eins og Pætur, altíð eru trúføst móti tí harranum, sum Jehova hevur sett yvir okkum, taka við vegleiðingini og rættleiðingini, sum hann gevur, og eyðmjúk fylgja honum dag eftir dag.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvussu hjálpti trúgvin Pæturi at vera trúfastur, hóast nógv góvust at fylgja Jesusi?
- Hvussu hjálpti trúgv og trúfesti Pæturs honum at taka við rættleiðing?
- Hvussu varð Pætur styrktur í trúnni av at síggja umbroytingina á fjallinum?
- Á hvønn annan hátt kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúnni hjá Pæturi?

22, 23. (a) Hvussu vísti Pætur, at hann bæði var eldhugaður og hjartagóður? (b) Hvørja aðra signing fingu Pætur, Jákup og Jóhannes ta náttina?

24. (a) Hvussu gagnaði sjónin Pæturi? (b) Hvussu kann sjónin gagna okkum í dag?

Saman við Jákupi og Jóhannesi sá Pætur eina einastandandi sjón

KAPITTUL TRÝ OG TJÚGU

Jesus lærdi hann at fyrigeva

PÆTUR fór ongantíð at gloyma ta ræðuligu løtuna, tá ið eygu teirra møttust. Sást tað á Jesusi, um hann var vónbrotin ella firtin? Tað vita vit ikki við vissu; frásøgan sigur bert: „Harrin vendi Sær og hugdi uppá Pætur.“ (Luk. 22:61) Beint tá skilti Pætur, hvussu álvarsliga hann hevði svikið. Hann varnaðist, at hann hevði gjørt júst tað, sum Jesus hevði sagt, at hann fór at gera, tað, sum hann sjálvur hevði tvíhildið um, at hann ongantíð fór at gera — hann hevði avnoktað elskaða Meistara sín. Hetta var ein dyggur smeitur hjá Pæturi, kanska ringasta løtan í hansara lívi.

2 Støðan hjá Pæturi var kortini ikki vónleys. Pætur hevði sera sterka trúgv, og tí hevði hann enn møguleika at koma fyri seg aftur eftir mistøk síni og at taka ein tann mest týðandi lærdómin hjá Jesusi til sín. Hann snúði seg um fyrigeving. Vit mugu øll taka henda lærdómin til okkara, so latið okkum vita, hvussu tað gekst Pæturi.

Ein maður, sum hevði nógv at læra

3 Umleið seks mánaðar frammanundan fór Pætur, í heimbýi sínum Kapernaum, til Jesus og spurdi hann: „Harri, hvussu ofta skal eg fyrigeva bróður mínum, táið hann syndar móti mær? So mikið sum sjey ferðir?“ Pætur helt ivaleyst, at hann var stórsinnaður. Trúarleiðararnir tá í tíðini lærdu jú, at tað var nóg mikið at fyrigeva tríggjar ferðir. Jesus svaraði: „Ikki sjey ferðir, men sjeyti ferðir sjey ferðir.“ — Matt. 18:21, 22.

4 Skeyt Jesus upp, at Pætur skuldi halda roknskap við, hvussu ofta fólk syndaðu móti honum? Nei. Við at broyta tær sjey ferðirnar hjá Pæturi til sjeyti ferðir sjey ferðir, vísti hann tvørturímóti, at

---

1. Hvør var kanska ringasta løtan í lívi Pæturs?

2. Hvat hevði Pætur fyri neyðini at læra, og hvussu kann frásøgan um hann gagna okkum?

3, 4. (a) Hvønn spurning setti Pætur Jesusi, og hvat kann Pætur hava hugsað? (b) Hvussu vísti Jesus, at Pætur hevði latið seg ávirka av menniskjum, sum ikki vóru sinnað at fyrigeva?

„Harrin vendi Sær og hugdi uppá Pætur“

kærleiki ikki loyvir okkum at seta eitt evstamark fyri, hvussu ofta vit skulu fyrigeva. (1 Kor. 13:4, 5) Jesus vísti, at Pætur læt seg ávirka av menniskjum, sum vóru harðhjartað og ikki sinnað at fyrigeva øðrum. Tey, sum vilja taka eftir Gudi, mugu vera fús at fyrigeva øðrum ferð eftir ferð. — ***Les Fyrsta bræv Jóhannesar 1:7-9.***

5 Pætur segði ikki Jesusi ímóti. Men skilti Pætur veruliga lærdómin hjá Jesusi? Vit læra kanska mest um fyrigeving, tá ið vit varnast, hvussu stóran tørv vit sjálvi hava á at verða fyrigivin. Men latið okkum venda aftur til hendingarnar undan Jesu deyða. Hesar torføru tímarnar gjørdi Pætur nógv mistøk, sum kravdu fyrigeving frá Jesusi.

Jesus fyrigav ofta Pæturi

6 Tað var eitt týðandi kvøld — seinasta kvøldið í lívi Jesusar á jørðini. Jesus hevði nógv eftir at læra ápostlar sínar, eitt nú um eyðmjúkleika. Hann gav teimum eina fyrimynd, tá ið hann eyðmjúkur vaskaði teimum um føturnar, nakað, sum tann tænarin, ið hevði minst at týða, plagdi at gera. At byrja við helt Pætur tað vera løgið. Síðani vildi hann ikki, at Jesus skuldi vaska honum um føturnar. Hareftir vildi hann hava Jesus at vaska, ikki bert føturnar, men eisini hendurnar og høvdið! Jesus ótolnaðist ikki, men greiddi sinniliga frá, hvussu umráðandi hetta var, og hvønn týdning tað hevði. — Jóh. 13:1-17.

7 Stutt eftir hetta royndi Pætur enn eina ferð tolið hjá Jesusi. Ápostlarnir fóru at munnhøggast um, hvør av teimum var størstur, og Pætur hevði uttan iva sín leiklut í hesum skammiliga kjakinum, sum væl lýsir menniskjans stolta lyndi. Kortini hevði Jesus bert vinaliga at teimum og rósti teimum enntá fyri tað góða, teir gjørdu — at teir trúfastir vórðu verandi hjá Meistara sínum. Tó segði hann, at teir allir fóru at rýma frá honum. Pætur segði, at hann fór at verða verandi hjá Jesusi, um hann so skuldi doyggja saman við honum. Jesus segði tvørturímóti, at Pætur hetta sama kvøldið fór at avnokta Meistara sín tríggjar ferðir, áðrenn ein hani hevði galið tvær ferðir. Tá segði Pætur ikki bara Jesusi ímóti, men breggjaði sær eisini av, at hann fór at vera meira trúfastur enn allir hinir ápostlarnir! — Matt. 26:31-35; Mark. 14:27-31; Luk. 22:24-28; Jóh. 13:36-38.

8 Misti Jesus tolið við Pæturi? Í roynd og veru helt Jesus alla hesa torføru tíðina fram at leita eftir tí góða í sínum ófullkomnu

---

5. Nær læra vit kanska mest um fyrigeving?

6. Hvat segði Pætur, tá ið Jesus royndi at læra ápostlarnar um eyðmjúkleika, men hvat gjørdi Jesus?

7, 8. (a) Nær mátti Jesus aftur hava tol við atburðinum hjá Pæturi? (b) Hvussu helt Jesus fram at vísa ein vinaligan og fyrigevandi hugburð?

ápostlum. Hann visti, at Pætur fór at svíkja hann, og kortini segði hann: „Eg bað fyri tær, at trúgv tín skal ikki svíkja; og táið tú einaferð vendir við, styrk tá brøður tínar!“ (Luk. 22:32) Soleiðis vísti Jesus, at hann hevði álit á, at Pætur fór at koma fyri seg aftur andaliga og trúfastur tæna Gudi. Sanniliga ein vinaligur og fyrigevandi hugburður!

9 Seinni, í Getsemane urtagarði, hevði Pætur tørv á at verða rættleiddur meira enn eina ferð. Jesus bað bæði hann og eisini Jákup og Jóhannes um at vakja, meðan hann sjálvur fór at biðja. Jesus var í svárari angist og hevði tørv á stuðli frá ápostlunum, men Pætur og hinir sovnaðu ferð eftir ferð. Tá var tað, Jesus kom við hesi samkennandi og fyrigevandi viðmerkingini: „Andin er til reiðar, men holdið er veikt.“ — Mark. 14:32-41.

10 Skjótt kom ein stórur flokkur við kyndlum, svørðum og gøssum. Nú skuldi farast fram við varsemi og skynsemi. Men Pætur leyp bráðræsin fram, sveiggjaði eitt svørð ímóti høvdinum á Malkusi, einum træli hjá høvuðsprestinum, og kvetti oyrað av honum. Jesus hevði róliga at Pæturi, grøddi sárið og greiddi frá, hví hansara lærisveinar ikki skuldu nýta harðskap. (Matt. 26:47-55; Luk. 22:47-51; Jóh. 18:10, 11) Pætur hevði longu gjørt nógv, sum kravdi fyrigeving Meistarans. Mistøkini hjá Pæturi minna okkum á, at vit øll synda ferð eftir ferð. (***Les Bræv Jákups 3:2.***) Hvør av okkum hevur ikki tørv á Guds fyrigeving hvønn einasta dag? Men náttin var als ikki av hjá Pæturi. Tað ringasta lá enn fyri framman.

Ringasta mistak Pæturs

11 Jesus segði við flokkin, at um tað var honum, teir leitaðu eftir, skuldu teir lata ápostlarnar fara. Pætur hugdi hjálparleysur at, meðan teir bundu Jesus. Síðani flýddu bæði Pætur og hinir ápostlarnir.

12 Pætur og Jóhannes steðgaðu á, kanska nærindis bústaðnum hjá fyrrverandi høvuðsprestinum, Annasi, har Jesus fyrst varð tikin til avhoyringar. Tá ið farið varð við Jesusi haðani, fylgdu Pætur og Jóhannes eftir teimum, men „langt aftaná“. (Matt. 26:58; Jóh. 18:12, 13) Pæturi vantaði ikki dirvi. Bara tað at fylgja aftaná kravdi stórt dirvi. Flokkurin var vápnaður, og Pætur hevði longu sært ein av teimum. Men í hesum førinum síggja vit einki dømi um tann trúfasta kærleikan, sum Pætur hevði sagt seg hava — at vera fúsur at doyggja saman við Meistaranum, um neyðugt. — Mark. 14:31.

9, 10. (a) Hvørja rættleiðing hevði Pætur fyri neyðini í Getsemane urtagarði? (b) Hvat minna mistøk Pæturs okkum á?

11, 12. (a) Hvussu vísti Pætur dirvi í ein ávísan mun, eftir at Jesus var handtikin? (b) Á hvønn hátt miseydnaðist tað hjá Pæturi at gera tað, hann sjálvur hevði sagt?

13 Eins og Pætur royna nógv í dag at fylgja Kristusi, men „langt aftaná“ — soleiðis at eingin annar varnast tey. Men sum Pætur sjálvur skrivaði seinni, mugu vit, um vit vilja fylgja Kristusi á rættan hátt, halda okkum so nær at honum sum gjørligt og taka eftir honum í øllum, uttan mun til avleiðingarnar. — ***Les Fyrra bræv Pæturs 2:21.***

14 Varisligu fetini hjá Pæturi førdu hann at enda til portrið inn til eini stásilig hús í Jerusalem. Her búði Kaifas, tann ríki og máttmikli høvuðspresturin. Slík hús vóru vanliga bygd rundan um ein garð við einum portri út á gøtuna. Pætur kom til portrið, men slapp ikki inn í garðin. Jóhannes, ið kendi høvuðsprestin, var longu komin inn, og hann bað hana, sum helt vakt við dyrnar, loyva Pæturi inn. Tað tykist ikki, sum Pætur helt seg hjá Jóhannesi, og hann royndi heldur ikki at sleppa inn í húsini, so hann kundi stuðla Meistara sínum. Hann varð verandi úti í garðinum, har nakrir trælir og tænarar styttu sær stundir við eitt bál hesa køldu náttina og hugdu at, meðan tey, sum bóru rangan vitnisburð móti Jesusi, fóru inn og út úr húsinum, har rættarmálið fór fram. — Mark. 14:54-57; Jóh. 18:15, 16, 18.

15 Í glæmuni frá bálinum fekk gentan, sum hevði loyvt Pæturi inn í garðin, høvi at hyggja nærri at honum. Hon kendi hann aftur. Hon ákærdi hann og segði: „Eisini tú vart við Jesusi úr Galilea!“ Tikin á bóli noktaði Pætur, at hann kendi Jesus, og lætst enntá sum hann ikki skilti, hvat gentan tosaði um. Hann fór út móti portrinum, so eingin skuldi varnast hann, men ein onnur genta sá hann og segði eisini: „Hesin var við Jesusi úr Nazaret!“ Pætur svór: „Eg kenni ikki tann mann!“ (Matt. 26:69-72; Mark. 14:66-68) Nú tá ið Pætur hevði avnoktað Jesus aðru ferð, hoyrdi hann kanska ein hana gala, men hann var so uppøstur, at hann ikki mintist tað, sum Jesus hevði sagt bert fáar tímar frammanundan.

16 Løtu seinni royndi Pætur enn av øllum alvi at standa soleiðis, at eingin skuldi varnast hann. Men nøkur fólk, sum vóru í garðinum, komu yvir til hansara. Ein av teimum var í familju við Malkus, trælin, sum Pætur hevði kvett oyrað av. Hann segði við Pætur: „Sá eg teg ikki í urtagarðinum við Honum!“ Pætur kendi seg kroystan at sannføra tey um, at tey fóru skeiv. Hann svór tí, at hann talaði satt, og segði eyðsýniliga, at hann skuldi vera bannaður, um hann leyg. Hetta var triðju ferð, Pætur avnoktaði Jesus. Hann hevði ikki meir enn talað, fyrr enn hann hoyrdi ein hana gala — aðru ferð ta náttina. — Jóh. 18:26, 27; Mark. 14:71, 72.

---

13. Hvussu eiga vit at fylgja Kristusi?

14. Hvat gjørdi Pætur ta náttina, Jesus varð avhoyrdur?

15, 16. Greið frá, hvussu tað gekk út, sum Jesus hevði sagt um, at Pætur fór at avnokta hann tríggjar ferðir.

17 Jesus var júst komin út á ein svala út móti garðinum. Ta løtuna møttust eyguni á Pæturi og honum, sum lýst fyrst í hesum kapitlinum. Tá skilti Pætur, hvussu dyggiliga hann hevði svikið Meistara sín. Pætur fór út úr garðinum, niðurboygdur av skuldarkenslu. Hann fór út á gøturnar í býnum, og fullmánin, sum stóð lágt á himli, lýsti vegin fyri honum. Sjónin kámaðist av tárunum, sum fyltu eyguni. Hann smokkaði saman og græt beiskliga. — Mark. 14:72; Luk. 22:61, 62.

18 Tá ið eitt menniskja raknar við eftir eitt sovorðið mistak, fær viðkomandi alt ov lætt kensluna av, at syndin er so álvarsom, at eingin vón er um fyrigeving. Pætur hugsaði kanska, at Jesus ikki kundi fyrigeva honum. Men kundi hann tað?

Pætur gjørdi nógv, sum kravdi fyrigeving Meistarans, men hvør av okkum hevur ikki dagliga tørv á fyrigeving?

Var eingin vón um fyrigeving hjá Pæturi?

19 Tað er torført at ímynda sær, hvussu sorgarfullur Pætur var, tá ið tað fór at lýsa fyri degi, og hann sá, hvat hendi Jesusi. Hann man hava verið sera vónsvikin av sær sjálvum, tá ið Jesus doyði seinnapartin eftir tímalanga líðing. Pætur man hava kulsað við tankan um, at hann hevði lagt stein oman á byrðu hjá Meistara sínum tann dagin, ið vísti seg at vera hansara seinasti sum menniskja. Hóast Pætur uttan iva var sera tungur í huga, misti hann ikki mótið fullkomiliga. Tað vita vit, tí frásøgan vísir, at hann stutt eftir var saman við andaligu brøðrum sínum aftur. (Luk. 24:33) Eingin ivi er um, at allir ápostlarnir angraðu sín atburð ta døpru náttina, og teir kendu ein ávísan ugga av at vera saman aftur.

20 Í roynd og veru lýsir henda frásøgan eina sera sterka síðu hjá Pæturi. Tá ið ein tænari hjá Gudi snávar, er tað, sum hevur størstan týdning, ikki, hvussu illa hann snávar, men heldur hvussu fastur hann er í avgerðini um at koma á føtur aftur, at fáa alt aftur í rættlag. (***Les Orðtøkini 24:16.***) Tað var tekin um sanna trúgv, at Pætur fór til brøður sínar, hóast hann var tungur í huga. Tá ið sorg ella iðran verður ein byrða, er tað freistandi at avbyrgja seg, men samstundis vandamikið. (Orðt. 18:1) Tað skilabesta er at koma

17, 18. (a) Hvat gjørdi Pætur, tá ið hann skilti, hvussu dyggiliga hann hevði svikið Meistara sín? (b) Hvat hugsaði Pætur kanska?

19. Hvussu man mistak Pæturs hava ávirkað hann, men hvussu vita vit, at hann ikki fullkomiliga misti mótið?

20. Hvat kann ein av sterku síðum Pæturs læra okkum?

saman við trúarfelagum og royna at koma fyri seg aftur andaliga. — Hebr. 10:24, 25.

21 Av tí at Pætur var saman við sínum andaligu brøðrum, hoyrdi hann tey skakandi tíðindini um, at likam Jesusar ikki var í grøvini. Pætur og Jóhannes runnu út til grøvina, har Jesus var lagdur, og inngongdin innsiglað. Jóhannes, sum helst var yngri enn Pætur, kom fyrst. Tá ið hann sá, at steinurin var tikin frá inngongdini, drálaði hann. Men tað gjørdi Pætur ikki. Hann var pøstur, men fór kortini beina leið inn í grøvina. Hon var tóm! — Jóh. 20:3-9.

22 Trúði Pætur, at Jesus var upprisin? Ikki beinanvegin, sjálvt um nakrar trúfastar kvinnur høvdu sagt, at einglar høvdu víst seg fyri teimum og boðað frá, at Jesus var risin upp frá teimum deyðu. (Luk. 23:55–24:11) Men tá ið dagurin fór at halla, var øll sorg og allur ivi horvin úr hjartanum á Pæturi. Jesus var á lívi, nú sum ein veldigur andaskapningur! Hann vísti seg fyri øllum ápostlum sínum. Men hann gjørdi nakað annað fyrst, nakað sum fór fram undir fýra eygum. Ápostlarnir søgdu sama dag: „Tað er satt, at Harrin er risin upp — Hann er sæddur av Símuni!“ (Luk. 24:34) Paulus ápostul skrivaði eisini seinni um henda merkisverda dagin, at Jesus „varð sæddur av Kefasi og síðani av hinum tólv“. (1 Kor. 15:5) Kefas og Símun eru onnur nøvn fyri Pætur. Jesus vísti seg fyri honum henda dagin — eyðsýniliga tá ið Pætur var einsamallur.

23 Bíblian sigur einki um, hvussu hjartanemandi tað var hjá Pæturi og Jesusi at hittast aftur. Tað varð verandi millum teir báðar. Vit kunnu bert hugsa okkum, hvussu kensluliga ávirkaður Pætur var av at síggja elskaða Harra sín á lívi aftur og at fáa høvi at seta orð á sína sorg og sín angur. Pætur ynskti sær meir enn nakað annað at verða fyrigivin. Kann nakar ivast í, at Jesus ríkliga fyrigav honum? Kristin í dag, sum gera eitt álvarsligt mistak, mugu minnast frásøguna um Pætur. Vit mugu ongantíð halda, at Gud ikki kann fyrigeva okkum. Jesus endurspeglar til fulnar Faðir sín, sum ’ríkliga skal fyrigeva’. — Es. 55:7.

Fleiri prógv um fyrigeving

24 Jesus bað ápostlarnar fara til Galilea, har teir skuldu møta honum aftur. Tá ið teir komu leiðina fram, gjørdi Pætur av at fara út at fiska á Galileavatni. Fleiri av hinum fóru við honum. Enn eina

---

21. Hvørji tíðindi frætti Pætur, av tí at hann var saman við andaligu brøðrum sínum?

22. Hvat fekk alla sorg og allan iva í hjarta Pæturs at hvørva?

23. Hví skulu kristin í dag, sum gera eitt álvarsligt mistak, minnast frásøguna um Pætur?

24, 25. (a) Lýs náttina, tá ið Pætur fiskaði á Galileavatni. (b) Hvat gjørdi Pætur, tá ið Jesus morgunin eftir framdi eitt undur?

ferð var Pætur á vatninum, har hann so mangan hevði verið áður. At hoyra bátin geva seg, aldurnar skvatla og at handfara tey grovu gørnini, man hava verið ein vælkend og dámlig kensla. Teir fingu tó ongan fisk ta náttina. — Matt. 26:32; Jóh. 21:1-3.

25 Men í lýsingini rópti ein maður inni av strondini, at teir skuldu seta gørnini út høgrumegin bátin. Teir so gjørdu og fingu nógvan fisk, 153 í tali! Nú visti Pætur, hvør maðurin var. Hann leyp útí og svam inn á land. Á strondini gav Jesus trúføstu vinum sínum fisk at eta, sum hann hevði steikt á kolgløðum. Hann vendi sær ímóti Pæturi. — Jóh. 21:4-14.



Pætur leyp útí og svam inn á land

26 Jesus spurdi Pætur, um hann elskaði Harra sín „meir enn hesar“ [*NW*], meðan hann helst peikaði á stóru mongdina av fiski.* Fór Pætur at hava størri kærleika til fiskiskapin enn til Jesus? Eins og Pætur hevði avnoktað Harra sín tríggjar ferðir, gav Jesus honum nú møguleika at staðfesta sín kærleika tríggjar ferðir, meðan vinir hansara vóru hjástaddir. So hvørt sum Pætur gjørdi tað, segði Jesus honum, hvussu hann skuldi vísa henda kærleikan: við at føða, styrkja og røkta seyð Kristusar, ella trúføstu lærisveinarnar, og harvið raðfesta heilaga tænastu fram um alt annað. — Luk. 22:32; Jóh. 21:15-17.

27 Jesus váttaði soleiðis, at Pætur enn var nyttuligur hjá honum og Faðir hansara. Pætur fór at hava ein týðandi leiklut í samkomuni undir leiðslu Kristusar. Av sonnum eitt kraftmikið prógv um ríkligu fyrigeving Jesusar! Pætur var uttan iva takksamur um at fáa fyrigeving, og hann lærdi av mistaki sínum.

28 Pætur røkti trúfastur sína uppgávu í nógv ár. Hann styrkti brøður sínar, sum Jesus hevði biðið hann tað kvøldið, hann doyði. Pætur tænti sum ein vinaligur og tolin hirði hjá lærisveinum Kristusar og gav teimum føði. Maðurin, ið varð róptur Símun, livdi við tíðini upp til navnið, Jesus hevði givið honum — Pætur, ella Klettur — tí hann gjørdist ein støðufastur, sterkur og álítandi stuðul í samkomuni. Rík prógv um tað finna vit í teimum báðum hjartanemandi brøvunum, Pætur skrivaði, sum seinni gjørdust virðismiklar bøkur í Bíbliuni. Brøvini vísa eisini, at Pætur ongantíð gloymdi tað, Jesus hevði lært hann um at fyrigeva. — ***Les Fyrra bræv Pæturs 3:8, 9; 4:8.***

29 Latið okkum eisini taka henda lærdóm til okkara. Biðja vit hvønn dag Gud fyrigeva okkara nógvu mistøk? Eru vit síðani fús at taka ímóti hansara fyrigeving, og trúgva vit, at vit kunnu verða reinsað? Og fyrigeva vit eisini øðrum? Gera vit tað, taka vit eftir trúnni hjá Pæturi — og miskunn Meistara hansara.

HUGSA UM HETTA . . .

- Hvørja skeiva áskoðan hevði Pætur viðvíkjandi fyrigeving?
- Hvat gjørdi Pætur, sum kravdi, at Jesus fyrigav honum?
- Hvussu vísti Jesus, at hann fyrigav Pæturi?
- Hvussu kundi tú hugsað tær at tikið eftir trúgv Pæturs og miskunn Jesusar?

* Hóast umseting *Victors Danielsens* rør framundir, at Jesus sipaði til fólk, kann grikski teksturin eisini umsetast soleiðis, at Jesus sipaði til fiskin, sum lá fyri føturnar á teimum.

26, 27. (a) Hvat gav Jesus Pæturi høvi at gera tríggjar ferðir? (b) Hvussu prógvaði Jesus, at hann veruliga hevði fyrigivið Pæturi?

28. Hvussu kom Pætur at liva upp til sítt navn?

29. Hvussu kunnu vit taka eftir trúnni hjá Pæturi og miskunn Meistara hansara?

Eftirmæli

'Eftirfylgið teimum, sum við trúgv og toli arva lyftini.'
— HEBREARABRÆVIÐ 6:12.

TRÚGV. Tað er eitt vakurt orð, sum lýsir ein sera dámligan eginleika. Tá ið vit síggja ella hoyra hetta orðið, eigur eitt annað orð eisini at koma okkum í hug: „Alneyðugt!" Tí um vit ikki hava trúgv, er tað alneyðugt, at vit fáa okkum trúgv. Og hava vit trúgv, er tað alneyðugt, at vit verja og røkta hana. Hví?

2 Ímynda tær, at tú gongur ígjøgnum eina stóra oyðimørk. Tað er alneyðugt hjá tær at fáa vatn. Tá ið tú finnur vatn, mást tú verja tað fyri sólini. Síðani er neyðugt, at tú fyllir ílatið hjá tær uppaftur, so tú klárar teg, til tú kemur á mál. Í dag liva vit øll í eini andaligari oyðimørk, einum heimi har sonn trúgv er líka sjáldsom sum vatn í eini oyðimørk og hevur lyndi at hvørva sum døgg fyri sól, um hon ikki verður vard og styrkt. Tað er lívið um at gera, tí eins og vit ikki kunnu liva uttan vatn, kunnu vit ikki yvirliva andaliga uttan trúgv. — Róm. 1:17.

3 Jehova veit, hvussu týðandi tað er, at vit hava trúgv, og hann veit, hvussu strævið tað er at menna og varðveita trúgv nú í tíðini. Tað er uttan iva orsøkin til, at hann hevur givið okkum fyrimyndir at taka eftir. Jehova læt Paulus ápostul skriva: 'Eftirfylgið teimum, sum við trúgv og toli arva lyftini.' (Hebr. 6:12) Og tí eggjar samskipan Jehova okkum til at gera okkara ítasta fyri at taka eftir trúføstum monnum og kvinnum, eitt nú teimum, sum vit hava umrøtt í hesi bókini. Men hvat skulu vit gera nú? Latið okkum minnast hetta: (1) Vit mugu halda fram at styrkja okkara trúgv. (2) Vit mugu halda vónina livandi.

4 *Halt fram at styrkja tína trúgv.* Trúgv hevur ein sterkan fígginda — Satan. Høvdingin yvir hesum heimi hevur gjørt heimsskipanina til eina andaliga oyðimørk, har tað er torført at varðveita sína trúgv. Hann er nógv sterkari, enn vit eru. Men er tað so vónleyst at menna og styrkja okkara trúgv? Nei, als ikki! Jehova er vinur teirra, sum royna at menna sanna trúgv. Hann vissar okkum um, at tá ið hann er við okkum, kunnu vit standa Djevulinum ímóti og enntá fáa hann at flýggja frá okkum. (Ják. 4:7) Vit standa honum ímóti, tá ið vit hvønn dag geva okkum stundir at

1, 2. Hví er tað alneyðugt, at vit menna trúnna nú? Lýs við einum dømi.

3. Hvussu hevur Jehova hjálpt okkum at menna trúnna, og hvat mugu vit minnast at gera?

4. Á hvønn hátt er Satan ein fíggindi trúarinnar, men hví skulu vit ikki missa mótið?

styrkja og menna okkara trúgv. Hvussu gera vit tað?

5 Sum vit hava lisið, vórðu trúarinnar menn og kvinnur í Bíbliuni ikki fødd trúføst. Tey gjørdust livandi prógv um, at trúgv er ein eginleiki, sum heilagi andin frá Jehova alir fram. (Gal. 5:22, 23) Tey bóðu Jehova um hjálp, og hann styrkti trúgv teirra afturfyri. Latið okkum gera tað sama og ongantíð gloyma, at Jehova ríkliga gevur av sínum anda, tá ið vit biðja um hann og liva samsvarandi okkara bønum. (Luk. 11:13) Kunnu vit gera meira?

6 Í hesi bókini hava vit bert umrøtt nakrar fáar tænarar, sum høvdu einastandandi trúgv. Nógvir eru eftir! **(*Les Hebrearabrævið 11:32.*)** Hvør einstakur av teimum kann hvør í sínum lagi læra okkum eina rúgvu, tá ið vit lesa um teir í okkara persónliga lestri. Lesa vit bert bíbliufrásøgurnar um trúarinnar menn og kvinnur leysliga, styrkja vit ikki trúnna so væl, sum vit annars kundu. Skulu vit fáa fulla nyttu av okkara bíbliulesing, mugu vit geva okkum stundir til at grava í samanhanginum og bakgrundini. Tá ið vit leggja okkum í geyma, at hesir ófullkomnu menninir og kvinnurnar høvdu 'somu kor sum vit', tykjast tey meira verulig í okkara hugaheimi. (Ják. 5:17) Tá kunnu vit ímynda okkum, hvussu tey møguliga høvdu tað, tá ið tey høvdu trupulleikar og avbjóðingar, sum líkjast okkara.

7 Vit styrkja eisini trúnna við okkara gerðum. Trúgvin er jú „deyð uttan verk". (Ják. 2:26) Hugsa bara, hvussu tað hevði frøtt menninar og kvinnurnar, sum vit hava umrøtt, um tey fingu ta uppgávuna, sum Jehova hevur givið okkum nú á døgum!

8 Hvussu hevði tað verið, um Ábraham til dømis hevði fingið at vita, at hann kundi tilbiðja Jehova, ikki við eitt altar úr gróti úti í oyðimørkini, men saman við samskipaðum bólkum av tilbiðjarum í dámligum ríkissalum og á stórum stevnum, har væl og virðiliga verður greitt frá lyftunum, sum hann bert sá „langt burtur"? **(*Les Hebrearabrævið 11:13.*)** Og hvussu hevði tað verið, um Elias fekk at vita, at hansara uppgáva ikki var at beina fyri óndum ba'alsprofetum, meðan hann royndi at tæna Jehova undir einum óndum og fráfalnum kongi, men friðarliga at vitja fólk og bera teimum ein uggandi og vónríkan boðskap? Heldur tú ikki, at trúarinnar menn og kvinnur á Bíbliunnar døgum høvdu verið skjót at tikið av tilboðnum um at tilbiðja Jehova á sama hátt sum vit í dag?

5. Hvussu fingu trúføstu menninir og kvinnurnar í Bíbliuni trúgv? Greið frá.

6. Hvussu fáa vit sum mest burturúr, tá ið vit kanna frásøgurnar í Bíbliuni?

7-9. (a) Hvussu høvdu nakrir av trúarinnar monnum og kvinnum á Bíbliunnar døgum kanska havt tað, um tey kundu tilbiðið Jehova á sama hátt sum vit í dag? (b) Hví eiga vit at styrkja trúnna við gerðum?

9 Latið okkum tí halda fram at styrkja trúnna við gerðum. Tá ið vit gera tað, fylgja vit teimum góðu trúarfyrimyndunum, sum vit lesa um í Guds innblásta orði. Sum nevnt í formælinum verða vit tættari knýtt at teimum. Men hesi vinabondini kunnu skjótt gerast meira verulig.

10 *Halt vónina livandi.* Trúfastir menn og trúfastar kvinnur hava altíð funnið styrki í vónini frá Gudi. Hvussu við tær? Ímynda tær til dømis, hvussu frálíkt tað verður at møta trúføstum tænarum hjá Gudi, tá ið teir fáa lívið aftur í 'uppreisnini av rættvísum'. **(*Les Ápostlasøguna 24:15.*)** Hvørjar spurningar kundi tú hugsað tær at sett teimum?

11 Tá ið tú hittir Ábel, kundi tú so hugsað tær at spurt hann, hvussu foreldrini hjá honum vóru? Ella kanska: „Tosaði tú nakrantíð við kerúbarnar, sum hildu vakt við Edens urtagarð? Svaraðu teir?" Hvussu við Nóa? Fert tú kanska at spyrja hann: „Ræddist tú nakrantíð nefilim? Hvussu kláraði tú at taka tær av øllum dýrunum tað árið í ørkini?" Hittir tú Ábraham, fert tú kanska at spyrja hann: „Kendi tú Sem? Hvør lærdi teg um Jehova? Var tað torført at fara úr Ur?"

12 Hugsa eisini um, hvørjar spurningar tú hevði viljað sett teimum trúføstu kvinnunum, sum fáa eina uppreisn. Tað kundi eitt nú verið: „Rutt, hvat fekk teg at tæna Jehova?" „Abigajil, vart tú bangin, tá ið tú skuldi fortelja Nabali um, hvussu tú hevði hjálpt Dávidi?" „Ester, hvat hendi tær og Mordokai, eftir at frásøgan í Bíbliuni endaði?"

13 Men kanska hava hesir trúføstu tænararnir eisini nógvar spurningar at seta tær. Sum tað verður spennandi at fortelja teimum um teir avgerandi síðstu dagarnar og um, hvussu Jehova signaði sítt fólk í torførum tíðum! Teir verða ivaleyst sera glaðir um at hoyra, hvussu Jehova læt øll síni lyfti ganga út. Til ta tíð verður tað ikki torført at hava Guds trúføstu tænarar úr forðum livandi í huga, tí teir vera har saman við okkum — í Paradísinum! Halt tí fram at gera alt, tú ert mentur nú, fyri at gera hesi fólkini verulig í tínum hugaheimi. Tak støðugt eftir trúgv teirra. So kanst tú gleðast um at tæna Jehova saman við teimum í allar ævir!

---

10. Hvørja gleði fáa vit í Paradísinum?

11, 12. Hvørjar spurningar kundi tú, í nýggja heiminum, hugsað tær at sett (a) Ábeli? (b) Nóa? (c) Ábrahami? (d) Rutt? (e) Abigajil? (f) Ester?

13. (a) Hvørjar spurningar fara tey upprisnu kanska at seta tær? (b) Hvussu dámar tær útlitini til at hitta trúfastar menn og kvinnur úr forðum?